Det Nationale Forskningscenter for Arbejdsmiljø

DEILDIN FYRI ARBEIÐS- OG ALMANNAHEILSU
SJÚKRAHÚSVERK FØROYA

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA



# Arbeiðsumhvørvi í Føroyum

## Úrslit frá spurnakanning um arbeiðsumhvørvi, heilsu og trivnað hjá arbeiðstakarum í Føroyum

Simone Vestergaard Christiansen, Pál Weihe, Thomas Clausen, Bo Netterstrøm og Annika Helgadóttir Davidsen

Det Nationale Forskningscenter for Arbejdsmiljø, København 2024

# Arbeiðsumhvørvi í Føroyum

## Úrslit frá spurnakanning um arbeiðsumhvørvi, heilsu og trivnað hjá arbeiðstakarum í Føroyum

**Simone Vestergaard Christiansen, Pál Weihe, Thomas Clausen, Bo Netterstrøm og Annika Helgadóttir Davidsen**

Det Nationale Forskningscenter for Arbejdsmiljø, København 2024

## NFA-frágreiðing

| | |
|---|---|
| Heiti | Arbeiðsumhvørvi í Føroyum |
| Undirheiti | Úrslit úr eini spurnakanning av arbeiðsumhvørvi, heilsu og trivnaði hjá arbeiðstakarum í Føroyum |
| Høvundar | Simone Vestergaard Christiansen, Pál Weihe, Thomas Clausen, Bo Netterstrøm og Annika Helgadóttir Davidsen. |
| Umseting úr donskum | Herborg Haraldsen & Annika Helgadóttir Davidsen |
| Útgevari | Det Nationale Granskingscenter fyri Arbeiðsumhvørvi (NFA) |
| Útgivið | Juni 2024 |
| Fíggjarligur stuðul | Granskingarráðið, Vellivforeningen, Betri Stuðul og Fakfelagssamstarvið |
| ISBN | 978-87-7904-424-1 |
| Internetútgáva | nfa.dk |

**Det Nationale Forskningscenter for Arbejdsmiljø**
Lersø Parkallé 105
2100 København Ø
Tlf.: 39165200
Fax: 39165201
Teldupostur: nfa@nfa.dk
Heimasíða: nfa.dk

# Formæli

Føroyar eru í dag eitt nútímans samfelag við knapt hálvthundrað túsund íbúgvum. Fólkið er sum heild væl útbúgvið, og fólkaheilsustøðan er góð, eisini samanborið við onnur Norðurlond. Gitnaðarførið hevur verið høgt, barnadeyðin er lágur og væntaði livialdurin er høgur fyri bæði kyn. Samlaða framleiðslan í føroyska samfelagnum er støðugt vaksandi og høg, máld sum bruttotjóðarframleiðsla per íbúgva.
Í tíðini eftir seinna heimsbardaga var arbeiðsmarknaðurin myndaður av fiskivinnu, landbúnaði og vælferðartænastum so sum skúlaverki og heilsuverki og harafturat eini relativt lítlari almennari fyrisiting. Tað er broytt munandi síðan túsundáraskiftið. Laksaaling er í dag ein høvuðsvinna. Fiskivinnan fevnir í høvuðsheitum um stór skip við alskyns hentleikum. Tænastuvinnan, ætlað tí vaksandi ferðavinnuni, er í skjótum vøkstri. Almenna fyrisitingin, íroknað vælferðartænasturnar, er somuleiðis vaksandi.

Undirritaði hevur í meira enn tríati ár verið arbeiðsmedisinari í føroyska heilsuverkinum í tøttum samstarvi við Arbeiðs- og Brunaeftirlitið, Skipaeftirlitið og Fróðskaparsetur Føroya. Øll árini hevur tørvurin á deskriptivum dátum viðvíkjandi umhvørvinum á føroyska arbeiðsmarknaðinum verið eyðsæddur, serliga samanborið við onnur Norðurlond. Fleiri spurnakanningar eru gjørdar seinastu tjúgu árini, men tær eru einamest gjørdar av fakfeløgum í mun til egnar limir. Tað hevur verið tørvur á einari samlaðari kanning av øllum arbeiðsmarknaðinum samstundis fyri at fáa vitan um, hvar trupulleikar eru í arbeiðsumhvørvinum. Umframt møguleikan at samanbera størv og vinnugreinar í føroyska samfelagnum, hava vit eisini ynskir um at kunna samanbera umstøðurnar í Føroyum við onnur samfeløg, sum líkjast okkum. Her hevur tað verið upplagt at samanbera við Danmark, tí bygnaðurin á arbeiðsmarknaðinum líkist tí danska og harafturat líkist arbeiðsumhvørvislógin.

Kanningin, hvørs úrslit verða løgd fram í hesi frágreiðing, er sprottin úr einum góðum og hugkveikjandi samstarvi við fyrrverandi samstarvsfelaga mín á Arbeiðsmedisinsku deild á Ríkissjúkrahúsinum Bo Netterstrøm, yvirlækna, dr. med. og seniorgranskari á Det Nationale Forskningscenter for Arbejdsmiljø Thomas Clausen, cand.scient.pol., ph.d., Simone Vestergaard Christiansen, cand.psych., vísindaligt hjálparfólk og Marie Louise Bak, cand.polit., vísindaligt hjálparfólk. Her í Føroyum hevur adjunktur á Fróðskaparsetri Føroya Annika Helgadóttir Davidsen, cand.psych., ph.d. staðið á odda fyri kanningini.

Vit vilja takka Granskingarráðnum, Velliv Foreningen, Betri Stuðul og Fakfelagssamstarvinum fyri at stuðla verkætlanini. Somuleiðis vilja vit takka uttanhýsis metarunum lektara Henrik Lund á Institut for Mennesker og Teknologi, Roskilde Universitet, og seniorgranskara Maj Britt Dahl Nielsen, Statens Institut for Folkesundhed, Syddansk Universitet fyri nágreiniligar viðmerkingar til eina eldri útgávu av hesi frágreiðing.

Frágreiðingin verður útgivin á føroyskum og donskum samstundis. Danska útgávan er bert í talgildum líki, men tann føroyska er bæði talgild og í avmarkaðum prentaðum upplagi. Vegna tey, sum hava verið við til at gjørt frágreiðingina, er mítt ynski, at

frágreiðingin bæði kann vera til íblástur og upplýsing fyri partarnar á arbeiðsmarknaðinum, verið tað seg arbeiðsgevarar, arbeiðstakarar og fakfeløg eins og útbúgvingarstovnar og myndugleikar. Dáturnar verða goymdar á Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, sum nú er nevnd Heilsugranskingareindin í Sjúkrahúsverkinum og eru atkomiligar her til víðari gransking, eins og eitt av okkara ynskjum er, at kanningin (ella partar av henni) verður endurtikin við jøvnum millumrúmi.

Pál Weihe, yvirlækni, professari
Heilsugranskingareindin í Sjúkrahúsverkinum

# Innihaldsyvirlit

**Samanumtøka ... 11**

**Summary ... 25**

**1 Inngangur ... 39**

**2 Mannagongd ... 41**

2.1 Lýsing av luttakarunum í spurnakanningini ... 41

2.1.1 Lýsing av donsku tilvísingarbólkunum ... 44

2.2 Lýsing av spurnablaðnum í kanningini ... 46

2.2.1 Stutt lýsing av DPQ spurnablaðnum ... 46
2.2.2 Stutt lýsing av spurningum úr *Arbeiðsumhvørvi og Heilsa* ... 46
2.2.3 Kanning av psykometrisku eginleikunum ... 47

2.3 Lýsing av greiningarháttalagi ... 49

2.4 Lesivegleiðing ... 50

**3 Úrslit um psykososialt arbeiðsumhvørvi og trivnað ... 51**

3.1 Hvussu arbeiðið er skipað ... 51

3.1.1 Ávirkan í arbeiðinum ... 52
3.1.2 Ávirkan á arbeiðstíðir ... 55
3.1.3 Menningarmøguleikar ... 58
3.1.4 Greidleiki um leiklutir ... 61
3.1.5 Tvídráttir um leiklutir ... 64
3.1.6 Møguleikar fyri at loysa arbeiðsuppgávurnar ... 68
3.1.7 Óneyðugar arbeiðsuppgávur ... 72
3.1.8 Forsøgni í arbeiðinum ... 75

3.2 Krøv í arbeiðinum ... 78

3.2.1 Arbeiðsferð ... 79
3.2.2 Arbeiðsmongd ... 82
3.2.3 Kenslulig krøv ... 85
3.2.4 Krøv um at fjala kenslur ... 89
3.2.5 Kognitiv krøv ... 92
3.2.6 Markleyst arbeiði ... 96

3.3 Samstarv ... 99

3.3.1 Sosialur stuðul frá starvsfeløgum ... 100
3.3.2 Sambond við nærmastu starvsfelagar ... 103
3.3.3 Álit á starvsfelagar ... 106

3.4 Leiðsla ... 110

3.4.1 Sambond við nærmasta leiðara ... 111
3.4.2 Leiðslugóðska ... 114
3.4.3 Sosialur stuðul frá nærmasta leiðara ... 117
3.4.4 Rættvísi ... 121
3.4.5 Hvussu leiðslan tekur starvsfólk uppí ... 124
3.4.6 Viðurkenning ... 128

3.5 Broytingar ... 131

3.5.1 Handfaring av broytingum ... 132

3.6 Neilig atferð ... 135

3.6.1 Hóttanir ... 136

3.6.2 Harðskapur ........ 140
3.6.3 Happing ........ 144
3.6.4 Kynslig happing ........ 148
3.6.5 Mismunur/vánalig viðferð ........ 152
3.6.6 Chikana ........ 156

3.7 Trivnaður í arbeiðinum ........ 161

3.7.1 Meining í arbeiðinum ........ 162
3.7.2 Hvussu arbeiðstakarin tekur lut á arbeiðsplássinum ........ 166
3.7.3 Hugbinding í arbeiðinum ........ 170
3.7.4 Óvissa í starvssetanini ........ 174
3.7.5 Strongd ........ 177
3.7.6 Nøgdsemi við arbeiðið ........ 181
3.7.7 Nøgdsemi við sálarliga arbeiðsumhvørvið ........ 184
3.7.8 Tvídráttir millum arbeiðslív og heimalív ........ 188

**4 Úrslit um likamligt og evnafrøðiligt arbeiðsumhvørvi, larm og ristingar, arbeiðsóhapp og trygd umframt heilsu og arbeiðsførleika ........ 191**

4.1 Likamligt arbeiðsumhvørvi ........ 191

4.1.1 Likamlig tyngd í arbeiðinum ........ 192
4.1.2 Arbeiði til gongu, standandi ella sitandi arbeiði ........ 195
4.1.3 Tyngjandi arbeiðsstøður ........ 201
4.1.4 Lyfting, skump ella togan av byrðum ........ 205

4.2 Evnafrøðiligt arbeiðsumhvørvi ........ 209

4.2.1 Húðárin og trupulleikar við húðini ........ 210

4.3 Larmur og ristingar ........ 214

4.3.1 Larmur og ristingar ........ 215

4.4 Arbeiðsóhapp og trygd ........ 222

4.4.1 Arbeiðsóhapp ........ 223
4.4.2 Trygd á arbeiðsplássinum ........ 227

4.5 Heilsa og arbeiðsførleiki ........ 230

4.5.1 Sjálvmett heilsa ........ 230
4.5.2 Arbeiðsførleiki ........ 233
4.5.3 Pína ........ 238
4.5.4 Møði og svøvntrupulleikar ........ 243
4.5.5 Heilsufremjandi tilboð ........ 249
4.5.6 Sjúkufrávera sambært luttakaranum sjálvum ........ 253
4.5.7 Tunglyndiseyðkenni ........ 256

**5 Samanhangir millum arbeiðsumhvørvisviðurskifti og heilsu millum arbeiðstakarar í Føroyum ........ 259**

5.1 Háttalag ........ 260

5.1.1 Tunglyndiseyðkenni ........ 260
5.1.2 Sjúkufrávera sambært luttakaranum sjálvum ........ 260
5.1.3 Greining ........ 260

5.2 Samanhangir millum arbeiðsumhvørvisviðurskifti og vanda fyri tunglyndiseyðkennum ........ 262

5.2.1 Samanhangurin millum viðurskifti í psykososiala arbeiðsumhvørvinum og vanda fyri tunglyndiseyðkennum ........ 262
5.2.2 Sambandið millum arbeiðsumhvørvisviðurskifti og vanda fyri tunglyndiseyðkennum ........ 265

5.3 Sambandið millum arbeiðsumhvørvisviðurskifti og sjúkufráveru sambært luttakaranum sjálvum ..... 268

5.3.1 Sambandið millum viðurskifti í psykososiala arbeiðsumhvørvinum og sjúkufrávera sambært luttakaranum sjálvum ..... 268

5.3.2 Sambandið millum arbeiðsumhvørvisviðurskifti og vanda fyri sjúkufráveru ..... 271

5.4 Samanumtøka og hugleiðingar um háttalagið ..... 274

**6 Endaligar viðmerkingar og hugleiðingar um háttalag ..... 277**

6.1 Kjak um úrslitini í kanningini ..... 278

6.2 Hugleiðingar um háttalag ..... 279

**Keldur ..... 281**

# Samanumtøka

Í hesi frágreiðing leggja vit úrslit fram frá einari landsumfatandi spurnakanning um arbeiðsumhvørvi, trivnað og heilsu hjá arbeiðstakarum í Føroyum. Kanningin er tann fyrsta av sínum slagi millum føroyskar arbeiðstakarar, og kanningin útvegar sostatt nýggja vitan um arbeiðsumhvørvið í Føroyum. Í aðrari frágreiðing nevnd *Sálarligt og sosialt arbeiðsumhvørvi hjá føroyskum arbeiðstakarum* løgdu vit fram yvirskipaðu úrslitini fyri psykososiala arbeiðsumhvørvið, meðan vit í hesari frágreiðingini leggja øll úrslitini frá spurnakanningini fram, ið fevna um eina langa røð av økjum innan arbeiðsumhvørvi og heilsu.

Endamálið við kanningini var at gera eina breiða kortlegging av arbeiðsumhvørvinum, trivnaði og heilsu hjá arbeiðstakarum í Føroyum. Harafturat var endamálið at kanna arbeiðsumhvørvið tvørtur um bólkar í kanningini, og tí leggja vit úrslitini fram tvørtur um kyn, aldursbólkar og starvsbólkar. Hetta ger tað møguligt at gera av, í hvørjum bólkum og økjum arbeiðsumhvørvið í Føroyum hevur ávísar styrkir ella avbjóðingar, sum kunnu vera umráðandi at hava atlit til fyri at seta fyribyrgjandi átøk í verk og soleiðis stuðla undir arbeiðsumhvørvið, heilsuna og trivnaðin hjá arbeiðstakarum í Føroyum. Í frágreiðingini kanna vit eisini, hvussu nakrir tættir í arbeiðsumhvørvinum og heilsu hanga saman.

Kanningin byggir lutvíst á validerað spurnabløð hjá det Nationale Forskningscenter for Arbejdsmiljø (NFA) um sálarligt og sosialt arbeiðsumhvørvi, Danish Psychosocial Questionnaire (DPQ), og lutvíst á spurningar úr donsku spurnakanningini *Arbeiðsumhvørvi og Heilsa*, sum eisini er ment av NFA.

Í kanningini hava vit spurt um 38 ymiskar dimensjónir av psykososiala arbeiðsumhvørvinum, sum kunnu bólkast í hesi sjey yvirskipaðu økini:

- Hvussu arbeiðið er skipað
- Krøv í arbeiðinum
- Samstarv
- Leiðsla
- Broytingar
- Neilig atferð
- Trivnaður

Harafturat hava vit spurt um ymiskar dimensjónir av arbeiðsumhvørvinum innan hesi øki:

- Likamligt arbeiðsumhvørvi
- Evnafrøðiligt arbeiðsumhvørvi
- Larmur og ristingar
- Arbeiðsóhapp og trygd
- Heilsa og arbeiðsførleiki

Úrslitini av kanningini benda sum heild á bæði líkleikar og munir, tá úrslit úr Føroyum og Danmark verða samanborin. Tvørtur um bólkar í kanningini benda úrslitini á, at tað

serliga eru munir millum, hvussu teir 11 starvsbólkarnir og ymisku aldursbólkarnir uppliva sítt arbeiðsumhvørvi og heilsu. Sum heild benda úrslitini á, at yngru arbeiðstakararnir í Føroyum meta arbeiðsumhvørvið og heilsuna verri enn eldru arbeiðstakararnir, ið meta sítt arbeiðsumhvørvi jaligari.

**Psykososialt arbeiðsumhvørvi og trivnaður**
Innan psykososiala arbeiðsumhvørvið benda úrslitini á, at føroyskir svarpersónar liggja lægri á stigunum *ávirkan í arbeiðinum, menningarmøguleikar* og *forsøgni í arbeiðinum* enn svarpersónarnir í donsku kanningini. Úrslitini benda eisini á, at føroyskir svarpersónar í eitt sindur størri mun uppliva *kenslulig krøv* í arbeiðinum samanborið við danskar svarpersónar. Úrslitini benda tó á, at føroyskir svarpersónar sum heild uppliva at hava eitt betri samstarv við sínar starvsfelagar sínar enn danskir svarpersónar, við tað at føroyskir svarpersónar liggja hægri á stigunum *sambond við nærmastu starvsfelagar* og *álit á starvsfeløgum*. Úrslitini benda á, at minni munur er á, hvussu danskir og føroyskir svarpersónar meta ymiskar faktorar í mun til leiðslu. Tó benda úrslitini á, at føroyskir svarpersónar meta *hvussu arbeiðstakarin tekur lut á arbeiðsplássinum*at vera munandi lægri enn danskir svarpersónar.

Kanningin vísir harumframt, at útbreiðslan av neiligari atferð er størri millum svarpersónar úr Føroyum enn úr Danmark. Henda størra útbreiðslan sæst innan fyri *harðskap, hóttanir, happing, kynsliga happing* og *mismun/vánaliga viðferð*. Grundað á hesi úrslit kann tað sostatt koma óvart á, at svarpersónarnir úr Føroyum sum heild siga frá betri trivnaði í arbeiðinum enn svarpersónarnir úr Danmark – hetta ger seg serliga galdandi fyri stigarnar *hvussu arbeiðstakarin tekur lut í arbeiðsplássinum, nøgdsemi við arbeiðið, strongd* og *tvídráttir millum arbeiðslív og heimalív*.

Úrslitini í kanningini benda harumframt á, at upplivingin av psykososiala arbeiðsumhvørvinum og trivnaðinum í arbeiðinum er nakað skiftandi upp á tvørs av kannaðu bólkunum, og munirnir koma serliga fyri í teimum ymisku aldursbólkunum og starvsbólkunum (sí talvu 1). Sum heild benda úrslitini á, at arbeiðstakarar í starvsbólkinum 'Leiðsluarbeiði' liggja betri enn miðal í einari langari røð av dimensjónum í psykososiala arbeiðsumhvørvinum og trivnaði (sí grønu puntarnar í talvu 1), meðan arbeiðstakarar í starvsbólkunum 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' og 'Annað handaligt arbeiði' liggja verri fyri enn miðal í einari røð av dimensjónum, ið snúgva seg um psykososialt arbeiðsumhvørvi og trivnað (sí reyðu puntarnar í talvu 1).

Í talvu 1 sæst millum annað, at arbeiðstakarar í starvsbólkunum 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' og 'Annað handaligt arbeiði' hava avbjóðingar í psykososiala arbeiðsumhvørvinum í økjunum *Ávirkan í arbeiðinum, Samstarv, Leiðsla* og *Trivnaður*. Øvugt benda úrslitini á, at arbeiðstakarar í hesum báðum starvsbólkum yvirskipað uppliva færri *krøv í arbeiðinum* samanborið við hinar starvsbólkarnar í kanningini (sí talvu 1). Sostatt benda úrslitini á, at starvsbólkarnir 'Annað handaligt arbeiði' og 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' ikki eru tyngdir av krøvum í arbeiðinum, men eru harafturímóti í størri mun tyngdir av vantandi jaligum tilfeingi í arbeiðinum sum t.d. gott samband í samstarvinum við starvsfelagar og leiðarar.

Harafturat sæst, at eisini arbeiðstakarar í 'Arbeiði á heilsuøkinum' og 'Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði' hava avbjóðingar í mun til *Hvussu arbeiðið er skipað* og til *Krøv í arbeiðinum* – serliga *kenslulig krøv* í arbeiðinum. Endaliga benda úrslitini á, at arbeiðstakarar í 'Leiðsluarbeiði' uppliva hægri krøv í arbeiðinum viðvíkjandi *arbeiðsmongd, kognitiv krøv* og *markleyst arbeiði* samanborið við hinar starvsbólkarnar í kanningini. Úrslitini í kanningini benda harumframt á, at kvinnuligir arbeiðstakarar uppliva fleiri *kenslulig krøv í arbeiðinum* og *krøv um at fjala kenslur* enn mannligir arbeiðstakarar. Úrslitini benda somuleiðis á, at kvinnur í hægri mun føla seg strongdar enn menn.

Úrslitini benda harumframt á, at psykososiala arbeiðsumhvørvið og trivnaðurin er ymiskur, serstakliga upp á tvørs av aldursbólkum í kanningini. Úrslitini benda á, at yngri svarpersónar í kanningini uppliva at hava fleiri avbjóðingar í sambandi við *Hvussu arbeiðið er skipað* og í arbeiðinum sum heild, tí yngri svarpersónar hava týðiliga verri stigatal á stigunum *uppliving av meining í arbeiðinum, hugbinding í arbeiðinum, strongd, nøgdsemi við arbeiðið, nøgdsemi í mun til sálarliga arbeiðsumhvørvið* og *tvídráttir millum arbeiðslív og heimalív*. Øvut hesum benda úrslitini á, at støðan týðiliga er øðrvísi hjá teimum eldru arbeiðstakarunum yvir 65 ár, ið sum heild meta psykososiala arbeiðsumhvørvið og trivnaðin jaliga (sí talvu 1).

Tá hugt verður eftir úrslitunum um neiliga atferð, vísa hesi fyrst og fremst, at *hóttanir* er tann av neiligu gerðunum, ið oftast kemur fyri hjá arbeiðstakarum í Føroyum (sí talvu 2). Harnæst benda úrslitini á, at kvinnuligir arbeiðstakarar í Føroyum yvirskipað eru meira útsettar fyri neiligari atferð enn mannligir arbeiðstakarar, serstakliga tá tað ræður um *hóttanir, harðskap, kynsliga happing* og *mismun/vánaliga viðferð*. Úrslitini benda eisini á, at yngri arbeiðstakarar oftari eru fyri neiligari atferð á arbeiðsplássinum enn eldri arbeiðstakarar. Tá úrslitini fyri neiligari atferð í teimum ymisku starvsbólkunum verða samanborin, vísa hesi millum annað, at ein størri partur av arbeiðstakarum í 'Arbeiði á heilsuøkinum' og 'Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði' eru serliga fyri *hóttanum, harðskapi* og *chikanu*. Harumframt benda úrslitini á, at *happing* og *mismunur/vánalig viðferð* koma oftari fyri hjá arbeiðstakarum í 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' og 'Annað handaligt arbeiði' enn í hinum starvsbólkunum. Úrslitini benda harumframt á, at *happing* eisini kemur oftari fyri hjá arbeiðstakarum í 'Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði' samanborið við, hvussu ofta hetta kemur fyri hjá arbeiðstakarum í hinum starvsbólkunum í kanningini (sí talvu 2).

**Likamligt arbeiðsumhvørvi**
Fyri eftirverandi arbeiðsumhvørvisfaktorarnar og heilsuorsøkirnar, ið vit hava kannað, benda úrslitini eisini á, at tað eru bæði líkleikar og munir millum Føroyar og Danmark. Tá úrslitini í donsku og føroysku kanningini verða samanborin, vísa hesi millum annað, at føroyskir svarpersónar í eitt sindur størri mun meta seg at hava eitt *likamliga tyngjandi arbeiði* samanborið við danskar arbeiðstakarar. Fyri hini økini av likamliga arbeiðsumhvørvinum; *arbeiði til gongu/sitandi, tyngjandi arbeiðsstøður* og *lyfting, skumpan og togan av byrðum* eru úrslitini upp á tvørs av Danmark og Føroyum meira skiftandi.

Tá likamliga arbeiðsumhvørvið verður samanborið upp á tvørs av bólkum í kanningini, benda úrslitini á, at likamliga arbeiðsumhvørvið er tyngst hjá hesum starvsbólkum: 'Tænastu- og søluarbeiði', 'Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap', 'Handverkaraarbeiði', 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' og 'Annað handaligt arbeiði', meðan likamliga arbeiðsumhvørvið sýnist at vera minni tyngjandi hjá starvsbólkum sum 'Leiðsluarbeiði', 'Arbeiði, treytað av vitan á høgum støði' og 'Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði' (sí talvu 3).

Harumframt benda úrslitini á, at yngri arbeiðstakarar eru meira tyngdir av teirra likamliga arbeiðsumhvørvi enn eldri arbeiðstakarar. Hetta er serliga galdandi fyri svarpersónar undir 25 ár, men sýnist eisini at gera seg galdandi fyri svarpersónar í aldrinum 25 til 34 ár. Sí talvu 3.

**Evnafrøðiligt arbeiðsumhvørvi, larmur og ristingar**
Tá úrslitini hjá føroysku og donsku svarpersónunum verða samanborin, benda úrslitini innan fyri *evnafrøðiliga arbeiðsumhvørvið* á, at svarpersónar úr Føroyum í minni mun siga seg hava húðsamband við kemisk evni og at hava vátar og slavnar hendur. Parturin av svarpersónum úr Danmark og Føroyum, sum sigur seg hava *húðtrupulleikar* á hendrunum er tó nærum tann sami. Tá ið samanborið verður upp á tvørs av bólkum í kanningini, sæst eisini í úrslitunum innan fyri evnafrøðiliga arbeiðsumhvørvið, at tað serliga eru starvsbólkar sum 'Tænastu- og søluarbeiði', 'Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap', 'Handverkaraarbeiði', 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði', 'Annað handaligt arbeiði' og 'Arbeiði á heilsuøkinum', sum í størri mun siga frá húðtrupulleikum á hendrunum samanborið við hinar starvsbólkarnar í kanningini. Upp á tvørs av kynum, benda úrslitini á, at ein størri partur av kvinnum upplivir at hava trupulleikar við húðini, meðan tað samanumtikið eru eitt sindur færri av monnum, sum siga frá at hava húðtrupulleikar. At enda benda úrslitini á, at húðtrupulleikar koma oftari fyri millum yngru arbeiðstakararnar enn millum eldru arbeiðstakararnar. Sí talvu 3.

Tá úrslitini millum føroyskar og danskar arbeiðstakarar verða samanborin, benda úrslitini á fyri '*larm og ristingar*', at svarpersónar úr Føroyum í minni mun uppliva '*órógvandi larm*' samanborið við danskar arbeiðstakarar. Harafturímóti hevur størsti parturin av føroysku svarpersónunum sagt seg uppliva harðan larm samanborið við donsku arbeiðstakararnar, meðan munurin var minni á títtleikanum av *kraftmiklum ristingum* í báðum bólkunum. Upp á tvørs av bólkum í kanningini benda úrslitini á, at tað serliga eru svarpersónar í starvsbólkunum 'Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap', 'Handverkaraarbeiði', 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' og 'Annað handaligt arbeiði', ið uppliva bæði órógvandi og harðan larm og *kraftmiklar ristingar*. Eisini svarpersónar í 'Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði' uppliva í stóran mun órógvandi og harðan larm samanborið við miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini (sí talvu 3). Harafturat benda úrslitini á, at svarpersónar í 'Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi' eisini tykjast at hava avbjóðingar í sambandi við larm og ristingar. Úrslitini benda á, at starvsbólkarnir 'Leiðsluarbeiði', 'Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði', 'Arbeiði á heilsuøkinum' og 'Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði' í minni mun hava ampa av larmi og ristingum. Til

endans benda úrslitini á, at avbjóðingar við larmi og ristingum vísir seg meira millum menn enn millum kvinnur, og úrslitini sýna framvegis, at tað serliga eru teir yngru arbeiðstakararnir, ið siga seg vera fyri larmi og ristingum. Sí talvu 3.

**Arbeiðsóhapp og trygd**

Innan fyri økið *Arbeiðsóhapp og trygd á arbeiðsplássinum* benda úrslitini á, at tað er ein heldur lítil munur á partinum av svarpersónum úr ávikavist Danmark og Føroyum, sum hava sagt seg hava verið fyri arbeiðsóhappum. Harumframt benda úrslitini á, at parturin av svarpersónum úr Føroyum, ið hevur verið fyri í minsta lagi einum arbeiðsóhappi er størstur í starvsbólkunum: 'Handverkaraarbeiði', 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' og 'Annað handaligt arbeiði'. Samstundis benda úrslitini á, at svarpersónar í 'Annað handaligt arbeiði' meta seg hava vánaligari trygdarviðurskifti á arbeiðsplássinum samanborið við hinar starvsbólkarnar í kanningini. Úrslitini innan fyri hetta økið benda serliga á avbjóðingar hjá arbeiðstakarum í 'Annað handaligt arbeiði', tí hesi úrslit vísa á vánaligt trygdarumhvørvi og at parturin av svarpersónum, sum hevur verið fyri minst einum arbeiðsóhappi er munandi størri í hesum starvsbólki samanborið við føroysku svarpersónarnar sum heild. Hesi úrslitini benda týðiliga á, at ónýttir møguleikar eru fyri at betra um viðurskiftini hjá hesum starvsfólkunum til tess at tryggja arbeiðsumhvørvið og at fyribyrgja arbeiðsóhappum. Til endans benda úrslitini á, at arbeiðsóhapp í eyðsýndan mun koma oftari fyri millum yngri arbeiðstakarar í felagsbólkinum. Sí talvu 3.

**Heilsa og arbeiðsføri**

Tá úrslitini millum føroyskar og danskar svarpersónar verða samanborin innan økini *Heilsa og arbeiðsføri*, benda úrslitini á, at føroyskir svarpersónar sum heild hava mett sína heilsu at vera vánaligari enn miðal av donskum arbeiðstakarum. Hetta sama úrslit sæst innan fyri sjálvmett *likamligt og sálarligt arbeiðsføri*, har føroyskir svarpersónar eisini meta likamliga og sálarliga arbeiðsførið at vera vánaligari enn danskir arbeiðstakarar.

Tá úrslitini fyri *Heilsu* upp á tvørs av bólkunum í kanningini verða samanborin, vísa hesi, at svarpersónar í starvsbólkunum 'Annað handaligt arbeiði' og 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' meta heilsu sína sum heild at vera vánaligari enn enn miðal av øllum svarpersónum úr Føroyum, meðan svarpersónar í 'Leiðsluarbeiði' meta heilsuna at vera betri enn hjá hinum starvsbólkunum (sí talvu 3).

Úrslitini benda eisini á, at tey yngru siga seg hava verri heilsu enn hinir aldursbólkarnir í kanningini.

Hyggja vit nærri at úrslitunum síggja vit, at starvsbólkarnir 'Tænastu- og søluarbeiði', 'Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap', 'Handverkaraarbeiði', 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' og 'Annað handaligt arbeiði' meta teirra likamliga arbeiðsføri sum verandi vánaligari enn miðaltalið av øllum í kanningini, ímeðan starvsfólk við leiðsluábyrgd og arbeiði, ið er treytað av vitan á høgum støði hava mett seg at vera likamliga væl fyri (sí talvu 3). Hetta vísir sostatt á, at teir starvsbólkar, sum meta seg hava eitt krevjandi likamligt arbeiði, eisini eru teir starvsbólkar, sum hava mett seg at vera ringast fyri likamliga. Úrslitini á hesum økinum vísa eisini, at

arbeiðstakarar eldri enn 65 ár hava mett seg at vera verri fyri likamliga enn miðaltalið av øllum í kanningini.

Tá úrslitini fyri *Heilsu* verða samanborin upp á tvørs av bólkunum í kanningini, benda úrslitini á, at svarpersónar í starvsbólkunum 'Annað handaligt arbeiði' og 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' meta teirra yvirskipaðu heilsu at vera verri enn miðaltalið av øllum svarpersónum úr Føroyum, meðan svarpersónar við 'Leiðsluarbeiði' meta teirra heilsu at vera betri enn hinir starvsbólkarnir (se talva 3). Harumframt benda úrslitini á, at teir yngstu arbeiðstakararnir í kanningini meta teirra heilsu at vera verri enn restin av aldursbólkunum.

Úrslitini vísa harumframt, at starvsbólkarnar 'Tænastu- og søluarbeiði', 'Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap', 'Handverkaraarbeiði', 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' og 'Annað handaligt arbeiði' meta teirra likamliga arbeiðsførleika at vera verri enn miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini, meðan starvsbólkarnir 'Leiðsluarbeiði' og 'Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði' hava mett seg at hava ein góðan likamligan arbeiðsførleika (sí talvu 3). Úrslitini merkja soleiðis, at teir starvsbólkar, sum sum heild meta seg hava et hart likamligt arbeiði, eisini eru teir starvsbólkarnir, sum í stóran mun hava mett seg at hava vánaligast likamligan arbeiðsførleika. Úrslitini á hesum øki vísir harumframt, at arbeiðstakararnir eldri enn 65 ár hava mett likamliga arbeiðsførleikan at vera verri enn miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini.

Innan økið *Sálarligur arbeiðsførleiki* benda úrslitini á eitt sindur færri týðiligar munir upp á tvørs av bólkunum í kanningini. Her hava svarpersónar innan fyri starvsbólkarnar 'Arbeiði á heilsuøkinum', 'Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði' umframt 'Annað handaligt arbeiði' mett seg at hava eitt sindur verri sálarligan arbeiðsførleika samanborið við miðaltalið av øllum svarpersónunum, meðan svarpersónar í 'Leiðsluarbeiði' og ' Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði' hava mett seg at hava ein betri sálarligan arbeiðsførleika enn miðaltalið (sí talvu 3). Harnæst benda úrslitini á, at menn hava mett seg at hava betri sálarligan arbeiðsførleika enn kvinnur.

Innan fyri økið *Pína* benda úrslitini ikki á ein týðiligan mun millum føroyskar og danskar svarpersónar, ið uppliva pínu fleiri ferðir vikuliga. Her hava umleið 30 prosent frá báðum bólkunum sagt frá, at tey uppliva pínu eina ella fleiri ferðir vikuliga. Tað er harafturímóti størri munur á, hvørt pínan avmarkar arbeiðstakararnar í arbeiðinum. Úrslitini benda nevniliga á, at føroysku svarpersónarnir í nógv størri mun eru avmarkaðir av pínu í arbeiðinum samanborið við danskar arbeiðstakarar.

Tá mann samanber *Pínu* upp á tvørs av bólkunum í kanningini, benda úrslitini á, at ein stórur partur av svarpersónum í fylgjandi starvsbólkum hava sagt frá, at tey uppliva pínu í arbeiðinum fleiri ferðir vikuliga: 'Annað handaligt arbeiði', 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði', 'Arbeiði á heilsuøkinum', 'Handverkaraarbeiði' og 'Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap'. Svarpersónar í starvsbólkunum 'Leiðsluarbeiði', 'Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði', 'Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi' og 'Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði' hava harafturímóti í minni mun sagt frá pínu í arbeiðinum, og

úrslitini benda á, at hesir starvsbólkar í minni mun uppliva at vera avmarkaðir í arbeiðinum vegna pínu. Harumframt benda úrslitini á, at ein størri partur av arbeiðstakarum yngri enn 34 ár uppliva pínu í arbeiðinum vikuliga, meðan teir elstu arbeiðstakararnir í minni mun siga frá um pínu í arbeiðinum. Úrslitini benda harumframt á, at ein størri partur av svarpersónum yngri enn 25 ár uppliva, at pína avmarkar tey í arbeiðinum, meðan svarpersónarnir eldri enn 65 ár í minni mun uppliva at vera avmarkað vegna pínu.

Tá úrslitini úr Danmark og Føroyum verða samanborin innan økið *Møði og svøvntrupulleikar,* benda tey á bara smærri munir millum teir báðar bólkarnar. Tó benda úrslitini á, at arbeiðstakarar úr Føroyum í eitt sindur størri mun uppliva møði í sambandi við arbeiðið, meðan danskir arbeiðstakarar í eitt sindur størri mun uppliva svøvntrupulleikar. Upp á tvørs av bólkunum í kanningini eru ábendingar um, at starvsbólkarnir 'Arbeiði á heilsuøkinum', 'Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði', 'Annað handaligt arbeiði' og 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' í størri mun uppliva møði eftir ein arbeiðsdag samanborið við miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini. Í hesum førinum benda úrslitini eisini, at arbeiðstakararnir yngri enn 34 ár í størri mun hava sagt frá at uppliva møði eftir ein arbeiðsdag, har svarpersónar eldri enn 55 ár í minni mun uppliva møði efter ein vanligan arbeiðsdag. Til endans benda úrslitini á, at svarpersónar í 'Annað handaligt arbeiði' siga frá oftari at hava svøvntrupulleikar enn hinir starvsbólkarnir í kanningini. Eisini innan hetta økið merkja úrslitini, at tað eru yngru arbeiðstakararnir, sum oftast uppliva svøvntrupulleikar samanborið við eldru arbeiðstakararnar.

Innan økið *Heilsufremjandi tilboð* benda úrslitini á, at danskir arbeiðstakarar í eitt sindur størri mun taka ímóti heilsufremjandi tilboðum frá arbeiðsgevaranum, burtursæð frá rørslutilboðum har bert lítil munur er á bólkunum. Fyri hini tilboðini: *Hjálp til at gevast við at roykja, kostvegleiðing* og *viðgerðartilboð* er tað ein týðiligt størri partur av donskum arbeiðstakarum, sum hava tikið ímóti tilboðum um hetta samanborið við føroysku arbeiðstakararnar. Úrslitini benda harumframt á, at tað serliga eru arbeiðstakarar í 'Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði' og 'Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi', sum siga frá at hava móttikið heilsufremjandi tilboð umvegis arbeiðsplássið.

Innan fyri økið *Sjúkufráveru* benda úrslitini á, at føroysku svarpersónarnir hava eitt sindur færri sjúkudagar samanborið við danskar arbeiðstakarar. Samanber mann úrslitini fyri sjúkufráveru upp á tvørs av bólkunum í kanningini, benda úrslitini á, at kvinnuligir arbeiðstakarar úr Føroyum í miðal hava uml. tveir fleiri sjúkudagar enn mannligir arbeiðstakarar. Harnæst peika úrslitini á, at arbeiðstakararnir yngri enn 25 ár hava næstan dupult so nógvar sjúkudagar enn arbeiðstakarar eldri enn 65 ár. Til endans benda úrslitini á, at sjúkufráveran er hægst innan fyri starvsbólkarnar 'Annað handaligt arbeiði' og 'Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap'.

Úrslitini viðvíkjandi *Tunglyndiseyðkenni* benda á, at ein eitt sindur størri partur av føroysku svarpersónunum hava ábendingar um tunglyndiseyðkenni samanborið við danskar arbeiðstakarar. Úrslitini benda eisini á, at ein størri partur av kvinnuligum arbeiðstakarum í Føroyum hava ábendingar um tunglyndiseyðkenni samanborið við

mannligar arbeiðstakarar. Harnæst benda úrslitini á, at ein týðiligt størri partur av arbeiðstakarum millum 25 og 34 ár hava tunglyndiseyðkenni samanborið við arbeiðstakararnar 55 ár og eldri. Til endans benda úrslitini á, at tað er ein størri partur av arbeiðstakarum í 'Annað handaligt arbeiði' og 'Tænastu- og søluarbeiði', sum hava ábendingar um tunglyndiseyðkenni samanborið við hinar starvsbólkarnar í kanningini. Her vísa úrslitini eisini, at tað eru fægst í starvsbólkunum 'Leiðsluarbeiði' og 'Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði' við ábendingum um tunglyndiseyðkenni (sí talvu 3).

Samanumtikið geva úrslitini í hesari kanning greiðar ábendingar um, hvørjir starvs- og aldursbólkar serliga tykjast vera í vanda fyri at uppliva neilig viðurskifti í arbeiðsumhvørvinum. Úrslitini geva somuleiðis ábendingar um, hvussu heilsan og trivnaðurin er upp á tvørs av bólkunum. Tað sæst týðiliga, at teir yngstu arbeiðstakararnir í Føroyum uppliva partar av bæði sálarliga og sosiala arbeiðsumhvørvinum at vera meira tyngjandi enn eldru arbeiðstakararnir, men eisini innan øki av likamliga og evnafrøðiliga arbeiðsumhvørvinum umframt heilsu og arbeiðsførleika, eru tað yngru arbeiðstakararnir, sum eru mest tyngdir. Úrslitini geva harumframt greiðar ábendingar um arbeiðsumhvørvið og heilsuna upp á tvørs av starvsbólkum. Sum heild eru tað serliga starvsbólkar sum 'Annað handaligt arbeiði' og 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði', sum eru tyngdir innan eina røð av økjum, ið hava týdning fyri arbeiðsumhvørvið.

**Samanhangir millum arbeiðsumhvørvi og heilsu**

Í frágreiðingini hava vit eisini kannað samanhangir millum ymisk viðurskifti innan arbeiðsumhvørvið og tunglyndiseyðkenni og sjúkufráveru. Hesi úrslit benda á, at fleiri viðurskifti í arbeiðinum hanga saman við ávikavist tunglyndiseyðkennum og sjúkufráveru, og benda sostatt á, at ein røð av viðurskiftum í arbeiðsumhvørvinum hava týdning fyri heilsuna hjá svarpersónunum.

Greiningarnar vísa millum annað, at svarpersónar, sum svara, at tey hava eitt 'gott' psykososialt arbeiðsumhvørvi minni sannlíkt siga seg hava tunglyndiseyðkenni og sjúkufráveru. Harafturímóti vísa úrslitini, at um mann hevur verið fyri neiligari atferð í arbeiðinum, so hevur mann eisini í størri mun lyndi til at siga frá fleiri tunglyndiseyðkennum og hægri sjúkufráveru.

Greiningarnar vísa harumframt, at viðurskifti, ið knýta seg til arbeiðsumhvørvið so sum likamlig arbeiðsbyrða og tyngjandi arbeiðsstøður, trupulleikar við húðini, órógvandi og harður larmur, umframt tað at hava verið fyri einum arbeiðsóhappi øki um vandan fyri tunglyndiseyðkennum og sjúkufráveru. Greiningarnar vísa eisini, at teir svarpersónar, sum siga frá pínu, uppliva møði og svøvntrupulleikar hava lyndi til hava fleiri tunglyndiseyðkenni og hægri sjúkufráveru. Til endans vísa greiningarnar, at tey, sum meta heilsuna, likamliga og sálarliga arbeiðsførleikan jaliga, minni sannlíkt uppliva tunglyndiseyðkenni og sjúkufráveru.

**Háttalagið**

Úrslitini í hesi frágreiðing byggja á eina spurnablaðskanning, sum allir arbeiðstakarar í Føroyum høvdu møguleika fyri at luttaka í. Talið á arbeiðstakarum í Føroyum var uml. 28.000 persónar, og vit høvdu fylgjandi treytir fyri luttøku: Arbeiðstakarar 18 ár og eldri

við fleiri enn 8 vikuligum arbeiðstímum, førleika at lesa og skilja føroyskt og føroyskum arbeiðsgevara. Vit roknaðu tí við einum bólki á 22.000 arbeiðstakarar[1]. Vit hava skrásett 9.420 svør, sum hava við sær eitt svarprosent á 42,8. Tað veruliga luttakaratalið er tó nakað lægri, av tí at vit hava skrásett færri svør uppá okkara spurningar um arbeiðsumhvørvi, heilsu og trivnað. Innsavnaðu dáturnar hava sostatt bæði styrkir og veikleikar. Øðrumegin er svarprosentið lutfalsliga lágt, men hinvegin er kanningin grundað á svar frá einum stórum parti av føroyskum arbeiðstakarum, sum má verða roknað sum ein týðandi styrki við kanningini.

**Útlit**

Kanningin er tann fyrsta av sínum slag í Føroyum og kemur við sínum íkasti soleiðis við nýggjari vitan um arbeiðsumhvørvi, heilsu og trivnað millum arbeiðstakarar í Føroyum.

I hesi frágreiðing eru vit byrjað upp á greiningina av dátunum, men tað er eisini ætlanin hjá rithøvundunum, at úrslitini kunnu geva øðrum granskarum íblástur til at kanna fleiri viðurskifti viðvíkjandi arbeiðsumhvørvi, heilsu og trivnaði á føroyska arbeiðsmarknaðinum.

Úrslitini í frágreiðingini eru harafturat týðandi fyri føroyska arbeiðsmarknaðin, av tí at vit í frágreiðingini hava eyðmerkt fleiri trupulleikar og møguleikar fyri fyribyrging, sum kunnu verða brúkt sum útgangsstøði fyri átøkum, ið hava til endamáls at betra um arbeiðsumhvørvið í Føroyum og harvið møguleikanum at varðveita og útvega arbeiðsmegina, sum er neyðug komandi áratíggjuni.

[1] Hagstovan, 2024: AM03041 Løntakarar skiftir á aldur, kyn og føðiland/ríkisborgaraskap (1985M01-2023M11). PxWeb (hagstova.fo)

## Talva 1: Yvirlit av úrslitum fyri psykososialum arbeiðsumhvørvi og trivnaði av kannaðu bólkunum í kanningini

| **Øki** | **Skipan av arbeiðinum** | | | | | | | | **Krøv í arbeiðinum** | | | | | | **Samstarv** | | | **Leiðsla** | | | | | | **HB** | **Trivnaður** | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Starvsbólkarnir** | **1** | **2** | **3** | **4** | **5** | **6** | **7** | **8** | **9** | **10** | **11** | **12** | **13** | **14** | **15** | **16** | **17** | **18** | **19** | **20** | **21** | **22** | **23** | **24** | **25** | **26** | **27** | **28** | **29** | **30** | **31** | **32** | **Evni** |
| Leiðsluarbeiði | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Arbeiði á heilsuøkinum | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Vanligt kontór- og kundatænastu-arbeiði | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Tænastu- og søluarbeiði | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Arbeiði innan fyri landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Handverkara-arbeiði | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Annað handaligt arbeiði | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |

**Evni**

1. Ávirkan í arbeiðinum
2. Ávirkan á arbeiðstíðir
3. Menningar-møguleikar
4. Greidleiki um leiklutir
5. Ósemjur um leiklutir
6. Møguleikar fyri at loysa arbeiðs-uppgávurnar
7. Óneyðugar arbeiðsuppgávur
8. Forsøgni í arbeiðinum
9. Arbeiðsferð
10. Arbeiðsmongd
11. Kenslulig krøv
12. Krøv um at fjala kenslur
13. Kognitiv krøv
14. Markleyst arbeiði
15. Sosialur stuðul frá starvsfeløgum
16. Sambond við nærmastu starvsfelagar
17. Álit á starvsfelagar
18. Samband við nærmasta leiðara
19. Leiðslugóðska
20. Sosialur stuðul frá nærmasta leiðara
21. Rættvísi
22. Hvussu leiðslan tekur starvsfólk uppí
23. Viðurkenning

| | Skipan av arbeiðinum | | | | | | | | Krøv í arbeiðinum | | | | | | Samstarv | | | Leiðsla | | | | | | HB | Trivnaður | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Kyn** | 1 | 2 | 3 | 4 | 5 | 6 | 7 | 8 | 9 | 10 | 11 | 12 | 13 | 14 | 15 | 16 | 17 | 18 | 19 | 20 | 21 | 22 | 23 | 24 | 25 | 26 | 27 | 28 | 29 | 30 | 31 | 32 |
| Menn | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Kvinnur | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| | **Skipan av arbeiðinum** | | | | | | | | **Krøv í arbeiðinum** | | | | | | **Samstarv** | | | **Leiðsla** | | | | | | **HB** | **Trivnaður** | | | | | | | |
| **Aldursbólkarnir** | 1 | 2 | 3 | 4 | 5 | 6 | 7 | 8 | 9 | 10 | 11 | 12 | 13 | 14 | 15 | 16 | 17 | 18 | 19 | 20 | 21 | 22 | 23 | 24 | 25 | 26 | 27 | 28 | 29 | 30 | 31 | 32 |
| Undir 25 ár | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| 25 til 34 ár | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| 35 til 44 ár | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| 45 til 54 ár | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| 55 til 64 ár | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Yvir 65 ár | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |

24. Handfaring av broytingum
25. Meining í arbeiðinum
26. Hvussu arbeiðstakarin tekur lut á arbeiðs-plássinum
27. Hugbinding í arbeiðinum
28. Óvissa í starvssetanini
29. Strongd
30. Nøgdsemi við arbeiðið
31. Nøgdsemi við sálarliga arbeiðs-umhvørvið
32. Tvídráttir millum arbeiðslív og heimalív

Viðmerkingar: Puntar, merktir við **myrkagrønum** og **ljósagrønum** vísa, at miðal arbeiðstakarin í viðkomandi bólki er ávikavist 5 og 3 stig <u>betri</u> í viðkomandi dimensjónini, enn miðaltalið fyri allar luttakarar í kanningini. Puntar, merktir við **myrkareyðum** og **ljósareyðum** vísa, at miðalarbeiðstakarin í viðkomandi bólki er ávikavist 5 og 3 stig <u>verri</u> í viðkomandi dimensjónini, enn miðaltalið fyri allar luttakarar í kanningini. Styttingin HB merkir *Handfaring av broytingum*.

**Talva 2: Yvirlit yvir úrslit fyri neiliga atferð fyri kannaðu bólkarnar í kanningini (Prosent)**

| Neilig atferð | Hóttanir | Harðskapur | Happing | Kynslig happing | Mismunur/vánalig viðferð | Chikana |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Partur av svarpersónum úr Føroyum | 23,2 | 6,6 | 12,4 | 5,9 | 11,0 | 8,1 |
| **Kyn** | | | | | | |
| Maður | 17,7 | 2,5 | 10,5 | 2,6 | 8,4 | 6,3 |
| Kvinna | 26,8 | 9,1 | 13,5 | 8,3 | 13,4 | 9,4 |
| **Aldursbólkarnir** | | | | | | |
| < 25 ár | 24,4 | 10,6 | 12,6 | 17,1 | 22,2 | 7,4 |
| 25 - 34 ár | 26,1 | 8,9 | 12,7 | 10,9 | 16,3 | 6,4 |
| 35 - 44 ár | 25,5 | 7,1 | 15,2 | 7,5 | 13,3 | 8,9 |
| 45 - 54 ár | 24,5 | 5,9 | 12,2 | 4,4 | 9,9 | 9,6 |
| 55 - 64 ár | 20,4 | 5,0 | 11,5 | 2,3 | 7,7 | 7,7 |
| > 65 ár | 10,9 | 2,3 | 4,9 | 2,2 | 6,0 | 4,7 |
| **Starvsbólkarnir** | | | | | | |
| 1 Leiðsluarbeiði | 26,0 | 2,7 | 7,1 | 1,7 | 5,9 | 9,4 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 18,0 | 0,9 | 8,7 | 4,5 | 9,9 | 7,6 |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 42,6 | 16,4 | 13,1 | 12,3 | 11,0 | 13,3 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 30,6 | 18,4 | 15,9 | 6,0 | 13,9 | 11,2 |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 16,3 | 1,1 | 10,9 | 2,6 | 10,4 | 4,8 |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 15,4 | 0,8 | 12,2 | 4,9 | 11,4 | 6,0 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 18,2 | 4,0 | 13,1 | 11 | 14,2 | 9,0 |
| 8 Arbeiði innan fyri landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 13,2 | | 13,2 | 10,3 | 5,8 | |
| 9 Handverkaraarbeiði | 11,7 | | 13,0 | 4,9 | 10,2 | |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 19,8 | 3,6 | 18,3 | 7,1 | 14,9 | 4,8 |
| 11 Annað handaligt arbeiði | 18,4 | 3,3 | 16,2 | 7,0 | 16,7 | 7,1 |

Viðmerking: Bert úrslit við svarum frá fimm ella fleiri persónum verða víst. Tómu puntarnir í talvuni merkja sostatt, at færri enn fimm persónar hava svarað játtandi til, at tey hava upplivað nevndu neiligu gerðina.

**Talva 3: Yvirlit av úrslitum fyri ymiskar arbeiðsumhvørvisfaktorar av kannaðu bólkunum í kanningini**

| Øki | Likamligt arbeiðsumhvørvi | | | | | Evnafrøðiligt arbeiðsumhvørvi, larmur og ristingar | | | | Arbeiðsóhapp og trygd | | Heilsa og arbeiðsførleiki | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Starvsbólkarnir** | **1** | **2** | **3** | **4** | **5** | **6** | **7** | **8** | **9** | **10** | **11** | **12** | **13** | **14** | **15** | **16** | **17** | **18** | **19** | **20** | **21** |
| Leiðsluarbeiði | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Arbeiði á heilsuøkinum | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Vanligt kontór- og kundatænastu-arbeiði | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Tænastu- og søluarbeiði | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Arbeiði innan fyri landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Handverkara-arbeiði | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Annað handaligt arbeiði | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |

**Evni**

1. Likamligt hart arbeiði
2. Arbeiði til gongu/standandi arbeiði
3. Sitandi arbeiði
4. Tyngjandi arbeiðsstøður
5. Lyfting, skump ella togan
6. Trupulleikar við húðini*
7. Órógvandi larmur
8. Harður larmur
9. Harðar ristingar
10. Arbeiðsóhapp*
11. Trygd á arbeiðsplássinum
12. Sjálvmett heilsa
13. Likamligur arbeiðsførleiki
14. Sálarligur arbeiðsførleiki
15. Pína í arbeiðinum*
16. Avmarkað/ur av pínu í arbeiðinum*
17. Møði
18. Svøvntrupulleikar
19. Heilsufremjandi tilboð*
20. Sjálvmett sjúkufrávera**
21. Tunglyndiseyðkenni (MDI-stigatalið)*

| | Likamligt arbeiðsumhvørvi | | | | | Evnafrøðiligt arbeiðsumhvørvi, larmur og ristingar | | | | Arbeiðsóhapp og trygd | | Heilsa og arbeiðsførleiki | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Kyn** | **1** | **2** | **3** | **4** | **5** | **6** | **7** | **8** | **9** | **10** | **11** | **12** | **13** | **14** | **15** | **16** | **17** | **18** | **19** | **20** | **21** |
| Menn | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Kvinnur | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| | **Likamligt arbeiðsumhvørvi** | | | | | **Evnafrøðiligt arbeiðsumhvørvi, larmur og ristingar** | | | | **Arbeiðsóhapp og trygd** | | **Heilsa og arbeiðsførleiki** | | | | | | | | | |
| **Aldursbólkarnir** | **1** | **2** | **3** | **4** | **5** | **6** | **7** | **8** | **9** | **10** | **11** | **12** | **13** | **14** | **15** | **16** | **17** | **18** | **19** | **20** | **21** |
| Undir 25 ár | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| 25 til 34 ár | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| 35 til 44 ár | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| 45 til 54 ár | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| 55 til 64 ár | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Yvir 65 ár | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |

Viðmerkingar: Puntar, merktir við **myrkagrønum** og **ljósagrønum** vísa, at miðal arbeiðstakarin í viðkomandi bólki er ávikavist 5 og 3 stig betri í tí viðkomandi dimensjónini enn miðaltalið fyri allar luttakarar í kanningini. Puntar, merktir við **myrkareyðum** og **ljósareyðum** vísa, at miðalarbeiðstakarin í viðkomandi bólki er ávikavist 5 og 3 stig verri í viðkomandi dimensjónini enn miðaltalið fyri allar luttakarar í kanningini. Puntar merktir við * merkja, at talan er um prosentir, har litirnir merkja antin ein mun upp á 3 ella 5 prosent, og eru sostatt ikkí eitt miðaltal á stiganum, sum í hinum evnunum. **Sjálvmett sjúkufrávera er uppgjørd í einum miðaltali av døgum við sjúkufráveru, og her merkja litirnir ein mun upp á antin 3 ella 5 dagar.

# Summary

In this report, we present the results from a national survey on work environment, well-being, and health among employees in the Faroe Islands. The survey is the first of its' kind among employees in the Faroe Islands and, accordingly, this report contributes with new knowledge about the work environment in the Faroe Islands. In a previous report entitled *Psychosocial work environment among employees in the Faroe Islands (Psykosocialt arbejdsmiljø blandt arbejdstagere på Færøerne)*, we presented some selected and overall results about the psychosocial work environment from the survey. In this report, we present all results from the survey, which contains a wide range of dimensions describing work environment, well-being, and health.

The aim of this project was to conduct a broad survey to map and describe the work environment, well-being, and health among employees in the Faroe Islands. Moreover, the aim of the project was to investigate the work environment across different groups described by gender, age, and job. This provides us with an opportunity to identify groups in the Faroese working population with particular strengths or challenges in their work environment, and this knowledge is instrumental to initiate preventive initiatives to improve the work environment and the health and well-being among employees in the Faroe Islands. In this report, we also investigate associations between factors in the work environment and selected health-related outcomes. Additionally, we have also had the opportunity to compare the results from the present survey with results from two Danish surveys on work environment and health, and the report thereby provides insights into how the work environment, well-being, and health among Faroese employees compares with a Danish working population.

The survey is based on the Danish Psychosocial Work Environment Questionnaire (DPQ), which is a validated questionnaire on psychosocial work environment that was developed by the National Research Centre for the Working Environment (NRCWE), and the survey also includes questions from the Danish questionnaire survey *Arbejdsmiljø og Helbred (Work Environment and Health)*, that was also developed by the NRCWE.

The study questionnaire operationalizes 38 different dimensions of the psychosocial work environment and these 38 dimensions can further be categorized into seven overall domains:

- Work organization
- Demands
- Cooperation
- Management
- Changes in the workplace
- Negative acts
- Well-being

The study questionnaire additionally operationalizes the following domains:

- Ergonomic exposures in the work environment
- Chemical exposures in the work environment

- Noise and vibrations
- Occupational accidents and workplace safety
- Health and work-ability

Overall, the results of the survey indicate some similarities and differences when comparing results from the Faroe Islands and Denmark. When comparing across groups in the Faroese study, the results indicate particular differences in the assessment of the work environment and health across the 11 job groups as well as across age groups. Overall, the results show that we find the biggest challenges pertaining to work environment and health among the younger respondents, while we conversely find the most positive assessments among older respondents.

**Psychosocial work environment and well-being at work**
When looking at the psychosocial work environment, the results show that Faroese respondents score lower on the following scales: *influence at work*, *possibilities for development* and *predictability,* compared to respondents from the Danish survey. The results also show that the Faroese respondents report higher levels of *emotional demands* at work compared to Danish respondents. The results also show, however, that Faroese respondents generally experience better cooperation compared to the Danish respondents, as Faroese respondents score higher on the scales *cooperation with colleagues* and *trust between colleagues*. Finally, the results show smaller differences in how Danish and Faroese respondents assess various aspects in relation to leadership and management. However, the results show that the Faroese respondents have significantly lower scores on the scale *involvement of employees* than Danish respondents.

The results also show a higher incidence of negative acts among respondents from the Faroe Islands than among Danish respondents. The higher incidence particularly manifests itself in the following dimensions: *violence*, *threats*, *bullying*, *sexual harassment* and *discrimination*. Based on these results, it may therefore seem surprising that the respondents from the Faroe Islands generally report better work-related well-being compared to respondents from Denmark, and – this especially applies for the dimensions: *commitment to the workplace*, *job satisfaction*, *stress* and *conflict between work-life and private life*.

The results of the survey further show that the assessment of the psychosocial work environment and well-being at work varies across the investigated age groups and job groups (see table 1). Overall, the results suggest that respondents in the job group 'Managers' have better scale-scores on a wide range of dimensions within the psychosocial work environment and well-being (cf. green markings in table 1) than the average of all respondents. On the other hand, respondents in the job groups 'Plant and Machine Operators, and Assemblers' and 'Elementary Occupations' have worse scale-scores on a number of the dimensions regarding psychosocial work environment and well-being (cf. red markings in table 1).

Among other things, table 1 shows that respondents in the job groups: 'Plant and Machine Operators, and Assemblers' and 'Elementary Occupations' are challenged by several stressors in the psychosocial work environment in the domains: *work organization*,

*cooperation*, *management* and *well-being*. Conversely, the results show that respondents in these two job groups generally experience lower *demands at work* compared to the other job groups in the survey (see table 1). Accordingly, the results indicate that the work environment of the job groups 'Elementary Occupations' and ''Plant and Machine Operators, and Assemblers ' are not burdened by high demands, but rather by a lack of positive resources, such as positive working relationships with colleagues and managers.

In addition, the results show that respondents in 'Health Professionals' and 'Teaching Professionals' also have challenges in the domains *work organization* and *demands at work* – especially the *emotional demands* at work. Finally, the results show that respondents in the job group 'Managers' experience higher demands at work for the scales: *quantitative demands*, *cognitive demands* and *work without boundaries,* compared to other job groups in the survey. The results of the study further show that women report more intense *emotional demands* at work and more intense *demands to hide emotions* compared to men. Likewise, the results show that women report *stress* to a higher extent compared to men.

The results further indicate that the psychosocial work environment and well-being vary particularly across the age groups in the Faroese study population. The results show that younger respondents report a poorer work environment, especially in relation to dimensions in the domain of *work organization*, but also in relation to their general well-being at work. They exhibit significantly worse scores on the following scales: *meaning at work, commitment to the workplace, work hugbinding, stress, job satisfaction, satisfaction with psychological working environment* and *conflict between work-life and private life*. In contrast, the results look markedly different for older respondents over the age of 65, who generally rate their psychosocial work environment and well-being more positively than younger respondents (see table 1).

When looking at the results for negative acts, the results show that *threats* is the most frequently occurring negative act among the respondents (see table 2). Next, the results indicate that women report more frequent exposure to negative acts compared to men, and especially when it concerns behaviors as *threats*, *violence*, *sexual harassment* and *discrimination*. The results also show that younger respondents report more frequent exposure to negative acts than older respondents do. When we compare the results for negative acts for the different job groups, the results show that a larger proportion of respondents in the job groups 'Health Professionals' and 'Teaching Professionals' report exposure to *threats*, *violence* and *harassment* than respondents in other job groups. The results further indicate that *bullying* and *discrimination* occur more frequently among respondents in 'Plant and Machine Operators, and Assemblers' and 'Elementary Occupations' than among the other job groups. Finally, the results show a higher incidence of *bullying* among respondents in the job group 'Teaching Professionals' compared to the incidence of bullying among the other job groups in the survey (see table 2).

**Ergonomic exposures in the work environment**

For the remaining work environment factors and indicators of health and well-being that we have investigated in the study, the results also show some similarities and differences between the results from the Faroese and Danish study populations. When comparing

the results in the Danish and Faroese surveys, the results show that Faroese respondents are slightly more likely to report higher physical workload when compared to Danish respondents. For the other exposures that were investigated in relation to the ergonomic work environment (i.e. *walking/sitting work*, *awkward working positions* and *lifting, pushing and pulling of loads*) the results varied slightly more, when comparing Denmark and the Faroe Islands.

When we compare results for ergonomic exposures in the work environment across groups in the study, the results show that the following job groups report more severe ergonomic exposures: 'Service and Sales Worker', 'Skilled Agricultural, Forestry and Fishery Workers', 'Craft and Related Trade Workers', 'Plant and Machine Operators, and Assemblers' and 'Elementary Occupations'. Conversely, the ergonomic work environment exposures appear less strained for respondents in the following job groups: 'Managers', 'Professionals' and 'Clerical Support Workers.' See table 3.

In addition, the results show that younger respondents report more severe ergonomic exposures in the work environment compared to older respondents. This especially applies to respondents under 25 years of age, but also to respondents aged 25 to 34 years. See table 3.

**Chemical exposures in the work environment, noise and vibrations**

When comparing the results between Faroese and Danish respondents, the results show that respondents from the Faroe Islands to a lesser extent report having *skin contact with chemicals* and *having wet and damp hands*. However, the proportion of respondents from Denmark and the Faroe Islands who report having *skin problems on their hands* is almost the same. When comparing across job groups in the study, the results show that respondents in the following job groups: 'Service and Sales Workers', 'Skilled Agricultural, Forestry and Fishery Workers', 'Craft and Related Trade Workers', 'Plant and Machine Operators, and Assemblers', 'Elementary Occupations' and 'Health Professionals', report a higher prevalence of *skin problems on the hands* compared to respondents from the other job groups. When we compare the results across gender, the results show that women are more likely to report *skin problems* compared to men. Finally, the results suggest that *skin problems* occur more frequently among younger respondents than among older respondents. See table 3.

The results on noise and vibrations show that respondents from the Faroe Islands report exposure to *disturbing noise* to a lesser extent than the Danish respondents do. On the other hand, a larger proportion of Faroese respondents report exposure to *high noise* when compared to Danish respondents, while there was a smaller difference in the frequency of exposure to *strong vibrations* between the two populations. Across groups in the study, the results show that it is mainly respondents in the following job groups: 'Skilled Agricultural, Forestry and Fishery Workers', 'Craft and Related Trade Workers', 'Plant and Machine Operators, and Assemblers' and 'Elementary Occupations', who report exposure to *disturbing noise* and *loud noise* as well as *strong vibrations*. Respondents in 'Teaching Professionals' also report exposure to higher levels of *disturbing noise* and *loud noise* compared to the average of all respondents in the survey (see table 3). In

addition, the results show that respondents in the job group 'Technicians and Associate Professionals' also appear to experience challenges in relation to *noise* and *vibrations*. Moreover, the results show that respondents in the job groups: 'Managers', 'Professionals', 'Health Professionals' and 'Clerical Support Workers' to a lesser extent report exposure to *noise* and *vibrations* at work. Finally, the results show that self-reported exposure to *noise* and *vibrations* is more pronounced among men than among women, and also more pronounced among younger respondents than among older respondents. See table 3.

**Occupational accidents and workplace safety**

Within the domain *Occupational accidents and workplace safety*, the results shows minor differences in the proportion of *occupational accidents* between respondents from Denmark and the Faroe Islands. In addition, the results show that the largest proportion of respondents, who have experienced at least one *occupational accident,* is within the following job groups: 'Craft and Related Trade Workers', 'Plant and Machine Operators, and Assemblers' and 'Elementary Occupations'. At the same time, the results show that respondents in the job group 'Elementary Occupations' also report a poorer *safety climate* in the workplace than the other job groups in the study. The results in this domain, therefore, indicate notable challenges for respondents in 'Elementary Occupations', as the results for this job group suggest a poor *safety climate* and a significantly higher proportion of *occupational accidents* compared to all respondents. These results provide a clear indication of a potential for improvement for this job group in order to enhance workplace safety and to prevent occupational accidents. Finally, the results also show a significantly higher incidence of *occupational accidents* among younger respondents in the study population. See table 3.

**Health and work ability**

When comparing the results between Faroese and Danish respondents in the domain of *health* and *work ability*, the results show that Faroese respondents have assessed their overall *health* as being slightly worse, when compared to the Danish respondents. Similar results are seen for self-assessed *physical* and *mental work ability*, where the Faroese respondents also assess their *physical* and *mental work ability* as being worse compared to respondents from Denmark. The results also show that respondents in the job groups 'Elementary Occupations' and 'Plant and Machine Operators, and Assemblers' rate their general *health* as being worse compared to the average of all respondents from the Faroe Islands, while respondents in the job group 'Managers' rate their *health* as better compared to the other job groups (see table 3). In addition, the results show that the youngest respondents in the study rate their *health* as being worse compared to the remaining age groups.

The results also show that the following job groups: 'Service and Sales Workers', 'Skilled Agricultural, Forestry and Fishery Workers', 'Craft and Related Trade Workers', 'Plant and Machine Operators, and Assemblers' and 'Elementary Occupations' rate their *physical work ability* as being worse compared to the average of all respondents in the survey. Conversely, the results show that respondents in the job groups 'Managers' and 'Professionals' have assessed themselves as having better *physical work ability* compared to the average of all respondents in the survey (see table 3). Thus, the results indicate

that the job groups who generally rate themselves as having hard physical and strained work environment are also the job groups who have reported the poorest *physical work ability*. The results also show that the oldest respondents have reported a poorer *physical work ability* compared to the average of all respondents in the survey.

When looking at the *mental work ability*, the results show fewer marked differences across the groups in the study. Accordingly, respondents within the following job groups: 'Health Professionals', 'Teaching Professionals' and 'Elementary Occupations' have assessed themselves as having a slightly worse *mental work ability* compared to the average of all respondents from the study population. On the other hand, respondents in the job groups 'Managers' and 'Professionals' exhibit a better *mental work ability* compared to the average of all respondents (see table 3). The results also show that men have rated their *mental work ability* as being better compared to women.

Within the area *pain*, the results show no significant differences in the number of respondents from the Faroese and Danish surveys who experience *pain* several times per week, as approximately 30 percent from both populations indicated that they experience pain one or more times per week. On the other hand, the results show greater differences in the assessment as to whether this *pain* limit the respondents in their work. Here, the results show that Faroese respondents report being limited at work by the reported *pain* to a much greater extent compared to the Danish respondents.

The results also show that a large proportion of respondents in the following job groups have reported that they experience *pain* at work several times a week: 'Elementary Occupations', 'Plant and Machine Operators, and Assemblers' , 'Health Professionals', 'Craft and Related Trade Workers' and 'Skilled Agricultural, Forestry and Fishery Workers'. On the other hand, respondents in the job groups: 'Managers', 'Professionals', 'Technicians and Associate Professionals ' and 'Clerical Support Workers', reported *pain* at work to a lesser extent compared to the average of all job groups, and the results further show that these job groups also reported being limited in work due to *pain* to a lesser extent. In addition, the results show that a larger proportion of younger respondents under the age of 34 report *pain* at work weekly, while the oldest respondents in the study population report pain at work less frequently. The results further show that a larger proportion of younger respondents under the age of 25 experience that the reported *pain* limit them in their work, while the oldest respondents over 65 years only to a lesser extent report being limited due to *pain*.

When comparing the results from Denmark and the Faroe Islands in the domain of *fatigue* and *sleeping problems*, the results show only minor differences between the two populations. The results do show, however, that respondents from the Faroe Islands report *fatigue* in relation to their work to a slightly higher degree, while Danish respondents experience *sleeping problems* to a slightly higher degree. Across groups in the study, the results show that the following job groups: 'Health Professionals', 'Teaching Professionals', 'Elementary Occupations' and 'Plant and Machine Operators, and Assemblers' experience *fatigue* after a working day to a higher extent compared to the average of all respondents. The results also show that younger respondents under the age of 34 have reported higher levels of *fatigue* after a working day, whereas respondents

over the age of 55 have reported *fatigue* to a lesser extent after a typical working day. Finally, the results show that respondents in 'Elementary Occupations' report *sleeping problems* more frequently than other job groups in the study. Also within this area, the results indicate that in particular younger respondents report *sleeping problems* compared to older respondents.

Within the area of *health promotion*, the results indicate that Danish respondents receive *health promotion* offers in connection with work to a greater extent than the Faroese respondents, with the exception of offers for *exercise facilities*, where there are only minor differences between the two populations. For the other types of health promotion activities: *smoking cessation*, *dietary guidance* and *offers for treatment schemes*, the proportion of Danish respondents who have received offers in this regard is significantly higher compared to Faroese respondents. The results further show that it is mainly respondents in the job groups: 'Professionals' and 'Technicians and Associate Professionals' who report having received *health promotion* offers via the workplace.

Within the domain *sickness absence*, the results show that Faroese respondents have slightly fewer days with *sickness absence* over the past 12 months compared to Danish respondents. When comparing the results for *sickness absence* across groups in the study, the results show that women, on average, report approximately two days more of *sickness absence* over the past 12 months compared to men. The results also show that the younger respondents under the age of 25 have almost twice as many days with *sickness absence* as respondents over the age of 65. Finally, the results show that the average level of *sickness absence* is highest within the job groups: 'Elementary Occupations' and 'Skilled Agricultural, Forestry and Fishery Workers'.

The results regarding *depressive symptoms* indicate that a slightly larger proportion of the Faroese respondents have indications of *depressive symptoms* compared to the Danish respondents. The results also show that a larger proportion of women from the Faroe Islands have indications of *depressive symptoms* compared to men. Furthermore, the results show that a significantly larger proportion of the younger respondents have indications of *depressive symptoms* compared to the older respondents aged 55 or more. Finally, the results show that a larger proportion of respondents in 'Elementary Occupations' and 'Service and Sales Workers' have indications of *depressive symptoms* compared to the other job groups in the study. Conversely, the results show the lowest prevalence indications of *depressive symptoms* in the job groups 'Managers' and 'Professionals' (see table 3).

In summary, the results of this study provide some clear indications as to which job and age groups that seem to be at risk of experiencing 'negative' exposures in the work environment. Moreover, the results give some indications on which job and age groups that are at risk of reporting poor health and well-being. The results clearly show that the youngest respondents from the Faroe Islands both experience the psychosocial work environment as being more stressful compared to the older respondents. Also, in the areas of the ergonomic and chemical work environment as well as health and work ability, it is the younger respondents who appear to be faced with most challenges in terms of work environment, health and well-being. Furthermore, the results provide

clear indications of the status of the work environment, well-being and health across job groups in the study. Overall, it is especially job groups such as 'Elementary Occupations' and 'Plant and Machine Operators, and Assemblers' that find themselves in an adverse position in many of the dimensions that were investigated in this study.

**Associations between work environment and health**

In this report, we have also examined associations between the investigated work environment factors and the following health-related outcomes: *indication of depressive symptoms* and *self-reported sickness absence*. The results show that several factors in the work environment are associated with indication of *depressive symptoms* and *sickness absence*, and accordingly, the results indicate that a large number of factors in the work environment may have an impact on the health of the respondents.

Among other things, the analyses show that respondents who report that they have a 'good' psychosocial work environment are also less likely to report *depressive symptoms* and *sickness absence*. On the other hand, the results indicate that respondents reporting exposure to *negative acts* at work are also more likely to report more *depressive symptoms* and higher levels of *sickness absence*.

The analyses further show that factors related to the work environment such as exposure to *high physical work load*, *awkward working positions*, *skin problems*, *disturbing* and *loud noise*, as well as having been exposed to an *occupational accident* increase the risk of *depressive symptoms* and *sickness absence*. The analyses also show that respondents who report *pain*, *fatigue* and *sleeping problems* are more likely to report more *depressive symptoms* and higher levels *sickness absence*. Finally, the analyses show that respondents, who rate their own *health*, *physical* and *mental work ability* positively, are less likely to report *depressive symptoms* and *sickness absence*.

**Methodological considerations**

The results in this report are based on a survey in which the entire workforce in the Faroe Islands was invited to participate. The total workforce in the Faroe Islands consists of approximately 28,000 persons, and we had the following exclusion criteria for the study population: respondents younger than 18, respondents with less than eight working hours per week, respondents with a lack of Faroese reading and comprehension skills and/or respondents with a foreign employer were excluded from the study population. Against this background, we therefore expect a real population size of approximately 22,000 persons.[2] We have registered 9,420 responses, which implies a response rate of 42.8. However, the real participation rate is somewhat lower, as we have recorded fewer responses to our survey questions on work environment, health and well-being. Thus, the data material of the study has both strengths and weaknesses. On the one hand, the response rate is relatively low, which can be considered a weakness of the study. On the other hand, the survey is based on responses from a large part of the total Faroese workforce, which must be considered a significant strength of the study.

[2] Færøernes Statistik, 2024: AM03041 Løntakarar skiftir á aldur, kyn og føðiland/ríkisborgaraskap (1985M01-2023M11). PxWeb (hagstova.fo)

**Perspectives**
The study is the first of its kind in the Faroe Islands and thus contributes with new knowledge about the work environment, health and well-being among employees in the Faroe Islands.

In this report, we have initiated the analysis of this unique data set, however, it is also the intention of the authors that the results in this report can inspire other researchers to investigate more and other aspects of the work environment, health and well-being in the Faroese labor market.

The results in the report are also relevant for the Faroese labor market, as we have identified a number of issues and prevention potentials. These findings may be used as a starting point for strengthened and more focused initiatives aiming at improving the work environment, which on the one hand may contribute to strengthening the work environment in the Faroe Islands and on the other hand could enhance the possibilities for recruiting and retaining the workforce that is needed over the coming decade.

**Table 1: Overview of results for the psychosocial work environment and well-being**

| Domain | Work organization | | | | | | | | Demands | | | | | | Cooperation | | | Management | | | | | | CM | Well-being | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Job groups** | **1** | **2** | **3** | **4** | **5** | **6** | **7** | **8** | **9** | **10** | **11** | **12** | **13** | **14** | **15** | **16** | **17** | **18** | **19** | **20** | **21** | **22** | **23** | **24** | **25** | **26** | **27** | **28** | **29** | **30** | **31** | **32** |
| Managers | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Professionals | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Health Professionals | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Teaching Professionals | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Technicians and Associate Professionals | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Clerical Support Workers | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Service and Sales Workers | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Skilled Agricultural, Forestry and Fishery Workers | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Craft and Related Trade Workers | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Plant and Machine Operators, and Assemblers | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Elementary Occupations | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |

**Dimensions**

1. Influence at work
2. Influence on working hours
3. Possibilities for development
4. Role clarity
5. Role conflicts
6. Possibilities for performing work tasks
7. Unnecessary work tasks
8. Predictability
9. Work pace
10. Quantitative demands
11. Emotional demands
12. Demands to conceal feelings
13. Cognitive demands
14. Work without boundaries
15. Social support from colleagues
16. Cooperation between colleagues
17. Trust between colleagues
18. Cooperation with immediate supervisor
19. Quality of leadership
20. Social support from management
21. Justice in the workplace

| | Work organization | | | | | | | | Demands | | | | | | Cooperation | | | Management | | | | | | CM | Well-being | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Gender** | **1** | **2** | **3** | **4** | **5** | **6** | **7** | **8** | **9** | **10** | **11** | **12** | **13** | **14** | **15** | **16** | **17** | **18** | **19** | **20** | **21** | **22** | **23** | **24** | **25** | **26** | **27** | **28** | **29** | **30** | **31** | **32** |
| Men | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Women | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| | **Work organization** | | | | | | | | **Demands** | | | | | | **Cooperation** | | | **Management** | | | | | | **CM** | **Well-being** | | | | | | | |
| **Age** | **1** | **2** | **3** | **4** | **5** | **6** | **7** | **8** | **9** | **10** | **11** | **12** | **13** | **14** | **15** | **16** | **17** | **18** | **19** | **20** | **21** | **22** | **23** | **24** | **25** | **26** | **27** | **28** | **29** | **30** | **31** | **32** |
| < 25 years | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| 25 - 34 years | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| 35 - 44 years | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| 45 - 54 years | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| 55 - 64 years | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| > 65 years | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |

22. Involvement of employees
23. Recognition
24. Change management
25. Meaning at work
26. Commitment to the workplace
27. Work hugbinding
28. Job insecurity
29. Stress
30. Job satisfaction
31. Overall assessment of the psychosocial work environment
32. Conflict between work and private life

Note: **1)** Fields marked with a **dark green** and **light green** color show that the average respondent within a given group reports a score that is respectively 5 or 3 points better on the given dimension compared to the average of all respondents in the survey. Likewise, fields marked with a **dark red** and **light red** color show that the average respondent within a given group reports a score that is respectively 5 or 3 points worse on the given dimension compared to the average of all respondents in the survey. 2) CM is an abbreviation of 'Change Management'

**Table 2: Overview of results for negative acts (Percent)**

| Negative acts | Threats | Violence | Bullying | Sexual harassment | Discrimination | Harassment |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Proportion of all respondents | 23,2 | 6,6 | 12,4 | 5,9 | 11,0 | 8,1 |
| **Gender** | | | | | | |
| Men | 17,7 | 2,5 | 10,5 | 2,6 | 8,4 | 6,3 |
| Women | 26,8 | 9,1 | 13,5 | 8,3 | 13,4 | 9,4 |
| **Age** | | | | | | |
| < 25 years | 24,4 | 10,6 | 12,6 | 17,1 | 22,2 | 7,4 |
| 25 - 34 years | 26,1 | 8,9 | 12,7 | 10,9 | 16,3 | 6,4 |
| 35 - 44 years | 25,5 | 7,1 | 15,2 | 7,5 | 13,3 | 8,9 |
| 45 - 54 years | 24,5 | 5,9 | 12,2 | 4,4 | 9,9 | 9,6 |
| 55 - 64 years | 20,4 | 5,0 | 11,5 | 2,3 | 7,7 | 7,7 |
| > 65 years | 10,9 | 2,3 | 4,9 | 2,2 | 6,0 | 4,7 |
| **Job groups** | | | | | | |
| 1 Managers | 26,0 | 2,7 | 7,1 | 1,7 | 5,9 | 9,4 |
| 2 Professionals | 18,0 | 0,9 | 8,7 | 4,5 | 9,9 | 7,6 |
| 3 Health Professionals | 42,6 | 16,4 | 13,1 | 12,3 | 11,0 | 13,3 |
| 4 Teaching Professionals | 30,6 | 18,4 | 15,9 | 6,0 | 13,9 | 11,2 |
| 5 Technicians and Associate Professionals | 16,3 | 1,1 | 10,9 | 2,6 | 10,4 | 4,8 |
| 6 Clerical Support Workers | 15,4 | 0,8 | 12,2 | 4,9 | 11,4 | 6,0 |
| 7 Service and Sales Workers | 18,2 | 4,0 | 13,1 | 11 | 14,2 | 9,0 |
| 8 Skilled Agricultural, Forestry and Fishery Workers | 13,2 | | 13,2 | 10,3 | 5,8 | |
| 9 Craft and Related Trade Workers | 11,7 | | 13,0 | 4,9 | 10,2 | |
| 10 Plant and Machine Operators, and Assemblers | 19,8 | 3,6 | 18,3 | 7,1 | 14,9 | 4,8 |
| 11 Elementary Occupations | 18,4 | 3,3 | 16,2 | 7,0 | 16,7 | 7,1 |

Note: We only show results where at least five respondents have answered the question. Blank cells in the table tells us that fewer than five respondents have answered that they have experienced the given negative act.

**Table 3: Overview of results for various work environment exposures**

| Domain | Ergonomic exposures in the work environment | | | | | Chemical exposures in the work environment, noise and vibrations | | | | Occupational accidents and safety | | Health and work-ability | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Job groups** | **1** | **2** | **3** | **4** | **5** | **6** | **7** | **8** | **9** | **10** | **11** | **12** | **13** | **14** | **15** | **16** | **17** | **18** | **19** | **20** | **21** |
| Managers | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Professionals | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Health Professionals | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Teaching Professionals | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Technicians and Associate Professionals | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Clerical Support Workers | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Service and Sales Workers | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Skilled Agricultural, Forestry and Fishery Workers | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Craft and Related Trade Workers | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Plant and Machine Operators, and Assemblers | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Elementary Occupations | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |

**Dimensions**

1. Physical workload
2. Walking/standing work
3. Sitting work
4. Awkward working positions
5. Lifting, pushing and pulling of loads
6. Skin problems*
7. Disturbing noise
8. Loud noise
9. Strong vibrations
10. Occupational accidents*
11. Safety climate in the workplace
12. Self-assessed health
13. Physical work ability
14. Mental work ability
15. Pain*
16. Limited at work due to pain*
17. Fatigue
18. Sleeping problems
19. Health promotion*
20. Self-reported sickness absence**
21. Depressive symptoms (MDI-score)*

| | **Ergonomic exposures in the work environment** | | | | | **Chemical exposures in the work environment, noise and vibrations** | | | | **Occupational accidents and safety** | | **Health and work-ability** | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Gender** | **1** | **2** | **3** | **4** | **5** | **6** | **7** | **8** | **9** | **10** | **11** | **12** | **13** | **14** | **15** | **16** | **17** | **18** | **19** | **20** | **21** |
| Men | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Women | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |

| | **Ergonomic exposures in the work environment** | | | | | **Chemical exposures in the work environment, noise and vibrations** | | | | **Occupational accidents and safety** | | **Health and work-ability** | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Age** | **1** | **2** | **3** | **4** | **5** | **6** | **7** | **8** | **9** | **10** | **11** | **12** | **13** | **14** | **15** | **16** | **17** | **18** | **19** | **20** | **21** |
| < 25 years | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| 25 - 34 years | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| 35 - 44 years | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| 45 – 54 years | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| 55 - 64 years | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| > 65 years | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |

Notes: 1) Fields marked with a **dark green** and **light green** color show that the average respondent within a given group reports a score that is respectively 5 or 3 points better on the given dimension compared to the average of all respondents in the survey. Likewise, fields marked with a **dark red** and **light red** color show that the average respondent within a given group reports a score that is respectively 5 or 3 points worse on the given dimensions compared to the average of all respondents in the survey. 2) Dimensions marked with * indicate that we compare results based on a percentage, where colors indicates either a 3 or a 5 percent difference. 3) **Self-reported sickness-absence is calculated on the average number of days of sickness-absence, and the colors therefore indicates either a 3 or a 5 day difference.

# 1 Inngangur

Tá ið talan er um arbeiðsumhvørvið, eru tað nógv ymisk viðurskifti upp á spæl. Arbeiðsumhvørvið fevnir um bæði psykososial og ergonomisk árin, men tað er eisini umráðandi at vísa møguligum vandum ans, sum eru í evnafrøðiliga arbeiðsumhvørvinum, ávirkanir innan larm og ristingar umframt viðurskifti í sambandi við arbeiðsóhapp og trygdarmentanina á arbeiðsplássinum.

Granskingin bendir á, at arbeiðsumhvørvið hevur stóran týdning fyri heilsuna og trivnaðin hjá arbeiðstakarum. Psykososiala arbeiðsumhvørvisgranskingin bendir so statt á, at tyngd í psykososiala arbeiðsumhvørvinum hongur saman við einum øktum vanda fyri sálarligum heilsutrupulleikum (1, 2), skerdum møguleika at halda upp á starvsfólk (3) umframt einum øktum vanda fyri drúgvari sjúkufráveru og óviljað at fara av arbeiðsmarknaðinum (4-8). Granskingin í likamligum arbeiðsumhvørvi vísir harumframt, at stór likamlig tyngd í arbeiðinum umframt arbeiði í klombrutum arbeiðsstøðum øki um vandan fyri at menna pínu í rørslulagnum (9). Henda likamliga tyngdin øki harafturat um vandan fyri drúgvari sjúkufráveru (10-12) og fyri fyritíðareftirløn (13, 14). Granskingin vísir eisini, at onnur viðurskifti í arbeiðinum sum t.d. harður larmur (15) ella órógvandi larmur (16) øki um vandan fyri drúgvari sjúkufráveru. Innan fyri tað evnafrøðiliga arbeiðsumhvørvið bendir granskingin harumframt á, at tað at vera fyri fyri ymiskum evnafrøðiligum tilfari øki um vandan fyri ymiskum húðtrupulleikum í mun til arbeiði sum t.d. hondeksem, sum í ringasta føri kann hava við sær sjúkufráveru, at skifta arbeiði og fyritíðareftirløn (17).

Fyri at kunna seta átøk í verk, sum miða móti at skapa burðardygg arbeiðspláss við høgum trivnaði, lágari sjúkufráveru og góðum møguleikum fyri at kunna halda upp á starvsfólkini, er umráðandi, at vitan verður útvegað um, hvørjar styrkir og avbjóðingar eru í ymisku økjunum av arbeiðsumhvørvinum. Tað er eisini umráðandi at útvega eina vitan um, hvørt tað eru ávísir bólkar á arbeiðsmarknaðinum – t.d. í mun til starvsbólk, kyn ella aldur – sum í serligan mun hava avbjóðingar vegna tyngjandi viðurskifti í arbeiðsumhvørvinum.

Henda vitan er bæði umráðandi fyri tey lokalu arbeiðsumhvørvisátøkini á ítøkiliga arbeiðsplássinum og í sambandi við íløgur, sum seta fokus á at styrkja arbeiðsumhvørvið og trivnaðin á arbeiðsplássum. Tað er umráðandi málrættaðum íløgum í arbeiðsumhvørvið, m.a. tí at nógv samfeløg í vesturheiminum hava avbjóðingar við at fáa nóg mikið av arbeiðsmegi komandi áratíggjuni, tí ein stórur partur av arbeiðstakarum fer frá vegna aldur og verður avloystur av lutfalsliga minni árgangum.

Ein partur av loysnini upp á henda trupulleika kann vera íløgur í arbeiðsumhvørvið, sum øðrumegin kann vera við til at tryggja, at fleiri arbeiðstakarar varðveita teirra heilsu, trivnað og arbeiðsførleika gjøgnum alt arbeiðslívið, og hinvegin viðvirka til at fyribyrgja sjúkufráveru hjá arbeiðstakarum. Ein triði vinningur við íløgum í arbeiðsumhvørvið kann vera, at eldri arbeiðstakarar í størri mun kunnu varðveita tilknýtið til arbeiðsmarknaðin.

Fyri at skapa nýggja vitan um arbeiðsumhvørvi og fyribyrgingartørv hjá ymsu bólkunum á føroyska arbeiðsmarknaðinum, hevur Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, Sjúkrahúsverk Føroya, gjørt eina spurnakanning um arbeiðsumhvørvi, heilsu og trivnað millum

arbeiðstakarum í Føroyum. Kanningin varð gjørd í tíðarskeiðnum apríl til desember 2021. Hetta háttalagið varð valt fyri at kunna gera eina breiða kortlegging av ymsu viðurskiftunum í arbeiðsumhvørvinum, við møguleika fyri at samanbera úrslit tvørtur um kyn, aldur, vinnugreinar o.s.fr.

Vit hava í einari aðrari frágreiðing við heitinum *Psykososialt arbeiðsumhvørvi millum arbeiðstakarar í Føroyum* (18), lýst úrslitini viðvíkjandi psykososiala arbeiðsumhvørvinum úr hesari spurnakanning, har úrslitini úr føroysku kanningini vórðu samanborin við úrslit frá danskari tilvísingarkanning (19). Endamálið við hesari frágreiðing er sostatt at lýsa samlaðu úrslitini frá kanningi um arbeiðsumhvørvi, heilsu og trivnað í Føroyum. Í hesi frágreiðing leggja vit fram úrslit um psykososiala arbeiðsumhvørvið, likamliga og evnafrøðiliga arbeiðsumhvørvið umframt úrslit um larm, ristingar, arbeiðsóhapp og trygdarmentan. Í frágreiðingini lýsa vit eisini trivnað, heilsu og arbeiðsførleika.

Úrslitini verða samanborin við úrslit frá tveimum ymiskum donskum kanningum, ávikavist einari kanning av psykososiala arbeiðsumhvørvinum á donskum arbeiðsplássum og kanningin *Arbeiðsumhvørvi og Heilsa 2018* (19, 20). Harumframt leggja vit fram og lýsa úrslitini úr hesari kanning av arbeiðsumhvørvi, heilsu og trivnað í Føroyum tvørtur um kyn, aldur og starvsbólkar. Frágreiðingin kann tískil vera við til at eyðmerkja bólkar av føroyskum arbeiðstakarum, har tørvur kann vera á at seta í verk átøk, ið hava til endamáls at betra um øki av arbeiðsumhvørvinum, trivnaðinum og heilsuni.

Kanningin er tann fyrsta av sínum slag í Føroyum, og við hesi frágreiðing kemur nýggj vitan um arbeiðsumhvørvi, heilsu og trivnað millum starvsfólk á føroyskum arbeiðsplássum. Sum nevnt omanfyri kunnu úrslitini verða grundarlag undir málrættaðum átøkum í mun til arbeiðsumhvørvið. Frágreiðingin hevur sostatt eitt endamál rættað móti praksis fyri at skapa tryggari, sunnari og burðardyggari arbeiðspláss í Føroyum. Hetta kann vera við til at tryggja arbeiðsmegina, sum tørvur er á í Føroyum. Harumframt kunnu styrktar íløgur í arbeiðsumhvørvið vera við til at skapa betri arbeiðslív og harvið eina økta lívsgóðsku í føroyska samfelagnum.

Umframt endamálið rættað móti praksis, hava rithøvundarnir eisini tað í hyggju, at úrslitini í hesi frágreiðing kunnu geva íblástur til meira gransking í arbeiðsumhvørvi, heilsu og trivnaði í føroyskum samanhangi. Tey úrslit, sum vera løgd fram í frágreiðingini, kunnu sigast at umboða fyrsta spakaskotið í gransking í arbeiðsumhvørvi í Føroyum, og tørvur verður óivað á gransking, sum fer meira í dýpdina við avbjóðingunum, ið verða lýstar í hesi frágreiðing.

# 2 Mannagongd

## 2.1 Lýsing av luttakarunum í spurnakanningini

Úrslitini av frágreiðingini eru grundað á dátur frá ein landsumfatandi spurnakanning, sum Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, Sjúkrahúsverk Føroya, hevur framt millum arbeiðstakarar í Føroyum í tíðarskeiðinum frá apríl til desembur 2021.

Allir føroyskir arbeiðstakarar, sum vóru eldri enn 18 ár, tá spurnakanningin byrjaði, vórðu bjóðað at luttaka í spurnakanningini. Úrslitini í hesi frágreiðing byggja á eina spurnakanning, sum allir arbeiðstakarar í Føroyum høvdu møguleika fyri at luttaka í. Talið á arbeiðstakarum í Føroyum var uml. 28.000 persónar, og vit høvdu fylgjandi treytir fyri luttøku: Arbeiðstakarar 18 ár og eldri við fleiri enn 8 vikuligum arbeiðstímum, førleika at lesa og skilja føroyskt og føroyskum arbeiðsgevara. Vit roknaðu tí við einum bólki á 22.000 arbeiðstakarar[3]. Vit hava skrásett 9.420 svør, sum hava við sær eitt svarprosent á 42,8. Tað veruliga luttakaratalið er tó nakað lægri, av tí at vit hava skrásett færri svør uppá okkara spurningar um arbeiðsumhvørvi, heilsu og trivnað.

Spurnakanningin varð gjøgnumførd við hjálp av einum spurnablaði á netinum. Luttakararnir vórðu fyrst bodnir gjøgnum útvarp, sjónvarp og sosialar miðlar, og síðani sendi Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu teldupostar til teir størstu arbeiðsgevararnar við einari áheitan til teir og teirra starvsfólk um at luttaka í kanningini. Umleið hálva leið inn í dátuinnsavningini sendi Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu brøv út til øll húsarhald í Føroyum við kunning um kanningina umframt eina áheitan til tey um at luttaka í spurnakanningini, um tey vóru partur av málbólkinum í kanningini. Eftirfylgjandi vórðu eisini eini boð send út til allar føroyingar, sum vóru skrásett í MínBoks við hesum sama boðskapi.

Orsakað av háttalagnum viðvíkjandi dátuinnsavningini hevur tað ikki verið møguligt at gera eina burturfallsgreining, sum annars hevði kunnað givið okkum vitan um, hvørt tað eru nakrir systematiskir skeivleikar í, hvørjir demografiskir bólkar hava luttikið í kanningini, og hvørjir bólkar hava havt minni lyndi til at svara spurnablaðnum í kanningini. Av royndum vita vit tó, at menn hava minni lyndi til at luttaka enn kvinnur og at yngri arbeiðstakarar hava minni lyndi til at luttaka enn eldri arbeiðstakarar. Tað hevur kortini ikki verið gjørligt at kanna burturfallið í hesari kanningini, av tí at vit ikki hava havt møguleika fyri at samanbera eyðkenni so sum kyn, aldur og starvsbólk fyri teir persónar, sum hava luttikið í kanningini og tey, ið ikki hava luttikið.

Talva 2.1.1 vísir útvald eyðkenni fyri luttakarar í spurnakanningini. Knapt 60 prosent av luttakarunum eru kvinnur og svarpersónarnir eru javnt býttir millum teir ymisku aldursbólkarnar.

[3] Hagstovan, 2024: AM03041 Løntakarar skiftir á aldur, kyn og føðiland/ríkisborgaraskap (1985M01-2023M11). PxWeb (hagstova.fo)

**Talva 2.1.1: Lýsing av eyðkennum av luttakarunum í kanningini**

| | Tal | Prosent |
|---|---|---|
| **Starvsbólkar** | | |
| 1 Leiðsluarbeiði | 551 | 9,7 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 702 | 12,3 |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 681 | 12,0 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 973 | 17,1 |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 828 | 14,6 |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 691 | 12,1 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 398 | 7,0 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 86 | 1,5 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 291 | 5,1 |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 224 | 3,9 |
| 11 Annað handaligt arbeiði | 267 | 4,7 |
| **Samanlagt Starvsbólkar** | **5692** | |
| **Kyn** | | |
| Kvinna | 3324 | 57,9 |
| Maður | 2148 | 42,1 |
| **Kyn samanlagt** | **5472** | |
| **Aldur** | | |
| < 25 ár | 329 | 5,7 |
| 25 – 34 ár | 826 | 14,4 |
| 35 - 44 ár | 1249 | 21,8 |
| 45 - 54 ár | 1507 | 26,3 |
| 55 - 64 ár | 1368 | 23,9 |
| > 65 ár | 457 | 8,0 |
| **Samanlagt og miðalaldur** | **5736** | **46,8** |
| **Útbúgving** | | |
| Fólkaskúli | 680 | 9,0 |
| Miðnámsútbúgving | 755 | 10,0 |
| Yrkisútbúgving (múrari, timburmaður, elektrikari) | 821 | 10,8 |
| Stutt útbúgving, undir 3 ár | 1042 | 13,7 |
| Miðal long útbúgving, 3-4 ár | 2654 | 34,9 |
| Long útbúgving, longri enn 4 ár | 1232 | 16,2 |
| Onnur útbúgving | 413 | 5,4 |
| **Samanlagt Útbúgving** | **7597** | |
| **Vikulig arbeiðstíð íroknað yvirarbeiði** | | |
| < 10 tímar | 369 | 4,9 |
| 10 - 20 tímar | 220 | 2,9 |
| 20 - 30 tímar | 622 | 8,3 |
| 30 - 40 tímar | 2119 | 28,2 |
| 40 - 50 tímar | 2887 | 38,4 |
| > 50 tímar | 1309 | 17,4 |
| **Samanlagt og vikulig arbeiðstíð í miðal** | **7526** | **38,4** |

Talva 2.1.1 vísir eisini býtið av luttakarum av ymiskum starvsbólkum, gjørdir upp eftir FISCO-bólkingini. Talvan vísir, at luttakararnir eru býttir upp eftir einari langari røð av ymiskum starvsbólkum, og teir størstu starvsbólkarnir eru ávikavist bólkur 4 (Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði), bólkur 5 (Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi), bólkur 2 (Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði) og bólkur 6 (Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði). Harumframt vísir talva 2.1.1, at umleið helmingurin av luttakarunum svara, at tey hava eina miðallanga ella langa útbúgving og at knapt níggju prosent ikki hava aðra útbúgving enn fólkaskúlan. Til endans vísir talvan, at luttakararnir í kanningini í miðal arbeiða 38,4 tímar um vikuna íroknað yvirarbeiði.

Teir 11 starvsbólkarnir í frágreiðingini eru uppbýttir grundað á tær upprunaligu FISCO-koturnar (21). Tað eru níggju FISCO-kotur í almennu útgávuni av FISCO, men í hesari frágreiðingini hava vit býtt FISCO-bólk 2 'Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði' upp í tríggjar bólkar, av tí at breiddin í starvsbólkinum var so stór. Vit hava sostatt tikið tveir lutfalsliga stórar undirbólkar úr FISCO-bólki 2, sum sostatt hevur fingið sína egnu starvsbólking. Hesi eru ávikavist 3 'Arbeiði á heilsuøkinum' og 4 'Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði'. FISCO-bólkur 2 er víðkaður til at fevna um hesar tríggjar starvsbólkarnar:

- 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði
- 3 Arbeiði á heilsuøkinum
- 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði

Harnæst hava vit flutt eina undirbólking, ið hevur fingið navnið 'Umsorganararbeiði', og sum upprunaliga var í FISCO-bólki 7 'Tænastu- og søluarbeiði'. Undirbólkingin 'Umsorganararbeiði' inniber annað umsorganararbeiði á heilsuøkinum sum t.d. sjúkraflutning, heilsurøkt og hjálparfólk. Henda bólkin hava vit tí koyrt í starvsbólk 3 'Arbeiði á heilsuøkinum', tí vit vænta, at arbeiðsumhvørvið fyri hetta slag av arbeiðstakarum í størri mun hevur somu eyðkenni, sum arbeiðsumhvørvið innan fyri heilsuøkið enn fyri starvsbólkin 'Tænastu- og søluarbeiði', sum bólkurin 'Umsorganararbeiði' er í í FISCO-kotuni.

Niðanfyri í talvu 2.1.2 vísa vit eina neyvari lýsing av starvsbólkunum og tey sløg av størvum, sum kunnu koma fyri í avvarðandi starvsbólki.

**Talva 2.1.2: Lýsing av sløgum av størvum innan fyri teir 11 ymisku bólkarnar av størvum**

| Starvsbólkar | Dømi um størv í økinum |
|---|---|
| **1 Leiðsluarbeiði** | Ovasta leiðsla í løggevandi myndugleikum, almenn virkir og fyritøkur, virkisleiðsla, leiðsla innan fyri fyrisiting og starvsbent virksemi, leiðsla av handils- og menningarlagaðum virki, leiðsla innan fyri tænastuyrki, leiðsla í smásøluyrkinum, leiðsla í gistingarhús- og matstovuyrkinum |
| **2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði** | Arbeiði innan fyri náttúruvísindi og verkfrøðingavinnuni, arbeiði innan fyri fígging og búskap, arbeiði innan fyri privatari og almennari virkisfyrisiting, arbeiði innan fyri HR- og starvsfólkamenning, arbeiði innan fyri sølu, marknaðarførslu og lýsingum, arbeiði innan fyri løgfrøði, samfelagsvísindi og mentan |

| | |
|---|---|
| **3 Arbeiði á heilsuøkinum** | Læknayrki, sjúkrarøktarfrøðinga- og ljósmøðrayrki, arbeiði innan fyri náttúruheilivág og aðra viðgerð, arbeiði innan fyri paramedisin, kliniskt sálarfrøðingayrki, djóralæknayrki og annað umsorganararbeiði á heilsuøkinum t.d. sjúkraflutningur og heilsurøktarar og hjálparar á stovnum |
| **4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði** | Undirvísing og gransking á lærdum háskúlum og hægri lærustovnum, undirvísing á yrkisútbúgvingum, almenn undivísing á barnaskúlastigi, undivísing og námsfrøðiligt yrki, sernámsfrøðiligt yrki og undirvísing |
| **5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi** | Tøkningayrki innan fyri vísindi, verkfrøðingavirki, skips- og flogferðsla, tøkni- og hjálparayrki á heilsuøkinum, arbeiði innan fyri ítrótt og venjing, sosialráðgevarayrki og løgfrøðiligt yrki á millumstigi, kunningar- og samskiftistøkninga yrki |
| **6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði** | Vanligt kontór- og skrivarayrki, kundatænastuyrki, arbeiði við kunning til viðskiftafólk, roknskapar- og bókhaldsyrki, skrivstovuarbeiði viðv. hagfrøði, fíggjarligum handilstiltøkum og tryggingum, skrásetingararbeiði innan fyri framleiðslu, flutnings- og ferðslustýring |
| **7 Tænastu- og søluarbeiði** | Tænastu- og umsjónaðarligt arbeiði undir flutningi og ferðum, kokkayrki, tænarar og barrvørðar, hárfríðkara- og kosmetologyrki, umsjónarfólk innan fyri húsarhald, reingerð og søluarbeiði í handli |
| **8 Arbeiði innan fyri landbúnað, skógrøkt og fiskiskap undantikið hjálparfólk** | Arbeiði við at dyrka avgrøði, vakstrarhús- og gróðursetufólkayrki, arbeiði við aling av húsdjórum og flogfenaði, skógrøktaryrki og arbeiði við fiskiskapi og veiðu |
| **9 Handverkaraarbeiði** | Handverkarayrki innan fyri bygging, metal- og maskinarbeiði t.d. sveising, smíði- og smiðjuyrki, nákvæmishandverk og grafiskt arbeiði t.d. prentarbeiði og grafisk framseting, arbeiði innan fyri elektroniska økið t.d. íseting og umvæling av elektriskari útgerð, arbeiði innan fyri matvøruframleiðslu, snikkarayrki og klædningsframleiðslu |
| **10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði** | Operatørarbeiði við føstum útbúnaði og maskinum, arbeiði við tilgerð og samanseting av mekaniskum maskinum, sjaføryrki og førarar av akførum og flytførum maskinum t.d. buss- og lastbilaførarar og lokomotivførarayrki |
| **11 Annað handaligt arbeiði** | Reingerðararbeiði í privatum heimum, gistingarhúsum og skrivstovum, handaligt arbeiði innan fyri landbúnað, skógrøkt og útróður, handaligt arbeiði innan fyri ráevnisgrevstur, byggi- og verklagsøkið, framleiðsla og flutningur, manuelt arbeiði við matgerð, gøtusøla- og tænasta, ruskkoyring og annað handaligt arbeiði t.d. ruskskiljing, gøtusóping og annað líknandí arbeiði |

### 2.1.1 Lýsing av donsku tilvísingarbólkunum

Í frágreiðingini samanbera vit úrslit úr føroysku kanningini við úrslit úr tveimum kanningum av arbeiðsumhvørvi, trivnaði og heilsu í Danmark. Tilvísingarkanningin, sum hevur kannað psykososiala arbeiðsumhvørvið, er gjørd í einari lagbýttari stakroynd av donskum arbeiðstakarum á heysti 2019. Úrslitini úr hesari kanning eru mett í mun til

starvsbólkar, aldur og kyn, og kunnu sostatt hugsast at vera umboðandi fyri arbeiðstakarar í Danmark (19). Bólkurin av arbeiðstakarum í donsku tilvísingarkanningini er settur saman av 5.046 persónum (svarprosent: 41,3).

Innan fyri hini økini av arbeiðsumhvørvi og heilsu, sum vit lýsa í kanningini, tvs. likamligt og evnafrøðiligt arbeiðsumhvørvi, arbeiðsóhapp og trygd umframt heilsa og arbeiðsførleiki samanbera vit úrslitini úr føroysku kanningini við úrslit úr kanningini *Arbeiðsumhvørvi og Heilsa i Danmark 2018* (20). Henda kanning er tann fjórða mátingin av arbeiðsumhvørvinum og heilsuni millum arbeiðandi í Danmark. *Arbeiðsumhvørvi og Heilsa 2018* er ein kanning, sum er útførd av NFA, og er grundað á eitt spurnablað, sum er svarað av uml. 38.000 arbeiðstakarum í Danmark. Hesi kanningarúrslit eru grundað á mett tøl, og taka soleiðis hædd fyri, at tað kunnu vera munir á kyni, aldri og starvsbólki. Umframt hetta taka úrslitini hædd fyri sannlíkindunum fyri at verða úttikin til luttøku í kanningini.

## 2.2 Lýsing av spurnablaðnum í kanningini

Kanningin er grundað á eitt spurnablað, sum granskarar á Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu hava sett saman við grundarlagi í tveimum donskum spurnabløðum, ið eru virkað til á NFA: Granskingarútgávan av *DPQ* og *Arbeiðsumhvørvi og Heilsa.*

### 2.2.1 Stutt lýsing av DPQ spurnablaðnum

Danish Psychosocial Questionnaire (DPQ) er eitt brúksrættað spurnablað, ið er ment fyri at lýsa tær mest viðkomandi síðurnar av psykososialum arbeiðsumhvørvi. Tað er samansett av 119 spurningum, ið umfatar 38 ymiskar dimensjónir, ið eru deildar upp í hesi sjey øki, ið lýsa psykososialt arbeiðsumhvørvi og trivnað í arbeiðinum:

- Hvussu arbeiðið er skipað
- Krøv í arbeiðinum
- Samstarv
- Leiðsla
- Broytingar
- Neiligur atburður
- Trivnaður

Í frágreiðingini lýsa vit tær 38 dimensjónirnar við støði í gransking, sum er gjørd í hesum sjey økjunum. Lýsingin av teimum 38 ymisku dimensjónunum viðvíkjandi psykososiala arbeiðsumhvørvinum og trivnaði samsvara við lýsingarnar í frágreiðingini fyri DPQ (22). Fleiri av dimensjónunum í DPQ-spurnablaðnum eru mátað við tveimum, trimum ella fýra spurningum, sum síðani verða løgd saman í ein stiga. Nýtslan av stigum ger tað møguligt at lýsa ymisk sjónarhorn av viðkomandi fyribrigdi. Dimensjónirnar, sum eftir eru, verða lýstar við einkultum spurningum.

Tey psykometrisku eyðkennini við DPQ-spurnablaðnum eru kannað og mett at vera nøktandi í fleiri vísindaligum útgávum (1, 23), og grundað á hetta kann staðfestast, at DPQ-spurnablaðið hevur gildi og er álítandi til at máta psykososialt arbeiðsumhvørvi og trivnað í arbeiðinum.

### 2.2.2 Stutt lýsing av spurningum úr *Arbeiðsumhvørvi og Heilsa*

*Arbeiðsumhvørvi og Heilsa* (AH) er ein spurnakanning, sum verður nýtt til at heinta vitan inn um, hvussu danskir arbeiðstakarar uppliva teirra arbeiðsumhvørvi. Spurnakanningin kann nýtast til leypandi at kanna, hvussu danskir arbeiðstakarar uppliva og meta teirra likamliga og sálarliga arbeiðsumhvørvi umframt at fylgja menningini í teirra heilsu og arbeiðsførleika. Kanningin varð fyrstu ferð gjørd í 2012, har spurnakanningin varð send út til ein umboðandi úrskurð av arbeiðstakarum á donskum arbeiðsplássum. Síðani er spurnakanningin send út í 2014, 2016 og 2018. Í hesi frágreiðingini brúka vit dátur úr kanningini í 2018 til at samanbera við úrslitini frá hesari kanning av arbeiðsumhvørvinum í Føroyum.

AH er ment av NFA og er sett saman av 53 spurningum. Spurnakanningin fevnir breitt um arbeiðsumhvørvi og heilsu, og hava vit nýtt DPQ-spurnablaðið til at umfevna

psykososiala arbeiðsumhvørvi og trivnað. Vit hava nýtt hesar partar úr AH-spurnakanningini:

- Arbeiðsóhapp og trygd á arbeiðsplássinum
- Likamligt virkni og lyfting í arbeiðinum
- Larmur og ristingar
- Húðárin og trupulleikar við húðini
- Arbeiðsførleiki
- Heilsa, møði og svøvnur

### 2.2.3 Kanning av psykometrisku eginleikunum

Sum nevnt omanfyri, eru fleiri av dimensjónunum í spurnablaðnum mátað við tveimum ella fleiri spurningum, sum síðani eru lagdir saman í ein stiga. Fyri at kanna, um spurningarnir í einum ávísum stiga er við til at lýsa somu undirliggjandi dimensjón, hava vit kannað 'interna konsistensin' millum spurningarnar, ið stigarnir umfata.

Fyri at kanna interna konsistensin í stigum við trimum ella fleiri spurningum, hava vit mett um Cronbach's alpha-koeffisientin fyri hvønn stiga. Ein Cronbach's alpha-koeffisientur størri enn 0,7 er vanliga góðtikin sum ein ábending um nøktandi internan konsistens. Talva 2.2.1 vísir, at allir stigar við trimum ella fleiri spurningum hava ein Cronbach's alpha-koeffisient, ið er størri enn 0,, og tískil meta vit, at hesir stigar hava nøktandi internan konsistens.

Tríggir av stigunum, vit hava brúkt í kanningini, hava tveir spurningar. Fyri at kanna interna konsistensin í hesum trimum stigum, hava vit mett um eina Pearson's r-korrelatión, har ein korrelatión størri enn 0,5 gevur ábendingar um eina sterka korrelatión (22). I teimum trimum stigunum, sum hava tveir spurningar, eru sterkar korrelatiónir millum spurningarnar, sum vísir nøktandi internan konsistens.

Psykometriska kanningin av nýttu stigunum, sum hava tveir ella fleiri spurningar, vísir sostatt, at allir stigar hava nøktandi internan konsistens.

**Talva 2.2.1: Úrslit frá psykometriskari kanning av stigum, ið hava tveir ella fleiri spurningar.**

| Stigi | Cronbach's alpha | Pearson's *r* |
|---|---|---|
| **Hvussu arbeiðið er skipað** | | |
| Ávirkan í arbeiðinum | 0.79 | |
| Ávirkan á arbeiðstíðir | 0.83 | |
| Menningarmøguleikar | 0.77 | |
| Greidleiki um leiklutir | 0.83 | |
| Tvídráttir um leiklutir | 0.74 | |
| Møguleikar fyri at loysa arbeiðsuppgávurnar | 0.84 | |
| Óneyðugar arbeiðsuppgávur | 0.82 | |
| Forsøgni í arbeiðinum | 0.83 | |

| | | |
|---|---|---|
| **Krøv í arbeiðinum** | | |
| Arbeiðsferð | | 0.52 |
| Arbeiðsmongd | 0.84 | |
| Kenslulig krøv | 0.84 | |
| Krøv um at fjala kenslur | | 0.52 |
| Kognitiv krøv | 0.80 | |
| Markleyst arbeiði | 0.76 | |
| **Samstarv** | | |
| Sosialur stuðul frá starvsfeløgum | 0.84 | |
| Sambond við nærmastu starvsfelagar | 0.83 | |
| Álit á starvsfelagar | 0.82 | |
| **Leiðsla** | | |
| Sambond við nærmasta leiðara | 0.90 | |
| Leiðslugóðska | 0.94 | |
| Sosialur stuðul frá nærmasta leiðara | 0.92 | |
| Rættvísi | 0.91 | |
| Hvussu leiðslan tekur starvsfólk uppí | 0.90 | |
| **Broytingar** | | |
| Handfaring av broytingum | 0.96 | |
| **Trivnaður í arbeiðinum** | | |
| Meining í arbeiðinum | 0.82 | |
| Hvussu arbeiðstakarin tekur lut á arbeiðsplássinum | 0.93 | |
| Hugbinding í arbeiðinum | 0.93 | |
| Óvissa í starvssetanini | 0.77 | |
| Tvídráttir millum arbeiðslív og heimalív | 0.93 | |
| **Likamligt arbeiðsumhvørvi** | | |
| Tyngjandi arbeiðsstøður | 0.78 | |
| Lyfting og skump | | 0.72 |
| **Arbeiðsóhapp og trygd** | | |
| Trygdarviðurskifti | 0.92 | |
| **Heilsa og arbeiðsførleiki** | | |
| Svøvntrupulleikar | 0.77 | |

## 2.3 Lýsing av greiningarháttalagi

Í frágreiðingini leggja vit fram vit úrslit fyri øll øki úr DPQ-spurnablaðnum. Vit leggja eisini úrslit fram innan fyri økini likamligt arbeiðsumhvørvi, evnafrøðiligt arbeiðsumhvørvi, larmur og ristingar, arbeiðsóhapp og heilsa og arbeiðsførleiki. Hesi øki eru kortløgd við spurningum, sum verða brúktir í donsku altjóða kanningini *Arbeiðsumhvørvi og Heilsa*. Fyri at kunna samanbera øll úrslitini í hesari kanningini við úrslit úr Danmark, hava vit umroknað tey flestu svørini frá hvørjum spurningi til stigar, sum fara frá 0 til 100. Sí talvu 2.3.1.

Umrokningin av spurningum til stigar merkir, at vit kunnu rokna okkum til eitt miðaltal millum 0 og 100, har eitt miðal upp á 100 merkir, at luttakararnir í miðal hava svarað 'Í sera stóran mun' ella 'Altíð' upp á spurningarnar. Eitt høgt stigavirði merkir sostatt, at tað er ein stór útbreiðsla av tí fyribrigdinum, sum verður mátað í tí ávísa stiganum. Umrokningin av spurningum til stigar merkir eisini, at vit kunnu samanbera miðaltalið fyri allar svarpersónarnar í hesari kanningini við danskar arbeiðstakarar, og ger tað harumframt gjørligt at samanbera kanningarúrslit (miðaltal) innanhýsis fyri svarpersónarnar í kanningini. Tað vil siga, at vit eisini kunnu samanbera miðaltølini fyri hvønn stiga upp á tvørs av ymisku bólkarnum í kanningini. Her kanna vit ávikavist kyn, aldur og starvsbólkar. Fyri økini *Neilig atferð, Arbeiðsóhapp, Pína, Heilsufremjandi tilboð* og *Tunglyndiseyðkenni* eru úrslitini uppgjørd í prosentum. Úrslitið fyri *Sjúkufráveru* er uppgjørt í einum miðaltali av døgum.

Fyri at kanna, um møguligir munir millum bólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir, hava vit nýtt ein t-test og $\chi^2$ fyri at kanna, um hvørt munirnir eru signifikant ymiskir fyri hvønn stiga fyri ávikavist kyn, aldur og starvsbólk. Vit hava nýtt eitt signifikansstøði (p-virði) upp á 0,05, tá ið vit hava mett, um hvørt munirnir millum bólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir.

**Talva 2.3.1: Lykil til tulking av stigavirðum**

| Virði | Týdningur |
|---|---|
| 100 | Merkir, at øll hava svarað 'Í sera stóran mun' ella 'Altíð' upp á spurningarnar |
| 75 | Merkir, at øll hava svarað 'Í stóran mun' ella 'Ofta' upp á spurningarnar |
| 50 | Merkir, at øll hava svarað 'Partvíst' ella 'Av og á' upp á spurningarnar |
| 25 | Merkir, at øll hava svarað 'Í lítlan mun' ella 'Sjáldan' upp á spurningarnar |
| 0 | Merkir, at øll hava svarað 'Í sera lítlan mun' ella 'Ongantíð' upp á spurningarnar |

*Les meira um DPQ spurnablaðið í vísindaligu greinini: Clausen et al. Scandinavian Journal of Work, Environment & Health 2019; 45(4):356-369. http://dx.doi.org/10.5271/sjweh.3793 ella á heimasíðuni hjá NFA: https://nfa.dk/da/Vaerktoejer/Sporgeskemaer/Dansk-psykososialt-sporgeskema*

Tað skal viðmerkjast, at vit ikki almannakunngera úrslit fyri bólkar, har tað eru færri enn fimm svarpersónar. Í førum, har tað eru færri enn fimm svør í einum bólki, hava vit markað við *.

## 2.4 Lesivegleiðing

Frágreiðingin inniheldur ein samlaðan part um úrslit viðvíkjandi psykososialum arbeiðsumhvørvi og trivnaði umframt ein samlaðan part um úrslit viðvíkjandi ávikavist likamligum og evnafrøðiligum arbeiðsumhvørvi, arbeiðsóhappi og heilsu. Í hvørjum parti og broti lýsa vit tað hugtaksliga innihaldið av og ta týðandi granskingina um tær dimensjónirnar av arbeiðsumhvørvi, heilsu og trivnaði, sum vit hava kannað í spurnakanningini.

Innan fyri hvørja dimensjón leggja vit fram og lýsa úrslitini við hjálp av talvum. Talvurnar, sum vísa úrslitini fyri starvsbólkarnar, eru settar í raðfylgju út frá einum miðaltali, prosenttali ella einum miðaltali av døgum við sjúkufráveru, sum ger tað gjørligt at eyðmerkja møguligar munir millum starvsbólkarnar. Hesar talvurnar eru harumframt markaðar við litum, sum lýsa, hvussu teir ymisku kannaðu starvsbólkarnir liggja á avvarðandi dimensjónini samanborið við tað føroyska miðaltalið.

Øki, sum eru markað við myrkagrønum, merkja, at miðal arbeiðstakarin í avvarðandi bólki sigur frá einum 5 stig betri stigatalið á tí avvarðandi dimensjónini enn tað føroyska miðaltalið. Øki, sum er markað við ljósagrønum, merkja, at miðal arbeiðstakarin innan fyri avvarðandi bólki sigur frá einum 3 stig betri stigatalið á avvarðandi dimensjón enn føroyska miðaltalið. Sama meginregla ger seg galdandi, tá úrslitini verða gjørd upp við prosentum ella einum miðaltali av døgum.

Øki, sum eru markað við myrkareyðum, merkja øvut, at miðal arbeiðstakarin í avvarðandi bólki sigur frá einum 5 stig verri stigatali á avvarðandi dimensjónini enn føroyska miðaltalið. Somuleiðis merkja tey øki, ið eru merkt við ljósareyðum, at miðal arbeiðstakarin innan fyri avvarðandi bólk sigur frá einum 3 stig verri stigatalið á avvarðandi dimensjón enn føroyska miðaltalið. Sama meginregla ger seg galdandi, tá úrslitini verða gjørd upp við prosentum ella einum miðaltali av døgum.

Talvurnar yvir starvsbólkar eru sostatt býttar upp og litmarkaðar, og kunnu tí bæði geva eitt innlit í, hvussu starvsbólkarnir liggja samanborið við hvønn annan, men eisini hvussu teir einstøku starvsbólkarnir liggja samanborið við miðal føroyska arbeiðstakaran.

# 3 Úrslit um psykososialt arbeiðsumhvørvi og trivnað

## 3.1 Hvussu arbeiðið er skipað

Innan fyri økið *Hvussu arbeiðið er skipað* verður sjóneykan sett á, hvussu arbeiðstakararnir uppliva innihaldið av arbeiðsuppgávunum og treytirnar fyri at útinna arbeiðið.

Økið er ein týðandi partur av psykososiala arbeiðsumhvørvinum, og nógv bendir á, at treytirnar fyri arbeiðið, millum annað greiðleiki av leiklutum, ávirkan á arbeiðið og møguleikarnir fyri at kunna loysa arbeiðsuppgávur, bæði er tengt at trivnaðinum hjá arbeiðstakaranum í arbeiðinum (24-29) og at sálarheilsuni hjá arbeiðstakaranum (30, 31). Harumframt týða onnur úrslit av bókmentum um evnið uppá, at organisatorisku rammurnar í arbeiðinum hava týdning fyri arbeiðstakara í mun til møguleika at handfara krøv í arbeiðinum á slíkan hátt, at tað ikki hevur neiliga ávirkan á trivnað og heilsu hjá arbeiðstakarunum (32-35).

Spurnakanningin lýsir hesi átta evni, sum endurspegla ymisk sjónarmið av økinum *Hvussu arbeiðið er skipað*[4]*:*

- Ávirkan í arbeiðinum
- Ávirkan á arbeiðstíðir
- Menningarmøguleikar
- Greidleiki um leiklutir
- Ósemjur um leiklutir
- Møguleikar fyri at loysa arbeiðsuppgávurnar
- Óneyðugar arbeiðsuppgávur
- Forsøgni í arbeiðinum

[4] Sí fylgiskjal 1 fyri at síggja spurningarnar, ið lýsa tey átta evnini.

### 3.1.1 Ávirkan í arbeiðinum

*Ávirkan í arbeiðinum* snýr seg um, hvørt arbeiðstakararnir uppliva seg at hava møguleika fyri sjálvir at taka týðandi avgerðir í arbeiðinum og at útinna hetta. Nágreiniligari sagt snýr tað seg um hvørt arbeiðstakararnir kunnu hava ávirkan á, hvussu teir útinna teirra kjarnuuppgávu. Hetta kann eitt nú vera ávirkan í mun til, hvussu uppgávan skal loysast ella raðfestingini av, í hvørjari raðfylgju, uppgávurnar skulu loysast í (36).

Fleiri kanningar hava áður kannað og greitt frá týdninginum av at hava ávirkan í arbeiðinum fyri heilsu og trivnað hjá arbeiðstakara. Eitt nú hava kanningar víst á, at ávirkan í arbeiðinum er ein av týdningarmestu faktorunum í psykososiala arbeiðsumhvørvinum tá tað kemur til sálarheilsuna hjá starvsfólkinum (37). Undanfarnar kanningar hava eisini víst, at tað at hava lítla ávirkan í arbeiðinum hongur saman við øktum vanda fyri drúgvari sjúkufráveru (1, 8), fyritíðareftirløn (31) og øktum vanda fyri sálarligum heilsutrupulleikum (1, 38). Hinvegin vísa kanningar, ið hava kannað ávirkan í arbeiðinum eisini á, at eitt høgt støði av ávirkan hongur saman við uppliving av, at arbeiðið gevur meining (25) umframt tað at vera við á arbeiðsplássinum (39). Ein nýggjari kanning hevur eisini víst á, at ávirkan í arbeiðinum er jaliga tengd at sálarligari vælveru (40). Til endans vísir granskingin, at høgt støði av ávirkan í arbeiðinum eisini kann minka um týdningin av arbeiðsbyrðuni í psykososiala arbeiðsumhvørvinum í mun til at fáa strongd (41).

Vit máta *Ávirkan í arbeiðinum* við fýra spurningum. Talva 3.1.1.1 vísir býti av svørum í prosentum fyri allar svarpersónar í kanningini.

**Talva 3.1.1.1: Býti av svørum í prosentum**

| | Í sera lítlan mun | Í lítlan mun | Partvíst | Í stóran mun | Í sera stóran mun |
|---|---|---|---|---|---|
| Hevur tú ávirkan á, hvussu tú loysir tínar arbeiðsuppgávur? | 2,5 | 5,0 | 24,7 | 42,1 | 25,7 |
| Hevur tú nóg mikið av heimildum í mun til tína ábyrgd í arbeiðinum? | 5,4 | 12,1 | 32,1 | 36,3 | 14,2 |
| Hevur tú møguleika fyri at taka týðandi avgerðir um títt arbeiði? | 7,4 | 15,3 | 33,6 | 29,3 | 14,4 |
| Hevur tú ávirkan á, í hvørjari raðfylgju tú loysir tínar arbeiðsuppgávur? | 4,0 | 7,4 | 26,3 | 41,3 | 21,0 |

Svørini frá teimum fýra spurningunum í talvu 3.1.1.1 eru gjørd um til ein stiga, ið gongur frá 0-100, har 100 merkir ávirkan í arbeiðinum í hægsta mun.

Talva 3.1.1.2 vísir, at svarpersónarnir úr Føroyum hava eitt miðaltal upp á 63,8 á stiganum um *Ávirkan í arbeiðinum*. Føroysku svarpersónarnirnir meta seg sostatt hava lægri ávirkan í arbeiðinum enn danski tilvísingarbólkurin, sum hevur eitt miðaltal upp á 71,3 á stiganum um *Ávirkan í arbeiðinum*.

**Talva 3.1.1.2: Miðaltøl fyri stigan *Ávirkan í arbeiðinum***

| Ávirkan í arbeiðinum | Miðaltal |
|---|---|
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum | 63,8 |
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Danmark | 71,3 |

Í talvunum niðanfyri verða úrslitini fyri *Ávirkan í arbeiðinum* deild upp í ávikavist kyn, aldur og starvsbólk.

Talva 3.1.1.3 vísir úrslitini fyri stigan um *Ávirkan í arbeiðinum* býtt upp í menn og kvinnur. Úrslitini benda á, at mannligir svarpersónar meta seg hava hægri ávirkan í arbeiðinum (miðaltal: 68,1) enn kvinnuligu svarpersónarnir (miðaltal: 61,5). Ískoytisgreiningar vísa harafturat, at munurin millum menn og kvinnur er hagfrøðiliga signifikantur (p<.0001).

**Talva 3.1.1.3: Miðaltøl fyri stigan *Ávirkan í arbeiðinum* deilt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| Maður | 2311 | 68,1 |
| Kvinna | 3159 | 61,5 |

Talva 3.1.1.4 vísir úrslitini fyri stigan um *Ávirkan í arbeiðinum* deild upp í ymiskar aldursbólkar. Í hesum førinum benda úrslitini á, at yngstu svarpersónarnir undir 25 ár greiða frá lægri ávirkan í arbeiðinum (miðaltal: 56,7) samanborið við hinar aldursbólkarnar. Øvut benda úrslitini á, at elstu svarpersónarnir yvir 65 ár uppliva í størri mun at hava ávirkan í arbeiðinum (miðaltal: 66,5) samanborið við hinar aldursbólkarnar. Ískoytisgreiningar vísa harafturat, at munurin millum aldursbólkarnar er hagfrøðiliga signifikantur (p<.0001).

**Talva 3.1.1.4: Miðaltøl fyri stigan *Ávirkan í arbeiðinum* deilt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| < 25 ár | 299 | 56,7 |
| 25 - 34 ár | 791 | 63,6 |
| 35 - 44 ár | 1208 | 65,6 |
| 45 - 54 ár | 1447 | 64,9 |
| 55 – 64 ár | 1304 | 63,8 |
| > 65 ár | 416 | 66,5 |

Talva 3.1.1.5 vísir úrslitini fyri stigan um *Ávirkan í arbeiðinum* býtt upp í 11 ymiskar starvsbólkar og vísir harumframt, hvar á stiganum hesir starvsbólkar liggja í mun til miðaltalið fyri allar svarpersónarnar í kanningini. Í hesum førinum benda úrslitini á, at svarpersónar í 'Leiðsluarbeiði' hava hægsta miðaltal (miðaltal: 79,7), meðan svarpersónar í 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' hava sagt frá lægsta støðið av ávirkan í arbeiðinum, har miðaltalið er 50,8. Svarpersónar í 'Annað handaligt arbeiði' hava somuleiðis lægri miðal á stiganum (54,0) enn hinir bólkarnir. Úrslitini benda sostatt á, at arbeiðstakarar í FISCO-bólki 10 og 11 uppliva týðiliga lægri ávirkan í arbeiðinum samanborið við hinar FISCO-starvsbólkarnar. Ískoytisgreiningar

vísa harumframt, at munirnir millum teir 11 starvsbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantur (p<.0001).

**Talva 3.1.1.5: Miðaltøl fyri stigan *Ávirkan í arbeiðinum* býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| 1 Leiðsluarbeiði | 531 | 79,7 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 689 | 70,4 |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 799 | 66,6 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 268 | 66,0 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 379 | 63,9 |
| **Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum** | **6422** | **63,8** |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 650 | 61,8 |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 657 | 61,1 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 81 | 60,6 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 923 | 59,5 |
| 11 Annað handaligt arbeiði | 250 | 54,0 |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 211 | 50,8 |

Viðmerking: **Grøna markingin** vísir, at luttakararnir úr starvsbólkinum greiða frá einum betri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum. **Reyða markingin** vísir, at luttakararnir úr starvsbólkinum greiða frá einum vánaligari psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Ávirkan í arbeiðinum***

Úrslitini fyri *Ávirkan í arbeiðinum* bendu á, at føroyskir svarpersónar í miðal meta sína ávirkan í arbeiðinum lægri enn miðal av svarpersónum úr donsku tilvísingarkanningini.

Tá hugt verður eftir, hvussu svarpersónarnir meta sína ávirkan í arbeiðinum tvørtur um kyn, aldur og starvsbólkar, benda úrslitini á, at mannligir svarpersónar uppliva at hava hægri støði av ávirkan í arbeiðinum enn kvinnuligu svarpersónarnir. Harumframt bendu úrslitini á, at teir elstu svarpersónarnirnir yvir 65 ár uppliva at hava hægri støði av ávirkan í arbeiðinum samanborið við hinar aldursbólkarnar. Harafturat bendu úrslitini á, at yngstu svarpersónarnir undir 25 ár hava mett sína ávirkan í arbeiðinum týðiliga lægri enn hinir aldursbólkarnir.

Til endans vístu úrslitini signifikantar munir á, hvussu svarpersónar upp á tvørs av teimum 11 starvsbólkunum uppliva ávirkan í arbeiðinum. Í hesum førinum vístu øll úrslitini, at svarpersónar í 'Leiðsluarbeiði' hava hægsta miðaltalið á stiganum um *Ávirkan í arbeiðinum*, men svarpersónar í 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' hava lægsta miðaltal á stiganum um *Ávirkan í arbeiðinum*. Úrslitini vístu harumframt, at allir munirnir upp á tvørs av kyni, aldri og starvsbólkum eru hagfrøðiliga signifikantir.

## 3.1.2 Ávirkan á arbeiðstíðir

*Ávirkan á arbeiðstíðir* leggur dent á, hvussu arbeiðstakarin upplivir møguleikarnar fyri at kunna útinna ávirkan á og taka avgerðir rundan um nær arbeiðið verður útint (42).

Bókmentirnar um ávirkan á arbeiðstíðir vísa, at tá arbeiðstakarin fær økta ávirkan á at leggja arbeiðstíðirnar til rættis slakar samanhangurin millum arbeiðsbyrðu í psykososiala arbeiðsumhvørvinum og vandan fyri sjúkrafráveru (43), og, at lítil ávirkan á arbeiðstíðir hongur saman við ringari sjálvsmetan av heilsu og sálarligum vantrivnaði. Ein nýggjari donsk kanning vísir, at arbeiðstakarar, sum greiða frá stórari ávirkan á egnar arbeiðstíðir eru í lægri vanda fyri at hava langa sjúkrafráveru og sálarligar heilsutrupulleikar (1).

Vit máta *Ávirkan á arbeiðstíðir* við trimum spurningum. Talva 3.1.2.1 vísir býti av svørum í prosentum fyri allar svarpersónar í kanningini.

**Talva 3.1.2.1: Býti av svørum í prosentum**

| | Í sera lítlan mun | Í lítlan mun | Partvíst | Í stóran mun | Í sera stóran mun |
|---|---|---|---|---|---|
| Hevur tú ávirkan á tínar arbeiðstíðir, t.d. nær tú møtir til arbeiðis ella fert heim úr arbeiði? | 24,6 | 15,9 | 25,0 | 20,4 | 14,1 |
| Hevur tú ávirkan á, nær tú heldur steðgir gjøgnum arbeiðsdagin? | 15,9 | 11,5 | 23,7 | 28,5 | 20,4 |
| Hevur tú ávirkan á, nær tú hevur frítíð og frídagar? | 15,4 | 12,0 | 28,2 | 29,0 | 15,4 |

Svørini frá teimum trimum spurningunum í talvu 3.1.2.1 eru umgjørd til ein stiga, sum gongur frá 0-100, har 100 vísir á hægsta støði av ávirkan á arbeiðstíðir.

Talva 3.1.2.2 vísir, at svarpersónarnir úr Føroyum hava eitt miðaltal upp á 52,2 á stiganum um *Ávirkan á arbeiðstíðir*, og tað merkir, at svarpersónarnir í miðal hava svarað 'Partvíst' upp á teir tríggjar spurningarnar í talvu 3.1.2.1. Luttakararnir í donsku kanningini fingu ikki spurningarnar um *Ávirkan á arbeiðstíðir*, og av tí sama er ikki møguligt at samanbera úrslitini við ein danskan tilvísingarbólk fyri henda stiga.

**Talva 3.1.2.2: Miðaltøl fyri stigan *Ávirkan á arbeiðstíðir***

| Ávirkan á arbeiðstíðir | Miðaltal |
|---|---|
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum | 52,2 |
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Danmark | * |

Í talvunum niðanfyri verða úrslit fyri *Ávirkan á arbeiðstíðir* býtt upp í ávikavist kyn, aldur og starvsbólkar.

Talva 3.1.2.3 vísir úrslitini fyri stigan um *Ávirkan á arbeiðstíðir* býtt upp í menn og kvinnur. Úrslitini benda á, at mannligir svarpersónar meta sína ávirkan á arbeiðstíðir hægri (miðaltal: 57,6) enn kvinnuligir svarpersónar (miðaltal: 49,0). Ískoytisgreiningar vísa harafturat, at munirnir millum menn og kvinnur eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 3.1.2.3: Miðaltøl fyri stigan Ávirkan á arbeiðstíðir býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Miðaltal |
|---|---:|---:|
| Maður | 2309 | 57,6 |
| Kvinna | 3160 | 49,0 |

Talva 3.1.2.4 vísir úrslitini fyri stigan um *Ávirkan á arbeiðstíðir* býtt upp í aldursbólkar. Úrslitini benda her á, at yngstu svarpersónarnir undir 25 ár í minni mun uppliva at hava ávirkan á sínar arbeiðstíðir (miðaltal: 42,9). Úrslitini benda harafturímóti á, at elstu svarpersónarnir yvir 65 ár meta seg í hægri mun hava ávirkan á sínar arbeiðstíðir (miðaltal: 60,8), tá ið teir ymisku aldursbólkarnir verða samanbornir við hvønn annan. Ískoytisgreiningar vísa harumframt, at munirnir millum aldursbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 3.1.2.4: Miðaltøl fyri stigan *Ávirkan á arbeiðstíðir* býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Miðaltal |
|---|---:|---:|
| < 25 ár | 299 | 42,9 |
| 25 - 34 ár | 789 | 49,2 |
| 35 - 44 ár | 1209 | 53,5 |
| 45 - 54 ár | 1446 | 52,8 |
| 55 – 64 ár | 1305 | 53,3 |
| > 65 ár | 416 | 60,8 |

Talva 3.1.2.5 vísir úrslitini fyri stigan um *Ávirkan á arbeiðstíðir* býtt upp í teir 11 ymisku starvsbólkarnar og vísir harumframt, hvar á stiganum hesir starvbólkar liggja í mun til miðaltalið fyri allar svarpersónar í kanningini. Í hesum førinum benda úrslitini á, at svarpersónar í 'Leiðsluarbeiði' hava hægsta miðaltal á stiganum (72,4), meðan svarpersónar innan fyri 'Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði' hava lægsta miðaltal á stiganum (31,4). Í úrslitunum sæst harafturat, at svarpersónar í 'Arbeiði á heilsuøkinum' og innan fyri 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' hava næstlægstu miðaltøl á ávikavist 39,3 og 40,0, og hava av tí sama eisini mett eitt lágt støði av ávirkan á arbeiðstíðir. Ískoytisgreiningar vísa harumframt, at munirnir millum teir 11 sarvsbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 3.1.2.5: Miðaltøl fyri stigan *Ávirkan á arbeiðstíðir* býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| 1 Leiðsluarbeiði | 530 | 72,4 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 689 | 70,4 |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 658 | 63,4 |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 799 | 55,4 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 379 | 53,7 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 268 | 53,2 |
| **Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum** | **6430** | **52,2** |
| 8 Arbeiði innan fyri landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 81 | 49,1 |
| 11 Annað handaligt arbeiði | 250 | 48,7 |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 211 | 40,0 |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 649 | 39,3 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligtnámsfrøðiligt arbeiði | 922 | 31,4 |

Viðmerking: **Grøna markingin** vísir, at luttakararnir úr starvsbólkinum greiða frá einum betri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum. **Reyða markingin** vísir, at luttakararnir úr starvsbólkinum greiða frá einum verri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Ávirkan á arbeiðstíðir***

Úrslitini fyri *Ávirkan á arbeiðstíðir* bendu á, at svarpersónarnir hava eitt stigatal upp á 52,2, sum merkir, at tey í miðal liggja tætt upp at svarbólkingini 'Partvíst'. Harnæst vístu úrslitini, at mannligir svarpersónar í kanningini hava mett seg at hava týðiligt størri ávirkan á egnar arbeiðstíðir enn kvinnuligir svarpersónar.

Úrslitini bendu harafturat á, at elstu svarpersónarnir yvir 65 ár í størri mun uppliva at hava ávirkan á egnar arbeiðstíðir samanborið við hinar aldursbólkarnar, har tað serliga eru yngstu svarpersónarnir undir 25 ár, sum siga frá, at tey í minni mun uppliva at hava ávirkan á egnar arbeiðstíðir. Sama rák sást fyri úrslitini úr *Ávirkan í arbeiðinum* í parti 3.1.1, har tess eldri svarpersónurin er, tess hægri uppliva teir ávirkanina.

At enda bendu úrslitini á, at svarpersónar í 'Leiðsluarbeiði' í størri mun uppliva at hava ávirkan á arbeiðstíðir samanborið við hinar starvsbókarnar, sum eisini sást í parti 3.1.1 um *Ávirkan í arbeiðinum*.

### 3.1.3 Menningarmøguleikar

Evnið *Menningarmøguleikar* snýr seg um, hvørt arbeiðstakararnir halda seg hava møguleika fyri at læra nakað nýtt og at menna fakligu førleikar sínar gjøgnum starvið. Hetta kann t.d. vera umvegis mennandi, avbjóðandi og fjølbroyttar arbeiðsuppgávur, uttanhýsis útbúgving ella innanhýsis skeið (22, 44, 45).

At hava góðar møguleikar at mennast í sínum arbeiði er partur av einum góðum psykososialum arbeiðsumhvørvi, og kann sostatt hugsast sum ein jaligur faktorur í arbeiðsumhvørvinum. Aðrar kanningar hava m.a. víst, at vantandi menningarmøguleikar í arbeiðinum hanga saman við einum øktum vanda fyri at brenna út (46). Kanningar hava eisini víst, at vantandi møguleikar fyri menning í arbeiðinum hanga saman við ynskinum hjá arbeiðstakara um at gevast í arbeiðinum (47) og at tíðliga taka seg burtur av arbeiðsmarknaðinum (48). At hava góðar møguleikar fyri menning í arbeiðinum er sostatt umráðandi fyri trivnaðin hjá starvsfeløgum, men eisini fyri møguleikan hjá arbeiðsplássinum at halda upp á starvsfelagar. Áður hevur ein kanning t.d. víst, at góðir menningarmøguleikar kunnu vera við til at avmarka týdningin av tyngd í psykososiala arbeiðsumhvørvinum fyri menningini av strongd (41).

Vit máta *Menningarmøguleikar* við hesum fýra spurningum í talvu 3.1.3.1. Talvan vísir býti av svørum í prosentum fyri allar svarpersónar í kanningini.

**Talva 3.1.3.1: Býti av svørum í prosentum**

| | Í sera lítlan mun | Í lítlan mun | Partvíst | Í stóran mun | Í sera stóran mun |
|---|---|---|---|---|---|
| Gevur títt arbeiði tær møguleika fyri at menna tínar fakligu førleikar? | 7,4 | 12,1 | 36,5 | 31,9 | 12,1 |
| Hevur tú ógvuliga skiftandi arbeiðsuppgávur? | 5,7 | 14,2 | 34,9 | 30,9 | 14,3 |
| Hevur tú møguleika fyri at læra okkurt nýtt í tínum arbeiði? | 4,3 | 10,6 | 32,9 | 36,8 | 15,4 |
| Hevur tú góðar møguleikar fyri at útbúgva teg víðari? | 17,1 | 23,3 | 31,8 | 19,1 | 8,6 |

Svørini av teimum fýra spurningunum í talvu 3.1.3.1 eru gjørd um til ein stiga, sum gongur frá 0-100, har 100 bendir á, at mann í sera stóran mun upplivir at hava møguleika fyri menning í arbeiði sínum.

Talva 3.1.3.2 vísir, at svarpersónarnir úr Føroyum hava 55,6 stig í miðal á stiganum um *Menningarmøguleikar*. Tað merkir sostatt, at svarpersónarnir í miðal hava svarað 'Partvíst' upp á teir fýra spurningarnar um menningarmøguleikar, sum sæst í talvu 3.1.3.1. Í talvu 3.1.3.2 niðanfyri sæst harafturat, at føroysku svarpersónarnir meta menningarmøguleikar sínar í arbeiðinum at vera lægri enn danski tilvísingarbólkurin, ið hevur eitt miðaltal upp á 61,5.

**Talva 3.1.3.2: Miðaltøl fyri stigan *Menningarmøguleikar***

| Menningarmøguleikar | Miðaltal |
|---|---|
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum | 55,6 |
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Danmark | 61,5 |

Talvurnar niðanfyri vísa úrslitini fyri *Menningarmøguleikar*, býtt upp í ávikavist kyn, aldur og starvsbólk.

Talva 3.1.3.3 vísir úrslitini fyri stigan um *Menningarmøguleikar* býtt upp í menn og kvinnur. Hesi úrslit vísa, at menn hava lyndi til at meta sínar menningarmøguleikar eitt sindur jaligari enn kvinnur. Ískoytisgreiningar vísa tó, at munurin millum menn og kvinnur er hagfrøðiliga signifikantur (p<.0001).

**Talva 3.1.3.3: Miðaltøl fyri stigan *Menningarmøguleikar* býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| Maður | 2311 | 57,2 |
| Kvinna | 3157 | 54,8 |

Talva 3.1.3.4 vísir úrslitini fyri stigan um *Menningarmøguleikar* býtt upp í ymiskar aldursbólkar. Í hesum førinum benda úrslitini á, at svarpersónar í aldrinum 25 til 34 ár hava hægsta miðaltal á stiganum (62,0). Hesi hava sostatt í størri mun mett seg at hava menningarmøguleikar í arbeiðinum samanborið við hinar aldursbólkarnar. Hinvegin benda úrslitini á, at elstu svarpersónarnir yvir 65 ár hava lægsta miðaltal á stiganum (47,3 stig). Yvirskipað bendir býtið av miðaltølunum á, at yngri arbeiðstakarar úr Føroyum uppliva fleiri menningarmøguleikar í arbeiðinum enn teir eldru. Ískoytisgreiningar vísa harafturat, at munirnir millum aldursbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 3.1.3.4: Miðaltøl fyri stigan *Menningarmøguleikar* býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| < 25 ár | 299 | 61,2 |
| 25 - 34 ár | 791 | 62,0 |
| 35 - 44 ár | 1206 | 58,0 |
| 45 - 54 ár | 1447 | 55,3 |
| 55 – 64 ár | 1304 | 51,9 |
| > 65 ár | 416 | 47,3 |

Talva 3.1.3.5 vísir úrslitini fyri stigan um *Menningarmøguleikar* býtt upp í 11 ymiskar starvsbólkar og vísir harafturat hvar á stiganum hesir starvsbólkar liggja í mun til miðaltalið fyri allar svarpersónarnar í kanningini. Hesi úrslit benda á, at svarpersónar í 'Leiðsluarbeiði' hava hægsta miðaltal á stiganum (65,6 stig), meðan svarpersónar í 'Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði' og 'Handverkaraarbeiði' hava næsthægsta miðaltalið (63,8 stig). Hesir tríggir starvsbólkar meta sostatt sínar møguleikar fyri at mennast í arbeiðinum at vera hægri enn hinir starvsbólkarnir, og eisini meira enn fimm stig hægri (betri) enn allir svarpersónar í kanningini. Harnæst vísa úrslitini, at svarpersónar í 'Annað handaligt arbeiði' í miðal siga frá lægsta støði av

menningarmøguleikum í arbeiðinum við einum stigatali upp á 37,2. Svarpersónar í 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' hava somuleiðis mett sínar menningarmøguleikar í arbeiðinum at vera lágar (39,3 stig). Til endans vísa ískoytisgreiningar, at munirnir millum teir 11 starvsbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 3.1.3.5: Miðaltøl fyri stigan *Menningarmøguleikar* býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| 1 Leiðsluarbeiði | 530 | 65,6 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 268 | 63,8 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 689 | 63,8 |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 649 | 58,4 |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 799 | 56,6 |
| **Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum** | **6429** | **55,6** |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligtnámsfrøðiligt arbeiði | 922 | 55,5 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 379 | 50,4 |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 658 | 50,4 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 81 | 48,5 |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 211 | 39,3 |
| 11 Annað handaligt arbeiði | 250 | 37,2 |

Viðmerking: **Grøna markingin** vísir, at luttakararnir úr starvsbólkinum greiða frá einum betri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum. **Reyða markingin** vísir, at luttakararnir úr starvsbólkinum greiða frá einum verri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Menningarmøguleikum***

Úrslitini fyri *Menningarmøguleikar* vístu, at føroyskir svarpersónar í minni mun uppliva at hava møguleikar at mennast í arbeiðinum samanborið við svarpersónar úr danska tilvísingarbólkinum.

Harnæst bendu úrslitini á ein lítlan mun millum metingarnar hjá monnum og kvinnum av sínum menningarmøguleikum í arbeiðinum. Úrslitini bendu tó á, at menn tykjast at hava lyndi til at meta sínar menningarmøguleikar eitt sindur jaligari enn kvinnur. Harumframt bendu úrslitini á, at yngri svarpersónar í størri mun uppliva at hava menningarmøguleikar í sínum arbeiði samanborið við eldri svarpersónar.

At enda bendu úrslitini á, at svarpersónar í starvsbólkinum 'Leiðsluarbeiði' í størri mun uppliva at hava møguleikar at mennast í arbeiðinum samanborið við hinar tíggju starvsbólkarnar, har úrslitini eisini bendu á, at svarpersónar í 'Annað handaligt arbeiði' meta sínar menningarmøguleikar í arbeiðinum at vera á lágum støði. Eisini týðiliga lægri enn miðal av øllum svarpersónum í kanningini.

### 3.1.4 Greidleiki um leiklutir

*Greidleiki um leiklutir* snýr seg um, hvørt arbeiðstakararnir uppliva greidleika um tann leiklutin, sum verður væntaður røktur í teirra starvi. Tað vil siga, um arbeiðstakararnir vita, hvussu teir skulu útinna arbeiðið, og um málini og væntanirnar til at loysa arbeiðsuppgávurnar eru greiðar. Tá tosað verður um greidleika um leiklutir, kann tað m.a. vera umráðandi, at arbeiðstakararnir uppliva at hava fingið ta neyðugu og nøktandi kunningina um útinningina av arbeiðinum og um málini fyri arbeiðinum. Tað er eisini av týdningi, at samsvar er millum væntanir hjá arbeiðstakara og arbeiðsgevara, og somuleiðis millum starvsfelagar, sum skulu samstarva um loysnina upp á arbeiðsuppgávuna (22, 49).

Greidleiki um leiklutir hevur týdning fyri trivnaðin hjá arbeiðstakarum og starvsfeløgum á starvsplássinum, og mangul upp á greidleika um leiklutir kann føra til ørkymlan og ósemjur t.d. millum starvsfelagar. Ein nýggjari donsk kanning vísir, at arbeiðstakarar, sum í stóran mun siga frá greidleika um leiklutir eru í lægri vanda fyri langari sjúkrafráveru og sálarligum heilsutrupulleikum (1). T.d. hevur ein kanning áður víst, at greidleiki um leiklutir í arbeiðinum hongur saman við, í hvønn mun happing á arbeiðsplássinum kemur fyri (50). Kanningar hava eisini áður víst, at ógreiðir leiklutir í arbeiðinum hanga saman við, at arbeiðstakarar ikki geva nógv á arbeiðsplássinum (39). Harumframt hava kanningar eisini víst, at ógreiðir leiklutir hanga saman við einum lágum støði av meining í arbeiðinum (25).

Vit máta *Greidleika um leiklutir* við hesum fýra spurningunum í talvu 3.1.4.1. Talvan vísir býtið av svørum í prosentum fyri allar svarpersónar í kanningini.

**Talva 3.1.4.1: Býti av svørum í prosentum**

| | Í sera lítlan mun | Í lítlan mun | Partvíst | Í stóran mun | Í sera stóran mun |
|---|---|---|---|---|---|
| Eru greið mál fyri títt arbeiði? | 3,3 | 7,9 | 28,0 | 42,9 | 17,9 |
| Veitst tú ítøkiliga, hvat verður væntað av tær í tínum arbeiði? | 2,6 | 5,8 | 21,8 | 47,8 | 22,0 |
| Veitst tú, nær tú hevur gjørt eitt gott arbeiði? | 4,1 | 7,9 | 25,1 | 44,0 | 19,0 |
| Er greitt fyri tær, hvørji tíni ábyrgdarøki eru? | 2,1 | 5,0 | 19,4 | 48,0 | 25,5 |

Svørini upp á teir fýra spurningarnir í talvu 3.1.4.1 eru umgjørd til ein stiga, ið gongur frá 0-100, har 100 bendir á, at mann í arbeiðinum í stóran mun upplivir greidleika um leiklutir.

Talva 3.1.4.2. vísir, at svarpersónarnir úr Føroyum hava 68,8 stig í miðal á stiganum um *Greidleika um leiklutir*, meðan danski tilvísingarbólkurin hevur 70,5 stig í miðal. Sostatt er ein rættiliga lítil munur á, hvussu bólkarnir báðir hava mett greidleika um leiklutir í arbeiðinum.

**Talva 3.1.4.2: Miðaltøl fyri stigan *Greidleiki um leiklutir***

| Greidleiki um leiklutir | Miðaltal |
|---|---|
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum | 68,8 |
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Danmark | 70,5 |

Í talvunum niðanfyri verða úrslitini víst fyri *Greidleika um leiklutir* býtt upp í ávikavist kyn, aldur og starvsbólk.

Talva 3.1.4.3 vísir úrslitini fyri stigan *Greidleiki um leiklutir* býtt upp í menn og kvinnur. Úrslitini benda á, at menn hava eitt sindur hægri stigatal á stiganum *Greidleiki um leiklutir* enn kvinnur. Ískoytisgreiningar vísa, at munurin millum menn og kvinnur er hagfrøðiliga signifikantur (p<.0001).

**Talva 3.1.4.3: Miðaltøl fyri stigan *Greidleiki um leiklutir* býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| Maður | 2258 | 70,8 |
| Kvinna | 3076 | 67,9 |

Talva 3.1.4.4 vísir úrslitini fyri stigan *Greidleiki um leiklutir* býtt upp í ymiskar aldursbólkar. Í hesum førinum vísa úrslitini, at svarpersónar í aldrinum 35-44 ár hava lægsta miðaltal á stiganum (66,8 stig), og meta sostatt sín greidleika um leiklutir í arbeiðinum at vera lægri enn hjá hinum aldursbólkunum. Harafturímóti hava elstu svarpersónarnir yvir 65 ár hægsta miðaltal á stiganum (74,6 stig), og meta seg sostatt hava hægri støði av greidleika um leiklutir í arbeiðinum enn hinir aldursbólkarnir. Ískoytisgreiningar vísa, at hesir munirnir millum aldursbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 3.1.4.4: Miðaltøl fyri stigan *Greidleiki um leiklutir* býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| < 25 ár | 280 | 69,4 |
| 25 - 34 ár | 764 | 68,0 |
| 35 - 44 ár | 1181 | 66,8 |
| 45 - 54 ár | 1416 | 69,0 |
| 55 – 64 ár | 1280 | 70,4 |
| > 65 ár | 408 | 74,6 |

Talva 3.1.4.5 vísir úrslitini fyri stigan *Greidleiki um leiklutir* býtt upp í 11 ymiskar starvsbólkar og vísir harumframt, hvar á stiganum hesir starvsbólkar liggja í mun til miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini. Úrslitini benda á, at tað bert eru smáir munir millum teir 11 starvsbólkarnar og, at svarpersónar í 'Leiðsluarbeiði' hava hægsta miðaltalið (72,5 stig), og er sostatt tann starvsbólkurin, sum í størstan mun upplivir at hava greidleika um leiklutir í arbeiðinum samanborið við hinar starvsbólkarnar. Svarpersónar í ávikavist 'Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði' og 'Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði' hava lægsta miðaltal á stiganum *Greidleiki um leiklutir* við miðaltølum upp á ávikavist 67,1 og 67,6, og meta sostatt sín greidleika um leiklutir í arbeiðinum at vera lægri samanborið við hinar starvsbólkarnar. Hóast munirnir eru lítlir,

vísa ískoytisgreiningar, at munirnir millum teir 11 starvsbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 3.1.4.5: Miðaltøl fyri stigan *Greidleiki um leiklutir* býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| 1 Leiðsluarbeiði | 520 | 72,5 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 258 | 71,2 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 368 | 71,1 |
| 11 Annað handaligt arbeiði | 239 | 70,7 |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 205 | 70,1 |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 782 | 70,0 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 79 | 69,1 |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 636 | 69,0 |
| **Miðaltal fyri svarpersonar úr Føroyum** | **6119** | **68,8** |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 898 | 68,0 |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 638 | 67,6 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 679 | 67,1 |

Viðmerking: **Grøna markingin** merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá betri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Greidleika um leiklutir***

Úrslitini fyri *Greidleiki um leiklutir* vístu, at svarpersónar úr føroysku kanningini meta seg í stóran mun hava greidleika um leiklutir í arbeiðinum. Úrslitini víkja í minni mun frá miðaltalinum hjá danska tilvísingarbólkinum, og benda sostatt á, at teir báðir bólkarnir ikki víkja nógv frá hvørjum øðrum tá tað kemur til teirra upplivilsi av greidleika um leiklutir í arbeiðinum. Úrslitini vístu upp á tvørs av kyni, at mannligir svarpersónar høvdu nakað hægri stigatal á stiganum um *Greidleika um leiklutir* enn kvinnuligir svarpersónar.

Harnæst vístu úrslitini, at elstu svarpersónarnir sum heild uppliva at hava meira greidleika um leiklutir í arbeiðinum enn hinir starvsbólkarnir, og serstakliga tey ungu. Harafturat bendu úrslitini á, at svarpersónar í starvsbólkinum 'Leiðsluarbeiði' meta seg hava meira greidleika um leiklutir í arbeiðinum enn hinir bólkarnir, meðan svarpersónar í 'Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði' og 'Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði' meta seg hava minni greidleika um leiklutir í arbeiðinum enn hinir bólkarnir. At enda skal viðmerkjast, at tað bert vóru smáir munir millum teir 11 starvsbólkarnar.

### 3.1.5 Tvídráttir um leiklutir

*Tvídráttir um leiklutir* snýr seg um, hvørt arbeiðstakararnir uppliva misjavna ella mótsøgn í væntanum og krøvum til tað arbeiðsavrik, sum skal útinnast. Arbeiðstakarar kunnu t.d. uppliva tvídrátt um leiklutir í arbeiðinum, um viðskiftafólk, leiðarar ella starvsfelagar hava aðrar væntanir til tað arbeiðið, sum skal gerast, enn arbeiðstakarin sjálvur hevur. Tað kann eisini vera, at arbeiðstakarin ikki følir, at hann kann brúka sína fakligu vitan ella hevur neyðuga tilfeingi ella førleikarnar til at vera førur fyri at avgreiða uppgávuna á ein hátt, ið livir upp til væntanirnar um eina fakliga nøktandi loysn av uppgávum. *Tvídráttir um leiklutir* kann eisini snúgva seg um, at arbeiðið fevnir um nakrar uppgávur, sum arbeiðstakarin upplivir at vera í stríð við síni persónligu virði. Stigin *Tvídráttir um leiklutir* skilir seg frá stiganum um *Greidleika um leiklutir* við at dentur verður lagdur á upplivingina, arbeiðstakarin hevur av væntanum hjá øðrum til tað arbeiðið, sum skal gerast, fram um tað at skilja sín leiklut í arbeiðsvirkseminum (22, 49).

Upplivingin av tvídráttum í arbeiðinum hevur á sama hátt sum vantandi greidleiki um leiklutir eisini týdning fyri trivnaðin hjá starvsfelaganum. Ein nýggjari donsk kanning vísir, at arbeiðstakarar, sum siga frá høgum støði av tvídrátti um leiklutir eru í minni vanda fyri langari sjúkrafráveru og sálarligum heilsutrupulleikum (1, 51). Kanningar hava áður staðfest, at tvídráttir um leiklutir hanga saman við, at starvsfólk javnan verða útskift á arbeiðsplássinum (24) og strongd (52).

Vit máta *Tvídráttir um leiklutir* við teimum fýra spurningunum í talvu 3.1.5.1. Talvan vísir býtið av svørum í prosentum fyri allar svarpersónar í kanningini.

**Talva 3.1.5.1: Býti av svørum í prosentum**

| | Í sera lítlan mun | Í lítlan mun | Partvíst | Í stóran mun | Í sera stóran mun |
|---|---|---|---|---|---|
| Hevur tú arbeiðsuppgávur, sum tú heldur skulu gerast øðrvísi? | 6,5 | 23,6 | 46,3 | 15,5 | 8,0 |
| Verða krøv sett til tín í tínum arbeiði, sum ikki eru í samsvar við hvørt annað? | 2,6 | 5,8 | 21,8 | 47,8 | 22,0 |
| Hevur tú arbeiðsuppgávur, ið eru í stríð við tíni persónligu virði? | 50,7 | 29,3 | 14,3 | 3,7 | 2,0 |
| Verður tú onkuntíð noydd/ur at fullføra eina arbeiðsuppgávu, áðrenn tú kennir, at tú ert liðug/ur við hana? | 19,1 | 29,1 | 33,4 | 13,3 | 5,1 |

Svørini frá teimum fýra spurningunum í talvu 3.1.5.1 eru umgjørd til ein stiga, ið gongur frá 0-100, har 100 bendir á, at mann í arbeiðinum í stóran mun upplivir tvídráttir um leiklutir í arbeiðinum. Hesin stigin er í øvutari raðfylgju í mun til áður umtalaðar stigar, og høgt stigatal og miðaltal í hesum stiganum bendir á møguliga tyngd í arbeiðsumhvørvinum.

Talva 3.1.5.2 vísir, at miðaltalið hjá svarpersónunum úr Føroyum er 35,7 stig á stiganum um *Tvídráttir um leiklutir*, meðan miðaltalið hjá danska tilvísingarbólkinum er 37,9 stig. Sostatt er bert ein heldur lítil munur á metingunum hjá bólkunum báðum um, hvussu teir uppliva tvídráttir um leiklutir í arbeiðinum, har føroyski felagsbólkurin hevur mett tvídráttir um leiklutir at vera eitt sindur lægri enn danski tilvísingarbólkurin hevur mett.

**Talva 3.1.5.2: Miðaltøl fyri stigan *Tvídráttir um leiklutir***

| Tvídráttir um leiklutir | Miðaltal |
|---|---|
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum | 35,7 |
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Danmark | 37,9 |

Í talvunum niðanfyri verða úrslitini fyri *Tvídráttir um leiklutir* víst býtt upp í ávikavist kyn, aldur og starvsbólk.

Talva 3.1.5.3 vísir úrslitini fyri stigan um *Tvídráttir um leiklutir* býtt upp í menn og kvinnur. Úrslitini benda á, at tað bert er ein minni munur millum metingarnar hjá mannligum og kvinnuligum svarpersónum av tvídráttum um leiklutir í arbeiðinum. Ískoytisgreiningar vísa harafturat, at munurin millum menn og kvinnur ikki er hagfrøðiliga signifikantur (p=0.0531).

**Talva 3.1.5.3: Miðaltøl fyri stigan *Tvídráttir um leiklutir* býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| Maður | 2255 | 34,6 |
| Kvinna | 3071 | 35,6 |

Talva 3.1.5.4 vísir úrslitini fyri stigan *Tvídráttir um leiklutir* býtt upp í ymiskar aldursbólkar. Í hesum førinum vísa úrslitini, at svarpersónar í aldrinum 25-34 ár hava hægsta miðaltal á stiganum um *Tvídráttir um leiklutir* (40,5 stig), og sostatt sýnist hesin bólkurin at uppliva tvídráttir um leiklutir í arbeiðinum í størri mun samanborið við hinar aldursbólkarnar. Harnæst vísa úrslitini, at teir eldru svarpersónarnir yvir 65 ár hava lægsta miðaltal á stiganum (24,8 stig), og uppliva tískil í minni mun tvídráttir um leiklutir í arbeiðinum samanborið hinar aldursbólkarnar. Ískoytisgreiningar vísa, at munirnir millum aldursbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 3.1.5.4: Miðaltøl fyri stigan *Tvídráttir um leiklutir* býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| < 25 ár | 279 | 37,0 |
| 25 - 34 ár | 762 | 40,5 |
| 35 - 44 ár | 1181 | 38,4 |
| 45 - 54 ár | 1415 | 35,3 |
| 55 – 64 ár | 1277 | 31,9 |
| > 65 ár | 407 | 24,8 |

Talva 3.1.5.5 vísir úrslitini fyri stigan *Tvídráttir um leiklutir* býtt upp í 11 ymiskar starvsbólkar og vísir harumframt, hvar á stiganum hesir starvsbólkar liggja í mun til miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini. Í hesum førinum benda úrslitini á, at svarpersónar í 'Arbeiði á heilsuøkinum' og 'Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði' hava

tvey tey hægstu miðaltølini á stiganum, ávikavist 39,7 og 39,6. Tískil sær út til, at arbeiðstakarar innan fyri hesi bæði sløgini av starvsbólkum uppliva í hægri mun tvídráttir um leiklutir í arbeiðinum enn hinir starvsbólkarnir. Hetta úrslit kemur ikki óvart, tí sama rák sæst í úrslitunum í donsku tilvísingarkanningini, har arbeiðstakarar í vinnugreinunum 'Undirvísing: Barnaskúli', 'Dagstovnar, frítíðarklubbar v.m.', og 'Sosialir stovnar: Eldrarøkt v.m.' hava signifikant hægri stigatal á stiganum um *Tvídráttir um leiklutir* samanborið við miðaltalið av donskum arbeiðstakarum (19). Tískil er okkurt, ið bendir á, at arbeiðstakarar í hesum slagi av starvi oftari koma seg í støður í arbeiðinum, har tvídráttir um leiklutir kunnu koma fyri.

Úrslitini vísa harumframt, at svarpersónar innan fyri 'Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði' hava lægsta miðaltal á stiganum (28,5 stig). Harafturat benda úrslitini á, at hesin starvsbólkurin fær í minsta lagi fimm stig lægri (betri) enn miðal av øllum svarpersónum í kanningini. Ískoytisgreiningar vísa, at munirnir millum teir 11 starvsbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 3.1.5.5: Miðaltøl fyri stigan *Tvídráttir um leiklutir* býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 634 | 39,7 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 898 | 39,6 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 79 | 36,9 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 259 | 36,3 |
| **Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum** | **6108** | **35,7** |
| 1 Leiðsluarbeiði | 520 | 35,2 |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 205 | 35,1 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 366 | 34,9 |
| 11 Annað handaligt arbeiði | 239 | 34,6 |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 780 | 33,8 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 678 | 33,4 |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 636 | 28,5 |

Viðmerking: **Grøna markingin** merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá betri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum. **Reyða markingin** merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá verri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Tvídráttum um leiklutir***
Úrslitini fyri *Tvídráttir um leiklutir* vístu, at svarpersónar í føroysku kanningini meta støðið av tvídráttum um leiklutir at vera á næstan sama støðið, sum svarpersónar í danska tilvísingarbólkinum. Somuleiðis bendu úrslitini á, at tað bert er lítil munur á, hvussu mannligir og kvinnuligir svarpersónar hava mett støðið av tvídráttum um leiklutir í arbeiðinum.

Harnæst bendu úrslitini á, at svarpersónar í aldrinum 25 til 34 ár í størri mun uppliva tvídráttir um leiklutir í arbeiðinum, men, at svarpersónar í aldrinum 65 ár og eldri uppliva í týðiliga minni mun tvídráttir um leiklutir í arbeiðinum, tá hesi verða

samanborin við hinar aldursbólkarnar. Til endans vístu úrslitini, at svarpersónar í 'Arbeiði á heilsuøkinum' og 'Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði' í størri mun uppliva tvídráttir um leiklutir í arbeiðinum samanborið við hinar níggju starvsbólkarnar, og harumframt, at hesi úrslit eru lík úrslitunum úr donsku tilvísingarkanningini, har arbeiðstakarar í hesum slag av vinnugrein eisini siga frá einum hægri støði av tvídráttum um leiklutir í arbeiðinum.

### 3.1.6 Møguleikar fyri at loysa arbeiðsuppgávurnar

*Møguleikar fyri at loysa arbeiðsuppgávurnar* snýr seg um, hvørt arbeiðstakararnir uppliva, at viðurskiftini á arbeiðsplássinum viðvirka til at stuðla upp undir, at arbeiðsuppgávurnar verða loystar nøktandi. Tað snýr seg eitt nú um, at arbeiðstakararnir uppliva, at teir hava tað neyðuga tilfeingið til taks til tess at hava møguleika at útinna eitt fakliga nøktandi arbeiði (28).

Hugsast kann, at arbeiðstakarar fara at trívast betri og fáa størri arbeiðsgleði, um tey uppliva at hava góðar møguleikar at kunna loysa sínar arbeiðsuppgávur. Úrslit úr einari nýliga gjørdari danskari ritgerð benda á, at arbeiðstakarar, sum siga seg hava góðar møguleikar at kunna loysa sínar arbeiðsuppgávur, eru í minni vanda fyri drúgvari sjúkufráveru og sálarligum heilsutrupulleikum (1). Ein onnur kanning hevur víst, at hvussu arbeiðstakarar uppliva møguleikarnar fyri at kunna útinna kjarnuuppgávuna, hongur saman við øktum nøgdsemi við arbeiðið og lækkaðum vanda fyri at brenna út (28).

Vit máta *Uppliving av møguleikunum fyri at loysa arbeiðsuppgávurnar* við hesum fýra spurningunum í talvu 3.1.6.1. Talvan vísir býtið av svørum í prosentum fyri allar svarpersónar í kanningini.

**Talva 3.1.6.1: Býti av svørum í prosentum**

| | Í sera lítlan mun | Í lítlan mun | Partvíst | Í stóran mun | Í sera stóran mun |
|---|---|---|---|---|---|
| Eru viðurskiftini á arbeiðsplássinum hóskandi, so tú fært útint títt arbeiði nóg væl? | 3,1 | 7,7 | 28,2 | 47,8 | 13,2 |
| Hevur tú tey arbeiðsamboð, tú hevur tørv á (t.d. hjálpartól, amboð, maskinur, KT-loysnir), soleiðis at tú kanst útinna títt arbeiði nóg væl? | 2,4 | 6,0 | 20,6 | 47,3 | 23,7 |
| Eru nóg mikið av starvsfólkum til, at tú kanst útinna títt arbeiði nóg væl? | 8,1 | 14,6 | 31,2 | 35,3 | 10,7 |
| Fært tú arbeitt soleiðis, at arbeiðið hevur eina góðsku, tú ert nøgd/ur við? | 2,3 | 7,1 | 31,5 | 47,1 | 11,9 |

Svørini frá teimum fýra spurningunum í talvu 3.1.6.1 eru umgjørd til ein stiga frá 0-100, har 100 bendir á, at mann í sera stóran mun upplivir at hava góðar møguleikar at loysa sínar arbeiðsuppgávur.

Talva 3.1.6.2. vísir, at svarpersónarnir úr Føroyum hava eitt miðaltal upp á 64,4 á stiganum um *Uppliving av møguleikunum fyri at loysa arbeiðsuppgávurnar,* meðan danski tilvísingarbólkurin hevur eitt miðaltal upp á 64,0. Sostatt er ikki munur á, hvussu báðir bólkarnir hava mett seg at uppliva møguleikarnar fyri at loysa arbeiðsuppgávurnar.

**Talva 3.1.6.2: Miðaltøl fyri stigan *Uppliving av møguleikunum fyri at loysa arbeiðsuppgávurnar***

| Uppliving av møguleikunum fyri at loysa arbeiðsuppgávurnar | Miðaltal |
|---|---|
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum | 64,4 |
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Danmark | 64,0 |

Í talvunum niðanfyri verða úrslitini víst fyri stigan um *Uppliving av møguleikunum fyri at loysa arbeiðsuppgávurnar* býtt upp í ávikavist kyn, aldur og starvsbólk.

Talva 3.1.6.3 vísir úrslitini fyri stigan um *Uppliving av møguleikunum fyri at loysa arbeiðsuppgávurnar* býtt upp í menn og kvinnur. Úrslitini benda á, at mannligir svarpersónar hava mett sína *Uppliving av møguleikunum fyri at loysa arbeiðsuppgávurnar* at vera hægri enn kvinnuligir svarpersónar. Ískoytisgreiningar vísa harafturat, at munurin millum menn og kvinnur er hagfrøðiliga signifikantur (p<.0001).

**Talva 3.1.6.3: Miðaltøl fyri stigan *Uppliving av møguleikunum fyri at loysa arbeiðsuppgávurnar* býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| Maður | 2137 | 67,5 |
| Kvinna | 2930 | 62,7 |

Talva 3.1.6.4 vísir úrslitini fyri stigan um *Uppliving av møguleikunum fyri at loysa arbeiðsuppgávurnar* býtt upp í ymiskar aldursbólkar. Í hesum førinum vísa úrslitini, at elstu svarpersónarnir yvir 65 ár hava mett sína *Uppliving av møguleikunum fyri at loysa arbeiðsuppgávurnar* at vera betri enn hinir aldursbólkarnir (70,9 stig). Øvut, benda úrslitini á, at yngstu svarpersónarnir undir 25 ár hava mett sína *Uppliving av møguleikunum fyri at loysa arbeiðsuppgávurnar* at vera verri enn hinir bólkarnir (60,2 stig). Ískoytisgreiningar vísa, at munirnir millum aldursbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 3.1.6.4: Miðaltøl fyri stigan *Uppliving av møguleikunum fyri at loysa arbeiðsuppgávurnar* býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| < 25 ár | 237 | 60,2 |
| 25 - 34 ár | 712 | 61,0 |
| 35 - 44 ár | 1138 | 62,7 |
| 45 - 54 ár | 1355 | 65,0 |
| 55 – 64 ár | 1235 | 67,4 |
| > 65 ár | 385 | 70,9 |

Talva 3.1.6.5 vísir úrslitini fyri stigan um *Uppliving av møguleikunum fyri at loysa arbeiðsuppgávurnar* býtt upp í 11 ymiskar starvsbólkar og vísir harumframt, hvar á stiganum hesir starvsbólkar liggja í mun til miðaltalið fyri allar svarpersónar í kanningini. Úrslitini benda á, at svarpersónar í 'Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði' hava hægsta miðaltalið á stiganum (70,0 stig), og hava tískil mett sína *Uppliving av*

*møguleikunum fyri at loysa arbeiðsuppgávurnar* at vera betri enn hinir starvsbólkarnir. Harnæst benda úrslitini á, at tveir starvsbólkar uppliva verri møguleikar fyri at loysa arbeiðsuppgávurnar samanborið við restina av starvsbólkunum. Teir báðir starvsbólkarnir eru ávikavist 'Arbeiði á heilsuøkinum' (58,9 stig) og 'Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði' (58,8 stig). Eisini sæst í úrslitunum í donsku tilvísingarkanningini, at arbeiðstakarar í heilsuverkinum og innan fyri undirvísningarøkið hava eina signifikant verri uppliving av møguleikunum fyri at loysa arbeiðsuppgávurnar enn miðaltalið av donskum arbeiðstakarum (19). Úrslitini í hesarí kanningini benda sostatt á somu rákini sum í donsku tilvísingarkanningini. Til endans benda ískoytisgreiningar á, at munirnir millum teir 11 starvsbólkarnar í kanningini eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 3.1.6.5: Miðaltal fyri stigan *Uppliving av møguleikunum fyri at loysa arbeiðsuppgávurnar* býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Miðal |
|---|---|---|
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 616 | 70,0 |
| 1 Leiðsluarbeiði | 493 | 69,1 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 661 | 68,4 |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 753 | 67,1 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 241 | 65,4 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 72 | 64,8 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 334 | 64,7 |
| **Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum** | **5583** | **64,4** |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 181 | 63,7 |
| 11 Annað handaligt arbeiði | 224 | 63,3 |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 607 | 58,9 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 857 | 58,8 |

Viðmerking: **Grøna markingin** merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá betri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum. **Reyða markingin** merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá verri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Uppliving av møguleikunum fyri at loysa arbeiðsuppgávurnar***

Úrslitini fyri *Uppliving av møguleikunum fyri at loysa arbeiðsuppgávurnar* bendu á, at tað ikki var munur á, hvussu svarpersónar úr Føroyum og svarpersónar úr danska tilvísingarbólkinum hava mett uppliving sína av møguleikunum fyri at loysa arbeiðsuppgávurnar at vera. Harnæst vístu úrslitini, at mannligir svarpersónar meta seg hava betri *Uppliving av møguleikunum fyri at loysa arbeiðsuppgávurnar* enn kvinnuligir svarpersónar. Harumframt bendu úrslitini á, at elstu svarpersónarnir meta sína *Uppliving av møguleikunum fyri at loysa arbeiðsuppgávurnar* at vera betri enn yngstu svarpersónarnir. Til endans bendu úrslitini á, at svarpersónar í 'Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði' í stóran mun uppliva at hava møguleikar fyri at loysa arbeiðsuppgávurnar, meðan svarpersónar í 'Arbeiði á heilsuøkinum' og 'Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði' týðiliga uppliva at hava verri Møguleikar fyri at loysa

arbeiðsuppgávurnar, sum tó ikki er óvæntað, av tí at sama rák sæst í úrslitunum úr donsku tilvísingarkanningini (19).

## 3.1.7 Óneyðugar arbeiðsuppgávur

*Óneyðugar arbeiðsuppgávur* snýr seg um, hvussu arbeiðstakarar uppliva innihaldið og skipanina av arbeiði teirra. Eitt dømi kann vera, at arbeiðstakararnir hava ilt við at síggja endamálið ella meiningina við teimum arbeiðsuppgávunum, tey skulu gera ella, at avrikið av teirra arbeiðsuppgávum verður tarnað av tí mátanum, arbeiðið er skipað. *Óneyðugar arbeiðsuppgávur* sipar sostatt til arbeiðsgongdir ella ítøkiligar arbeiðsuppgávur, sum arbeiðstakarin fatar at vera óneyðugar í mun til loysnina av sjálvari kjarnuuppgávuni og, sum kunnu koma í vegin fyri møguleikunum at fáa fakligu førleikarnar í spæl, tá uppgávan skal loysast (53).

Granskingarúrslit vísa, at upplivingin av *Óneyðugum arbeiðsuppgávum* hava týdning fyri trivnað og atferð hjá arbeiðstakarunum á arbeiðsplássinum. T.d. er ein kanning áður komin fram til, at upplivingin av at hava *óneyðugar arbeiðsuppgávur* kann verða fatað sum ein strongdarfaktorur í arbeiðinum, og soleiðis vera við til at økja um vandan fyri strongd í arbeiðinum (54, 55). Harumframt hongur upplivingin av óneyðugum arbeiðsuppgávum saman við skerdari sálarligari vælveru (30, 56) og atferð á arbeiðsplássinum, ið virkar beint øvut (54). Til endans hevur ein nýliga gjørd donsk ritgerð staðfest fram til, at arbeiðstakarar, sum siga frá, at óneyðugar arbeiðsuppgávur ofta koma fyri, eru í øktum vanda at fáa sálarligar heilsutrupulleikar (1).

Vit máta *Óneyðugar arbeiðsuppgávur* við teimum fýra spurningunum í talvu 3.1.7.1. Talvan vísir býtið av svørum í prosentum fyri allar svarpersónar í kanningini.

**Talva 3.1.7.1: Býti av svørum í prosentum**

| | Í sera lítlan mun | Í lítlan mun | Partvíst | Í stóran mun | Í sera stóran mun |
|---|---|---|---|---|---|
| Brúkar tú tíð uppá arbeiðsuppgávur, sum tú hevur trupult við at síggja endamálið við? | 17,5 | 39,7 | 31,3 | 9,1 | 2,4 |
| Verður tú í tínum arbeiði sett/ur í støður, sum eru óneyðuga truplar? | 20,7 | 39,6 | 29,1 | 8,4 | 2,2 |
| Verður arbeiðið gjørt truplari av óhóskandi arbeiðsgongdum? | 21,5 | 36,3 | 28,4 | 10,3 | 3,6 |
| Skalt tú útinna arbeiðsuppgávur, sum tú heldur vera óneyðugar? | 26,0 | 39,4 | 25,8 | 6,8 | 2,1 |

Svørini frá teimum fýra spurningunum í talvu 3.1.7.1 eru umgjørd til ein stiga frá 0-100, har 100 bendir á, at mann í stóran mun upplivir óneyðugar arbeiðsuppgávur í arbeiðinum. Øvut stigavirðum og miðaltølum, nevnd omanfyri, er hesin stigin vendur upp og niður, soleiðis, at eitt høgt miðaltal á stiganum merkir ein møgulig byrða í arbeiðsumhvørvinum.

Talva 3.1.7.2. vísir, at svarpersónarnir úr Føroyum hava eitt miðaltal upp á 33,1 á stiganum um *Óneyðugar arbeiðsuppgávur*, meðan danski tilvísingarbólkurin hevur eitt miðaltal upp á 35,5. Sostatt er bert ein lítil munur á, hvussu báðir bólkarnir hava mett upplivingina av óneyðugum arbeiðsuppgávum í arbeiðinum.

**Talva 3.1.7.2: Miðaltøl fyri stigan *Óneyðugar arbeiðsuppgávur***

| Óneyðugar arbeiðsuppgávur | Miðaltal |
|---|---|
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum | 33,1 |
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Danmark | 35,5 |

Í talvunum niðanfyri verða úrslitini víst fyri *Óneyðugar arbeiðsuppgávur* býtt upp í ávikavist kyn, aldur og starvsbólk.

Talva 3.1.7.3 vísir úrslitini fyri stigan um *Óneyðugar arbeiðsuppgávur* býtt upp í menn og kvinnur. Úrslitini benda á, at mannligir og kvinnuligir svarpersónar hava mett upplivingina av óneyðugum arbeiðsuppgávum lutfalsliga eins. Ískoytisgreiningar vísa harafturat, at munurin millum menn og kvinnur ikki er hagfrøðiliga signifikantur (p=0.1246)

**Talva 3.1.7.3: Miðaltøl fyri stigan *Óneyðugar arbeiðsuppgávur* býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| Maður | 2134 | 32,2 |
| Kvinna | 2930 | 33,1 |

Talva 3.1.7.4 vísir úrslitini fyri stigan um *Óneyðugar arbeiðsuppgávur* býtt upp í ymiskar aldursbólkar. Í hesum førinum vísa úrslitini, at elstu svarpersónarnir yvir 65 ár uppliva óneyðugu arbeiðsuppgávurnar í arbeiðinum at vera lægri enn restin av aldursbólkunum (22,8 stig). Øvut benda úrslitini á, at svarpersónar í aldrinum 25 til 34 ár hava tað hægsta miðaltalið á stiganum (40,5 stig), og harvið sær út til, at svarpersónar í hesum aldursbólkinum í størri mun uppliva óneyðugar arbeiðsuppgávur í arbeiðinum. Ískoytisgreiningar vísa, at munirnir millum aldursbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 3.1.7.4: Miðaltøl fyri stigan *Óneyðugar arbeiðsuppgávur* býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| < 25 ár | 237 | 36,7 |
| 25 - 34 ár | 710 | 37,2 |
| 35 - 44 ár | 1137 | 35,7 |
| 45 - 54 ár | 1354 | 33,2 |
| 55 – 64 ár | 1236 | 29,0 |
| > 65 ár | 385 | 22,8 |

Talva 3.1.7.5 vísir úrslitini fyri stigan um *Óneyðugar arbeiðsuppgávur* býtt upp í 11 ymiskar starvsbólkar og vísir harumframt, hvar hesir starvsbólkar eru á stiganum í mun til miðaltalið fyri allar svarpersónar í kanningini. Í hesum førinum benda úrslitini, at svarpersónar í 'Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði' hava lægsta miðaltalið (28,5 stig), og meta seg sostatt hava færri óneyðugar arbeiðsuppgávur enn hinir starvsbólkarnir. Harnæst vísa úrslitini, at teir báðir starvsbólkarnir, ið tykjast uppliva at hava flestar óneyðugar arbeiðsuppgávur í arbeiðinum, eru svarpersónar í 'Arbeiði á heilsuøkinum' (36,6 stig) og í 'Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði' (37,4 stig). Tá tað

kemur til *Óneyðugar arbeiðsuppgávur* vísa úrslitini sama rákið, sum úrslitini fyri stigan *Uppliving av møguleikunum fyri at loysa arbeiðsuppgávurnar*. Ískoytisgreiningar vísa harafturat, at munirnir millum starvsbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 3.1.7.5: Miðaltøl fyri stigan *Óneyðugar arbeiðsuppgávur* býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 857 | 37,4 |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 606 | 36,6 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 240 | 36,6 |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 181 | 33,4 |
| **Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum** | **5579** | **33,1** |
| 1 Leiðsluarbeiði | 493 | 32,5 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 72 | 31,5 |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 752 | 31,1 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 335 | 30,8 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 661 | 30,1 |
| 11 Annað handaligt arbeiði | 223 | 29,7 |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 616 | 28,5 |

Viðmerking: **Grøna markingin** vísir, at luttakararnir úr starvsbólkinum greiða frá einum betri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum. **Reyða markingin** vísir, at luttakararnir úr starvsbólkinum greiða frá einum verri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Óneyðugum arbeiðsuppgávum***

Í úrslitunum fyri *Óneyðugar arbeiðsuppgávur* sást ein heldur lítil munur í metingunum hjá svarpersónum úr ávikavist Føroyum og Danmark. Úrslitini bendu somuleiðis á, at tað eru minni týðandi munir á metingunum hjá monnum og kvinnum av óneyðugum arbeiðsuppgávum.

Úrslitini bendu á eitt sindur størri munir í upplivingini av óneyðugum arbeiðsuppgávum upp á tvørs av aldursbólkunum. Í hesum førinum søgdu elstu svarpersónarnir frá einum lágum støði av óneyðugum arbeiðsuppgávum, meðan tveir teir yngstu aldursbólkarnir søgdu seg uppliva munandi hægri støði av óneyðugum arbeiðsuppgávum. Til endans vístu úrslitini, at munur er á, hvussu starvsbólkarnir uppliva óneyðugar arbeiðsuppgávur. Úrslitini bendu millum annað á, at svarpersónar í 'Arbeiði á heilsuøkinum' og 'Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði' í størri mun meta seg hava óneyðugar arbeiðsuppgávur samanborið við hinar starvsbólkarnar. Hetta úrslitið kemur ikki óvart á, og eitt líknandi rák sæst eisini í donsku tilvísingarkanningini, har arbeiðstakarar í heilsuverkinum og innan fyri undirvísing í størri mun siga frá óneyðugum arbeiðsuppgávum samanborið við miðaltalið av donskum arbeiðstakarum.

### 3.1.8 Forsøgni í arbeiðinum

*Forsøgni í arbeiðinum* snýr seg um, hvørt arbeiðstakarar uppliva at kunna spáa um og síggja arbeiðsstøðu sína frammanundan, bæði tá tey møta upp til ein nýggjan arbeiðsdag, men eisini í longdini. Samstundis snýr *Forsøgni í arbeiðinum* seg eisini um, at arbeiðstakararnir verða kunnaðir um, hvat gongur fyri seg á arbeiðsplássinum viðvíkjandi møguligum broytingum í t.d. arbeiðsuppgávum og arbeiðstíðum (22).

Forsøgni í arbeiðinum hevur týdning fyri, at arbeiðstakararnir hava møguleika fyri at spáa um, og leggja ætlanir um síni arbeiðsavrik, sum síðani eisini kann hava týdning fyri, hvørjar møguleikar teir hava til at gera arbeiðsuppgávurnar. Tá forsøgni í arbeiðinum manglar kann tað føra til verri trivnað í arbeiðinum millum arbeiðstakararnar. Ein nýliga gjørd donsk kanning vísir t.d., at arbeiðstakarar, sum siga frá einum høgum støði av forsøgni í arbeiðinum eru í minni vanda fyri drúgvari sjúkufráveru og sálarligum heilsutrupulleikum (1). Ein onnur kanning hevur eisini víst, at eitt lágt støði av forsøgni í arbeiðinum hongur saman við ynskinum hjá arbeiðstakarunum at gevast í arbeiðinum (47).

Vit máta *Forsøgni í arbeiðinum* við teimum fýra spurningunum í talvu 3.1.8.1. Talvan vísir býtið av svørum í prosentum fyri allar svarpersónar í kanningini.

**Talva 3.1.8.1: Býti av svørum í prosentum**

| | **Í sera lítlan mun** | **Í lítlan mun** | **Partvíst** | **Í stóran mun** | **Í sera stóran mun** |
|---|---|---|---|---|---|
| Verður tú í góðari tíð kunnað/ur um t.d. týðandi avgerðir, broytingar og framtíðarætlanir? | 16,5 | 22,8 | 36,1 | 19,8 | 4,9 |
| | **Ongantíð /næstan ongantíð** | **Av og á** | **Onkuntíð** | **Ofta** | **Altíð** |
| Verður tú kunnað/ur í góðari tíð, um broytingar eru í tínum arbeiðsuppgávum? | 8,4 | 27,2 | 32,1 | 21,7 | 10,7 |
| Verður tú kunnað/ur í góðari tíð, um broytingar eru í, hvørjum tú skalt arbeiða saman við? | 15,2 | 25,3 | 23,8 | 21,1 | 14,6 |
| Verður tú kunnað/ur í góðari tíð, um broytingar eru í tínum arbeiðstíðum? | 11,3 | 20,1 | 24,4 | 22,1 | 22,0 |

Svørini upp á teir fýra spurningarnar í talvu 3.1.8.1 eru umgjørd til ein stiga frá 0-100, har 100 bendir á, at mann í sera stóran mun/altíð upplivir at hava forsøgni í arbeiðinum í sínum arbeiði.

Talva 3.1.8.2. vísir, at svarpersónarnir úr Føroyum hava eitt miðaltal upp á 49,4 á stiganum um *Forsøgni í arbeiðinum*, meðan danski tilvísingarbólkurin hevur eitt miðaltal

upp á 61,8. Arbeiðstakarar í Føroyum siga seg tískil hava týðiliga lægri forsøgni í arbeiðinum samanborið við arbeiðstakarar úr Danmark.

**Talva 3.1.8.2: Miðaltøl fyri stigan *Forsøgni í arbeiðinum***

| Forsøgni í arbeiðinum | Miðaltal |
|---|---|
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum | 49,4 |
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Danmark | 61,8 |

Í talvunum niðanfyri verða úrslitini víst fyri *Forsøgni í arbeiðinum* býtt upp í ávikavist kyn, aldur og starvsbólk.

Talva 3.1.8.3 vísir úrslitini fyri stigan um *Forsøgni í arbeiðinum* býtt upp í menn og kvinnur. Úrslitini benda á, at kvinnuligir svarpersónar hava mett forsøgni í arbeiðinum at vera hægri enn mannligir svarpersónar. Ískoytisgreiningar vísa harafturat, at munurin millum menn og kvinnur er hagfrøðiliga signifikantur (p<.0001).

**Talva 3.1.8.3: Miðaltøl fyri stigan *Forsøgni í arbeiðinum* býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| Maður | 2177 | 47,4 |
| Kvinna | 2977 | 51,1 |

Talva 3.1.8.4 vísir úrslitini fyri stigan um *Forsøgni í arbeiðinum* býtt upp í ymiskar aldursbólkar. Í hesum førinum benda úrslitini á, at yngstu svarpersónarnir undir 25 ár hava lægsta miðaltalið á stiganum (47,5 stig), og meta seg sostatt hava lægri forsøgni í arbeiðinum enn hinir aldursbólkarnir. Svarpersónar í aldrinum 55 til 64 ár hava hægsta miðaltalið á stiganum (51,2 stig), og meta seg sostatt í hægri mun hava forsøgni í arbeiðinum samanborið við hinar aldursbólkarnar. Tá hugt verður eftir úrslitunum fyri allar aldursbólkarnar, eru tað samanumtikið smærri munir millum metingina hjá bólkunum av forsøgni í arbeiðinum. Ískoytisgreiningar vísa harafturat, at munirnir millum aldursbólkarnar ikki eru hagfrøðiliga signifikantir (p=0.0748).

**Talva 3.1.8.4: Miðaltøl fyri stigan *Forsøgni í arbeiðinum* býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| < 25 ár | 254 | 47,5 |
| 25 - 34 ár | 733 | 48,5 |
| 35 - 44 ár | 1152 | 48,8 |
| 45 - 54 ár | 1373 | 49,7 |
| 55 – 64 ár | 1247 | 51,2 |
| > 65 ár | 390 | 49,2 |

Talva 3.1.8.5 vísir úrslitini fyri stigan um *Forsøgni í arbeiðinum* býtt upp í 11 ymiskar starvsbólkar og talvan vísir harumframt, hvar á stiganum hesir starvsbólkar liggja í mun til miðaltalið fyri allar svarpersónar í kanningini. Í hesum førinum vísa úrslitini, at teir báðir starvsbólkarnir, sum í hægstan mun hava mett seg at hava forsøgni í arbeiðinum eru ávikavist svarpersónar í 'Leiðsluarbeiði' (54,3 stig) og svarpersónar í 'Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði' (54,7). Harnæst benda úrslitini á, at svarpersónar í

’Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði’ hava lægsta miðaltalið á stiganum (39,7), og meta seg sostatt í minni mun enn hinir starvsbólkarnir hava forsøgni í arbeiðinum. Ískoytisgreiningar vísa harafturat, at munurin millum teir 11 starvsbólkarnar er hagfrøðiliga signifikantur (p<.0001).

**Talva 3.1.8.5: Miðaltøl fyri stigan *Forsøgni í arbeiðinum* býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 667 | 54,7 |
| 1 Leiðsluarbeiði | 501 | 54,3 |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 621 | 52,9 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 874 | 51,7 |
| **Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum** | **5744** | **49,4** |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 616 | 48,7 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 345 | 47,9 |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 762 | 46,5 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 250 | 43,9 |
| 11 Annað handaligt arbeiði | 229 | 42,0 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 74 | 40,8 |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 186 | 39,7 |

Viðmerking: **Grøna markingin** merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá betri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum. **Reyða markingin** merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá verri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Forsøgni í arbeiðinum***

Úrslitini fyri *Forsøgni í arbeiðinum* vístu, at svarpersónar úr Føroyum hava mett seg at hava lægri forsøgni í arbeiðinum enn svarpersónar úr donsku tilvísingarkanningini. Úrslitini bendu harafturat á, at kvinnuligir svarpersónar í eitt sindur størri mun uppliva forsøgni í arbeiðinum enn mannligir svarpersónar.

Harnæst bendu úrslitini á onkrar smærri munir, sum tó ikki eru signifikantir, millum metingarnar hjá ymsu aldursbólkunum, av forsøgni í arbeiðinum. Til endans bendu úrslitini á signifikantar munir millum starvsbólkarnar, har svarpersónar í ’Leiðsluarbeiði’ og ’Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði’ vísa seg at uppliva forsøgni í arbeiðinum í størstan mun, meðan svarpersónar í ’Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði’ uppliva forsøgni í arbeiðinum í minstan mun, tá úrslitini verða samanborin upp á tvørs av starvsbólkunum. Kortini eru tað fleiri av FISCO-starvsbólkunum, sum siga seg uppliva týðiliga lægri forsøgni í arbeiðinum samanborið við miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini. Hesi eru ávikavist ’Handverkaraarbeiði’, ’Annað handaligt arbeiði’ og ’Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap’.

## 3.2 Krøv í arbeiðinum

Innan fyri økið *Krøv í arbeiðinum* er fokus á, hvussu arbeiðstakarar uppliva krøvini, sum verða sett teimum í arbeiðsstøðuni. Tað kunnu t.d. vera kenslulig krøv ella krøv, ið hava við sær væntanir til ta mongd av arbeiðsuppgávum, ið skulu gerast, og skjótleikan av útinningini av arbeiðsuppgávunum. Á tí einu síðuni kunnu *Krøv í arbeiðinum* verða at rokna sum avbjóðingar, ið motivera arbeiðstakararnar og skapa arbeiðsstøður, sum geva meining (57, 58). Hinvegin kunnu krøvini, serstakliga um tey gerast ov stór og standa á í longri tíðarskeið, tó eisini hava við sær verri trivnað, eina skerda sálariga vælveru og í síðsta enda drúgva sjúkufráveru og fyritíðareftirløn (44, 51, 59-61). Krøvini í arbeiðinum kunnu sostatt bæði verða roknað sum fakligar avbjóðingar, men eisini sum møguligar byrðar í sálarliga og sosiala arbeiðsumhvørvinum.

Spurnakanningin lýsir hesi evnini, sum endurspegla ymisk sjónarmið í økinum *Krøv í arbeiðinum*:

- Arbeiðsferð
- Arbeiðsmongd
- Kenslulig krøv
- Krøv um at fjala kenslur
- Kognitiv krøv
- Markleyst arbeiði

### 3.2.1 Arbeiðsferð

*Arbeiðsferð* snýr seg um hvussu arbeiðstakarar uppliva ta ferð, arbeiðsuppgávur teirra skulu avgreiðast í. Høg arbeiðsferð kann partvíst standast av, at arbeiðsmongdin er so stór, at arbeiðstakararnir skulu avgreiða arbeiðsuppgávurnar í eini høgari ferð til tess at kunna fylgja við og náa allar uppgávurnar hjá sær. Ein høg arbeiðsferð kann eisini standast av arbeiðsgongdum, ið ferðin beinleiðis er stýrd av. Høg arbeiðsferð kann merkja, at arbeiðstakarar hava ilt við at náa allar uppgávur sínar, sum síðani kann hava ávirkan á arbeiðsdygdina (44, 62).

Ein umráðandi partur av einum góðum arbeiðsumhvørvi er eisini, at arbeiðstakararnir uppliva, at teir hava nóg mikið at gera, men helst á einum støði, har arbeiðsuppgávurnar enn eru greiðar og arbeiðstakarin megnar at fylgja við. T.d. hevur ein kanning staðfest, at høg arbeiðsferð hongur saman við øktum vanda fyri drúgvari sjúkufráveru (60). Ein nýggjari donsk kanning bendir eisini á, at arbeiðstakarar, sum siga frá høgari arbeiðsferð, eru í øktum váða fyri drúgvari sjúkufráveru og sálarligum heilsutrupulleikum (1).

Vit máta *Arbeiðsferð* við teimum báðum spurningunum í talvu 3.2.1.1. Talvan vísir býtið av svørum í prosentum fyri allar svarpersónar í kanningini.

**Talva 3.2.1.1: Býti av svørum í prosentum fyri stigan *Arbeiðsferð***

| | Ongantíð/ næstan ongantíð | Av og á | Partvíst | Ofta | Altíð |
|---|---|---|---|---|---|
| Er neyðugt at arbeiða sera skjótt? | 4,3 | 12,5 | 40,6 | 31,8 | 10,8 |
| Er arbeiðsferðin so høg, at hon ávirkar góðskuna í tínum arbeiði? | 11,8 | 35,1 | 35,2 | 14,9 | 2,9 |

Svørini frá spurningunum báðum í talvu 3.2.1.1 eru umbroytt til ein stiga frá 0-100, har 100 merkir, at ein altíð upplivir, at arbeiðsferðin er høg, og at tað gongur út yvir góðskuna av arbeiðinum. Stigin vendir aftur soleiðis, at eitt høgt miðaltal kann vera ábending upp á eina møguliga avbjóðing og tyngd í arbeiðsumhvørvinum.

Talva 3.2.1.2. vísir, at svarpersónarnir úr Føroyum hava eitt miðaltal á 49,3 á stiganum um *Arbeiðsferð,* meðan danski tilvísingarbólkurin hevur eitt miðaltal á 53,5. Svørini frá føroysku arbeiðstakarunum benda sostatt á, at teir uppliva eina lægri arbeiðsferð í arbeiðinum enn danskir arbeiðstakarar.

**Talva 3.2.1.2: Miðaltøl fyri stigan *Arbeiðsferð***

| Arbeiðsferð | Miðaltal |
|---|---|
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum | 49,3 |
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Danmark | 53,5 |

Í talvunum niðanfyri verða úrslitini víst fyri *Arbeiðsferð* býtt upp í ávikavist kyn, aldur og starvsbólk.

Talva 3.2.1.3 vísir úrslitini fyri stigan um *Arbeiðsferð* býtt upp í menn og kvinnur. Úrslitini benda á, at kvinnur uppliva eina nakað hægri arbeiðsferð enn menn. Ískoytisgreiningar vísa, at munurin millum menn og kvinnur er hagfrøðiliga signifikantur (p=0.0003).

**Talva 3.2.1.3: Miðaltøl fyri stigan *Arbeiðsferð* býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Miðaltal |
|---|---:|---:|
| Maður | 2219 | 47,5 |
| Kvinna | 3016 | 49,6 |

Talva 3.2.1.4 vísir úrslitini fyri stigan um *Arbeiðsferð* býtt upp í ymiskar aldursbólkar. Í hesum førinum vísa úrslitini, at svarpersónar í aldrinum 25 til 34 ár hava tað hægsta miðaltalið á stiganum (52,2 stig), og harvið sær út til, at svarpersónar í hesum aldursbólkinum í størri mun uppliva eina høga arbeiðsferð samanborið við hinar aldursbólkarnar. Harnæst vísa úrslitini, at eldru svarpersónarnir yvir 65 ár hava lægsta miðaltalið á stiganum (37,5 stig), og uppliva tí í minni mun eina høga arbeiðsferð samanborið við hinar aldursbólkarnar. Sum heild benda úrslitini á, at yngru aldursbólkarnir uppliva arbeiðsferðina at vera hægri, meðan eldru aldursbólkarnir uppliva arbeiðsferðina at vera lægri. Ískoytisgreiningar vísa, at munirnir millum aldursbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 3.2.1.4: Miðaltøl fyri stigan *Arbeiðsferð* býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Miðaltal |
|---|---:|---:|
| < 25 ár | 267 | 51,9 |
| 25 - 34 ár | 747 | 52,2 |
| 35 - 44 ár | 1169 | 51,7 |
| 45 - 54 ár | 1387 | 49,3 |
| 55 – 64 ár | 1262 | 46,1 |
| > 65 ár | 398 | 37,5 |

Talva 3.2.1.5 vísir úrslitini fyri stigan um *Arbeiðsferð* býtt upp í teir 11 ymisku starvsbólkarnar og vísir harumframt, hvar á stiganum hesir starvsbólkarnir liggja í mun til miðaltalið fyri allar svarpersónar í kanningini. Úrslitini benda á, at svarpersónar í 'Leiðsluarbeiði' hava hægsta miðaltalið (52,5 stig), og meta sostatt arbeiðsferðina at vera hægri enn hinir starvsbólkarnir. Harumframt vísa úrslitini, at tríggir ymiskir starvsbólkar, hava lægstu miðaltølini á stiganum. Hesir starvsbólkar eru ávikavist svarpersónar í 'Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap' (45,1 stig), svarpersónar í 'Handverkaraarbeiði' (45,4 stig) og svarpersónar í 'Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði' (45,9 stig). Hesir starvsbólkar vísa seg sostatt at uppliva sína arbeiðsferð at vera lægri enn hinir starvsbólkarnir. Tó liggur eingin starvsbólkur fimm stig hægri ella lægri enn miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini. Ein ískoytisgreining vísir, at munirnir millum teir 11 starvsbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 3.2.1.5: Miðaltøl fyri stigan *Arbeiðsferð* býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| 1 Leiðsluarbeiði | 508 | 52,5 |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 622 | 51,8 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 672 | 51,0 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 358 | 50,6 |
| **Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum** | **5909** | **49,3** |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 197 | 48,9 |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 770 | 47,5 |
| 11 Annað handaligt arbeiði | 233 | 47,3 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 883 | 47,0 |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 627 | 45,9 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 257 | 45,4 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 77 | 45,1 |

Viðmerking: **Grøna markingin** merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá betri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum. **Reyða markingin** merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá verri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Arbeiðsferð***

Úrslitini fyri *Arbeiðsferð* vístu, at svarpersónar úr Føroyum uppliva eina lægri arbeiðsferð samanborið við svarpersónar úr donsku tilvísingarkanningini. Harnæst bendu úrslitini á, at kvinnuligir svarpersónar uppliva eina nakað hægri arbeiðsferð enn mannligir svarpersónar.

Upp á tvørs av ymiskum aldursbólkum vístu úrslitini, at yngstu svarpersónarnir sum heild hava mett seg at hava hægri arbeiðsferð enn eldru svarpersónarnir, har svarpersónarnir yvir 65 ár hava mett seg at hava eina greitt lægri arbeiðsferð enn restin av aldursbólkunum. Til endans vístu úrslitini, at svarpersónar í 'Leiðsluarbeiði' siga seg uppliva eina hægri arbeiðsferð enn hinir starvsbólkarnir. Harnæst vístu úrslitini, at svarpersónar í 'Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap', 'Handverkaraarbeiði' og 'Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði' uppliva arbeiðsferðina at vera lægri samanborið við restina av starvsbólkunum.

### 3.2.2 Arbeiðsmongd

*Arbeiðsmongd* snýr seg um, hvussu arbeiðstakararnir uppliva mongdina av teimum arbeiðsuppgávum, sum tey skulu handfara í sínum arbeiði. Arbeiðsmongdin kann vera lýst sum eitt krav í arbeiðinum, og kann vera so víðfevnd ella trupul at spáa um, at arbeiðstakararnir koma at uppliva arbeiðsmongdina sum eitt stórt arbeiðstrýst. Arbeiðsmongdin kann t.d. upplivast tyngjandi, um arbeiðstakararnir ikki náa arbeiðsuppgávurnar, ella um tað er trupult at halda seg til tíðarfreistirnar (44, 62).

Arbeiðsmongdin hevur týdning fyri trivnað og heilsu hjá arbeiðstakarunum. Úrslit frá einari danskari kanning vísa, at arbeiðstakarar sum siga frá stórari arbeiðsmongd, eru í øktum vanda fyri drúgvari sjúkufráveru og sálarligum heilsutrupulleikum (1). Kanningar hava eisini áður staðfest, at stór arbeiðsmongd hongur saman við strongd (2), sálarligari vælveru (59) og happing á arbeiðsplássinum (63). Harumframt hevur ein kanning staðfest, at arbeiðstakarar við ávikavist stórari ella lítlari arbeiðsmongd eru í øktum vanda fyri drúgvari sjúkufráveru, tá mann samanber við arbeiðstakarar við moderatari arbeiðsmongd (60).

Vit máta *Arbeiðsmongd* við teimum fýra spurningunum í talvu 3.2.2.1. Talvan vísir býtið av svørum í prosentum fyri allar svarpersónar í kanningini.

**Talva 3.2.2.1: Býti av svørum í prosentum fyri stigan *Arbeiðsmongd***

| | Ongantíð/ næstan ongantíð | Av og á | Partvíst | Ofta | Altíð |
|---|---|---|---|---|---|
| Hvussu ofta kemur tað fyri, at tú ikki nært allar tínar arbeiðsuppgávur? | 10,0 | 28,9 | 37,8 | 20,3 | 3,1 |
| Hvussu ofta ført tú óvæntaðar arbeiðsuppgávur, ið seta teg undir tíðartrýst? | 4,7 | 20,6 | 40,1 | 30,2 | 4,3 |
| Hvussu ofta hevur tú tíðarfreistir, ið eru truplar at halda? | 11,7 | 33,0 | 34,1 | 18,1 | 3,1 |
| Kemur tú afturút við tínum arbeiði? | 14,7 | 32,9 | 35,0 | 14,4 | 3,0 |

Svørini frá teimum fýra spurningunum í talvu 3.2.2.1 eru umgjørd til ein stiga frá 0-100, har 100 bendir á, at mann altíð upplivir at hava stóra arbeiðsmongd. Stigin vendir sostatt aftur soleiðis, at eitt høgt miðaltal kann benda á eina møguliga avbjóðing og tyngd í arbeiðsumhvørvinum.

Talva 3.2.2.2. vísir, at svarpersónarnir úr Føroyum hava eitt miðaltal upp á 44,5 á stiganum um *Arbeiðsmongd*, meðan danski tilvísingarbólkurin hevur eitt miðaltal upp á 45,1. Sostatt er ikki nakar veruligur munur á, hvussu báðir bólkarnir hava mett sína arbeiðsmongd.

**Talva 3.2.2.2: Miðaltøl fyri stigan *Arbeiðsmongd***

| Arbeiðsmongd | Miðaltal |
|---|---|
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum | 44,5 |
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Danmark | 45,1 |

Í talvunum niðanfyri verða úrslitini víst fyri *Arbeiðsmongd* býtt upp í ávikavist kyn, aldur og starvsbólk.

Talva 3.2.2.3 vísir úrslitini fyri stigan um *Arbeiðsmongd* býtt upp í menn og kvinnur. Úrslitini benda á, at tað ikki er nakar týðandi munur á, hvussu mannligir og kvinnuligir svarpersónar hava mett sína arbeiðsmongd. Ískoytisgreiningar vísa harafturat, at munurin millum menn og kvinnur ikki er hagfrøðiliga signifikantur (p=0.1356).

**Talva 3.2.2.3: Miðaltøl fyri stigan *Arbeiðsmongd* býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| Maður | 2219 | 43,5 |
| Kvinna | 3016 | 44,3 |

Talva 3.2.2.4 vísir úrslitini fyri stigan um *Arbeiðsmongd* býtt upp í ymiskar aldursbólkar. Í hesum førinum benda úrslitini á, at svarpersónar í aldrinum 35 til 44 ár hava tað hægsta miðaltalið á stiganum um *Arbeiðsmongd* (47,8 stig), og harvið sær út til, at svarpersónar í hesum aldursbólkinum oftari uppliva størri arbeiðsmongd enn hinir aldursbólkarnir. Harnæst vísa úrslitini, at elstu svarpersónarnir yvir 65 ár hava lægsta miðaltalið á stiganum (33,1 stig), og benda sostatt á, at tey sjáldan uppliva stóra arbeiðsmongd í arbeiðinum. Ískoytisgreiningar vísa, at munirnir millum aldursbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 3.2.2.4: Miðaltøl fyri stigan *Arbeiðsmongd* býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| < 25 ár | 267 | 37,6 |
| 25 - 34 ár | 747 | 45,4 |
| 35 - 44 ár | 1169 | 47,8 |
| 45 - 54 ár | 1387 | 45,5 |
| 55 – 64 ár | 1262 | 42,9 |
| > 65 ár | 398 | 33,1 |

Talva 3.2.2.5 vísir úrslitini fyri stigan um *Arbeiðsmongd* býtt upp í 11 ymiskar starvsbólkar og vísir harumframt, hvar á stiganum hesir starvsbólkar liggja í mun til miðaltalið fyri allar svarpersónar í kanningini. Eins og úrslitini nevnd omanfyri um stigan *Arbeiðsferð*, benda hesi úrslitini eisini á, at tað eru svarpersónar í 'Leiðsluarbeiði', sum hava hægsta miðaltalið á stiganum um *Arbeiðsmongd* (50,6 stig). Teir svarpersónar, sum harafturímóti uppliva ta lægstu arbeiðsmongdina eru svarpersónar í 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' (33,8 stig). Eisini svarpersónar í 'Annað handaligt arbeiði' uppliva lægri arbeiðsmongd (37,1 stig). Harafturat sæst, at tveir teir síðstnevndu starvsbólkarnir fáa fimm stig lægri (betri) á stiganum um *Arbeiðsmongd* enn

miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini. Ískoytisgreiningar vísa harafturat, at munirnir millum teir ymisku starvsbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 3.2.2.5: Miðaltøl fyri stigan *Arbeiðsmongd* býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| 1 Leiðsluarbeiði | 508 | 50,6 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 672 | 49,2 |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 622 | 47,6 |
| **Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum** | **5910** | **44,5** |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 770 | 44,1 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 257 | 43,3 |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 627 | 41,6 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 883 | 41,6 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 358 | 40,9 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 77 | 39,7 |
| 11 Annað handaligt arbeiði | 233 | 37,1 |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 197 | 33,8 |

Viðmerking: **Grøna markingin** merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá betri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum. **Reyða markingin** merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá verri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum.

**Samantumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Arbeiðsmongd***

Úrslitini fyri *Arbeiðsmongd* vístu, at tað ikki er nakar týðandi munur á, hvussu ávikavist føroyskir og danskir svarpersónar hava mett sína arbeiðsmongd. Somuleiðis var ein heldur lítil munur á, hvussu mannligir og kvinnuligir svarpersónar hava mett arbeiðsmongdina í arbeiðinum.

Millum teir ymisku aldursbólkarnar var eitt sindur størri munur á metingini av arbeiðsmongd. Í hesum førinum høvdu serliga eldru svarpersónarnir yvir 65 ár mett seg at hava lítla arbeiðsmongd, meðan svarpersónar í aldrinum 35 til 44 ár mettu sína arbeiðsmongd at vera størri enn hinir bólkarnir.

Til endans vístu úrslitini, at svarpersónar í 'Leiðsluarbeiði' meta teirra arbeiðsmongd at vera størst samanborið við hinar starvsbólkarnar. Harumframt vístu úrslitini, at svarpersónar í starvsbólkunum 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' og 'Annað handaligt arbeiði' hava mett seg at hava týðiliga (fimm stig) lægri arbeiðsmongd samanborið við miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini.

### 3.2.3 Kenslulig krøv

*Kenslulig krøv* snýr seg um upplivingina hjá arbeiðstakaranum av kensluliga krevjandi støðum í sambandi við teirra arbeiði. Kensluliga krevjandi støður kunnu t.d. vera, um mann hevur við persónar at gera, sum eru mótvilligir ella ágangandi, ella um mann skal fyrihalda seg til persónar, ið eru komnir illa fyri í lívinum, sum fylgja av eitt nú heilsutrupulleikum ella øðrum sosialum tilburðum (62, 64).

Kenslulig krøv kunnu vera sálarliga tyngjandi og hava við sær, at arbeiðstakarar noyðast at gera eina stóra kensluliga orkuíløgu, til tess at vera førir fyri at røkja starv sítt. Kanningar hava áður staðfest, at høg kenslulig krøv í arbeiðinum hanga saman við ynskinum um at gevast á arbeiðsplássinum (47), sálarligum heilsutrupulleikum (65) og drúgvari sjúkufráveru (6). Ein onnur kanning hevur tó eisini staðfest, at høg kenslulig krøv hanga saman við einari kenslu av meining í arbeiðinum (25). Kenslulig krøv kunnu soleiðis bæði vera ein møgulig byrða í arbeiðinum, men kunnu eisini vera við til at skapa meining fyri nakrar arbeiðstakarar í ávísum starvsgreinum.

Vit máta *Kenslulig krøv* við teimum fýra spurningunum í talvu 3.2.3.1. Talvan vísir býtið av svørum í prosentum fyri allar svarpersónar í kanningini.

**Talva 3.2.3.1: Býti av svørum í prosentum fyri stigan *Kenslulig krøv***

| | Ongantíð /næstan ongantíð | Av og á | Partvíst | Ofta | Altíð |
|---|---|---|---|---|---|
| Kemur tú í kensluliga krevjandi støður undir arbeiðinum? | 15,1 | 26,4 | 30,6 | 21,8 | 6,2 |
| Hevur tú í tínum arbeiði samband við fólk, ið eru tvør ella ágangandi? | 8,9 | 21,0 | 38,8 | 24,5 | 6,9 |
| Hevur tú í tínum arbeiði sambond, ið eru kensluliga trupul at handfara? | 20,0 | 31,4 | 31,5 | 13,3 | 3,8 |
| Hevur tú í tínum arbeiði samband við fólk, ið eru í truplum støðum (t.d. persónar raktir av álvarsamari sjúku, vanlukku, í sorg, kreppu ella við sosialum trupulleikum)? | 24,4 | 22,2 | 26,8 | 16,5 | 10,2 |

Svørini frá teimum fýra spurningunum í talvu 3.2.3.1 eru umgjørd til ein stiga frá 0-100, har 100 bendir á, at mann altíð upplivir høg kenslulig krøv í arbeiðinum. Stigin vendir sostatt aftur soleiðis, at eitt høgt miðaltal kann benda á eina møguliga avbjóðing og tyngd í arbeiðs-umhvørvinum.

Talva 3.2.3.2. vísir, at svarpersónarnir úr Føroyum hava eitt miðaltal upp á 43,3 á stiganum um *Kenslulig krøv,* meðan danski tilvísingarbólkurin hevur eitt miðaltal upp á 34,9. Harvið sær út til, at teir føroysku arbeiðstakararnir í týðiligt størri mun uppliva at vera fyri kensluligum krøvum í arbeiðinum samanborið við danskar arbeiðstakarar.

**Talva 3.2.3.2: Miðaltøl fyri stigan *Kenslulig krøv***

| Kenslulig krøv | Miðaltal |
|---|---|
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum | 43,3 |
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Danmark | 34,9 |

Í talvunum niðanfyri verða úrslitini víst fyri *Kenslulig krøv* býtt upp í ávikavist kyn, aldur og starvsbólk.

Talva 3.2.3.3 vísir úrslitini fyri stigan um *Kenslulig krøv* býtt upp í menn og kvinnur. Úrslitini benda á, at kvinnuligir svarpersónar í munandi størri mun uppliva kenslulig krøv í arbeiðinum oftari enn mannligir svarpersónar. Ískoytisgreiningar vísa harafturat, at munurin millum menn og kvinnur er hagfrøðiliga signifikantur ($p<.0001$).

Úrslitið kemur ikki óvart á, um hugt verður eftir teimum størvunum og starvsgreinum, har menn og kvinnur oftast eru umboðað í kanningarbólkinum. Um hugt verður nærri at kanningarbólkinum sæst t.d., at tað eru 628 kvinnur umboðaðar innan fyri starvsbólkin 'Arbeiði á heilsuøkinum', har tað, øvut hesum, einans eru 53 menn umboðaðir. Innan fyri starvsbólkin 'Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði' eru tað 796 kvinnuligir svarpersónar umboðaðar, meðan tað bert eru 176 mannligir svarpersónar. Sum heild, eru tað tískil fleiri kvinnuligir svarpersónar, sum starvast innan fyri hesar umsorganar- og relatiónsstarvsgreinar, har kensluligu krøvini sum oftast eru høg.

**Talva 3.2.3.3: Miðaltøl fyri stigan *Kenslulig krøv* býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| Maður | 2217 | 34,8 |
| Kvinna | 3013 | 48,4 |

Talva 3.2.3.4 vísir úrslitini fyri stigan um *Kenslulig krøv* býtt upp í ymiskar aldursbólkar. Í hesum førinum benda úrslitini á, at elstu svarpersónarnir yvir 65 ár hava lægsta miðaltalið á stiganum um *Kenslulig krøv* (34,0 stig), og harvið sær út til, at hesin bólkurin av svarpersónum sjáldan uppliva kenslulig krøv í arbeiðinum samanborið við hinar aldursbólkarnar. Harnæst benda úrslitini á, at svarpersónar í aldrinum 35 til 44 ár og 45 til 54 ár hava hægstu miðaltølini á stiganum (44,6 stig og 44,2 stig), og meta seg sostatt í størri mun at vera fyri kensluligum krøvum í arbeiðinum samanborið við hinar aldursbólkarnar. Ískoytisgreiningar vísa, at munirnir millum aldursbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir ($p<.0001$).

**Talva 3.2.3.4: Miðaltøl fyri stigan *Kenslulig krøv* býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| < 25 ár | 267 | 41,2 |
| 25 - 34 ár | 745 | 43,8 |
| 35 - 44 ár | 1168 | 44,6 |
| 45 - 54 ár | 1387 | 44,2 |
| 55 – 64 ár | 1261 | 41,4 |
| > 65 ár | 397 | 34,0 |

Talva 3.2.3.5 vísir úrslitini fyri stigan um *Kenslulig krøv* býtt upp í 11 ymiskar starvsbólkar og vísir harumframt, hvar á stiganum hesir starvsbólkar liggja í mun til miðaltalið fyri allar svarpersónar í kanningini. Úrslitini benda á, at svarpersónar í 'Arbeiði á heilsuøkinum' hava hægsta miðaltalið á stiganum um *Kenslulig krøv* (63,4 stig), og harumframt sæst í úrslitunum, at teir hava týðiliga hægri stigatal enn hinir starvsbólkarnir. Eisini svarpersónar í 'Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði' hava týðiliga hægri stigatal á stiganum (56,5) enn miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini. Hesi úrslitini samsvara við úrslitini úr danska tilvísingarbólkinum, har tað eisini júst eru hesir bólkarnir av arbeiðstakarum, sum uppliva høg kenslulig krøv í arbeiðinum, bæði tá samanborið verður við landsmiðaltalið og ymiskar aðrar starvsgreinar (19).

Harnæst vísa úrslitini, at svarpersónar innan fyri 'Handverkaraarbeiði' hava lægsta miðaltalið (29,1 stig). Eisini svarpersónar í 'Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap' meta teirra kensluligu krøv at vera lág, og tá hugt verður eftir úrslitunum úr danska tilvísingarbólkinum, sæst líknandi úrslit upp á tvørs av starvsgreinum (19). Ískoytisgreiningar vísa harafturat, at munirnir millum starvsbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir ($p<.0001$).

**Talva 3.2.3.5: Miðaltøl fyri stigan *Kenslulig krøv* býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 622 | 63,4 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 883 | 56,5 |
| **Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum** | **5900** | **43,3** |
| 1 Leiðsluarbeiði | 508 | 41,6 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 672 | 37,5 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 358 | 36,8 |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 768 | 35,4 |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 625 | 35,0 |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 197 | 34,3 |
| 11 Annað handaligt arbeiði | 232 | 32,9 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 77 | 30,8 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 257 | 29,1 |

Viðmerking: **Grøna markingin** merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá betri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum. **Reyða markingin** merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá verri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Kensluligum krøvum***

Úrslitini fyri *Kenslulig krøv* vístu, at svarpersónar úr Føroyum liggja munandi hægri á stiganum enn svarpersónar úr danska tilvísingarbólkinum, sum merkir, at føroyskir arbeiðstakarar í miðal uppliva at vera meiri fyri kensluligum krøvum í arbeiðinum enn danskir arbeiðstakarar.

Úrslitini bendu harafturat á, at tað eru stórir munir á, hvussu menn og kvinnur uppliva kenslulig krøv í arbeiðinum, har kvinnuligir svarpersónar í miðal uppliva kenslulig krøv í størri mun í arbeiðinum enn mannligir svarpersónar. Harnæst vístu úrslitini, at svarpersónar í aldrinum 35 til 44 ár og 45 til 54 ár í størri mun uppliva kenslulig krøv í arbeiðinum, meðan elstu svarpersónarnir yvir 65 ár hava mett kenslulig krøv í arbeiðinum at vera lægri.

Til endans vístu úrslitini, at svarpersónar í 'Arbeiði á heilsuøkinum' og 'Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði' hava mett kenslulig krøv í arbeiðinum at vera týðiliga hægri enn hinir starvsbólkarnir, og til endans er hetta eisini eitt úrslit, sum samsvarar við úrslitini í donsku tilvísingarkanningini (19).

### 3.2.4 Krøv um at fjala kenslur

*Krøv um at fjala kenslur* snýr seg um, hvørt arbeiðstakararnir standa í arbeiðsstøðum, har teir mugu vera professjonellir, og tí handfara og fjala egnar kenslur fyri øðrum persónum t.d. viðskiftafólki, klientum, sjúklingum v.m. Í bókmentunum verður hetta eisini lýst undir hugtakinum 'emotional labour', sum vísir til, hvussu arbeiðstakarar í nøkrum arbeiðsstøðum skulu stýra sínum kenslum, og hvussu tær koma til sjóndar, soleiðis, at tær samsvara við tær væntanir, sum knýta seg til ta serstøku arbeiðsstøðuna. T.d. kundi hetta verið at vera vinaligur, fólkaligur og professionellur, tí hetta verður væntað í arbeiðsleiklutinum hjá viðkomandi (66).

Gransking í hugtakinum 'emotional labour' hevur víst, at tað kann hava eina neiliga ávirkan á vælveruna hjá arbeiðstakaranum og avrik upp á tvørs av ymiskum starvsgreinum. Harumframt hava kanningar staðfest, at tað at skula fjala kenslur eisini hongur saman við vandanum fyri at brenna út og lægri nøgdsemi við arbeiðið (67). Ein donsk kanning vísir, at arbeiðstakarar, sum siga frá høgum krøv um at fjala kenslur, eru í øktum vanda fyri drúgvari sjúkufráveru og sálarligum heilsutrupulleikum (1). Granskingin bendir á, at tað er ein møgulig byrða, um mann í eitt longri tíðarskeið er fyri 'emotional labour', har mann í sínum professionella leikluti sær út til at vera uttanveltaður ella jaligur, meðan mann heldur sínum veruligu neiligu kenslum burturi.

Vit máta *Krøv um at fjala kenslur* við teimum báðum spurningunum í talvu 3.2.4.1. Talvan vísir býtið av svørum í prosentum fyri allar svarpersónar í kanningini.

**Talva: 3.2.4.1: Býti av svørum í prosentum fyri stigan *Krøv um at fjala kenslur***

| | Í sera lítlan mun | Í lítlan mun | Partvíst | Í stóran mun | Í sera stóran mun |
|---|---|---|---|---|---|
| Skalt tú vera vinarlig/ur og fyrikomaðuri mótvegis øllum, uttan mun til hvussu tey eru mótvegis tær? | 4,6 | 8,7 | 20,3 | 33,5 | 33,0 |
| Krevur títt arbeiði, at tú fjalir tínar kenslur? | 15,4 | 18,8 | 29,3 | 20,6 | 15,9 |

Svørini frá teimum báðum spurningunum í talvu 3.2.4.1 eru umgjørd til ein stiga frá 0-100, har 100 bendir á, at mann í sera stóran mun upplivir at skula fjala sínar kenslur í arbeiðinum. Stigin vendir sostatt aftur soleiðis, at eitt høgt miðaltal kann benda á eina møguliga avbjóðing og tyngd í arbeiðsumhvørvinum.

Talva 3.2.4.2 vísir, at svarpersónarnir úr Føroyum hava eitt miðaltal upp á 60,6 á stiganum um *Krøv um at fjala kenslur.* Hetta úrslitið vísir, at føroysku svarpersónarnir uppliva lutfalsliga høg krøv um at fjala kenslur í arbeiðinum, har teirra stigatal samsvarar við, at svørini í miðal liggja millum 'Partvíst' og 'Í stóran mun'. Spurningarnir í samband við henda stigan vórðu ikki settir luttakarunum í donsku kanningini, og av tí sama er ikki møguligt at samanbera úrslitini við ein danskan tilvísingarbólk.

**Talva 3.2.4.2: Miðaltøl fyri stigan *Krøv um at fjala kenslur***

| Krøv um at fjala kenslur | Miðaltal |
|---|---|
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum | 60,6 |
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Danmark | * |

Í talvunum niðanfyri verða úrslitini víst fyri *Krøv um at fjala kenslur* býtt upp í ávikavist kyn, aldur og starvsbólk.

Talva 3.2.4.3 vísir úrslitini fyri stigan um *Krøv um at fjala kenslur* býtt upp í menn og kvinnur. Úrslitini vísa, at kvinnuligir svarpersónar uppliva høg krøv um at fjala kenslur í arbeiðinum, og eisini í størri mun enn mannligir svarpersónar. Ískoytisgreiningar vísa harafturat, at munurin millum menn og kvinnur er hagfrøðiliga signifikantur (p<.0001).

**Talva 3.2.4.3: Miðaltøl fyri stigan *Krøv um at fjala kenslur* býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| Maður | 2258 | 52,3 |
| Kvinna | 3074 | 65,9 |

Talva 3.2.4.4 vísir úrslitini fyri stigan um *Krøv um at fjala kenslur* býtt upp í ymiskar aldursbólkar. Í hesum førinum benda úrslitini á, at elstu svarpersónarnir yvir 65 ár hava lægsta miðaltalið á stiganum um *Krøv um at fjala kenslur* (54,3 stig), og hesin aldursbólkurin upplivir soleiðis í minni mun krøv um at fjala kenslur enn hinir aldursbólkarnir. Harnæst benda úrslitini á, at svarpersónar í aldrinum 25 til 34 ár hava hægsta miðaltalið á stiganum (62,7 stig), og uppliva tískil oftari at skula fjala kenslur í arbeiðinum samanborið við hinar aldursbólkarnar. Ískoytisgreiningar vísa, at munirnir millum aldursbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 3.2.4.4: Miðaltøl fyri stigan *Krøv um at fjala kenslur* býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| < 25 ár | 279 | 62,1 |
| 25 - 34 ár | 763 | 62,7 |
| 35 - 44 ár | 1180 | 60,3 |
| 45 - 54 ár | 1415 | 60,9 |
| 55 – 64 ár | 1281 | 58,8 |
| > 65 ár | 409 | 54,3 |

Talva 3.2.4.5 vísir úrslitini fyri stigan um *Krøv um at fjala kenslur* býtt upp í 11 ymiskar starvsbólkar og vísir harumframt, hvar á stiganum hesir starvsbólkar liggja í mun til miðaltalið fyri allar svarpersónar í kanningini. Úrslitini benda á, at svarpersónar í 'Arbeiði á heilsuøkinum' aftur liggja hægst á stiganum við einum stigatali upp á 75,1, ið er tað sama sum, at hesir svarpersónar í miðal hava svarað 'Í stóran mun' upp á teir báðar spurningarnar, sum verða settir í sambandi við stigan.

Harnæst er vert at leggja til merkis, at svarpersónar í 'Tænastu- og søluarbeiði' og 'Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði' eisini hava høg stigatøl á stiganum um *Krøv um at fjala kenslur*, og úrslitini vísa harumframt, at hesir starvsbólkar í stóran mun uppliva at

skula fjala kenslur í arbeiðinum. Teir nevndu tríggir starvsbólkarnir liggja somuleiðis í minsta lagi fimm stig hægri (verri) enn miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini.

Svarpersónar í 'Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap' hava lægsta miðaltalið (42,7 stig), og hava sostatt í lægri mun sagt seg uppliva krøv um at fjala kenslur í arbeiðinum. Ískoytisgreiningar vísa harafturat, at munirnir millum starvsbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 3.2.4.5: Miðaltøl fyri stigan *Krøv um at fjala kenslur* býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 635 | 75,1 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 899 | 68,5 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 366 | 68,3 |
| **Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum** | **6114** | **60,6** |
| 1 Leiðsluarbeiði | 520 | 59,0 |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 637 | 57,1 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 678 | 55,0 |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 783 | 54,4 |
| 11 Annað handaligt arbeiði | 239 | 52,0 |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 205 | 51,6 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 259 | 45,8 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 79 | 42,7 |

Viðmerking: **Grøna markingin** merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá betri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum. **Reyða markingin** merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá verri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Krøvum um at fjala kenslur***

Úrslitini fyri *Krøv um at fjala kenslur* vístu, at føroysku svarpersónarnir uppliva lutfalsliga høg krøv um at fjala kenslur í arbeiðinum við einum miðaltali upp á 60,6 á stiganum. Úrslitini bendu harafturat á, at kvinnuligir svarpersónar uppliva harðari krøv um at fjala kenslur í arbeiðinum enn mannligir svarpersónar.

Harnæst bendu úrslitini á, at elstu svarpersónarnir yvir 65 ár í minni mun uppliva krøv um at fjala kenslur í arbeiðinum samanborið við hinar aldursbólkarnar, meðan svarpersónar í aldrinum 25 til 34 ár í størri mun tykjast at uppliva krøv um at fjala kenslur í arbeiðinum. Til endans bendu úrslitini, upp á tvørs av starvsbólkunum, á, at svarpersónar í starvsbólkunum 'Arbeiði á heilsuøkinum', 'Tænastu- og søluarbeiði' og 'Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði' uppliva hægri krøv um at fjala kenslur í arbeiðinum enn hinir starvsbólkarnir, og annars, samanborið við miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini. Til endans bendu úrslitini á, at fleiri av starvsbólkunum uppliva at fáa færri krøv um at fjala kenslur í arbeiðinum samanborið við miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini, har tað serliga eru svarpersónar í 'Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap', sum vísa seg at uppliva lág krøv um at fjala kenslur í arbeiðinum samanborið við hinar starvsbólkarnar í kanningini.

### 3.2.5 Kognitiv krøv

*Kognitiv krøv* snúgva seg um tey krøv, sum arbeiðið inniheldur, og sum krevur hugsavning, uppmerksemi og viðgerð av kunning í arbeiðsstøðuni. Kognitiv krøv fevna millum annað um tær væntanir, sum fara at vera tá avgerðir skulu takast, til at viðgera kunning, til uppmerksemi og til at klára at halda fleiri bóltum í luftini í arbeiðinum. Sum onnur krøv í arbeiðinum, kunnu kognitiv krøv eisini verða at rokna sum krøv í arbeiðinum, sum kunnu motivera arbeiðstakararnar, men høg kognitiv krøv kunnu eisini vera roknað sum ein møgulig byrða í arbeiðsumhvørvinum (62).

Væntanin er, at høg kognitiv krøv kunnu hava samband við bæði jalig endaúrslit, t.d. motivatión, arbeiðsgleði og trivnað, men kunnu eisini hava samband við eina røð av neiligum endaúrslitum so sum strongd, at brenna út og sjúkufráveru – helst, um arbeiðstakararnir fáa høg kognitiv krøv í eitt longri tíðarskeið. Granskingarliga vitanin um kognitiv krøv og avleiðingarnar av hesum er lítil. Ein kanning hevur tó staðfest, at høg kognitiv krøv í arbeiðinum hanga saman við øktum vanda fyri drúgvari sjúkufráveru (51), meðan ein onnur kanning úr Danmark vísir, at tað ikki eru hagfrøðiliga signifikantir samanhangir millum kognitiv krøv og vanda fyri drúgvari sjúkufráveru og sálarligum heilsutrupulleikum (1).

Vit máta *Kognitiv krøv* við teimum fimm spurningunum í talvu 3.2.5.1. Talvan vísir býtið av svørum í prosentum fyri allar svarpersónar í kanningini.

**Talva: 3.2.5.1: Býti av svørum í prosentum fyri stigan *Kognitiv krøv***

| | Í sera lítlan mun | Í lítlan mun | Partvíst | Í stóran mun | Í sera stóran mun |
|---|---|---|---|---|---|
| Krevur títt arbeiði, at tú hugsavnar teg fult og heilt? | 1,5 | 3,6 | 16,3 | 41,5 | 37,1 |
| Skalt tú í tínum arbeiði viðgera stórar mongdir av kunning ella vitan? | 4,5 | 9,9 | 26,7 | 34,0 | 24,9 |
| Krevur títt arbeiði, at tú tekur fløkjasligar avgerðir? | 7,1 | 14,8 | 32,0 | 27,2 | 18,9 |
| | **Ongantíð /næstan ongantíð** | **Av og á** | **Onkuntíð** | **Ofta** | **Altíð** |
| Skalt tú í tínum arbeiði halda skil á nógvum samstundis? | 1,6 | 4,4 | 19,4 | 40,7 | 33,9 |
| Krevur arbeiðið hjá tær, at tú minnist nógv? | 1,3 | 3,7 | 16,1 | 43,2 | 35,7 |

Svørini frá teimum fimm spurningunum í talvu 3.2.5.1 eru umgjørd til ein stiga frá 0-100, har 100 bendir á, at mann í sera stóran mun ella altíð upplivir kognitiv krøv í

arbeiðinum. Stigin vendir sostatt aftur soleiðis, at eitt høgt miðaltal kann vera ein ábending um eina møguliga avbjóðing og tyngd í arbeiðsumhvørvinum.

Talva 3.2.5.2 vísir, at svarpersónarnir úr Føroyum hava eitt miðaltal upp á 69,7 á stiganum um *Kognitiv krøv.* Hetta úrslitið bendir á, at føroysku svarpersónarnir uppliva høg kognitiv krøv í arbeiðinum, har teirra stigatal næstan samsvarar við, at svarpersónarnir í miðal hava svarað 'Í stóran mun' og 'Ofta'. Spurningarnir í mun til henda stigan vórðu ikki settir luttakarunum í donsku kanningini, og tískil er tað ikki møguligt at samanbera úrslitini við ein danskan tilvísingarbólk.

**Talva: 3.2.5.2: Miðaltøl fyri stigan *Kognitiv krøv***

| Kognitiv krøv | Miðaltal |
|---|---|
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum | 69,7 |
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Danmark | * |

Í talvunum niðanfyri verða úrslitini víst fyri *Kognitiv krøv* býtt upp í ávikavist kyn, aldur og starvsbólk.

Talva 3.2.5.3 vísir úrslitini fyri stigan um *Kognitiv krøv* býtt upp í menn og kvinnur. Úrslitini benda á, at bæði mannligir og kvinnuligir svarpersónar í kanningini hava mett seg at hava høg kognitiv krøv í arbeiðinum. Ískoytisgreiningar vísa, at munurin millum menn og kvinnur ikki er hagfrøðiliga signifikantur (p=0.7833).

**Talva: 3.2.5.3: Miðaltøl fyri stigan *Kognitiv krøv* býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| Maður | 2219 | 69,3 |
| Kvinna | 3013 | 69,5 |

Talva 3.2.5.4 vísir úrslitini fyri stigan um *Kognitiv krøv* býtt upp í ymiskar aldursbólkar. Í hesum førinum benda úrslitini á, at tað eru teir yngstu og elstu svarpersónarnir, sum uppliva fægst kognitiv krøv í arbeiðinum, har yngstu svarpersónarnir hava eitt miðaltal upp á 59,9, og teir elstu eitt miðaltal upp á 60,8 á stiganum um *Kognitiv krøv.* Úrslitini benda sostatt á, at svarpersónar úr hesum báðum aldursbólkum uppliva kognitiv krøv í arbeiðinum at vera lægri samanborið við hinar aldursbólkarnar. Harnæst vísa úrslitini, at aldursbólkarnir í miðjuni liggja eitt sindur hægri á stiganum og harumframt hava umleið tað sama miðaltalið. Svarpersónar í aldrinum 25 til 34 ár og 35 til 44 ár hava hægstu miðaltølini á stiganum (72,1 og 72,2 stig). Sum heild benda úrslitini á, at allir aldursbólkarnir uppliva lutfalsliga høg kognitiv krøv í arbeiðinum. Ískoytisgreiningar vísa, at munirnir millum aldursbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva: 3.2.5.4: Miðaltøl fyri stigan *Kognitiv krøv* býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| < 25 ár | 267 | 59,9 |
| 25 - 34 ár | 746 | 72,1 |
| 35 - 44 ár | 1168 | 72,2 |
| 45 - 54 ár | 1387 | 71,3 |
| 55 – 64 ár | 1262 | 68,0 |
| > 65 ár | 397 | 60,8 |

Talva 3.2.5.5 vísir úrslitini fyri stigan um *Kognitiv krøv* býtt upp í 11 ymiskar starvsbólkar og vísir harumframt, hvar á stiganum hesir starvsbólkar liggja í mun til miðaltalið fyri allar svarpersónar í kanningini. Úrslitini benda á, at svarpersónar í 'Leiðsluarbeiði' hava tað hægsta miðaltalið á stiganum um *Kognitiv krøv* (78,6 stig). Tað eru harafturat tveir starvsbólkar, sum hava høg miðaltøl á hesum stiganum. Hesir eru ávikavist svarpersónar í 'Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði' (76,3 stig) og svarpersónar í 'Arbeiði á heilsuøkinum' (75,7 stig). Svarpersónar úr hesum trimum starvsbólkunum hava sostatt mett, at tey 'Í stóran mun' og 'Ofta' uppliva at hava kognitiv krøv í arbeiðinum.

Svarpersónar í 'Annað handaligt arbeiði' hava lægsta miðaltalið (48,7 stig), og meta seg sostatt í lægri mun hava kognitiv krøv í arbeiðinum samanborið við restina av starvsbólkunum. Sum eisini skilst av talvuni, er tað sum heild stórir munir millum ymisku metingarnar hjá starvsbólkunum av kognitivum krøvum, har tey kognitivu krøvini tykjast hægri millum svarpersónar úr FISCO-starvsbólkunum 1, 2, 3 og 4. Ískoytisgreiningar vísa harafturat signifikantir munir millum starvsbólkarnar (p<.0001).

**Talva: 3.2.5.5: Miðaltøl fyri stigan *Kognitiv krøv* býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| 1 Leiðsluarbeiði | 508 | 78,6 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 672 | 76,3 |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 622 | 75,7 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 882 | 72,6 |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 769 | 70,7 |
| **Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum** | **5907** | **69,7** |
| 9 Handverkaraarbeiði | 257 | 65,8 |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 626 | 63,6 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 358 | 61,2 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 77 | 58,8 |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 197 | 54,9 |
| 11 Annað handaligt arbeiði | 233 | 48,7 |

Viðmerking: **Grøna markingin** merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá betri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum. **Reyða markingin** merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá verri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Kognitivum krøvum***

Úrslitini fyri *Kognitiv krøv* vístu, at svarpersónarnir uppliva lutfalsliga høg krøv til hugsavning og uppmerksemi í arbeiðinum (69,7 stig). Úrslitini bendu harafturat á, at eingin munur var á upplivingini av kognitivum krøvum millum mannligir og kvinnuligir svarpersónar. Millum teir ymisku aldursbólkarnar, bendu úrslitini á, at teir yngstu og elstu svarpersónarnir uppliva kognitiv krøv í eitt sindur minni mun enn hinir aldursbólkarnir, hava svarpersónar í aldrinum 25 til 44 ár uppliva hægri kognitiv krøv samanborið við restina av bólkunum.

Til endans bendu úrslitini á, at svarpersónar í 'Leiðsluarbeiði', 'Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði' og 'Arbeiði á heilsuøkinum' uppliva munandi hægri kognitiv krøv í arbeiðinum, meðan serliga svarpersónar í 'Annað handaligt arbeiði' tykjast at meta mongdina av kognitivum krøvum at vera minni samanborið við hinar bólkarnar.

### 3.2.6 Markleyst arbeiði

*Markloysi í arbeiðinum* er ikkí eitt nýtt tema í sálarligu og sosialu arbeiðsumhvørvisgranskingini (68, 69). Kortini er ein røð av broytingum hend tey seinastu áratíggjuni, sum øki um møguleikar hjá onkrum arbeiðstakarum at vera 'on' og fylgja teirra arbeiði uttan fyri vanliga arbeiðstíð (70), sum tískil hevur við sær ein vanda fyri styrktum trupulleikum á markamótinum millum arbeiðslív og heimaumhvørvið og, sum fylgja av hesum, ein vanda fyri verri sálarligari heilsubót. Ein nýliga gjørd donsk kanning vísir tó, at tað ikki eru hagfrøðiliga signifikantir samanhangir millum markleyst arbeiði og vanda fyri drúgvari sjúkufráveru og sálarligum heilsutrupulleikum (1).

Ítøkiligari leggja vit, við hesum stiganum dent á, í hvussu stóran mun svarpersónurin hevur møguleika fyri og er førur fyri at gera mun á arbeiðslív og heimalív. Vit hava sett spurningar, sum snúgva seg um yvirarbeiði, heimaarbeiði og um at vera til taks.

Vit máta *Markleyst arbeiði* við hesum fimm spurningunum í talvu 3.2.6.1. Talvan vísir býtið av svørum í prosentum fyri allar svarpersónar í kanningini.

**Talva 3.2.6.1: Býti av svørum í prosentum fyri stigan *Markleyst arbeiði***

| | Ongantíð/ næstan ongantíð | Av og á | Partvíst | Ofta | Altíð |
|---|---|---|---|---|---|
| Hvussu ofta ert tú tøk/ur uttan fyri vanliga arbeiðstíð? | 7,2 | 12,8 | 25,6 | 31,7 | 22,7 |
| Hvussu ofta arbeiðir tú heima uttan fyri vanliga arbeiðstíð, t.d. um kvøldið, um vikuskiftið ella í frítíðini? | 29,8 | 22,4 | 25,7 | 19,7 | 2,4 |
| Hvussu ofta arbeiðir tú dagar, har tú í veruleikanum hevur frí, t.d. um vikuskiftið, á frídøgum ella í frítíðum? | 19,0 | 24,8 | 31,1 | 22,9 | 2,2 |
| Hvussu ofta er neyðugt at arbeiða yvir, tvs. longri enn tína avtalaðu ella væntaðu arbeiðstíð? | 9,0 | 27,1 | 39,5 | 22,1 | 2,3 |
| Hvussu ofta er neyðugt at arbeiða yvir, tvs. longri enn tína avtalaðu ella væntaðu arbeiðstíð? | 12,9 | 27,9 | 33,9 | 21,4 | 3,8 |

Svørini frá teimum fimm spurningunum í talvu 3.2.6.1 eru umgjørd til ein stiga frá 0-100, har 100 bendir á, at mann altíð upplivir, at arbeiðið kennist markleyst og fyllir uttan fyri arbeiðstíðina. Stigin vendir aftur soleiðis, at eitt høgt miðaltal kann benda á eina møguliga avbjóðing og tyngd í arbeiðsumhvørvinum.

Talva 3.2.6.2 vísir, at svarpersónarnir hava eitt miðaltal upp á 46,1 á stiganum um *Markleyst arbeiði,* og svarar tískil til, at svørini í miðal liggja tætt upp at svarflokkinum

'Partvíst'. Spurningarnir í mun til henda stigan vórðu ikki settir luttakarunum í donsku kanningini, og tískil er ikki møguligt at samanbera úrslitini við ein danskan tilvísingarbólk.

**Talva 3.2.6.2: Miðaltøl fyri stigan *Markleyst arbeiði***

| Markleyst arbeiði | Miðaltal |
|---|---|
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum | 46,1 |
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Danmark | * |

Í talvunum niðanfyri verða úrslitini víst fyri *Markleyst arbeiði* býtt upp í ávikavist kyn, aldur og starvsbólk.

Talva 3.2.6.3 vísir úrslitini fyri stigan um *Markleyst arbeiði* býtt upp í menn og kvinnur. Úrslitini benda á, at mannligir svarpersónar oftari uppliva teirra arbeiði at vera markleyst samanborið við kvinnuligar svarpersónar. Ískoytisgreiningar vísa harafturat, at munurin millum menn og kvinnur er hagfrøðiliga signifikantur ($p<.0001$).

**Talva 3.2.6.3: Miðaltøl fyri stigan *Markleyst arbeiði* býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| Maður | 2179 | 49,7 |
| Kvinna | 2978 | 43,6 |

Talva 3.2.6.4 vísir úrslitini fyri stigan um *Markleyst arbeiði* býtt upp í ymiskar aldursbólkar. Í hesum førinum vísa úrslitini, at svarpersónar í aldrinum 45 til 54 ár oftari uppliva teirra arbeiði at vera markleyst (48,2 stig) samanborið við hinar aldursbólkarnar. Svarpersónar í aldrinum 35 til 44 ár hava tað næsthægsta miðaltal á stiganum (47,6 stig), og tað sær tískil eisini út til, at hesir arbeiðstakararnir í eitt sindur størri mun uppliva arbeiðið at vera markleyst samanborið við hinar aldursbólkarnar. Til endans benda úrslitini á, at elstu svarpersónarnir yvir 65 ár hava tað lægsta miðaltalið (41,7 stig), og harvið sær út til, at tey í minni mun uppliva teirra arbeiði at vera markleyst samanborið við restina av bólkunum. Ískoytisgreiningar vísa, at munirnir millum aldursbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir ($p<.0001$).

**Talva 3.2.6.4: Miðaltøl fyri stigan *Markleyst arbeiði* býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| < 25 ár | 254 | 42,5 |
| 25 - 34 ár | 733 | 45,0 |
| 35 - 44 ár | 1155 | 47,6 |
| 45 - 54 ár | 1374 | 48,2 |
| 55 – 64 ár | 1246 | 45,5 |
| > 65 ár | 390 | 41,7 |

Talva 3.2.6.5 vísir úrslitini fyri stigan um *Markleyst arbeiði* býtt upp í 11 ymiskar starvsbólkar og vísir harumframt, hvar á stiganum hesir starvsbólkar liggja í mun til miðaltalið fyri allar svarpersónar í kanningini. Úrslitini benda á, at svarpersónar í

'Leiðsluarbeiði' hava tað hægsta miðaltalið (64,1 stig), og eisini sæst í úrslitunum, at hesir svarpersónar meta teirra arbeiði at vera markleyst í týðiligt størri mun enn hinir starvsbólkarnir. Svarpersónar í 'Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði' hava lægsta miðaltalið (37,6 stig), og meta sostatt teirra arbeiði at vera minni markleyst enn hinir starvsbólkarnir. Ískoytisgreiningar vísa, at munirnir millum starvsbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 3.2.6.5: Miðaltøl fyri stigan *Markleyst arbeiði* býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| 1 Leiðsluarbeiði | 500 | 64,1 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 74 | 48,8 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 667 | 47,9 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 875 | 47,9 |
| **Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum** | **5747** | **46,1** |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 186 | 45,5 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 251 | 45,5 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 345 | 45,5 |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 762 | 45,3 |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 616 | 41,0 |
| 11 Annað handaligt arbeiði | 229 | 39,2 |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 622 | 37,6 |

Viðmerking: **Grøna markingin** merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá betri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum. **Reyða markingin** merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá verri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Markleysum arbeiði***

Úrslitini fyri stigan *Markleyst arbeiði* vístu, at svarpersónarnir hava eitt miðaltal upp á 46,1 á stiganum. Úrslitini vístu harumframt, at mannligir svarpersónar tykjast at uppliva arbeiðið at vera markleyst í eitt sindur størri mun samanborið við kvinnuligar svarpersónar.

Tá úrslitini vórðu býtt upp eftir aldursbólkunum, bendu tey á, at svarpersónar í aldrinum 45 til 54 ár í eitt sindur størri mun uppliva teirra arbeiði at vera markleyst, tá samanborið verður við hinar aldursbólkarnar, meðan elstu svarpersónarnir yvir 65 ár í minni mun uppliva arbeiðið at vera markleyst. Til endans bendu úrslitini á, at svarpersónar í 'Leiðsluarbeiði' uppliva teirra arbeiði at vera markleyst í týðiligt størri mun enn hinir starvsbólkarnir, hava svarpersónar í 'Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði' hava lægsta miðaltalið á stiganum um *Markleyst arbeiði*.

## 3.3 Samstarv

Innan fyri økið *Samstarv* er fokus á hvussu arbeiðstakarar uppliva teirra samstarvssambond við starvsfelagar. Samstarv kann t.d. vera praktisk hjálp, ráð og vegleiðing frá starvsfeløgum og samskifti um hvussu arbeiðið er skipað, men kann eisini skiljast sum sosial sambond millum starvsfelagar og felags fatanin av arbeiðsuppgávunum, og hvussu hetta ávirkar samstarvið um kjarnuuppgávuna.

Kanningar hava áður staðfest, at góð samstarvssambond við bæði starvsfelagar og leiðarar kann vera at rokna sum viðurskifti, ið geva møguleikar í tí sálarliga og sosiala arbeiðsumhvørvinum, sum hava týdning fyri heilsu og trivnað hjá arbeiðstakara (32, 33, 35). Kanningar hava eisini áður staðfest, at arbeiðstakarar, sum uppliva góð samstarvssambond við starvsfelagar og leiðarar, í størri mun trívast betri í arbeiðinum (25, 27, 71-73), meðan arbeiðstakarar, sum uppliva vánalig samstarvssambond, í størri mun trívast verri í arbeiðinum (74-76). Harumframt hava úrslit frá bókmentum áður bent á, at interpersonellu rammurnar fyri arbeiðið, sum verður gjørt, hava týdning fyri møguleikan hjá arbeiðstakaranum at handfara starvsligu krøvini á slíkan hátt, at tað ikki gongur út yvir teirra trivnað og heilsu (32, 33, 35). Og til endans bendir gransking á, at samstarvið millum starvsfelagar og millum leiðarar og starvsfólk eisini hevur týdning fyri avrikið hjá arbeiðsplássinum (71).

Spurnakanningin lýsir hesi evnini, sum endurspegla ymisk sjónarmið í økinum *Samstarv*:

- Sosialur stuðul frá starvsfeløgum
- Sambond við nærmastu starvsfelagar
- Álit á starvsfelagar

### 3.3.1 Sosialur stuðul frá starvsfeløgum

*Sosialur stuðul frá starvsfeløgum* snýr seg um sambandið hjá arbeiðstakaranum við sínar starvsfelagar og tann mun av stuðli, arbeiðstakararnir uppliva at kunna fáa frá sínum starvsfeløgum. Í bókmentunum verður skilt millum fleiri sløg av stuðli (22):

- Praktiskan stuðul (hjálp)
- Kensluligan stuðul og
- Kunningarligan stuðul

Kanningar hava áður staðfest samanhangir millum sosialan stuðul frá starvsfeløgum og heilsu og trivnað hjá arbeiðstakaranum í arbeiðinum. T.d. vísir granskingin, at lágur stuðul hongur saman við skerdum sálarligum trivnaði (1, 75, 77) og vanda fyri útkoyring av arbeiðsmarknaðinum (76, 78).

Vit máta *Sosialan stuðul frá starvsfeløgum* við teimum fýra spurningunum í talvu 3.3.1.1. Talvan vísir býtið av svørum í prosentum fyri allar svarpersónar í kanningini.

**Talva 3.3.1.1: Býti av svørum í prosentum fyri stigan *Sosialur stuðul frá starvsfeløgum***

| | Í sera lítlan mun | Í lítlan mun | Partvíst | Í stóran mun | Í sera stóran mun | Havi ongar starvsfelagar |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fært tú praktiska hjálp til arbeiðið frá tínum starvsfeløgum, um tú hevur tørv á tí? | 2,4 | 5,7 | 19,7 | 34,4 | 35,7 | 2,1 |
| Fært tú ráð og vegleiðing frá tínum starvsfeløgum, um tú hevur tørv á tí? | 1,9 | 5,3 | 17,7 | 35,6 | 37,0 | 2,5 |
| Kanst tú tosa við tínar starvsfelagar um tað, um tit uppliva trupulleikar í arbeiðinum? | 1,6 | 4,6 | 17,5 | 35,0 | 38,5 | 2,8 |
| Geva tú og tínir starvsfelagar tykkum far um trivnaðin hjá hvørjum øðrum? | 2,5 | 8,5 | 29,7 | 37,4 | 19,6 | 2,4 |

Svørini frá teimum fýra spurningunum í talvu 3.3.1.1 eru umgjørd til ein stiga frá 0-100, har 100 bendir á, at mann í sera stóran mun upplivir sosialan stuðul frá starvsfeløgum. Tað hevur verið møguligt at svara 'Havi ongar starvsfelagar' til hesar spurningarnar. Svør í svarflokkinum 'Havi ongar starvsfelagar' er ikki roknað við í stigan.

Talva 3.3.1.2 vísir, at svarpersónarnir úr Føroyum hava eitt miðaltal upp á 73,3 á stiganum um *Sosialan stuðul frá starvsfeløgum,* sum merkir, at føroysku svarpersónarnir í stóran mun uppliva at fáa sosialan stuðul frá sínum starvsfeløgum. Spurningarnir í mun til henda stigan vórðu ikki sett luttakarunum í donsku kanningini, og tískil er ikki møguligt at samanbera úrslitini við ein danskan tilvísingarbólk.

**Talva 3.3.1.2: Miðaltøl fyri stigan *Sosialur stuðul frá starvsfeløgum***

| Sosialur stuðul frá starvsfeløgum | Miðaltal |
|---|---|
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum | 73,3 |
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Danmark | * |

Í talvunum niðanfyri verða úrslitini víst fyri *Sosialur stuðul frá starvsfeløgum* býtt upp í ávikavist kyn, aldur og starvsbólk.

Talva 3.3.1.3 vísir úrslitini fyri stigan um *Sosialan stuðul frá starvsfeløgum* býtt upp í menn og kvinnur. Úrslitini benda á, at kvinnur uppliva ein eitt sindur størri mun av sosialum stuðli frá starvsfeløgum enn menn. Ískoytisgreining vísir, at munurin millum menn og kvinnur er hagfrøðiliga signifikantur (p<.0001).

**Talva 3.3.1.3: Miðaltøl fyri stigan *Sosialur stuðul frá starvsfeløgum* býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| Maður | 2032 | 71,6 |
| Kvinna | 2771 | 74,5 |

Talva 3.3.1.4 vísir úrslitini fyri stigan um *Sosialan stuðul frá starvsfeløgum* býtt upp í aldursbólkar. Í hesum førinum vísa úrslitini, at tveir teir yngstu aldursbólkarnir hava hægstu miðaltølini á stiganum um *Sosialan stuðul frá starvsfeløgum.* Svarpersónar undir 25 ár hava eitt stigatal uppá 75,1, meðan svarpersónar í aldrinum 25 til 34 ár hava eitt stigatal uppá 75,6. Øvut, sæst, at eldru svarpersónarnir hava lægsta miðaltal á stiganum, hava svarpersónar millum 55 og 64 ár hava tað lægsta stigatalið uppá 71,5, og svarpersónar yvir 65 ár hava tað næstlægsta stigatalið uppá 72,5. Harvið sær tað út til, at teir yngru arbeiðstakararnir í Føroyum meta sínar møguleikar til sosialan stuðul frá starvsfeløgum at vera eitt sindur hægri enn teir elstu arbeiðstakararnir. Sum heild, eru munirnir smáir, og allir aldursbólkarnir hava mett sínar møguleikar fyri at fáa sosialan stuðul frá starvsfeløgum at vera høgar. Ískoytisgreiningar vísa, at munirnir millum aldursbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p=0.0007).

**Talva 3.3.1.4: Miðaltøl fyri stigan *Sosialur stuðul frá starvsfeløgum* býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| < 25 ár | 227 | 75,1 |
| 25 - 34 ár | 673 | 75,6 |
| 35 - 44 ár | 1079 | 73,5 |
| 45 - 54 ár | 1284 | 73,3 |
| 55 – 64 ár | 1182 | 71,5 |
| > 65 ár | 353 | 72,5 |

Talva 3.3.1.5 vísir úrslitini fyri stigan um *Sosialan stuðul frá starvsfeløgum* býtt upp í 11 ymiskar starvsbólkar og vísir harumframt, hvar á stiganum hesir starvsbólkar liggja í mun til miðaltalið fyri allar svarpersónar í kanningini. Í hesum førinum vísa úrslitini, at svarpersónar í 'Arbeiði á heilsuøkinum' hava tað hægsta miðaltalið (76,4 stig), og meta sostatt sínar møguleikar fyri at fáa sosialan stuðul frá starvsfeløgum at vera hægri enn

hinir starvsbólkarnir. Svarpersónar í 'Annað handaligt arbeiði' hava lægsta miðaltalið á stiganum (67,7 stig), og uppliva sostatt sínar møguleikar fyri at fáa sosialan stuðul frá starvsfeløgum at vera lægri enn hinir bólkarnir. Hóast munirnir eru smáirir, benda ískoytisgreiningar á signifikantar munir millum starvsbólkarnar (p<.0001).

**Talva 3.3.1.5: Miðaltøl fyri stigan *Sosialur stuðul frá starvsfeløgum* býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 574 | 76,4 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 812 | 74,1 |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 587 | 74,0 |
| **Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum** | **5226** | **73,3** |
| 1 Leiðsluarbeiði | 468 | 73,3 |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 727 | 73,3 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 315 | 73,2 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 639 | 73,1 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 226 | 72,6 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 67 | 70,7 |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 159 | 69,5 |
| 11 Annað handaligt arbeiði | 204 | 67,7 |

Viðmerking: **Grøna markingin** merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá betri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum. **Reyða markingin** merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá verri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Sosialum stuðli frá starvsfeløgum***

Úrslitini fyri økið *Sosialur stuðul frá starvsfeløgum* vístu, at teir føroysku arbeiðstakararnir í stóran mun meta at kunna fáa sosialan stuðul frá starvsfeløgum við einum miðaltali uppá 73,3.

Harnæst bendu úrslitini á, at tað vóru smærri munir á, hvussu ávikavist mannligir og kvinnuligir svarpersónar hava mett sínar møguleikar fyri at fáa sosialan stuðul frá starvsfeløgum. Millum teir ymisku aldursbólkarnar, bendu úrslitini á, at teir yngru svarpersónarnir meta møguleikarnir fyri sosialum stuðli frá starvsfeløgum at vera hægri enn eldru svarpersónarnir – tó benda úrslitini á, at allir aldursbólkarnir í stóran mun meta seg kunna fáa sosialan stuðul frá starvsfeløgum. Til endans bendu úrslitini á, at svarpersónar í 'Arbeiði á heilsuøkinum' hava tað hægsta miðaltalið á stiganum, og meta seg sostatt í størri mun enn hinir starvsbólkarnir at kunna fáa sosialan stuðul frá starvsfeløgum, meðan svarpersónar í 'Annað handaligt arbeiði' hava mett lægsta støðið av sosialum stuðli frá starvsfeløgum. Aftur, bendu úrslitini á, at allir starvsbólkar hava eitt miðaltal á stiganum, sum bendir á, at tey sum heild uppliva at hava góðar møguleikar fyri at fáa sosialan stuðul frá starvsfeløgum, og at munirnir millum starvsbólkarnar eru lutfalsliga smáir.

### 3.3.2 Sambond við nærmastu starvsfelagar

*Sambond við nærmastu starvsfelagar* snýr seg um samstarvssambondini millum starvsfelagarinir á arbeiðsplássinum. Tað snýr seg millum annað um, hvørt starvsfelaganir uppliva, at tað er samanhald, felagsskapur og nóg mikil hjálp og sparring millum starvsfelagar á arbeiðsplássinum (79).

Samstarv og sambond millum starvsfelagar er ein týðandi partur av sosiala kapitalinum á arbeiðsplássinum, og granskingin vísir, at dygdin av samstarvssambondunum hava týdning fyri heilsuna og trivnaðin hjá arbeiðstakarum í arbeiðinum (80). Kanningar hava áður t.d. víst, at arbeiðstakarar, sum uppliva góð samstarvssambond, sýna størri trivnað í arbeiðinum (25, 71-73), meðan aðrar kanningar benda á, at arbeiðstakarar, sum uppliva vánalig samstarvssambond, sýna minni trivnað í arbeiðinum (74, 75). Til endans er tað eisini gransking, sum bendir á, at gott samstarv innan fyri toymir hava týdning fyri hvussu arbeiðstakarar uppliva møguleikarnir til at loysa arbeiðsuppgávurnar (71).

Vit máta *Sambond við nærmastu starvsfelagar* við teimum fýra spurningunum í talvu 3.3.2.1. Talvan vísir býtið av svørum í prosentum fyri allar svarpersónar í kanningini.

**Talva 3.3.2.1: Býti av svørum í prosentum fyri stigan *Sambond við nærmastu starvsfelagar***

| | Í sera lítlan mun | Í lítlan mun | Partvíst | Í stóran mun | Í sera stóran mun | Havi ongar starvsfelagar |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Hjálpa tit starvsfeløgum, ið hava ov nógv at gera? | 2,3 | 6,0 | 26,2 | 36,6 | 26,6 | 2,3 |
| Er ein kensla av samanhaldi og felagsskapi millum teg og tínar starvsfelagar? | 2,5 | 4,1 | 19,1 | 34,5 | 37,1 | 2,8 |
| Eru tú og tínir starvsfelagar samd um, hvat tað týdningarmiklasta er í tykkara arbeiðsuppgávum? | 1,4 | 3,8 | 23,5 | 44,0 | 24,8 | 2,5 |
| Duga tú og tínir starvsfelagar væl at samstarva, tá trupulleikar taka seg upp, ið krevja felags loysnir? | 1,6 | 4,7 | 21,8 | 42,7 | 26,7 | 2,5 |

Svørini frá teimum fýra spurningunum í talvu 3.3.2.1 eru umgjørd til ein stiga frá 0-100, har 100 bendir á, at mann í sera stóran mun gevur eina jaliga meting av sambondunum við nærmastu starvsfelagar. Tað hevur verið møguligt at svara 'Havi ongar starvsfelagar' til hesar spurningarnar. Hesi svørini eru ikki roknað við í stigan.

Talva 3.3.2.2 vísir, at svarpersónarnir úr Føroyum hava eitt miðaltal upp á 72,6 á stiganum um *Sambond við nærmastu starvsfelagar,* sum merkir, at føroysku svarpersónarnir í stóran mun geva eina jaliga meting av teirra sambondum við nærmastu starvsfelagar. Úrslitini vísa harumframt, at arbeiðstakarar úr Føroyum tykjast

í størri mun at uppliva góð samstarvssambond til teirra nærmestu starvsfelagar enn danski tilvísingarbólkurin (67,0 stig).

**Talva 3.3.2.2: Miðaltøl fyri stigan *Sambond við nærmastu starvsfelagar***

| Sambond við nærmastu starvsfelagar | Miðaltal |
|---|---|
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum | 72,6 |
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Danmark | 67,0 |

Í talvunum niðanfyri verða úrslitini víst fyri *Sambond við nærmastu starvsfelagar* býtt upp í ávikavist kyn, aldur og starvsbólk.

Talva 3.3.2.3 vísir úrslitini fyri stigan um *Sambond við nærmastu starvsfelagar* býtt upp í menn og kvinnur. Úrslitini benda á, at tað stórt sæð ikki er munur á, hvussu mannligir og kvinnuligir svarpersónar hava mett síni sambond við nærmastu starvsfelagar. Ískoytisgreiningar vísa harafturat, at munirnir millum menn og kvinnur ikki er hagfrøðiliga signifikantur (p=0.6248).

**Talva 3.3.2.3: Miðaltøl fyri stigan *Sambond við nærmastu starvsfelagar* býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| Maður | 2019 | 72,6 |
| Kvinna | 2774 | 72,9 |

Talva 3.3.2.4 vísir úrslitini fyri stigan um *Sambond við nærmastu starvsfelagar* býtt upp í aldursbólkar. Í hesum førinum vísa úrslitini, at tað sum heild ikki eru stórir munir millum miðaltølini hjá teimum ymisku aldursbólkunum, har allir bólkarnir í stóran mun geva eina jaliga meting av teirra sambondum við nærmastu starvsfelagar. Ein ískoytisgreining vísir harafturat, at munirnir millum aldursbólkarnar ikki hagfrøðiliga signifikantir (p=0.4748).

**Talva 3.3.2.4: Miðaltøl fyri stigan *Sambond við nærmastu starvsfelagar* býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| < 25 ár | 228 | 74,5 |
| 25 - 34 ár | 673 | 73,3 |
| 35 - 44 ár | 1079 | 72,1 |
| 45 - 54 ár | 1273 | 73,0 |
| 55 – 64 ár | 1182 | 72,3 |
| > 65 ár | 353 | 72,9 |

Talva 3.3.2.5 vísir úrslitini fyri stigan um *Sambond við nærmastu starvsfelagar* býtt upp í 11 ymiskar starvsbólkar og vísir harumframt, hvar á stiganum hesir starvsbólkar liggja í mun til miðaltalið fyri allar svarpersónar í kanningini. Úrslitini benda á, at svarpersónar í 'Arbeiði á heilsuøkinum' (76,0 stig) og svarpersónar í 'Leiðsluarbeiði' (75,5 stig) hava hægstu miðaltølini á stiganum um *Sambond við nærmastu starvsfelagar.* Harafturímóti benda úrslitini á, at svarpersónar í 'Annað handaligt arbeiði' hava tað lægsta miðaltalið (69,0 stig), og tykjast sostatt at geva eina minni jaliga meting av teirra sambondum við

nærmastu starvsfelagar samanborið við hinar starvsbólkarnar. Tó skal viðmerkjast, at allir starvsbólkar sum heild geva eina høga jaliga meting av teirra sambondum við nærmastu starvsfelagar. Hóast munirnir eru smáirir, benda ískoytisgreiningar á, at munirnir millum starvsbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 3.3.2.5: Miðaltøl fyri stigan *Sambond við nærmastu starvsfelagar* býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 578 | 76,0 |
| 1 Leiðsluarbeiði | 465 | 75,5 |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 721 | 73,9 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 67 | 73,1 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 313 | 72,8 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 227 | 72,7 |
| **Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum** | **5215** | **72,6** |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 155 | 72,5 |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 591 | 72,5 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 812 | 71,6 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 638 | 70,5 |
| 11 Annað handaligt arbeiði | 201 | 69,0 |

Viðmerking: **Grøna markingin** merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá betri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum. **Reyða markingin** merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá verri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Sambondum við nærmastu starvsfelagar***
Úrslitini fyri *Sambond við nærmastu starvsfelagar* vístu, at føroysku svarpersónarnir í stóran mun geva eina jaliga meting av teirra sambondum við nærmastu starvsfelagar, og eisini meiri jaliga enn miðaltalið av svarpersónum úr donsku tilvísingarkanningini. Úrslitini bendu harafturat á, at tað ikki eru signifikantir munir á metingini av sambondum við nærmastu starvsfelagar upp á tvørs av hvørki kyn ella aldursbólkar. Millum ymiskar starvsbólkar, er tað eitt sindur størri munir, hava svarpersónar í 'Arbeiði á heilsuøkinum' og í 'Leiðsluarbeiði' geva eina meira jaliga meting av teirra sambondum við nærmastu starvsfelagar enn hinir starvsbólkarnir. Harafturímóti hava svarpersónar í 'Annað handaligt arbeiðinum' mett teirra sambond við nærmastu starvsfelagar at vera eitt sindur minni jalig samanborið við hinar starvsbólkarnar. Tó skal viðmerkjast, at allir starvsbólkarnir sum heild hava givið jaligar metingar av teirra sambondum við nærmastu starvsfelagar, og at munirnir millum starvsbólkarnar eru smáir.

### 3.3.3 Álit á starvsfelagar

*Álit á starvsfelagar* snýr seg um væntanir og álit hjá arbeiðstakarunum til, at teirra starvsfelagar fara at hava eina atferð, sum er í samsvar við normarnar á arbeiðsplássinum, og tær væntanir, ið eru til arbeiðsstøðuna. Hetta kann t.d. vera at lurta eftir sjónarmiðunum hjá øðrum, at kunna geva arbeiðsuppgávur harumframt og at kunna hvør annan um ting, sum eru umráðandi fyri at loysa uppgávuna. Álit snýr seg eisini um, hvørt arbeiðstakarar líta á, at teirra starvsfelagar fara at siga, og kunnu siga, meiningar og kenslur, og tora at siga frá, um trupulleikar eru (81).

Tað, at álit er á og millum starvsfelagar, verur mett sum ein týðandi fortreyt fyri, at samstarvssambond virka á arbeiðsplássinum. Álit er ein partur av sosiala kapitalinum á arbeiðsplássinum, og umráðandi fyri trivnaðin hjá starvsfeløgunum í arbeiðinum. T.d. hava kanningar áður staðfest, at álit hongur saman við nøgdsemi í arbeiðinum (73) og tunglyndi (1), meðan ein onnur kanning hevur staðfest, at álit er týðandi fyri fatanina av læring, samstarvi og avrik í fyritøkum (72).

Vit máta *Álit á starvsfelagar* við teimum fýra spurningunum í talvu 3.3.3.1. Talvan vísir býtið av svørum í prosentum fyri allar svarpersónar í kanningini.

**Talva 3.3.3.1: Býti av svørum í prosentum fyri stigan *Álit á starvsfelagar***

| | Í sera lítlan mun | Í lítlan mun | Partvíst | Í stóran mun | Í sera stóran mun | Havi ongar starvsfelagar |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Siga tit hvørjum øðrum frá um viðurskifti, ið eru umráðandi fyri, at tit kunnu útinna arbeiðið nóg væl? | 1,8 | 4,9 | 20,4 | 38,7 | 32,0 | 2,2 |
| Hevur tú álit á førleikunum hjá starvsfeløgunum at útinna arbeiðið væl? | 0,9 | 3,0 | 16,1 | 38,1 | 38,9 | 3,0 |
| Kanst tú siga tínum nærmastu starvsfeløgum frá tínum meiningum og kenslum? | 3,4 | 7,7 | 25,1 | 36,6 | 24,8 | 2,5 |
| Hava tú og tínir starvsfelagar vanliga álit á hvørjum øðrum? | 1,3 | 2,0 | 14,8 | 44,1 | 34,9 | 3,0 |

Svørini frá teimum fýra spurningunum í talvu 3.3.3.1 eru umgjørd til ein stiga frá 0-100, har 100 bendir á, at mann í sera stóran mun hevur álit á sínar starvsfelagar. Tað hevur verið møguligt at svara 'Havi ongar starvsfelagar' til hesar spurningarnar. Svør í svarflokkinum 'Havi ongar starvsfelagar' eru ikki roknað við í stigan.

Talva 3.3.3.2 vísir, at føroysku svarpersónarnir hava eitt miðaltal upp á 74,8 á stiganum um *Álit á starvsfelagar*, og bendir sostatt á, at svarpersónarnir í stóran mun uppliva, at tey hava álit til teirra starvsfelagar. Úrslitini benda harumframt á, at føroysku

svarpersónarnir liggja eitt sindur hægri enn teir donsku svarpersónarnir (71,4 stig) í meting teirra av, um teir hava álit til teirra starvsfelagar.

**Talva 3.3.3.2: Miðaltøl fyri stigan *Álit á starvsfelagar***

| Álit á starvsfelagar | Miðaltal |
|---|---|
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum | 74,8 |
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Danmark | 71,4 |

Í talvunum niðanfyri verða úrslitini víst fyri *Álit á starvsfelagar* býtt upp í ávikavist kyn, aldur og starvsbólk.

Talva 3.3.3.3 vísir úrslitini fyri stigan um *Álit á starvsfelagar* býtt upp í menn og kvinnur. Úrslitini benda á, at tað bert er ein lítil munur á, hvussu mannligir og kvinnuligir svarpersónar hava mett seg at hava álit á starvsfelagar. Ískoytisgreiningar vísa tó, at munurin millum menn og kvinnur er hagfrøðiliga signifikantur ($p<.0001$).

**Talva 3.3.3.3: Miðaltøl fyri stigan *Álit á starvsfelagar* býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| Maður | 2018 | 73,5 |
| Kvinna | 2761 | 75,9 |

Talva 3.3.3.4 vísir úrslitini fyri stigan um *Álit á starvsfelagar* býtt upp í aldursbólkar. Í hesum førinum benda úrslitini á, at tað sum heild eru smærri munir á, hvussu teir ymisku aldursbólkarnir hava mett sítt álit á starvsfelagar at vera, hava svarpersónar í aldrinum 25 til 34 ár hava tað hægsta miðaltalið (76,0 stig), og svarpersónar undir 25 ár hava tað lægsta miðaltalið (72,7 stig). Ískoytisgreiningar vísa harafturat, at munurin millum aldursbólkarnar ikki eru hagfrøðiliga signifikantir ($p=0.2329$).

**Talva 3.3.3.4: Miðaltøl fyri stigan *Álit á starvsfelagar* býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| < 25 ár | 229 | 72,7 |
| 25 - 34 ár | 664 | 76,0 |
| 35 - 44 ár | 1077 | 74,9 |
| 45 - 54 ár | 1272 | 75,1 |
| 55 – 64 ár | 1180 | 74,5 |
| > 65 ár | 352 | 74,3 |

Talva 3.3.3.5 vísir úrslitini fyri stigan um *Álit á starvsfelagar* býtt upp í teir 11 ymisku starvsbólkarnar og vísir harumframt, hvar á stiganum hesir starvsbólkar liggja í mun til miðaltalið fyri allar svarpersónar í kanningini. Úrslitini benda á, at svarpersónar í 'Arbeiði á heilsuøkinum' hava tað hægsta miðaltalið (77,4 stig), og hava tískil mett sítt álit á starvsfelagar at vera betri enn hinir starvsbólkarnir. Svarpersónar í 'Annað handaligt arbeiði' hava harafturímóti lægsta miðaltalið (69,0 stig), og meta sostatt teirra álit á starvsfelagar í lægri mun. Tó skal viðmerkjast, at allir starvsbólkarnir í miðal meta, at tey hava eitt høgt støði av áliti til teirra starvsfelagar, og at munirnir millum

starvsbólkarnar eru smáir. Ein ískoytisgreining vísir, at munirnir millum starvsbólkarnar hagfrøðiliga signifikantir ($p<.0001$).

**Talva 3.3.3.5: Miðaltøl fyri stigan *Álit á starvsfelagar* býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 573 | 77,4 |
| 1 Leiðsluarbeiði | 458 | 76,7 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 812 | 75,7 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 635 | 75,6 |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 725 | 75,6 |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 585 | 75,1 |
| **Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum** | **5194** | **74,8** |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 314 | 73,2 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 67 | 72,7 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 226 | 71,4 |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 159 | 70,8 |
| 11 Annað handaligt arbeiði | 200 | 69,0 |

Viðmerking: **Grøna markingin** merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá betri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum. **Reyða markingin** merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá verri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Áliti á starvsfelagar***
Úrslitini fyri *Álit á starvsfelagar* vístu, at svarpersónar úr Føroyum meta teirra álit á starvsfelagar eitt sindur hægri enn svarpersónar úr danska tilvísingarbólkinum. Úrslitini bendu harafturat á, at tað bert er ein lítil munur á, hvussu menn og kvinnur hava mett seg at hava álit á starvsfelagarinir.
Harnæst bendu úrslitini á, at svarpersónar í aldrinum 25 til 34 ár hava tað hægsta miðaltalið á stiganum um *Álit á starvsfelagar*, meðan svarpersónar undir 25 ár hava tað lægsta miðaltalið. Felags fyri aldursbólkarnar er tó, at allir hava mett teirra álit á starvsfelagar at vera høgt, og munirnir er heldur ikki hagfrøðiliga signifikantir.

Til endans bendu úrslitini á, at svarpersónar í 'Arbeiði á heilsuøkinum' hava mett teirra álit á starvsfelagar at vera hægri enn hinir starvsbólkarnir. Her bendu úrslitini eisini á, at svarpersónar í 'Annað handaligt arbeiði' hava tað lægsta miðaltalið, og harafturat, at hesin starvsbólkurin liggur meira enn fimm stig lægri á stiganum um *Álit á starvsfelagar* samanborið við miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini. Felags fyri allar teir kannaðu starvsbólkarnar er tó, at allir hava mett teirra álit á starvsfelagar at vera høgt.

Samanumtikið fyri økið *Samstarv* bendu úrslitini á, at svarpersónar í 'Arbeiði á heilsuøkinum' sum heild vísa seg at uppliva góð og álítandi samstarvssambond við teirra starvsfelagar, hava svarpersónar úr 'Annað handaligt arbeiði' harafturímóti vísa seg at uppliva eitt sindur verri samstarvssambond við starvsfelagar – í hvussu so er, tá miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini verður samanborið. Samanumtikið fyri úrslitini fyri *Samstarv*, tykist tað sum, at arbeiðstakarar úr Føroyum meta teirra

samstarvssambond at vera jalig, bæði tá vit hyggja eftir *Sosialum stuðli, Sambondum við nærmastu starvsfelagar* og *Áliti á starvsfelagar*.

## 3.4 Leiðsla

Innan fyri økið *Leiðsla* er fokus á upplivingina hjá arbeiðstakarum av teirra sambondum við nærmastu leiðslu og onnur sløg av leiðslu í fyritøkuni. Sambandið millum arbeiðstakarum og leiðarar er umráðandi, av tí at leiðslan í stóran mun setur rammurnar upp fyri, hvussu uppgávurnar skulu loysast á arbeiðsplássinum. Tað er tí ein týðandi fyrimunur, um leiðarar og starvsfólk hava eitt gott samstarv, at tey hava álit á hvørjum øðrum, og at tað eru týðiligar sínámillum væntanir til íkastið hjá hvørjum øðrum til at loysa uppgávuna. Sum áður lýst, hava kanningar áður víst, at arbeiðstakarar, sum uppliva góð samstarvssambond við starvsfelagar og leiðarar, sýna í størri mun trivnað í arbeiðinum (25, 27, 71-73), meðan arbeiðstakarar, sum uppliva vánalig samstarvssambond, sýna í minni mun trivnað í arbeiðinum (74-76).

Spurnakanningin lýsir hesi evnini, sum endurspegla ymisk sjónarmið í økinum *Leiðsla*:

- Sambond við nærmasta leiðara
- Leiðslugóðska
- Stuðul frá leiðslu
- Rættvísi
- Hvussu leiðslan tekur starvsfólk uppí
- Viðurkenning

## 3.4.1 Sambond við nærmasta leiðara

*Sambond við nærmasta leiðara* snýr seg um, hvussu arbeiðstakarar uppliva teirra samband við tann nærmastu leiðaran á arbeiðsplássinum. Hetta bæði tá tað viðvíkur, um arbeiðstakararnir uppliva sínámillum virðing, viðurkenning og at nærmasti leiðarin og arbeiðstakararnir skilja hvønn annan, men eisini um arbeiðstakarum uppliva, at tann nærmasti leiðarin kemur við sínum íkasti til at loysa trupulleikar í gerandisdegnum (79).

Eitt gott samband við nærmasta leiðara hevur týdning fyri møguleikar hjá arbeiðstakaranum fyri at gera arbeiðsuppgávur nøktandi. Samband við nærmasta leiðara er ein partur av sosiala kapitalinum á arbeiðsplássinum og hevur tí sum fyrrnevndu evni týdning fyri trivnað hjá arbeiðstakaranum í arbeiðinum og fyri teirra møguleikar fyri at gera teirra arbeiðsuppgávur (71, 79). Ein donsk kanning vísir, at arbeiðstakarar, sum siga frá um góð sambond til teirra nærmasta leiðara, eru í minni vanda fyri drúgvari sjúkufráveru og sálarligum heilsutrupulleikum (1).

Vit máta *Sambond við nærmasta leiðara* við teimum fýra spurningunum í talvu 3.4.1.1. Talvan vísir býtið av svørum í prosentum fyri allar svarpersónar í kanningini.

**Talva 3.4.1.1: Býti av svørum í prosentum fyri stigan *Sambond við nærmasta leiðara***

| | Í sera lítlan mun | Í lítlan mun | Partvíst | Í stóran mun | Í sera stóran mun | Havi ongan leiðara |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Er sambandið ímillum tín nærmasta leiðara og starvsfólkini merkt av sínámillum virðing og viðurkenning? | 3,4 | 7,2 | 18,7 | 34,9 | 31,6 | 4,2 |
| Hevur tín nærmasti leiðari gott skil á tí arbeiðinum, ið starvsfólkið útinnir? | 7,3 | 10,0 | 23,5 | 30,8 | 23,7 | 4,7 |
| Tekur tín nærmasti leiðari atlit at tørvum og sjónarmiðum hjá starvsfólkunum, tá hann ella hon tekur avgerðir? | 8,2 | 10,6 | 31,0 | 30,3 | 15,6 | 4,4 |
| Hjálpir tín nærmasti leiðari við at loysa ítøkiligar trupulleikar í gerandisdegnum? | 8,2 | 13,3 | 25,8 | 28,8 | 19,5 | 4,4 |

Svørini frá teimum fýra spurningunum í talvu 3.4.1.1 eru umgjørd til ein stiga frá 0-100, har 100 bendir á, at mann í sera stóran mun gevur eina jaliga meting av sínum sambandi við nærmasta leiðara. Tað hevur verið møguligt at svara 'Havi ongan leiðara' til hesar spurningarnar. Svør í svarflokkinum 'Havi ongan leiðara' eru ikki roknað við í stigan.

Talva 3.4.1.2 vísir, at føroysku svarpersónarnir hava eitt miðaltal upp á 63,6 á stiganum um *Sambond við nærmasta leiðara,* ið liggur tætt upp at miðaltalinum fyri danska tilvísingarbólkin, sum hevur eitt miðaltal upp á 64,1. Tað er sostatt ikki stórur munur á,

hvussu teir føroysku og donsku svarpersónarnir í miðal hava mett síni sambond við nærmasta leiðara.

**Talva 3.4.1.2: Miðaltøl fyri stigan *Sambond við nærmasta leiðara***

| Sambond við nærmasta leiðara | Miðaltal |
|---|---|
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum | 63,6 |
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Danmark | 64,1 |

Í talvunum niðanfyri verða úrslitini víst fyri *Sambond við nærmasta leiðara* býtt upp í ávikavist kyn, aldur og starvsbólk.

Talva 3.4.1.3 vísir úrslitini fyri stigan um *Sambond við nærmasta leiðara* býtt upp í menn og kvinnur. Úrslitini benda á, at tað bert er ein lítil munur á, hvussu mannligir og kvinnuligir svarpersónar hava mett síni sambond við nærmasta leiðara. Ein ískoytisgreining vísir harumframt, at munurin millum menn og kvinnur ikki er hagfrøðiliga signifikantur (p=0.2007).

**Talva 3.4.1.3: Miðaltøl fyri stigan *Sambond við nærmasta leiðara* býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| Maður | 1903 | 64,4 |
| Kvinna | 2734 | 63,5 |

Talva 3.4.1.4 vísir úrslitini fyri stigan um *Sambond við nærmasta leiðara* býtt upp í aldursbólkar. Úrslitini benda á, at elstu svarpersónarnir yvir 65 ár hava tað hægsta miðaltalið á stiganum (67,0 stig), og soleiðis geva teir í eitt sindur størri mun eina jaliga meting av teirra sambondum við nærmasta leiðara samanborið við hinar aldursbólkarnar. Svarpersónar í aldrinum 45 til 54 ár hava harafturímóti lægsta miðaltalið á stiganum uppá 62,3, og geva í eitt sindur lægri mun eina jaliga meting av teirra sambondum við nærmasta leiðara samanborið við restina av aldursbólkunum. Ískoytisgreiningar vísa, at munirnir millum aldursbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p=0.0073).

**Talva 3.4.1.4: Miðaltøl fyri stigan *Sambond við nærmasta leiðara* býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| < 25 ár | 221 | 64,7 |
| 25 - 34 ár | 660 | 65,4 |
| 35 - 44 ár | 1051 | 62,8 |
| 45 - 54 ár | 1239 | 62,3 |
| 55 – 64 ár | 1131 | 64,5 |
| > 65 ár | 330 | 67,0 |

Talva 3.4.1.5 vísir úrslitini fyri stigan um *Sambond við nærmasta leiðara* býtt upp í 11 ymiskar starvsbólkar og vísir harumframt, hvar á stiganum hesir starvsbólkar liggja í mun til miðaltalið fyri allar svarpersónar í kanningini. Úrslitini benda á, at tað bert eru smærri munir millum starvsbólkarnar, og at svarpersónar í 'Vanligt kontór- og

kundatænastuarbeiði' hava tað hægsta miðaltalið (67,5 stig), og er soleiðis tann starvsbólkurin, sum geva ta mest jaligu metingina av teirra sambondum við nærmasta leiðara. Øvut geva svarpersónar í 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' ta minst jaligu metingina av sambondum við nærmasta leiðara (58,8 stig). Ein ískoytisgreining vísir, at munirnir millum starvsbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 3.4.1.5: Miðaltøl fyri stigan *Sambond við nærmasta leiðara* býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 588 | 67,5 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 599 | 66,8 |
| 1 Leiðsluarbeiði | 400 | 66,4 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 64 | 66,1 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 207 | 64,1 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 309 | 64,0 |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 707 | 63,9 |
| **Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum** | **4958** | **63,6** |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 561 | 62,4 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 810 | 61,1 |
| 11 Annað handaligt arbeiði | 207 | 60,0 |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 164 | 58,8 |

Viðmerking: **Grøna markingin** merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá betri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum. **Reyða markingin** merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá verri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Sambondum við nærmasta leiðara***
Úrslitini fyri *Sambond við nærmasta leiðara* vístu, at tað bert er ein líti munur er á, hvussu svarpersónar úr Føroyum og Danmark meta teirra sambond við nærmasta leiðara. Úrslitini bendu harafturat á, at tað eisini bert eru smærri munir á, hvussu mannligir og kvinnuligir svarpersónar hava mett síni sambond við nærmasta leiðara.

Harnæst bendu úrslitini á, at elstu svarpersónarnir yvir 65 ár hava tað hægsta miðaltalið á stiganum, og meta sostatt teirra sambond við nærmasta leiðara, í størri mun enn hinir aldursbólkarnir, at vera jalig. Til endans bendu úrslitini á, at svarpersónar innan fyri 'Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði' í miðal hava mett síni sambond við nærmasta leiðara meira jalig enn hinir starvsbólkarnir, hava svarpersónar í 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' góvu ta minst jaligu metingina av teirra sambondum við nærmasta leiðara. Úrslitini fyri starvsbólkarnar vístu harafturat, at eingin av starvsbólkunum skilti seg meira enn fimm stig frá miðaltalinum av øllum svarpersónum í kanningini í metingini av *Sambondum við nærmasta leiðara.*

### 3.4.2 Leiðslugóðska

*Leiðslugóðska* snýr seg um, hvussu arbeiðstakararnir uppliva leiðsluháttin hjá teirra nærmasta leiðara. Leiðslugóðska snýr seg bæði um sparring, at leggja arbeiðið til rættis, at loysa ósemjur og miðla ætlanir. Harumframt eru evnini hjá leiðaranum til at motivera arbeiðstakarunum, við at seta rammurnar fyri fakligari menning og samstarvi, eisini umráðandi (82).

Høgt støði av leiðslugóðsku er við til at skapa týðiligar rammur á einum arbeiðsplássi, og hevur stóran týdning fyri trivnað og arbeiðsgleði hjá arbeiðstakaranum. Kanningar hava áður t.d. víst, at eitt høgt støði av leiðslugóðsku hongur saman við hvussu arbeiðstakarar uppliva meining í arbeiðinum (25, 83), sálarligu vælveruna (1, 27) og Hugbinding á arbeiðsplássinum (39). Kanningar hava eisini víst, at eitt lágt støði av leiðslugóðsku hongur saman við drúgvari sjúkufráveru (7, 60), og tí fer leiðslugóðska ofta at vera ein av teimum faktorunum í arbeiðsumhvørvinum, mann kann kunna seg um, um mann ynskir at økja trivnað og styrkja tað sálarliga og sosiala arbeiðsumhvørvið.

Vit máta *Leiðslugóðska* við teimum fýra spurningunum í talvu 3.4.2.1. Talvan vísir býtið av svørum í prosentum fyri allar svarpersónar í kanningini.

**Talva 3.4.2.1: Býti av svørum í prosentum fyri stigan *Leiðslugóðska***

| | Í sera lítlan mun | Í lítlan mun | Partvíst | Í stóran mun | Í sera stóran mun | Havi ongan leiðara |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Raðfestir tín nærmasti leiðari trivnaðin høgt á arbeiðsplássinum? | 7,5 | 10,4 | 22,4 | 30,0 | 25,2 | 4,5 |
| Dugir tín nærmasti leiðari at miðla klár mál fyri arbeiðið? | 7,9 | 12,5 | 26,3 | 30,4 | 18,5 | 4,3 |
| Dugir tín nærmasti leiðari væl at loysa ósemjur? | 10,4 | 13,4 | 30,7 | 26,8 | 14,4 | 4,3 |
| Dugir tín nærmasti leiðari væl at motivera starvsfólkið? | 10,2 | 13,5 | 30,2 | 27,6 | 14,2 | 4,3 |

Svørini frá teimum fýra spurningunum í talvu 3.4.2.1 eru umgjørd til ein stiga frá 0-100, har 100 bendir á, at mann í sera stóran mun metir leiðslugóðskuna hjá sínum nærmasta leiðara jaligt. Tað hevur verið møguligt at svara 'Havi ongan leiðara' til hesar spurningarnar. Hesi svørini eru ikki roknað við í stigan.

Talva 3.4.2.2 vísir, at tað er ein heldur lítil munur á, hvussu ávikavist føroyskir og danskir arbeiðstakarar hava mett leiðslugóðskuna hjá teirra nærmasta leiðara. Av úrslitunum í talvunum skilst, at føroysku svarpersónarnir hava eitt miðaltal upp á 58,9 á stiganum um *Leiðslugóðsku,* og geva soleiðis eitt sindur jaligari meting av leiðslugóðskuni hjá teirra nærmasta leiðara enn miðaltalið av donskum arbeiðstakarum, sum hava eitt miðaltal upp á 56,5.

**Talva 3.4.2.2: Miðaltøl fyri stigan *Leiðslugóðska***

| Leiðslugóðska | Miðaltal |
|---|---|
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum | 58,9 |
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Danmark | 56,5 |

Í talvunum niðanfyri verða úrslitini víst fyri *Leiðslugóðska* býtt upp í ávikavist kyn, aldur og starvsbólk.

Talva 3.4.2.3 vísir úrslitini fyri stigan um *Leiðslugóðska* býtt upp í menn og kvinnur. Úrslitini benda á, at tað bert er ein lítil munur á, hvussu ávikavist mannligir og kvinnuligir svarpersónar hava mett leiðslugóðskuna hjá teirra nærmasta leiðara. Ískoytisgreiningar vísa harafturat, at munurin millum menn og kvinnur ikki er hagfrøðiliga signifikantur (p=0.5437).

**Talva 3.4.2.3: Miðaltøl fyri stigan *Leiðslugóðska* býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| Maður | 1915 | 59,3 |
| Kvinna | 2743 | 58,8 |

Talva 3.4.2.4 vísir úrslitini fyri stigan um *Leiðslugóðsku* býtt upp í aldursbólkar. Úrslitini benda á, at elstu svarpersónarnir yvir 65 ár hava tað hægsta miðaltalið á stiganum um *Leiðslugóðsku* (64,6 stig), og meta sostatt leiðslugóðskuna hjá teirra nærmasta leiðara meira jaliga enn hinir aldursbólkarnir. Úrslitini benda harumframt á, at svarpersónar í aldrinum 45 til 54 ár hava tað lægsta miðaltalið, og meta sostatt leiðslugóðskuna hjá teirra nærmasta leiðara minni jaligt enn hinir aldursbólkarnir. Ískoytisgreiningar vísa, at munirnir millum aldursbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 3.4.2.4: Miðaltøl fyri stigan *Leiðslugóðska* býtt upp í aldursbólkar**

| Aldur | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| < 25 ár | 222 | 59,7 |
| 25 - 34 ár | 664 | 59,6 |
| 35 - 44 ár | 1052 | 57,4 |
| 45 - 54 ár | 1247 | 57,2 |
| 55 – 64 ár | 1133 | 60,6 |
| > 65 ár | 335 | 64,6 |

Talva 3.4.2.5 vísir úrslitini fyri stigan um *Leiðslugóðsku* býtt upp í 11 ymiskar starvsbólkar og vísir harumframt, hvar á stiganum hesir starvsbólkar liggja í mun til miðaltalið fyri allar svarpersónar í kanningini. Í hesum førinum vísa úrslitini, at svarpersónar í 'Leiðsluarbeiði' hava tað hægsta miðaltalið á stiganum um *Leiðslugóðska* (63,2 stig). Harumframt benda úrslitini á, at svarpersónar úr starvsbólkunum 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' (54,3 stig) og 'Annað handaligt arbeiði' (54,2 stig) hava tvey tey lægstu miðaltølini á stiganum, og soleiðis meta teir báðir starvsbólkarnir leiðslugóðskuna hjá teirra nærmasta leiðara minni jaligt enn hinir

starvsbólkarnir. Ískoytisgreiningar vísa, at munirnir millum starvsbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 3.4.2.5: Miðaltøl fyri stigan *Leiðslugóðska* býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| 1 Leiðsluarbeiði | 408 | 63,2 |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 593 | 62,3 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 63 | 60,4 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 603 | 60,2 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 209 | 60,0 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 311 | 59,1 |
| **Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum** | **4983** | **58,9** |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 707 | 58,8 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 811 | 57,5 |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 562 | 57,5 |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 164 | 54,3 |
| 11 Annað handaligt arbeiði | 206 | 54,2 |

Viðmerking: **Grøna markingin** merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá betri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum. **Reyða markingin** merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá verri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum.

**Samanumtøka fyri úrslitini viðvíkjandi *Leiðslugóðsku***

Úrslitini fyri *Leiðslugóðsku* vístu, at tað bert er ein lítil munur á, hvussu svarpersónar úr ávikavist Føroyum og Danmark meta teirra nærmasta leiðara, men svarpersónar úr føroysku kanningini hava mett leiðslugóðsku eitt vet meira jaligt enn svarpersónar úr donsku tilvísingarkanningini.

Úrslitini bendu harafturat á, at tað eisini bert er ein lítil munur á metingini hjá mannligu og kvinnuligu svarpersónunum av leiðslugóðskuni hjá teirra nærmasta leiðara. Harnæst bendu úrslitini á, at elstu svarpersónarnir yvir 65 ár meta leiðslugóðsku meira jaligt enn hinir aldursbólkarnir. Til endans bendu úrslitini á, at svarpersónar í 'Leiðsluarbeiði' meta leiðslugóðsku at vera meira jaliga enn hinir starvsbólkarnir, hava íð svarpersónar í 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' og 'Annað handaligt arbeiði' hava mett leiðslugóðsku hjá nærmasta leiðara minst jaligt. Úrslitini fyri starvsbólkarnar vístu harumframt, at eingin av starvsbólkunum skilti seg frá hinum við meira enn fimm stigum frá miðaltalinum av øllum svarpersónum í kanningini í meting teirra av *Leiðslugóðskuni* hjá nærmasta leiðara.

### 3.4.3 Sosialur stuðul frá nærmasta leiðara

*Sosialur stuðul frá nærmasta leiðara* snýr seg um sambandið hjá arbeiðstakaranum við teirra leiðslu og tann mun av stuðli, sum teir uppliva at kunna fáa frá teirra nærmasta leiðara. Stuðul hevur við sær bæði praktiskan stuðul (hjálp), kensluligan stuðul (viðhald) og stuðul viðvíkjandi upplýsing (sparring), har tørvurin fyri tey ymisku sløgini av stuðli er treytað av støðuni og av tí einstaka arbeiðstakaranum (84).

At kunna fáa stuðul frá nærmasta leiðara hevur týdning fyri møguleikarnar hjá arbeiðstakarunum fyri at handfara krøv og arbeiðsbyrðu í arbeiðinum. Ein kanning hevur áður staðfest, at sosialur stuðul frá leiðsluni hongur saman við støði av hugbinding hjá arbeiðstakaranum á arbeiðsplássinum umframt teirra umhugsanir um at søkja annað arbeiði (85). Harumframt koma aðrar kanningar fram til, at lágur sosialur stuðul frá leiðsluni eisini hongur saman við einum øktum vanda fyri strongd (2) og tunglyndi (1) hjá arbeiðstakarunum. Til endans vísir ein kanning frá danska heilsuverkinum, at arbeiðstakarar, sum eru fyri harðskapi og hóttanum, eru í øktum vanda fyri drúgvari sjúkufráveru, og at hesin vandin er minni millum arbeiðstakarum, sum uppliva eitt høgt støði av sosialum stuðli frá leiðsluni samanborið við arbeiðstakarar, sum uppliva lágt støði av sosialum stuðli frá leiðsluni (86).

Vit máta *Sosialan stuðul frá nærmasta leiðara* við teimum fýra spurningunum í talvu 3.4.3.1. Talvan vísir býtið av svørum í prosentum fyri allar svarpersónar í kanningini.

**Talva 3.4.3.1: Býti av svørum í prosentum fyri stigan *Sosialur stuðul frá nærmasta leiðara***

| | Í sera lítlan mun | Í lítlan mun | Partvíst | Í stóran mun | Í sera stóran mun | Havi ongan leiðara |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fært tú praktiska hjálp til arbeiðið frá tínum nærmasta leiðara, um tú hevur tørv á tí? | 5,9 | 10,4 | 20,1 | 30,3 | 28,8 | 4,5 |
| Kanst tú tosa við tín nærmasta leiðara, um tú upplivir trupulleikar í arbeiðinum? | 4,8 | 6,8 | 16,3 | 32,3 | 35,0 | 4,7 |
| Fylgir tín nærmasti leiðari upp, um tit hava havt samrøður um trupulleikar í arbeiðinum? | 10,1 | 14,1 | 25,7 | 26,8 | 19,0 | 4,3 |
| Fært tú ráð og vegleiðing frá tínum nærmasta leiðara, um tú hevur tørv á tí? | 5,7 | 9,0 | 20,1 | 32,1 | 28,5 | 4,6 |

Svørini frá teimum fýra spurningunum í talvu 3.4.3.1 eru umgjørd til ein stiga frá 0-100, har 100 bendir á, at mann upplivir eitt høgt støði av sosialum stuðli frá sínum nærmasta leiðara. Tað hevur verið møguligt at svara 'Havi ongan leiðara' til hesar spurningarnar. Hesi svørini eru ikki roknað við í stigan. Samanumtikið finna vit eitt miðaltal upp á 66,4 á stiganum um *Sosialan stuðul frá nærmasta leiðara.*

Í donsku tilvísingarkanningini er stigin um *Sosialan stuðul frá nærmasta leiðara* grundaður á spurningarnar 2 og 4 úr talvu 3.4.3.1. Úrslitini í talvu 3.4.3.2 eru tískil grundað á hesar báðar spurningarnar. Talva 3.4.3.2 vísir, at føroysku svarpersónarnir hava eitt miðaltal upp á 70,3 á stiganum um *Sosialan stuðul frá nærmasta leiðara,* meðan svarpersónar úr danska tilvísingarbólkinum hava eitt miðaltal upp á 67,2. Svarpersónarnir úr føroysku kanningini meta sostatt sínar møguleikar fyri at fáa sosialan stuðul frá nærmasta leiðara at vera hægri enn svarpersónar úr donsku tilvísingarkanningini.

**Talva 3.4.3.2: Miðaltøl fyri stigan *Sosialur stuðul frá nærmasta leiðara***

| Sosialur stuðul frá nærmasta leiðara | Miðaltal |
|---|---|
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum | 70,3 |
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Danmark | 67,2 |

Í talvunum niðanfyri verða úrslitini víst fyri *Sosialan stuðul frá nærmasta leiðara* býtt upp í ávikavist kyn, aldur og starvsbólk. Hesi úrslitini eru grundað á allan stigan við teimum fýra spurningunum úr talvu 3.4.3.1.

Talva 3.4.3.3 vísir úrslitini fyri stigan um *Sosialan stuðul frá nærmasta leiðara* býtt upp í menn og kvinnur. Úrslitini benda á, at tað ikki er ein veruligur munur á metingunum hjá mannligum og kvinnuligum svarpersónum av teirra møguleikum fyri at fáa stuðul frá nærmasta leiðara. Ískoytisgreining vísir harumframt, at munurin millum menn og kvinnur ikki er hagfrøðiliga signifikantur (p=0.4967).

**Talva 3.4.3.3: Miðaltøl fyri stigan *Sosialur stuðul frá nærmasta leiðara* býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| Maður | 1906 | 66,8 |
| Kvinna | 2735 | 66,3 |

Talva 3.4.3.4 vísir úrslitini fyri stigan um *Sosialan stuðul frá nærmasta leiðara* býtt upp í aldursbólkar. Í hesum førinum vísa úrslitini, at elstu svarpersónarnir yvir 65 ár hava mett sínar møguleikar fyri sosialum stuðli frá nærmasta leiðara at vera hægri enn hinir aldursbólkarnir (68,8 stig). Harafturímóti hava svarpersónar í aldrinum 45 til 54 ár tað lægsta miðaltalið (64,6 stig), og hava tískil mett sínar møguleikar fyri at fáa sosialan stuðul frá nærmasta leiðara at vera lægri samanborið við hinar aldursbólkarnar. Hóast munirnir er lutfalsliga smáir, vísir ein ískoytisgreining, at munirnir millum aldursbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p=0.0313).

**Talva 3.4.3.4: Miðaltøl fyri stigan *Sosialur stuðul frá nærmasta leiðara* býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| < 25 ár | 221 | 67,4 |
| 25 - 34 ár | 660 | 67,6 |
| 35 - 44 ár | 1045 | 66,2 |
| 45 - 54 ár | 1241 | 64,6 |
| 55 – 64 ár | 1137 | 67,5 |
| > 65 ár | 332 | 68,8 |

Talva 3.4.3.5 vísir úrslitini fyri stigan um *Sosialan stuðul frá nærmasta leiðara* býtt upp í 11 ymiskar starvsbólkar og vísir harumframt, hvar á stiganum hesir starvsbólkar liggja í mun til miðaltalið fyri allar svarpersónar í kanningini. Úrslitini benda á, at svarpersónar í 'Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap' hava tað hægsta miðaltalið (71,3 stig), og er soleiðis tann starvsbólkurin, sum hevur mett teirra møguleikar fyri at fáa sosialan stuðul frá nærmasta leiðara hægst. Øvut, hava svarpersónar í 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' tað lægsta miðaltalið (60,0 stig). Úrslitini vísa harumframt, at hesin starvsbólkurin hevur mett sínar møguleikar fyri at fáa sosialan stuðul frá nærmasta leiðara meira enn fimm stig verri enn miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini. Ískoytisgreining vísir harumframt, at munirnir millum starvsbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 3.4.3.5: Miðaltøl fyri stigan *Sosialur stuðul frá nærmasta leiðara* býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 64 | 71,3 |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 590 | 70,7 |
| 1 Leiðsluarbeiði | 407 | 69,7 |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 704 | 67,8 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 602 | 67,7 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 309 | 67,4 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 207 | 66,8 |
| **Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum** | **4967** | **66,4** |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 809 | 64,3 |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 560 | 63,5 |
| 11 Annað handaligt arbeiði | 206 | 62,3 |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 162 | 60,0 |

Viðmerking: **Grøna markingin** merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá betri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum. **Reyða markingin** merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá verri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Sosialum stuðli frá nærmasta leiðara***
Úrslitini fyri *Sosialur stuðul frá nærmasta leiðara* vístu, at føroysku svarpersónarnir sum heild hava mett, at tey hava góðar møguleikar fyri at fáa sosialan stuðul frá nærmasta leiðara, og eisini betri enn svarpersónarnir úr donsku tilvísingarkanningini. Harnæst bendu úrslitini á, at tað ikki var ein veruligur munur á, hvussu mannligir og kvinnuligir svarpersónar hava mett sínar møguleikar fyri at fáa sosialan stuðul frá nærmasta leiðara.

Upp á tvørs av teimum ymisku aldursbólkunum, bendu úrslitini tó á, at tað vóru meira signifikantir munir í metingini av møguleikunum fyri at fáa sosialan stuðul frá nærmasta leiðara. Her høvdu svarpersónar yvir 65 ár hægsta miðaltalið, og hava tí mett møguleikarnar fyri sosialum stuðli frá nærmasta leiðara at vera hægri enn hinir aldursbólkarnir. Harafturímóti høvdu svarpersónar í aldrinum 45 til 54 ár tað lægsta miðaltalið á stiganum um *Sosialan stuðul frá nærmasta leiðara.* Til endans bendu úrslitini á,

at svarpersónar í 'Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap' hava mett møguleikarnar fyri at fáa sosialan stuðul frá nærmasta leiðara at vera hægri enn hinir starvsbólkarnir, hava svarpersónarnir í 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' hava mett lægsta støði av sosialum stuðli frá nærmasta leiðara samanborið við restina av starvsbólkunum.

### 3.4.4 Rættvísi

*Rættvísi* á arbeiðsplássinum snýr seg um fleiri ting. Rættvísi nertir við bæði tær mannagongdir, ið verða brúktar, tá avgerðir vera tiknar á arbeiðsplássinum, men upplivingin av rættvísi kann eisini nerta við sambondini á arbeiðsplássinum. Tað fyrsta slagið av rættvísi (rættvísi í mun til mannagongdir) snýr seg sostatt um, um arbeiðstakararnir uppliva, at teirra viðurskifti verða handfarin upp á ein 'ordiligan' máta, meðan rættvísi í mun til sambond snýr seg um, um arbeiðstakararnir uppliva, at teir sjálvir og teirra starvsfelagar verða rættvíst viðfarnir (87).

Upplivingin av rættvísi kann vera roknað sum ein partur av sosiala kapitalinum hjá arbeiðsplássinum og hevur týdning fyri trivnað og heilsu hjá arbeiðstakarunum. Kanningar hava áður t.d. staðfest, at upplivingin hjá arbeiðstakarunum av rættvísi hongur saman við nøgdsemi við arbeiðið (88), og mangul upp á rættvísi á arbeiðsplássinum harafturímóti hongur saman við øktum vanda fyri at fáa eyðkenni í mun til strongd (2), lága sálarliga vælveru (89) og tunglyndi (74).

Vit máta *Rættvísi* við teimum fýra spurningunum í talvu 3.4.4.1. Talvan vísir býtið av svørum í prosentum fyri allar svarpersónar í kanningini.

**Talva 3.4.4.1: Býti av svørum í prosentum fyri stigan *Rættvísi***

| | Í sera lítlan mun | Í lítlan mun | Partvíst | Í stóran mun | Í sera stóran mun |
|---|---|---|---|---|---|
| Verða ósemjur loystar á rættvísan hátt? | 5,1 | 9,6 | 38,0 | 39,5 | 7,9 |
| Fært tú eina greiða grundgeving, tá týðandi avgerðir verða tiknar á arbeiðsplássinum? | 7,8 | 13,4 | 31,9 | 35,7 | 11,2 |
| Virðir leiðslan á tínum arbeiðsplássi teg? | 4,3 | 7,2 | 20,9 | 46,8 | 20,9 |
| Fer leiðslan á tínum arbeiðsplássi rættvíst við tær? | 4,0 | 5,2 | 22,8 | 47,5 | 20,4 |

Svørini frá teimum fýra spurningunum í talvu 3.4.4.1 eru umgjørd til ein stiga frá 0-100, har 100 bendir á, at mann upplivir eitt høgt støði av rættvísi á arbeiðsplássinum.

Talva 3.4.4.2 vísir, at føroysku svarpersónarnir hava eitt miðaltal upp á 63,2 á stiganum um *Rættvísi,* meðan arbeiðstakarar úr danska tilvísingarbólkinum hava eitt miðaltal upp á 64,9. Sostatt er heldur lítil munur á, hvussu teir báðir bólkarnir í kanningini hava mett sínar upplivingar av rættvísi á arbeiðsplássinum, men har donsku arbeiðstakararnir hava eitt nakað hægri miðaltal á stiganum um *Rættvísi.*

**Talva 3.4.4.2: Miðaltøl fyri stigan *Rættvísi***

| Rættvísi | Miðaltal |
|---|---|
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum | 63,2 |
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Danmark | 64,9 |

Í talvunum niðanfyri verða úrslitini víst fyri *Rættvísi* býtt upp í ávikavist kyn, aldur og starvsbólk.

Talva 3.4.4.3 vísir úrslitini fyri stigan um *Rættvísi* býtt upp í menn og kvinnur. Úrslitini benda á, at tað bert er ein lítil munur á, hvussu mannligir og kvinnuligir svarpersónar hava mett stigan *Rættvísi. Ein* ískoytisgreining vísir tó, at munurin millum menn og kvinnur er hagfrøðiliga signifikantur (p=0.0013).

**Talva 3.4.4.3: Miðaltøl fyri stigan *Rættvísi* býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| Maður | 1966 | 64,7 |
| Kvinna | 2735 | 62,5 |

Talva 3.4.4.4 vísir úrslitini fyri stigan um *Rættvísi* býtt upp í aldursbólkar. Úrslitini benda á, at elstu svarpersónarnir yvir 65 ár hava tað hægsta miðaltalið á stiganum um *Rættvísi* (68,7 stig), og meta seg sostatt í størri mun uppliva rættvísi á arbeiðsplássinum enn hinir starvsbólkarnir, men svarpersónar undir 25 ár hava lægsta miðaltalið á stiganum (61,2 stig). Ískoytisgreiningar vísa, at munirnir millum aldursbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 3.4.4.4: Miðaltøl fyri stigan *Rættvísi* býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| < 25 ár | 217 | 61,2 |
| 25 - 34 ár | 662 | 62,3 |
| 35 - 44 ár | 1073 | 62,5 |
| 45 - 54 ár | 1274 | 62,9 |
| 55 – 64 ár | 1140 | 64,6 |
| > 65 ár | 330 | 68,7 |

Talva 3.4.4.5 vísir úrslitini fyri stigan um *Rættvísi* býtt upp í 11 ymiskar starvsbólkar og vísir harumframt, hvar á stiganum hesir starvsbólkar liggja í mun til miðaltalið fyri allar svarpersónar í kanningini. Í hesum førinum vísa úrslitini, at svarpersónar í 'Leiðsluarbeiði' aftur hava tað hægsta miðaltalið við einum stigatali upp á 71,4. Tey meta sostatt í stóran mun, at tey uppliva rættvísi á arbeiðsplássinum, meðan svarpersónar í 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' (56,0 stig) og 'Annað handaligt arbeiði' (55,8 stig) hava lægstu miðaltøl á stiganum, og meta seg sostatt uppliva týðiliga minni rættvísi á arbeiðsplássinum, samanborið við hinar starvsbólkarnar. Ískoytisgreiningar vísa harafturat, at munirnir millum starvsbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

Hesi Úrslitini benda á eitt líknandi rák, sum úrslitini fyri stigunum um *Leiðslugóðsku* og *Sambond við nærmasta leiðara,* hava svarpersónar úr starvsbólkunum 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' og 'Annað handaligt arbeiði' uppliva teirra samstarvssambond og dygdina av leiðslu at vera minni jaligar einn hinir starvsbólkarnir. Líknandi úrslit sóu vit eisini innan fyri økið *Samstarv* í parti 3.3.

**Talva 3.4.4.5: Miðaltøl fyri stigan *Rættvísi* býtt upp í starvsbólkarnar**

| Starvsbólkar | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| 1 Leiðsluarbeiði | 440 | 71,4 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 631 | 67,2 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 796 | 63,7 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 214 | 63,3 |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 590 | 63,3 |
| **Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum** | **4986** | **63,2** |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 701 | 62,2 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 307 | 62,0 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 67 | 60,9 |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 565 | 60,5 |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 166 | 56,0 |
| 11 Annað handaligt arbeiði | 202 | 55,8 |

Viðmerking: **Grøna markingin** merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá betri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum. **Reyða markingin** merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá verri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Rættvísi***

Úrslitini fyri *Rættvísi* vístu, at tað er heldur lítil munur á, hvussu føroyskir og danskir svarpersónar hava mett støðið av rættvísi á arbeiðsplássinum. Upp á tvørs av kyni, bendu úrslitini eisini á, at tað bert er ein lítil munur á, hvussu mannligir og kvinnuligir svarpersónar hava mett stigan um *Rættvísi*. Upp á tvørs av aldursbólkunum, bendu úrslitini harafturímóti á, at elstu svarpersónarnir yvir 65 ár hava sagt frá, at tey í størri mun uppliva rættvísi á arbeiðsplássinum enn hinir bólkarnir, hava svarpersónar undir 25 ár hava sagt frá lægsta støðið av rættvísi upp á tvørs av teimum ymisku aldursbólkunum.

Til endans bendu úrslitini upp á tvørs av teimum 11 starvsbólkunum á, at svarpersónar í 'Leiðsluarbeiði' í størri mun uppliva rættvísi á arbeiðsplássinum samanborið við restina av starvsbólkunum. Úrslitið vísti harumframt, at hesin starvsbólkurin hevur mett støðið av rættvísi meira enn fimm stig hægri enn miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini. Harafturímóti bendu úrslitini á, at svarpersónar í 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' og 'Annað handaligt arbeiði' hava mett teirra uppliving av rættvísi á arbeiðsplássinum at vera lægri enn hinir starvsbólkarnir.

### 3.4.5 Hvussu leiðslan tekur starvsfólk uppí

*Hvussu leiðslan tekur starvsfólk uppí* snýr seg um, hvussu starvsfólk og leiðarar arbeiða saman um at betra arbeiðsgongdirnar á arbeiðsplássinum. Hetta kann t.d. vera í førum sum tá leiðaranir velja at lurta eftir starvsfólkunum og taka teirra vitan og hugskot uppí, í samband við broytingar á arbeiðsplássinum (22).

Hvussu leiðslan tekur starvsfólk upp í umráðandi avgerðir er ein partur av sosiala kapitalinum á arbeiðsplássinum. Starvsfólkið hava ofta ein haldgóðan kunnleika til og royndir við bæði arbeiðsgongdum og sambondum á arbeiðsplássinum, sum kann vera brúkiligt í skipanini av arbeiðinum. Tá leiðslan tekur starvsfólk upp í umráðandi avgerðir gevur hetta harumframt arbeiðstakarunum kensluna av viðurkenning og meining, og tað kann styrkja sambandið millum leiðaran og starvsfólkið. Hóast tað ikki er nógv vitanargrundað gransking til, viðvíkjandi samanhangin millum, hvussu leiðslan tekur starvsfólk uppí og trivnað, kann tað kortini hugsast, at tað er ein samanhangur millum hvussu leiðslan tekur starvsfólk uppí og trivnað á arbeiðsplássinum. Ein donsk kanning hevur t.d. staðfest, at jú hægri stigatal á stiganum *Hvussu leiðslan tekur starvsfólk uppí,* jú hægri stigatal høvdu luttakarar eisini á stigunum *Nøgdsemi við arbeiðið* og *Sálarlig vælvera,* og jú betri mettu tey teirra sálarliga og sosiala arbeiðsumhvørvi (22). Onnur úrslit úr hesari kanning vísa, at arbeiðstakarar, sum siga frá einum høgum støði av uppítøku av starvsfólki, eru í einum minni vanda fyri drúgvari sjúkufráveru og sálarligum heilsutrupulleikum (1).

Vit máta *Hvussu leiðslan tekur starvsfólk uppí* við hesum trimum spurningum í talvu 3.4.5.1. Talvan vísir býtið av svørum í prosentum fyri allar svarpersónar í kanningini.

**Talva 3.4.5.1: Býti av svørum í prosentum fyri stigan *Hvussu leiðslan tekur starvsfólk uppí***

| | Í sera lítlan mun | Í lítlan mun | Partvíst | Í stóran mun | Í sera stóran mun |
|---|---|---|---|---|---|
| Eggjar leiðslan tær og tínum starvsfeløgum at koma við hugskotum um broytingar? | 12,4 | 18,3 | 29,2 | 28,7 | 11,4 |
| Duga starvsfólk og leiðarar at samstarva um at bøta um arbeiðsgongdir? | 7,5 | 14,6 | 38,5 | 31,2 | 8,2 |
| Tekur leiðslan á arbeiðsplássinum uppskot um menning og framstig í álvara? | 10,4 | 14,0 | 33,4 | 32,0 | 10,2 |

Svørini frá teimum trimum spurningunum í talvu 3.4.5.1 eru umgjørd til ein stiga frá 0-100, har 100 bendir á, at mann sum starvsfólk í sera stóran mun upplivir at verða tikin uppí.

Talva 3.4.5.2 vísir, at føroysku svarpersónarnir hava eitt miðaltal upp á 53,6 á stiganum um *Hvussu leiðslan tekur starvsfólk uppí,* meðan danski tilvísingarbólkurin hevur eitt miðaltal upp á 61,5. Føroysku svarpersónarnir liggja tískil týðandi lægri á hesum stiganum, og harvið sær út til, at teir í lægri mun uppliva at verða tikin upp í sum starvsfólk samanborið við danskar arbeiðstakarar.

**Talva 3.4.5.2: Miðaltøl fyri stigan um *Hvussu leiðslan tekur starvsfólk uppí***

| Hvussu leiðslan tekur starvsfólk uppí | Miðaltal |
|---|---|
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum | 53,6 |
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Danmark | 61,5 |

Í talvunum niðanfyri verða úrslitini víst fyri *Hvussu leiðslan tekur starvsfólk uppí* býtt upp í ávikavist kyn, aldur og starvsbólk.

Talva 3.4.5.3 vísir úrslitini fyri stigan um *Hvussu leiðslan tekur starvsfólk uppí* býtt upp í menn og kvinnur. Úrslitini benda á, at tað stórt sæð ikki er munur á, hvussu mannligir og kvinnuligir svarpersónar hava mett sínar møguleikar fyri hvussu leiðslan tekur starvsfólk uppí í arbeiðinum. Ein ískoytisgreining vísir harafturat, at munir millum menn og kvinnur ikki er hagfrøðiliga signifikantur (p=0.7430).

**Talva 3.4.5.3: Miðaltøl fyri stigan um *Hvussu leiðslan tekur starvsfólk uppí* býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| Maður | 1974 | 54,0 |
| Kvinna | 2738 | 53,8 |

Talva 3.4.5.4 vísir úrslitini fyri stigan um *Hvussu leiðslan tekur starvsfólk uppí* býtt upp í aldursbólkar. Í hesum førinum benda úrslitini eisini á, at tað ikki eru stórir munir á, hvussu teir ymisku aldursbólkarnir hava mett støðið av hvussu leiðslan tekur starvsfólk uppí á arbeiðsplássinum. Úrslitini benda tó á, at elstu svarpersónarnir yvir 65 ár hava eitt nakað hægri miðaltal enn hinir aldursbólkarnir (56,6 stig), og tykjast sostatt at uppliva í eitt sindur størri mun, hvussu leiðslan tekur starvsfólk uppí. Ein ískoytisgreining vísir harafturat, at munirnir millum aldursbólkarnar ikki eru hagfrøðiliga signifikantir (p=0.4990).

**Talva 3.4.5.4: Miðaltøl fyri stigan um *Hvussu leiðslan tekur starvsfólk uppí* býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| < 25 ár | 216 | 54,2 |
| 25 - 34 ár | 663 | 53,4 |
| 35 - 44 ár | 1075 | 53,6 |
| 45 - 54 ár | 1276 | 53,7 |
| 55 – 64 ár | 1146 | 53,7 |
| > 65 ár | 331 | 56,6 |

Talva 3.4.5.5 vísir úrslitini fyri stigan um *Hvussu leiðslan tekur starvsfólk uppí* býtt upp í 11 ymiskar starvsbólkar og vísir harumframt, hvar á stiganum hesir starvsbólkar liggja í mun til miðaltalið fyri allar svarpersónar í kanningini. Í hesum førinum vísa úrslitini, at svarpersónar í 'Leiðsluarbeiði' hava tað hægsta miðaltalið á stiganum um *Hvussu leiðslan tekur starvsfólk uppí* (64,1 stig) og bendir sostatt á, at hesir svarpersónar í størri mun uppliva at verða tiknir upp í enn hinir starvsbólkarnir. Harnæst benda úrslitini á, at svarpersónar í 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' hava lægsta miðaltalið á stiganum (42,0 stig), og er soleiðis tann starvsbólkurin, sum meta tað lægsta støðið av hvussu leiðslan tekur starvsfólk uppí. Ein ískoytisgreining vísir, at munirnir millum starvsbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 3.4.5.5: Miðaltøl fyri stigan um *Hvussu leiðslan tekur starvsfólk uppí* býtt upp í starvsbólkarnar**

| Starvsbólkar | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| 1 Leiðsluarbeiði | 438 | 64,1 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 635 | 58,3 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 801 | 56,2 |
| **Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum** | **4998** | **53,6** |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 591 | 53,4 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 214 | 52,2 |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 703 | 51,5 |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 563 | 51,3 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 312 | 50,7 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 67 | 47,3 |
| 11 Annað handaligt arbeiði | 200 | 43,8 |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 166 | 42,0 |

Viðmerking: **Grøna markingin** merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá betri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum. **Reyða markingin** merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá verri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Hvussu leiðslan tekur starvsfólk uppí***

Úrslitini fyri stigan *Hvussu leiðslan tekur starvsfólk uppí* vístu, at metingin hjá svarpersónum úr føroyska kanningarbólkinum av, hvussu leiðslan tekur starvsfólk upp í var lægri enn hjá svarpersónum úr donsku tilvísingarkanningini við einum muni á 7,9 stig. Úrslitini bendu harafturat á, at tað ikki er nakar týðandi munur á, hvussu mannligir og kvinnuligir svarpersónar hava mett støðið av hvussu leiðslan tekur starvsfólk uppí. Á sama hátt, bendu úrslitini á, at tað ikki eru týðiligir munir á metingunum hjá teimum ymisku aldursbólkunum av, hvussu leiðslan tekur starvsfólk uppí. Upp á tvørs av teimum 11 starvsbólkunum vóru munirnir týðiligari, og tað eru serliga svarpersónar í 'Leiðsluarbeiði', sum skilja seg frá samanborið við hinar starvsbólkarnar. Hesir svarpersónar hava hægsta miðaltalið á stiganum um *Hvussu leiðslan tekur starvsfólk uppí*, og liggja eisini meira enn fimm stig hægri á stiganum enn miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini og hinir ymisku starvsbólkarnarnir. Tað kemur ikki óvart á, at svarpersónar í 'Leiðsluarbeiði' meta tann mun av hvussu leiðslan tekur starvsfólk upp

í at vera hægri, av tí at hesir svarpersónar í onkran mun, sum fylgja av teirra støðu sum leiðsla, lutvíst kunnu hugsast at verða blandaðir upp í avgerðir, ið viðvíkja teirra egnu uppgávuloysn og lutvíst sjálvir gera tað møguligt hjá leiðsluni at taka tey starvsfólk upp í, teir hava leiðsluábyrgd fyri.

### 3.4.6 Viðurkenning

*Viðurkenning* snýr millum annað um tey sínámillum sambondini á arbeiðsplássinum og um, hvussu arbeiðstakararnir uppliva at verða viðurkendir fyri teirra arbeiðsavrik. Viðurkenning snýr seg bæði um at geva eitt herðaklapp, men eisini um at vera uppmerksom/samur uppá og spyrja um, hvussu arbeiðstakararnir gera teirra arbeiðsuppgávur, og hvar tey møguliga hava brúk fyri meira vitan, ráðgeving ella uppbyggjandi afturboðan (22).

Eins og fleiri av hinum evnunum innan fyri økið *Leiðsla,* er *Viðurkenning* ein partur av sosiala kapitalinum á arbeiðsplássinum (80), og verur væntað at hava týdning fyri bæði trivnað og heilsu. Vantandi viðurkenning í arbeiðinum kann upplivast at vera órættvís, sum so aftur kann vera við til, at starvsfólk missa motivatión og trivnað í arbeiðinum. Kanningar hava áður t.d. staðfest, at vantandi upplivilsi av rættvísi á arbeiðsplássinum hongur saman við øktum vanda fyri tunglyndi (74) og lægri trivnaði í arbeiðinum (2), og tí kann eisini hugsast, at viðurkenning er avgerandi fyri trivnað og heilsu. Hesi úrslitini vera stuðlað av einari danskari kanning, sum vísir, at arbeiðstakarar, sum siga frá einum høgum støði av viðurkenning, eru í minni vanda fyri drúgvari sjúkufráveru og sálarligum heilsutrupulleikum (1).

Vit máta *Viðurkenning* við spurninginum í talvu 3.4.6.1. Talvan vísir býtið av svørum í prosentum fyri allar svarpersónar í kanningini.

**Talva 3.4.6.1: Býti av svørum í prosentum fyri stigan *Leiðsla***

| | Í sera lítlan mun | Í lítlan mun | Partvíst | Í stóran mun | Í sera stóran mun |
|---|---|---|---|---|---|
| Verður títt arbeiðsavrik viðurkent og virðismett á tínum arbeiðsplássi? | 5,5 | 10,0 | 25,5 | 39,7 | 19,4 |

Svørini frá spurninginum í talvu 3.4.6.1 eru umgjørd til ein stiga frá 0-100, har 100 bendir á, at mann í sera stóran mun upplivir at verða viðurkendur í sínum arbeiði.

Talva 3.4.6.2 vísir, at føroysku svarpersónarnir hava eitt miðaltal upp á 64,4 á stiganum um *Viðurkenning,* meðan arbeiðstakarar úr danska tilvísingarbólkinum hava eitt miðaltal upp á 64,9. Sostatt er ikki ein veruligur munur á, hvussu teir báðir bólkarnir í kanningini meta teirra viðurkenning í arbeiðinum.

**Talva 3.4.6.2: Miðaltøl fyri stigan *Viðurkenning***

| Viðurkenning | Miðaltal |
|---|---|
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum | 64,4 |
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Danmark | 64,9 |

Í talvunum niðanfyri verða úrslitini víst fyri *Viðurkenning* býtt upp í ávikavist kyn, aldur og starvsbólk.

Talva 3.4.6.3 vísir úrslitini fyri stigan um *Viðurkenning* býtt upp í menn og kvinnur. Úrslitini benda á, at tað er ein lítil munur á, hvussu mannligir og kvinnuligir

svarpersónar hava mett støðið av viðurkenning í arbeiðinum. Ein ískoytisgreining vísir harumframt, at munurin millum menn og kvinnur ikki er hagfrøðiliga signifikantur (p=0.0942).

**Talva 3.4.6.3: Miðaltøl fyri stigan *Viðurkenning* býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Miðaltal |
|---|---:|---:|
| Maður | 2003 | 65,4 |
| Kvinna | 2777 | 64,0 |

Talva 3.4.6.4 vísir úrslitini fyri stigan um *Viðurkenning* býtt upp í ymiskar aldursbólkar. Úrslitini benda á, at tað eru stórir munir upp á tvørs av aldursbólkunum, og at elstu svarpersónarnir yvir 65 ár hava eitt týðiliga hægri miðaltal (73,7 stig) enn hinir aldursbólkarnir, og teirra stigatal samsvarar við, at hesir svarpersónar í miðal hava svarað spurninginum um *Viðurkenning* við svarflokkingini 'Í stóran mun'. Øvut hesum hava yngstu svarpersónarnir undir 25 ár týðiliga lægsta miðaltalið (58,2 stig), og meta seg sostatt í lægri mun verða viðurkendir á arbeiðsplássinum. Ískoytisgreiningar vísa harafturat, at munirnir millum aldursbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 3.4.6.4: Miðaltøl fyri stigan *Viðurkenning* býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Miðaltal |
|---|---:|---:|
| < 25 ár | 219 | 58,2 |
| 25 - 34 ár | 669 | 62,8 |
| 35 - 44 ár | 1085 | 61,4 |
| 45 - 54 ár | 1289 | 64,5 |
| 55 - 64 ár | 1167 | 67,2 |
| > 65 ár | 346 | 73,7 |

Talva 3.4.6.5 vísir úrslitini fyri stigan um *Viðurkenning* býtt upp í 11 ymiskar starvsbólkar og vísir harumframt, hvar á stiganum hesir starvsbólkar liggja í mun til miðaltalið fyri allar svarpersónar í kanningini.

Í hesum førinum vísa úrslitini, at svarpersónar í 'Leiðsluarbeiði' aftur hava tað hægsta miðaltalið (71,8 stig), og meta sostatt í stóran mun, at tey fáa viðurkenning í arbeiðinum. Svarpersónar í bólkinum 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' hava tað lægsta miðaltalið (54,9 stig). Hesir svarpersónar meta sostatt í minni mun at verða viðurkendir fyri teirra arbeiðsavrik samanborið við hinar starvsbólkarnar. Svarpersónar í 'Annað handaligt arbeiði' hava harafturat eitt lágt miðaltal samanborið við hinar starvsbólkarnar (56,3 stig).

Úrslitini benda harafturat á, at teir báðir síðstnevndu starvsbólkarir liggja meira enn fimm stig lægri (verri) á stiganum um *Viðurkenning* samanborið við miðaltalið av øllum svarpersónunum í kanningini. Talan er sostatt aftur um, at FISCO-starvsbólkarnir 10 og 11 liggja í minsta lagi fimm stig verri enn miðaltalið av øllum svarpersónum. Ein ískoytisgreining vísir, at munirnir millum starvsbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 3.4.6.5: Miðaltøl fyri stigan *Viðurkenning* býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| 1 Leiðsluarbeiði | 454 | 71,8 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 217 | 67,5 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 68 | 67,3 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 638 | 66,5 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 317 | 65,9 |
| **Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum** | **5055** | **64,4** |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 806 | 64,4 |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 596 | 63,8 |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 712 | 63,5 |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 576 | 63,2 |
| 11 Annað handaligt arbeiði | 207 | 56,3 |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 167 | 54,9 |

Viðmerking: **Grøna markingin** merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá betri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum. **Reyða markingin** merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá verri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Viðurkenning***
Úrslitini fyri *Viðurkenning* vístu, at tað er heldur lítil munur á, hvussu teir føroysku og donsku svarpersónarnir hava mett sína uppliving av viðurkenning í arbeiðinum. Upp á tvørs av kyni, bendu úrslitini eisini á, at tað er heldur lítil munur á, hvussu mannligir og kvinnuligir svarpersónar meta viðurkenning í arbeiðinum at vera. Úrslitini fyri aldursbólkarnar vístu, at elstu svarpersónarnir yvir 65 ár geva eina munandi meira jaliga meting av, hvussu teir verða viðurkendir í arbeiðinum enn restin av aldursbólkunum. Yngstu svarpersónarnir undir 25 ár síggja harafturímóti út til at meta støðið av viðurkenning í arbeiðinum at vera lægri enn hinir aldursbólkarnir.

Úrslitini fyri starvsbólkarnar vístu, at svarpersónar í 'Leiðsluarbeiði' uppliva viðurkenning í størri mun í arbeiðinum samanborið við hinar starvsbólkarnar. Hesir svarpersónar hava harumframt mett teirra viðurkenning í arbeiðinum meira enn fimm stig hægri enn miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini. Harumframt bendu úrslitini á, at svarpersónar í 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' og 'Annað handaligt arbeiði' hava mett teirra viðurkenning í arbeiðinum meira enn fimm stig lægri (verri) enn miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini. Grundað á hini úrslitini, í samband við økið *Leiðsla* kemur tað ikki óvart á, at teir báðir síðstnevndu starvsbólkarnir liggja lægri enn miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini, tá mann hyggur eftir upplivingini av viðurkenning í arbeiðinum.

## 3.5 Broytingar

Innan fyri økið *Broytingar* er fokus á, hvussu arbeiðstakarar uppliva tær broytingar, ið vera gjørdar á arbeiðsplássinum. Tá broytingar ganga fyri seg á arbeiðsplássinum, kann hetta skapa eina óvissu, og økt trýst millum arbeiðstakararnar - serstakliga um arbeiðstakararnir ikki vita, hvørjar avleiðingarnar broytingarnar fara at hava fyri teir (90). Broytingarnar kunnu t.d. snúgva seg um endurskipanir, innleiðslu av nýggjari tøkni ella uppsagnir av starvsfólkum.

Granskingin bendir á, at mátin, broytingarnar verða handfarnar uppá, bæði kann hava týdning fyri sjálva íverksetanina av broytingunum á arbeiðsplássinum og fyri trivnað í sambandi við broytinartilgongdina hjá arbeiðstakarunum (91, 92).

Spurnakanningin lýsir hetta evnið innan fyri økið *Broytingar*:

- Handfaring av broytingum

### 3.5.1 Handfaring av broytingum

*Handfaring av broytingum* snýr seg um, hvussu størri broytingar eru handfarnar á arbeiðsplássinum. Innan fyri økið *Broytingar* er fokus á, hvussu arbeiðstakarar uppliva tær broytingar, sum henda á arbeiðsplássinum. Tá broytingar ganga fyri seg á arbeiðsplássinum, kann hetta elva til óvissu og eitt økt trýst millum arbeiðstakararnar - helst um arbeiðstakararnir ikki vita, hvørjar avleiðingar broytingarnar kunnu hava fyri teir. Broytingarnar kunnu t.d. snúgva seg um endurskipanir, innleiðslu av nýggjari tøkni ella uppsagnir av starvsfólkum.

Granskingin bendir á, at mátin, broytingarnar verða handfarnar, bæði kann hava týdning fyri sjálva verksetanina av broytingunum á arbeiðsplássinum og fyri trivnað í sambandi við broytingartilgongdina. Broytingar á arbeiðsplássinum kunnu nevniliga hanga saman við tyngd í líki av øktum krøvum í arbeiðinum ella óvissu um, hvønn týdning broytingarnar fara at hava, og hesar tyngdir kunnu vera við til neilig heilsuúrslit (90). Fleiri kanningar hava tó kortini eisini staðfest, at mátin leiðslan handfer broytingarnar uppá, hevur týdning fyri, hvussu tyngjandi arbeiðstakararnir uppliva broytingartilgongdirnar (92). Ein donsk kanning vísir á júst hetta, at arbeiðstakarar, sum siga frá einari góðari handfaring av broytingum á arbeiðsplássinum, eru í minni vanda fyri drúgvari sjúkufráveru og sálarligum heilsutrupulleikum (1).

Vit máta fyrst fyrikomingina av broytingum við spurningunum í talvu 3.5.1.1. Talvan vísir býtið av svørum í prosentum fyri allar svarpersónar í kanningini.

**Talva 3.5.1.1: Býti av svørum í prosentum fyri stigan *Handfaring av broytingum***

| | Í sera lítlan mun | Í lítlan mun | Partvíst | Í stóran mun | Í sera stóran mun | Ongar størri broytingar hava verið á arbeiðsplássinum |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Hevur leiðslan í nóg stóran mun kunnað starvsfólkini um broytingarnar á arbeiðsplássinum? | 7,5 | 13,1 | 26,7 | 23,6 | 9,0 | 20,2 |
| Eru starvsfólkini í nóg stóran mun tikin við í mun til broytingarnar? | 15,6 | 23,3 | 25,0 | 12,7 | 4,4 | 19,0 |
| Ert tú yvirskipað nøgd/ur við mátan, leiðslan hevur handfarið broytingarnar? | 11,8 | 14,4 | 27,2 | 20,9 | 6,6 | 19,1 |
| Skilir tú grundgevingarnar hjá leiðsluni fyri at seta broytingarnar í verk? | 8,3 | 10,1 | 27,0 | 24,2 | 11,1 | 19,3 |

Svørini frá teimum fýra spurningunum í talvu 3.5.1.1 eru umgjørd til ein stiga frá 0-100, har 100 bendir á, at mann í sera stóran mun metir, at broytingarnar á arbeiðsplássinum eru væl handfarnar. Tað hevur verið møguligt at svara 'Ongar størri broytingar hava verið á arbeiðsplássinum', um mann ikki hevur upplivað nakrar størri broytingar á

arbeiðsplássinum, og hesi svørini eru tískil ikki tald við í samlaða stiganum um *Handfaring av broytingum.*
Talva 3.5.1.2 vísir, at føroysku svarpersónarnir hava eitt miðaltal upp á 49,6 á stiganum um *Handfaring av broytingum,* meðan svarpersónar úr danska tilvísingarbólkinum hava eitt miðaltal upp á 51,2. Sostatt er heldur lítil munur á, hvussu teir báðir bólkarnir í kanningini hava mett handfaring av broytingum á arbeiðsplássinum.

**Talva 3.5.1.2: Miðaltøl fyri stigan *Handfaring av broytingum***

| Handfaring av broytingum | Miðaltal |
|---|---|
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum | 49,6 |
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Danmark | 51,2 |

Í talvunum niðanfyri verða úrslitini víst fyri *Handfaring av broytingum* býtt upp í ávikavist kyn, aldur og starvsbólk.

Talva 3.5.1.3 vísir úrslitini fyri stigan um *Handfaring av broytingum* býtt upp í menn og kvinnur. Úrslitini benda á, at munur er á, hvussu mannligir og kvinnuligir svarpersónar hava svarað upp á spurningarnar um *Handfaring av broytingum*, og at menn sum heild, eru eitt sindur betri nøgdir við handfaringina av broytingum á arbeiðsplássinum enn kvinnur. *Ein* ískoytisgreining vísir, at munurin millum menn og kvinnur er hagfrøðiliga signifikantur (p=0.0002).

**Talva 3.5.1.3: Miðaltøl fyri stigan *Handfaring av broytingum* býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| Maður | 1544 | 51,5 |
| Kvinna | 2151 | 48,4 |

Talva 3.5.1.4 vísir úrslitini fyri stigan um *Handfaring av broytingum* býtt upp í ymiskar aldursbólkar. Í hesum førinum vísa úrslitini, at elstu og yngstu svarpersónarnir hava hægstu miðaltølini á stiganum við miðaltølum upp á ávikavist 53,8 og 53,2, og meta sostatt handfaringina av broytingum meira jaligt enn hinir aldursbólkarnir. Ískoytisgreining vísir harumframt, at munirnir millum aldursbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p=0.0387).

**Talva 3.5.1.4: Miðaltøl fyri stigan *Handfaring av broytingum* býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| < 25 ár | 145 | 53,2 |
| 25 - 34 ár | 498 | 49,1 |
| 35 - 44 ár | 868 | 49,8 |
| 45 - 54 ár | 1003 | 49,4 |
| 55 – 64 ár | 918 | 48,7 |
| > 65 ár | 260 | 53,8 |

Talva 3.5.1.5 vísir úrslitini fyri stigan um *Handfaring av broytingum* býtt upp í 11 ymiskar starvsbólkar og vísir harumframt, hvar á stiganum hesir starvsbólkar liggja í mun til miðaltalið fyri allar svarpersónar í kanningini. Í hesum førinum benda úrslitini á, at

svarpersónar í 'Leiðsluarbeiði' hava tað hægsta miðaltalið á stiganum um *Handfaring av broytingum* (60,1 stig). Hesin starvsbólkurin hevur harafturat mett handfaringina av broytingum meira enn fimm stig betri enn miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini. Harnæst benda úrslitini á, at svarpersónar í 'Arbeiði á heilsuøkinum' hava tað lægsta miðaltalið (42,5 stig), og hava soleiðis ta minst jaligu metingina av tí mátanum, broytingar verða handfarnar uppá á arbeiðsplássinum millum teir 11 starvsbólkarnar. Hesin starvsbólkurin hava harafturat mett handfaringina av broytingum meira enn fimm stig verri enn miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini. Ískoytisgreiningar vísa harafturat, at munirnir millum starvsbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 3.5.1.5: Miðaltøl fyri stigan *Handfaring av broytingum* býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| 1 Leiðsluarbeiði | 328 | 60,1 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 467 | 53,3 |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 485 | 51,2 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 163 | 51,0 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 625 | 49,9 |
| **Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum** | **3951** | **49,6** |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 55 | 48,9 |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 570 | 48,3 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 226 | 46,4 |
| 11 Annað handaligt arbeiði | 166 | 45,2 |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 129 | 44,7 |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 465 | 43,5 |

Viðmerking: **Grøna markingin** merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá betri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum. **Reyða markingin** merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá verri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Handfaring av broytingum***

Úrslitini fyri stigan *Handfaring av broytingum* vístu, at tað er heldur lítil munur á, hvussu føroyskir og danskir svarpersónar hava mett handfaring av broytingum á arbeiðsplássinum. Harumframt bendu úrslitini á, at tað er ein lítil munur á, hvussu mannligir og kvinnuligir svarpersónar hava mett handfaringina av broytingum á arbeiðsplássinum, har menn tykjast vera eitt sindur nøgdari við handfaringina av broytingum. Harnæst bendu úrslitini á, at tað eisini eru smærri munir upp á tvørs av aldursbólkunum, men har teir yngstu og elstu svarpersónarnir hava mett handfaringina av broytingum eitt sindur jaligari enn hinir aldursbólkarnir. Upp á tvørs av teimum ymisku starvsbólkunum bendu úrslitini á, at svarpersónar í 'Leiðsluarbeiði' hava mett handfaringina av broytingum jaligari enn hinir starvsbólkarnir. Øvut, hava svarpersónar í 'Arbeiði á heilsuøkinum' mett handfaringina av broytingum minni jaliga samanborið við restina av starvsbólkunum, og hesin starvsbólkurin liggur harumframt meira enn fimm stig undir miðaltalinum av øllum svarpersónum í kanningini.

## 3.6 Neilig atferð

Innan fyri økið *Neilig atferð* er fokus á tey ymisku sløgini av interpersonellum ósemjum, sum arbeiðstakararnir kunnu verða drignir uppí í sambandi við teirra arbeiði. Stórur meiriluti av arbeiðstakarunum hava í arbeiðshøpi samband við onnur menniskju – antin persónar, sum teir arbeiða saman við (starvsfelagar, leiðarar ella, sum, leiðari hevur starvsfólk undir sær) ella persónar, sum teir hava samband við í sínum arbeiði (viðskiftafólk, klientar, sjúklingar, næmingar v.m.). Í slíkum sambondum er vandi fyri, at neilig atferð kann koma fyri, sum t.d. hóttanir, harðskapur, happing, mismunur/vánalig viðferð og chikana, og granskingin bendir á, at tað at vera fyri fyri neiligari atferð øki um vandan fyri neiligum úrsliti í sambandi við heilsu, trivnað og sjúkufráveru (3, 93-98).

Spurnakanningin lýsir hesi seks evni, sum endurspegla ymisk sjónarmið í økinum *Neilig atferð*:

- Hóttanir
- Harðskapur
- Happing
- Kynslig happing
- Mismunur/vánalig viðferð
- Chikana

### 3.6.1 Hóttanir

*Hóttanir* snýr seg um, hvørt arbeiðstakararnir, 12 teir seinastu mánaðirnar undan, at tey svaraðu spurnakanningini, hava verið fyri hóttanum í sambandi við teirra arbeiði. Hóttanir kunnu vera at roknað sum fráboðanin upp á eina ósemju millum tveir ella fleiri persónar og kemur oftast fyri í starvsbólkum, har arbeiðstakararnir arbeiða við t.d. viðskiftafólki, klientum, sjúklingum ella næmingum.

Í vísundaligu bókmentunum eru greiðar ábendingar um, at tað at vera fyri hóttanum í arbeiðinum hevur neiligan týdning fyri heilsu og trivnað í arbeiðinum hjá arbeiðstakaranum. Tvær kanningar, sum hava kannað arbeiðstakarar í eldrarøktini, hava staðfest, at títtleikin av hóttanum hongur saman við einum øktum vanda fyri ávikavist drúgvari sjúkufráveru og arbeiðssteðgi (93, 99).

Vit máta títtleikan av hóttanum við spurninginum í talvu 3.6.1.1. Talvan vísir býtið av svørum í prosentum fyri allar svarpersónar í føroyska kanningarbólkinum og fyri danskar svarpersónar í danska tilvísingarbólkinum. Úrslitini benda á, at tað samanlagt eru 23,2 prosent av føroysku svarpersónunum, sum hava svarað 'Ja' til at hava upplivað hóttanir í sambandi við arbeiðið. Harafturímóti eru tað samanlagt 18,4 prosent av donskum arbeiðstakarum, sum hava svarað 'Ja' til spurningin um hóttanir í arbeiðinum. Harvið sær út til, at teir føroysku arbeiðstakararnir oftari uppliva hóttanir í sambandi við arbeiðið enn danskir arbeiðstakarar.

**Talva 3.6.1.1: Býti av svørum í prosentum fyri spurningin 'Hevur tú seinastu 12 mánaðirnar verið fyri hóttanum í samband við títt arbeiði?'**

| | Nei | Ja, men sjáldan | Ja, mánaðarliga | Ja, vikuliga | Ja, dagliga ella næstan dagliga |
|---|---|---|---|---|---|
| Partur av svarpersónum úr Føroyum | 76,8 | 17,5 | 2,8 | 2,0 | 1,0 |
| Partur av svarpersónum úr Danmark | 81,6 | 11,6 | 3,6 | 2,5 | 0,7 |

Tilsamans 1247 svarpersónar úr føroyska kanningarbólkinum hava svarað 'Ja' til at hava verið fyri hóttanum í sambandi við arbeiðið. Teir svarpersónar, sum søgdu seg hava verið fyri hóttanum, fingu eisini henda spurningin 'Hvør hevur hótt teg?'. Talva 3.6.1.2 vísir býtið av svørum upp á henda spurning.

Úrslitini benda á, at 15,3 prosent av teimum svarpersónum, sum hava sagt seg upplivað at verið fyri hóttanum í arbeiðinum, siga frá, at tey eruu hótt av ovastu leiðslu, meðan 15,2 prosent siga frá, at tey eruu hótt av nærmasta leiðara. Tað er týðiligt, at tey flestu siga frá, at tey eruu hótt av pørtum uttanífrá sum t.d. Viðskiftafólki, klientum, sjúklingum við meira (69,8 prosent). Fægst siga frá, at tey hava móttikið túlnevndar hóttanir (4,0 prosent). Sum heild, benda úrslitini á, at hóttanir í stóran mun koma uttanífrá t.d. Viðskiftafólki, klientum o.s.fr. Men úrslitini merkja eisini, at hóttanir koma innanhýsis á arbeiðsplássinum, serliga frá leiðsluni. Av tí, at tað hevur verið møguligt at geva fleiri svør, er tað samanlagda prosenttalið meira enn 100 prosent.

**Talva 3.6.1.2: Býti av svørum í prosentum fyri spurningin 'Hvør hevur hótt teg?'**

| | Tal | Prosent |
|---|---|---|
| Ovasta leiðsla | 191 | 15,3 |
| Nærmasti leiðari | 190 | 15,2 |
| Starvsfelagar | 118 | 9,5 |
| Starvsfólk, eg eri leiðari hjá | 57 | 4,6 |
| Viðskiftafólki, klientar, sjúklingar, næmingar, Avvarðandi við meira | 871 | 69,8 |
| Dulnevndar hóttanir | 50 | 4,0 |

Í talvunum niðanfyri verða úrslitini víst fyri hóttanum býtt upp í ávikavist kyn, aldur og starvsbólkar.

Talva 3.6.1.3 vísir tann partin, sum hevur váttað spurningin um *Hóttanir* býtt upp í kyn. Úrslitini benda á, at 17,7 prosent av øllum mannligum svarpersónum siga seg hava verið fyri hóttanum í arbeiðinum, meðan 26,8 prosent av øllum kvinnuligum svarpersónum siga seg hava verið fyri hóttanum í arbeiðinum. Úrslitini merkja tískil, at tað í týðiligan mun eru fleiri kvinnuligir svarpersónar, sum hava upplivað hóttanir í arbeiðinum. Ískoytisgreining vísir harafturat, at munurin millum menn og kvinnur er hagfrøðiliga signifikantur ($p<.0001$).

**Talva 3.6.1.3: Partur, sum váttar spurningin 'Hevur tú seinastu 12 mánaðirnar verið fyri hóttanum í sambandi við títt arbeiði?' uppgjørt eftir kyni**

| Kyn | Tal | Prosent |
|---|---|---|
| Maður | 368 | 17,7 |
| Kvinna | 765 | 26,8 |

Talva 3.6.1.4 vísir úrslitini fyri hóttanum býtt upp í teir ymisku aldursbólkarnar. Úrslitini benda á, at svarpersónar millum 25 og 34 ár í størri mun siga frá um hóttanir í arbeiðinum samanborið við hinar aldursbólkarnar. Harafturímóti eru elstu svarpersónarnir yvir 65 ár tann aldursbólkurin, har fægst siga seg hava upplivað hóttanir í sambandi við arbeiðið. Ískoytisgreining vísir, at munirnir millum aldursbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir ($p<.0001$).

**Talva 3.6.1.4: Partur, ið váttar spurningin 'Hevur tú seinastu 12 mánaðirnar verið fyri hóttanum í sambandi við títt arbeiði?' uppgjørt eftir aldri**

| Aldur | Tal | Prosent |
|---|---|---|
| < 25 ár | 55 | 24,4 |
| 25 - 34 ár | 180 | 26,1 |
| 35 - 44 ár | 283 | 25,5 |
| 45 - 54 ár | 325 | 24,5 |
| 55 – 64 ár | 247 | 20,4 |
| > 65 ár | 41 | 10,9 |

Talva 3.6.1.5 vísir úrslitini fyri hóttanum býtt upp í 11 ymiskar starvsbólkar og vísir harumframt, hvussu starvsbólkarnir liggja samanborið við úrslitið fyri allar svarpersónar

í kanningini. Tað er týðiligt, at her benda úrslitini á, at svarpersónar í 'Arbeiði á heilsuøkinum' oftari uppliva hóttanir í sambandi við arbeiðið enn hinir starvsbólkarnir (42,6 prosent). Úrslitini benda eisini á, at tað eru 30,6 prosent av svarpersónum innan fyri 'Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði', sum hava sagt seg hava upplivað hóttanir í arbeiðinum, sum eisini er ein munandi størri partur samanborið við hinar starvsbólkarnar. Eisini ein størri partur av svarpersónum í 'Leiðsluarbeiði' siga seg hava upplivað hóttanir í sambandi við arbeiðið (26,0 prosent).

Svarpersónar í 'Handverkaraarbeiði' er tann starvsbólkurin, har fægst hava sagt seg uppliva hendingar við hóttanum í arbeiðinum (11,7 prosent). Sum heild, eru tað svarpersónar í arbeiðum við tøttum sambandi við viðskiftafólk, klientar, næmingar, avvarðandi og líknandi, sum seg uppliva hóttanir í arbeiðinum. Sama rákið sæst millum arbeiðstakarum í Danmark, har úrslitini eisini benda á, at ein størri partur av arbeiðstakarum innan fyri undirvísing og heilsuverkið eru fyri hóttanum í arbeiðinum (19). Ískoytisgreining vísir harafturat, at munirnir millum teir 11 starvsbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 3.6.1.5: Partur, ið váttar spurningin 'Hevur tú seinastu 12 mánaðirnar verið fyri hóttanum í sambandi við títt arbeiði?' uppgjørt eftir starvsbólkum**

| Starvsbólkar | Tal | Prosent |
|---|---|---|
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 252 | 42,6 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 254 | 30,6 |
| 1 Leiðsluarbeiði | 125 | 26,0 |
| **Partur av svarpersónum úr Føroyum** | **1247** | **23,2** |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umfram flutningsarbeiði | 34 | 19,8 |
| 11 Annað handaligt arbeiði | 40 | 18,4 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 60 | 18,2 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 117 | 18,0 |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 120 | 16,3 |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 93 | 15,4 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 9 | 13,2 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 27 | 11,7 |

Viðmerking: **Grønu markingarnar** merkja, at tað er ein heldur lítil partur av svarpersónum úr avvarðandi starvsbólki, sum sigur frá hóttanum í arbeiðinum samanborið við partin av øllum svarpersónum úr Føroyum. **Reyða markingin** merkir, at tað er ein størri partur av svarpersónum í avvarðandi starvsbólki, sum sigur frá hóttanum í arbeiðinum samanborið við partin av øllum svarpersónum úr Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Hóttanum***
Úrslitini fyri *Hóttanir* vístu, at 23,2 prosent av føroysku svarpersónunum hava upplivað hóttanir í sambandi við arbeiðið, og soleiðis sær út til, at føroysku svarpersónarnir oftari uppliva hóttanir í arbeiðinum enn svarpersónar úr donsku tilvísingarkanningini.

Harumframt bendu úrslitini á, at 69,8 prosent av svarpersónunum, sum hava upplivað hóttanir í arbeiðinum, siga frá, at tey eruu hótt av viðskiftafólki, klientum, sjúklingum, næmingum, avvarðandi við meira. Harnæst bendu úrslitini eisini á, at ein lutfalsliga stórur partur hava sagt frá, at tey eru hótt av antin ovastu ella nærmestu leiðslu. Úrslitini

bendu harafturat á, at tað eru flest kvinnur, sum hava upplivað hóttanir í sambandi við arbeiðið. Upp á tvørs av aldursbólkunum, bendu úrslitini á, at tað eru flest svarpersónar í aldrinum 25 til 34 ár, sum hava upplivað hóttanir í sambandi við arbeiðið. Tá úrslitini verða býtt upp í starvsbólkarnar, sæst týðiliga, at tað er tann størsti parturin av svarpersónum í 'Arbeiði á heilsuøkinum', sum hava sagt frá hóttanum í arbeiðinum. Harnæst bendu úrslitini á, at tað eru færri svarpersónar innan fyri 'Handverkaraarbeiði', sum siga frá hóttanum í arbeiðinum samanborið við hinar starvsbólkarnar.

## 3.6.2 Harðskapur

*Harðskapur* snýr seg um, hvørt arbeiðstakararnir, innan fyri 12 teir seinastu mánaðirnar undan luttøkuni í spurnakanningini, hava verið fyri harðskapi í sambandi við teirra arbeiði. Harðskapur kann vera roknaður sum ein ósemja millum tveir ella fleiri persónar, sum hevur við sær eina likamliga harðliga atferð. Hetta slagið av ósemjum kemur oftast fyri í starvsbólkum, har arbeiðstakararnir arbeiða við t.d. viðskiftafólki, klientum, sjúklingum ella næmingum (19).

Í vísindaligu bókmentunum er semja um, at harðskapur á arbeiðsplássinum hevur týdning fyri heilsuna hjá arbeiðstakarunum. Kanningar hava áður staðfest, at harðskapur á arbeiðsplássinum hongur saman við øktum vanda fyri drúgvari sjúkufráveru (96), heilivágsviðgerð fyri tunglyndi (100), typu 2 diabetes (101) og hjarta-æðra-sjúkum (102).

Vit máta títtleikan av harðskapi við spurninginum í talvu 3.6.2.1. Talvan vísir býtið av svørum í prosentum fyri allar svarpersónar í føroyska kanningarbólkinum og fyri danskar svarpersónar í danska tilvísingarbólkinum. Úrslitini fyri *Harðskap* vísa, at 6,6 prosent av svarpersónunum úr føroyska kanningarbólkinum hava upplivað harðskap í sambandi við arbeiðið, meðan 5,2 prosent av svarpersónunum úr danska tilvísingarbólkinum hava upplivað harðskap í arbeiðinum. Úrslitini benda á sostatt á eitt sindur størri útbreiðslu av harðskapi fyri arbeiðstakarar í Føroyum enn fyri danskar arbeiðstakarar.

**Talva 3.6.2.1: Býti av svørum í prosentum fyri spurningin 'Hevur tú seinastu 12 mánaðirnar verið fyri likamligum harðskapi í samband við títt arbeiði?'**

| | Nei | Ja, men sjáldan | Ja, mánaðarliga | Ja, vikuliga | Ja, dagliga ella næstan dagliga |
|---|---|---|---|---|---|
| Partur av arbeiðstakarum í Føroyum | 93,4 | 4,8 | 0,7 | 0,7 | 0,4 |
| Partur av svarpersónum úr Danmark | 94,9 | 3,4 | 1,0 | 0,5 | 0,3 |

Tað eru tilsamans 350 svarpersónar úr føroysku kanningini, sum hava svarað 'Ja' til, at tey hava verið fyri harðskapi í sambandi við arbeiðið. Teir svarpersónar, sum søgdu seg hava verið fyri harðskapi, fingu eisini henda spurningin 'Hvør hevur verið harðigur móti tær?'. Talva 3.6.2.2 vísir býtið av svørum upp á henda spurning.

Tað er týðiligt, at úrslitini her benda á, at tað eru flest svarpersónar, sum siga frá, at tey hava verið fyri harðligari atferð frá viðskiftafólki, klientum, næmingum, avvarðandi við meira (99,4 prosent), og fægst siga frá, at tey hava upplivað harðskap frá fólki, tey hava undir sær (1,4 prosent). Sum heild benda hesi úrslitini á, at harðskapur fyrst og fremst kemur fyri uttanhýsis, og harvið í minni mun innanhýsis á arbeiðsplássinum. Av tí, at tað hevur verið møguligt at geva fleiri svør, er samlaða prosenttalið meira enn 100.

**Talva 3.6.2.2: Býti av svørum í prosentum fyri spurningin 'Hvør hevur verið harðigur móti tær?'**

| | Tal | Prosent |
|---|---|---|
| Ovasta leiðsla | 8 | 2,3 |
| Nærmasti leiðari | 13 | 3,7 |
| Starvsfelagar | 18 | 5,1 |
| Starvsfólk, eg eri leiðari hjá | 5 | 1,4 |
| Viðskiftafólki, klientar, sjúklingar, næmingar, avvarðandi við meira | 348 | 99,4 |

Í talvunum niðanfyri verða úrslitini víst fyri *Harðskap* býtt upp í ávikavist kyn, aldur og starvsbólkar.

Talva 3.6.2.3 vísir tann partin, sum hevur játtað spurningin um *Harðskap* býtt upp í kyn. Úrslitini benda á, at 2,5 prosent av øllum mannligum svarpersónum siga seg hava verið fyri harðskapi í arbeiðinum, meðan 9,1 prosent av øllum kvinnuligum svarpersónum siga seg hava verið fyri harðskapi í arbeiðinum. Úrslitini merkja sostatt, at tað í týðiligan mun eru fleiri kvinnuligir svarpersónar, sum hava upplivað harðskap í arbeiðinum. Ískoytisgreining vísir harafturat, at munurin millum menn og kvinnur er hagfrøðiliga signifikantur (p<.0001).

**Talva 3.6.2.3: Partur, sum gevur játtandi svar upp á spurningin 'Hevur tú seinastu 12 mánaðirnar verið fyri likamligum harðskapi í samband við títt arbeiði?' býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Prosent |
|---|---|---|
| Maður | 51 | 2,5 |
| Kvinna | 256 | 9,1 |

Talva 3.6.2.4 vísir úrslitini fyri *Harðskap* býtt upp í ymiskar aldursbólkar. Úrslitini benda á, at 10,6 prosent av øllum svarpersónum undir 25 ár hava sagt seg verið fyri harðskap í sambandi við arbeiðið. Øvut benda úrslitini á, at 2,2 prosent av øllum svarpersónum yvir 65 ár hava sagt seg verið fyri harðskap í arbeiðinum. Sum heild, benda úrslitini sostatt á, at teir yngru svarpersónarnir í størri mun uppliva hendingar við harðskapi í arbeiðinum samanborið við eldru svarpersónarnar. Ískoytisgreining vísir harafturat, at munirnir millum aldursbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 3.6.2.4: Partur, sum gevur játtandi svar upp á spurningin 'Hevur tú seinastu 12 mánaðirnar verið fyri likamligum harðskapi í samband við títt arbeiði?' býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Prosent |
|---|---|---|
| < 25 ár | 23 | 10,6 |
| 25 - 34 ár | 61 | 8,9 |
| 35 - 44 ár | 78 | 7,1 |
| 45 - 54 ár | 77 | 5,9 |
| 55 - 64 ár | 60 | 5,0 |
| > 65 ár | 8 | 2,2 |

Talva 3.6.2.5 vísir tann partin, sum hevur játtað spurningin um *Harðskap* býtt upp í 11 ymiskar starvsbólkar og vísir harumframt, hvar starvsbólkarnir liggja á stiganum samanborið við úrslitið fyri allar svarpersónar í kanningini. Í hesum førinum benda úrslitini á, at ein størri partur av svarpersónum í 'Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði' hava sagt frá harðskap í arbeiðinum (18,4 prosent). Harnæst hava 16,4 prosent av svarpersónunum í 'Arbeiði á heilsuøkinum' sagt frá harðskapi í sambandi við arbeiðið. Tað eru færri enn fimm svarpersónar, sum hava sagt frá harðskapi í arbeiðinum innan fyri starvsbólkarnar 'Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap' og 'Handverkaraarbeiði' og vit kunnu tí ikki vísa tey neyvu úrslitini við fyriliti fyri, at svarpersónarnir verða verandi túlnevndir. Upp á tvørs av starvsbólkunum, síggjast sostatt týðiligir munir í títtleikanum av harðskapi, og aftur her peika úrslitini á, at harðskapur vanliga kemur fyri í arbeiði við tøttum sambondum uttanhýsis sum t.d. Við viðskiftafólk, klientar, næmingar, avvarðandi og líknandi. Ein ískoytisgreining vísir harafturat, at munirnir millum starvsbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 3.6.2.5: Partur, sum gevur játtandi svar upp á spurningin 'Hevur tú seinastu 12 mánaðirnar verið fyri likamligum harðskapi í samband við títt arbeiði?' býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Prosent |
|---|---|---|
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 151 | 18,4 |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 96 | 16,4 |
| **Partur av svarpersónum úr Føroyum** | **350** | **6,6** |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 13 | 4,0 |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 6 | 3,6 |
| 11 Annað handaligt arbeiði | 7 | 3,3 |
| 1 Leiðsluarbeiði | 13 | 2,7 |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 8 | 1,1 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 6 | 0,9 |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 5 | 0,8 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | <5 | * |
| 9 Handverkaraarbeiði | <5 | * |

Viðmerking: **Grønu markingarnar** merkja, at tað er ein heldur lítil partur av svarpersónum úr avvarðandi starvsbólki, sum sigur frá harðskapi í arbeiðinum samanborið við partin av øllum svarpersónum úr Føroyum. **Reyða markingin** merkir, at tað er ein størri partur av svarpersónum í avvarðandi starvsbólki, sum sigur frá harðskapi í arbeiðinum samanborið við partin av øllum svarpersónum úr Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Harðskapi***

Úrslitini fyri *Harðskap* vístu, at 6,6 prosent av svarpersónunum hava sagt seg verið fyri harðskap í sambandi við arbeiðið. Úrslitini merkja tískil, at útbreiðslan av harðskapi millum føroysku arbeiðstakarar er eitt sindur størri enn millum danskar arbeiðstakarar, har 5,2 prosent av svarpersónunum í danska tilvísingarbólkinum hava sagt seg verið fyri harðskapi í sambandi við arbeiðið.

Meginparturin av teimum svarpersónum, sum hevur upplivað harðskap í sambandi við teirra arbeiði, siga frá, at tey hava upplivað harðskap frá viðskiftafólki, klientum, sjúklingum, næmingum, avvarðandi við meira. Harnæst benda úrslitini á, at tað í týðiligan mun eru fleiri kvinnuligir svarpersónar, sum hava sagt frá harðskap í sambandi við teirra arbeiði. Hetta kann møguliga hanga saman við, at tað eru fleiri kvinnuligir arbeiðstakarar umboðaðir í arbeiðum og starvsgreinum, har harðskapur oftari kemur fyri sum t.d. 'Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði' og 'Arbeiði á heilsuøkinum', sum harafturat eru teir starvsbólkarnir, har harðskapur tykist koma oftast fyri í hesari kanning. Til endans bendu úrslitini á, at harðskapur tykist koma oftast fyri millum yngri svarpersónar, meðan tað tykist at koma fyri í minstan mun millum eldri svarpersónar yvir 65 ár.

### 3.6.3 Happing

*Happing* snýr seg um, hvørt arbeiðstakararnir innan fyri 12 teir seinastu mánaðirnar undan luttøkuni í spurnakanningini, hava verið fyri happing í sambandi við teirra arbeiði.

Talan er um happing, um mann regluliga, í longri tíðarskeið ella afturvendandi er fyri ágangi ella neiligum gerðum, sum vera fataðar særandi, vanvirðandi, og sum mann ikki sjálv/ur kann verja seg móti (103). Øvut harðskapi og hóttanum er happing et fyribrigdi, sum fyrst og fremst hendir millum starvsfelagar á einum arbeiðsplássi og ikki í mun til samband við t.d. Viðskiftafólk, klientar, sjúklingar ella líknandi (19). Happing kann síggja ymiskt út. Tað kann t.d. vera, um mann er fyri órímiliga nógvum eftirliti í sínum arbeiði, at umráðandi kunning verur afturhildin, sum ávirkar arbeiðsavrikið, ella um mann verður eyðmýktur, hildin fyri gjøldur og tað verður latið sum um mann ikki verður sæddur/hoyrdur. Happing kann koma fyri á øllum sløgum av arbeiðsplássum, og taka seg ofta upp í sambandi við innanhýsis óloystar ósemjur á arbeiðsplássinum (104).

Í vísindaligu bókmentunum er semja um, at happing á arbeiðsplássinum hevur týdning fyri heilsuna og trivnað hjá arbeiðstakarunum. Kanningar hava áður staðfest, at happing hongur saman við øktum vanda fyri drúgvari sjúkufráveru (93) og arbeiðssteðgi (99). Harumframt hava aðrar kanningar staðfest, at happing á arbeiðsplássinum hongur saman við øktum vanda fyri tunglyndi (97) og sjálvmorð (95).

Vit máta títtleikan av happing við spurninginum í talvu 3.6.3.1. Talvan vísir býtið av svørum í prosentum fyri allar svarpersónar í føroyska kanningarbólkinum og fyri danskar svarpersónar í danska tilvísingarbólkinum.

Úrslitini fyri *Happing* vísa, at tað samanlagt eru 12,4 prosent av svarpersónunum úr føroysku kanningini, sum svara, at tey hava verið fyri happing, meðan 10,0 prosent av svarpersónunum úr danska tilvísingarbólkinum hava upplivað at verið fyri happing í arbeiðinum. Úrslitini benda sostatt á eina størri útbreiðslu av happing fyri arbeiðstakarar í Føroyum enn fyri arbeiðstakarar í Danmark. Úrslitini benda harumframt á eina lítla útbreiðslu av regluligari happing (tvs. vikuliga ella oftari).

**Talva 3.6.3.1: Býti av svørum í prosentum fyri spurningin 'Hevur tú seinastu 12 mánaðirnar verið fyri happing í tínum núverandi arbeiði?'**

| | Nei | Ja, men sjáldan | Ja, mánaðarliga | Ja, vikuliga | Ja, dagliga ella næstan dagliga |
|---|---|---|---|---|---|
| Partur av svarpersónum úr Føroyum | 87,6 | 8,3 | 1,9 | 1,4 | 0,8 |
| Partur av svarpersónum úr Danmark | 90,0 | 6,2 | 1,8 | 1,4 | 0,6 |

Tað eru tilsamans 663 svarpersónar úr føroysku kanningini, sum hava svarað 'Ja' til at hava verið fyri happing í sínum arbeiði. Teir svarpersónar, sum søgdu seg hava verið fyri happing, fingu eisini henda spurningin 'Hvør happaði teg?'. Talva 3.6.3.2 vísir býtið av svørum upp á henda spurningin.

Í hesum førinum benda úrslitini á, at 53,2 prosent av svarpersónunum, sum hava sagt seg verið fyri happing, vóru fyri happing av starvsfólkum, meðan fægst hava sagt seg verið fyri happing av starvsfólki, sum tey eru leiðarar hjá (5,0 prosent). Harumframt sæst eisini í úrslitunum, at 16,9 prosent siga seg hava verið fyri happing av nærmasta leiðara. Úrslitini benda harafturat á, at happing í stóran mun kemur fyri innanhýsis á arbeiðsplássinum øvut av *Harðskapi* og *Hóttanum, sum* í størri mun sóu út til at koma uttanhýsis frá (tvs. Viðskiftafólki, klientum, sjúklingum v.m.). Av tí, at tað hevur verið møguligt at geva fleiri svør, er samlaða prosenttalið meira enn 100.

**Talva 3.6.3.2: Býti av svørum í prosentum fyri spurningin 'Hvør happaði teg?'**

| | Tal | Prosent |
|---|---|---|
| Ovasta leiðsla | 69 | 10,4 |
| Nærmasta leiðara | 112 | 16,9 |
| Starvsfelagar | 353 | 53,2 |
| Starvsfólk, eg eri leiðari hjá | 33 | 5,0 |
| Viðskiftafólki, klientar, sjúklingar, næmingar, avvarðandi við meira | 106 | 16,0 |

Í talvunum niðan fyri vera úrslitini víst fyri *Happing* býtt upp í ávikavist kyn, aldur og starvsbólkar.

Talva 3.6.3.3 vísir úrslitini fyri *Happing* býtt upp í kyn. Í hesum førinum benda úrslitini á, at 13,5 prosent av kvinnuligu svarpersónunum hava sagt seg vera fyri happing, meðan 10,5 prosent av mannligu svarpersónunum hava sagt seg verið fyri happing í arbeiðinum. Ein ískoytisgreining vísir, at munurin millum menn og kvinnur er hagfrøðiliga signifikantur (p=0.0018).

**Talva 3.6.3.3: Partur, sum gevur játtandi svar upp á spurningin 'Hevur tú seinastu 12 mánaðirnar verið fyri happing í tínum núverandi arbeiði?' býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Prosent |
|---|---|---|
| Maður | 218 | 10,5 |
| Kvinna | 383 | 13,5 |

Talva 3.6.3.4 vísir úrslitini fyri *Happing* býtt upp í aldur. Í hesum førinum benda úrslitini á, at 15,2 prosent av svarpersónunum í aldursbólkinum 35 til 44 ár hava sagt seg verið fyri happing í arbeiðinum. Harnæst benda úrslitini á, at 4,9 prosent av svarpersónunum í aldursbólkinum yvir 65 ár hava sagt seg verið fyri happing, og er soleiðis tann bólkurin, har fægst hava upplivað happing. Ein ískoytisgreining vísir, at munirnir millum aldursbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 3.6.3.4: Partur, sum gevur játtandi svar upp á spurningin 'Hevur tú seinastu 12 mánaðirnar verið fyri happing í tínum núverandi arbeiði?' býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Prosent |
|---|---|---|
| < 25 ár | 28 | 12,6 |
| 25 - 34 ár | 87 | 12,7 |
| 35 - 44 ár | 167 | 15,2 |
| 45 - 54 ár | 161 | 12,2 |
| 55 - 64 ár | 139 | 11,5 |
| > 65 ár | 18 | 4,9 |

Talva 3.6.3.5 vísir úrslitini fyri *Happing* býtt upp í starvsbólkarnar og vísir harumframt, hvar starvsbólkarnir liggja samanborið við úrslitið fyri allar svarpersónar í kanningini. Í hesum førinum vísa úrslitini, at 18,3 prosent av svarpersónunum í 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' hava sagt seg verið fyri happing í arbeiðinum, og er soleiðis tann starvsbólkurin, har størst partur av svarpersónum siga frá happing. Harnæst vísa úrslitini, at 7,1 prosent av svarpersónunum innan fyri 'Leiðsluarbeiði' hava sagt frá happing, og er tískil tann starvsbólkurin, har fægst svarpersónar hava sagt frá happing á arbeiðsplássinum. Ískoytisgreining vísir, at munirnir millum teir 11 starvsbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 3.6.3.5: Partur, sum gevur játtandi svar upp á spurningin 'Hevur tú seinastu 12 mánaðirnar verið fyri happing í tínum núverandi arbeiði?' býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Prosent |
|---|---|---|
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 31 | 18,3 |
| 11 Annað handaligt arbeiði | 35 | 16,2 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 131 | 15,9 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 9 | 13,2 |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 77 | 13,1 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 43 | 13,1 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 30 | 13,0 |
| **Partur av svarpersónum úr Føroyum** | **663** | **12,4** |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 73 | 12,2 |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 80 | 10,9 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 56 | 8,7 |
| 1 Leiðsluarbeiði | 34 | 7,1 |

Viðmerking: **Grønu markingarnar** merkja, at tað er ein heldur lítil partur av svarpersónum úr avvarðandi starvsbólki, sum sigur frá happing í arbeiðinum samanborið við partin av øllum svarpersónum úr Føroyum. **Reyðu markingarnar** merkja, at tað er ein størri partur av svarpersónum í avvarðandi starvsbólki, sum sigur frá happing í arbeiðinum samanborið við partin av øllum svarpersónum úr Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Happing***

Úrslitini fyri *Happing* vístu, at 12,4 prosent av svarpersónunum úr føroysku kanningini hava upplivað happing í sambandi við arbeiðið. Sostatt er útbreiðslan av happing

millum føroysku svarpersónarnar eitt sindur størri enn millum teir donsku svarpersónarnar, har 10,0 prosent hava sagt frá happing.

Øvut úrslitunum fyri *Harðskapi* og *Hóttanir*, bendu úrslitini her á, at fremjararnir av happing fyrst og fremst eru persónar innahýsis, har 53,2 prosent av svarpersónum, sum hava upplivað happing, hava sagt seg verið fyri happing av starvsfólkum. Harnæst vístu úrslitini, at 16,9 prosent hava upplivað at verða happað av nærmasta leiðara.

Úrslitini bendu harafturat á, at tað er eitt sindur størri partur av kvinnuligum svarpersónum, sum hava sagt frá happing. Upp á tvørs av aldursbólkunum, bendu úrslitini týðiliga á, at fægst svarpersónar yvir 65 ár siga seg hava verið fyri happing, meðan tað er meira javnt býtt tvørtur um hinar aldursbólkarnar, men har ein eitt sindur størri partur av svarpersónum í aldrinum 35 til 44 ár hava sagt frá happing. Býtt upp í starvsbólkarnar, bendu úrslitini á, at flestu svarpersónar í 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' hava sagt frá happing í arbeiðinum, og fægst svarpersónar í 'Leiðsluarbeiði' siga seg harafturímóti hava verið fyri happing.

### 3.6.4 Kynslig happing

*Kynslig happing* snýr seg um, hvørt starvsfelagarnir innan fyri 12 teir seinastu mánaðirnar undan luttøkuni í spurnakanningini hava verið fyri kynsligari happing í sambandi við teirra arbeiði. Kynslig happing á arbeiðsplássinum er eitt fløkjasligt fyribrigdi við fleiri síðum. Innan fyri granskingina í kynsligari happing verður skilt millum trý ymisk sløg av atferð: 1) kynsliga at fara yvir um mørk, 2) óynskt kynsligt uppmerksemi og 3) kynsligur tvingsil (105). Kynslig happing hendir, tá persónar uppliva óynsktar gerðir av kynisligum slag, sum viðkomandi upplivir fara yvir um síni mørk. Kynslig happing kann t.d. vera óynsktar nertingar, fúlar viðmerkingar ella óviðkomandi fyrispurningar um kynslig evni.[5]

Í vísindaligu bókmentunum er semja um, at kynslig happing hevur týdning fyri trivnað og heilsu hjá starvsfeløgunum. Kanningar hava áður staðfest, at kynslig happing á arbeiðsplássinum hongur saman við øktum vanda fyri sjálvmorði, sjálvmorðsroynd (106) og tunglyndiseyðkennum (98). Harumframt hevur ein kanning staðfest, at menn, men ikki kvinnur, sum uppliva at fáa óynskt kynsligt uppmerksemi frá starvsfeløgum, eru í øktum vanda fyri drúgvari sjúkufráveru (107).

Vit máta títtleikan av kynsligari happing við spurninginum í talvu 3.6.4.1. Talvan vísir býtið av svørum í prosentum fyri allar svarpersónar í føroysku kanningini og fyri danskar svarpersónar í danska tilvísingarbólkinum.

Úrslitini benda á, at tað samanlagt eru 5,9 prosent av svarpersónunum úr føroysku kanningini, sum siga frá at hava upplivað kynsliga happing í arbeiðinum, meðan tað samanlagt eru 2,4 prosent av svarpersónunum úr donsku tilvísingarkanningini, sum hava sagt frá kynsligari happing. Úrslitini benda sostatt á eina størri útbreiðslu av kynsligari happing millum arbeiðstakarar í Føroyum enn millum danskar arbeiðstakarar.

**Talva 3.6.4.1: Býti av svørum í prosentum fyri spurningin 'Hevur tú seinastu 12 mánaðirnar verið fyri kynsligari happing á tínum arbeiðsplássi?'**

| | Nei | Ja, men sjáldan | Ja, mánaðarliga | Ja, vikuliga | Ja, dagliga ella næstan dagliga |
|---|---|---|---|---|---|
| Partur av svarpersónum úr Føroyum | 94,1 | 3,6 | 1,1 | 0,7 | 0,5 |
| Partur av svarpersónum úr Danmark | 97,5 | 2,0 | 0,2 | 0,1 | 0,1 |

Tilsamans 312 svarpersónar úr føroysku kanningini, sum hava svarað 'Ja' til at hava verið fyri kynsligari happing í arbeiðinum. Svarpersónarnir, sum søgdu seg hava verið fyri kynsligari happing, fingu eisini henda spurningin 'Hvør happaði teg kynsliga?'. Talva 3.6.4.2 vísir býtið av svørum upp á henda spurning.

Her vísa úrslitini aftur, at flest siga frá, at ávikavist starvsfelagar og/ella viðskiftafólk, klientar, sjúklingar v.m. hava verið atvoldin til, at viðkomandi hevur verið fyri neiligari

[5] Allýsing og upplýsingar eru tiknar frá Arbejdstilsynet (www.at.dk) á síðuni undir 'AT-vejledninger – Krænkende handlinger'

gerð – í hesum førinum kynsligari happing. Her sæst, at 46,5 prosent hava svarað, at tað vóru starvsfelagar, ið framdu kynsligu happingina, meðan 44,2 prosent siga frá, at tað vóru viðskiftafólk, klientar, sjúklingar við meira, ið framdu kynsligu happingina. Her er tað aftur fægst, sum siga frá, at tey hava verið fyri kynsligari happing av starvsfólki, tey eru leiðari hjá (4,5 prosent). Harafturat er vert at viðmerkja, at tað samanlagt eru 17,0 prosent av svarpersónunum, sum siga frá, at tey hava upplivað kynsliga happing framda av leiðsluumboði (ovastu/nærmastu leiðslu). Av tí, at tað hevur verið møguligt at geva fleiri svør, er samlaða prosenttalið meira enn 100.

**Talva 3.6.4.2: Býti av svørum í prosentum fyri spurningin 'Hvør happaði teg kynsliga?'**

| | Tal | Prosent |
|---|---|---|
| Ovasta leiðsla | 29 | 9,3 |
| Nærmasti leiðari | 24 | 7,7 |
| Starvsfelagar | 145 | 46,5 |
| Starvsfólk, eg eri leiðari hjá | 14 | 4,5 |
| Viðskiftafólk, klientar, sjúklingar, næmingar, avvarðandi við meira | 138 | 44,2 |

Í talvunum niðan fyri vera úrslitini víst fyri *Kynsliga happing* býtt upp í ávikavist kyn, aldur og starvsbólkar.

Talva 3.6.4.3 vísir úrslitini fyri *Kynsliga happing* býtt upp í kyn. Í hesum førinum benda úrslitini á, at tað er týðiliga størsti parturin av kvinnuligum svarpersónum, sum hava sagt frá kynsligari happing á arbeiðsplássinum, har 8,3 prosent hava svarað 'Ja' til spurningin um kynsliga happing. Harafturímóti hava 2,6 prosent av mannligu svarpersónunum sagt frá, at teir hava upplivað kynsliga happing. Ein ískoytisgreining vísir harafturat, at munurin millum menn og kvinnur er hagfrøðiliga signifikantur ($p<.0001$).

**Talva 3.6.4.3: Partur, sum gevur játtandi svar upp á spurningin 'Hevur tú seinastu 12 mánaðirnar verið fyri kynsligari happing á tínum arbeiðsplássi?' býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Prosent |
|---|---|---|
| Maður | 53 | 2,6 |
| Kvinna | 235 | 8,3 |

Talva 3.6.4.4 vísir úrslitini fyri *Kynsliga happing* býtt upp í aldursbólkar. Í hesum førinum benda úrslitini á, at ein týðiligt størri partur av svarpersónum undir 25 ár hava svarað 'Ja' til spurningin um kynsliga happing. Harnæst benda úrslitini á, at elstu svarpersónarnir yvir 65 ár tykjast at vera tann aldursbólkurin, har fægst hava sagt frá kynsligari happing (2,2 prosent). Sum heild, benda úrslitini á, at kynslig happing kemur oftast fyri millum yngri arbeiðstakarar í Føroyum, og í minni mun tykjast at koma fyri millum teir eldru. Ískoytisgreining vísir, at munirnir millum aldursbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir ($p<.0001$).

**Talva 3.6.4.4: Partur, sum gevur játtandi svar upp á spurningin 'Hevur tú seinastu 12 mánaðirnar verið fyri kynsligari happing á tínum arbeiðsplássi?' býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Prosent |
|---|---|---|
| < 25 ár | 38 | 17,1 |
| 25 - 34 ár | 75 | 10,9 |
| 35 - 44 ár | 82 | 7,5 |
| 45 - 54 ár | 58 | 4,4 |
| 55 – 64 ár | 27 | 2,3 |
| > 65 ár | 8 | 2,2 |

Talva 3.6.4.5 vísir úrslitini fyri *Kynsliga happing* býtt upp í 11 ymiskar starvsbólkar og vísir harumframt, hvar starvsbólkarnir liggja samanborið við úrslitið fyri allar svarpersónar í kanningini. Í hesum førinum benda úrslitini á, at 12,3 prosent av svarpersónunum í 'Arbeiði á heilsuøkinum' hava sagt frá kynsligari happing á arbeiðsplássinum, og er sostatt tann starvsbólkurin, har størst partur av svarpersónum hava sagt frá kynsligari happing. Eisini sæst í úrslitunum, at ein størri partur av svarpersónum í 'Tænastu- og søluarbeiði' (11,0 prosent) hava sagt frá kynsligari happing á arbeiðsplássinum. Til endans benda úrslitini á, at 1,7 prosent av svarpersónunum í 'Leiðsluarbeiði' hava sagt frá kynsligari happing, og er sostatt tann starvsbólkurin, har fægst svarpersónar siga seg hava upplivað kynsliga happing. Ískoytisgreining vísir, at munirnir millum teir 11 starvsbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 3.6.4.5: Partur, sum gevur játtandi svar upp á spurningin 'Hevur tú seinastu 12 mánaðirnar verið fyri kynsligari happing á tínum arbeiðsplássi?' býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Prosent |
|---|---|---|
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 72 | 12,3 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 36 | 11,0 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 7 | 10,3 |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 12 | 7,1 |
| 11 Annað handaligt arbeiði | 15 | 7,0 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 49 | 6,0 |
| **Partur av svarpersónum úr Føroyum** | **312** | **5,9** |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 29 | 4,9 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 11 | 4,9 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 29 | 4,5 |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 19 | 2,6 |
| 1 Leiðsluarbeiði | 8 | 1,7 |

Viðmerking: **Grøna markingin** merkir, at tað er ein heldur lítil partur av svarpersónum úr avvarðandi starvsbólki, sum sigur frá kynsligari happing í arbeiðinum samanborið við partin av øllum svarpersónum úr Føroyum. **Reyðu markingarnar** merkja, at tað er ein størri partur av svarpersónum í avvarðandi starvsbólki, sum sigur frá kynsligari happing í arbeiðinum samanborið við partin av øllum svarpersónum úr Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Kynsligari happing***

Úrslitini fyri *Kynsliga happing* vístu, at 5,9 prosent av svarpersónunum úr føroysku kanningini siga frá at hava upplivað kynsliga happing í arbeiðinum. Úrslitini benda sostatt á eina nakað størri útbreiðslu av kynisligari happing millum føroyskar arbeiðstakarar enn millum arbeiðstakarar í Danmark, har 2,4 prosent av svarpersónunum í danska tilvísingarbólkinum hava sagt seg verið fyri kynsligari happing í sambandi við arbeiðið.
Úrslitini vístu víðari, at flestu svarpersónar siga frá, at tað er ein starvsfelagi, sum hevur verið atvoldin til, at teir hava verið fyri kynsligari happing, og síðani næstflest, sum siga frá, at tað hava verið viðskiftafólk, klientar, sjúklingar, næmingar, avvarðandi við meira, sum hava verið atvold til ágangin.

Úrslitini vístu eisini her, at tað í týðiligan mun eru fleiri kvinnuligir enn mannligir svarpersónar, sum hava verið fyri kynsligari happing. Upp á tvørs av aldursbólkunum bendu úrslitini á, at tað eru flest svarpersónar undir 25 ár, sum hava upplivað kynsliga happing í arbeiðinum, har fægst svarpersónar yvir 65 ár hava sagt frá kynsligari happing. Býtt upp í starvsbólkarnar bendu úrslitini á, at svarpersónar í starvsbólkunum 'Tænastu- og søluarbeiði' og 'Arbeiði á heilsuøkinum' siga frá regluligastu útbreiðsluni av kynsligari happing í arbeiðinum, meðan vit finna minstu útbreiðsluna millum svarpersónar í 'Leiðsluarbeiði'.

## 3.6.5 Mismunur/vánalig viðferð

*Mismunur/vánalig viðferð* snýr seg um, hvørt arbeiðstakarar, innan 12 teir seinastu mánaðirnar undan luttøkuni í spurnakanningini hava verið fyri mismuni/vánaligari viðferð í sambandi við teirra arbeiði. Mismunur/vánalig viðferð hendir, tá ein persónur ella ein bólkur verður neiligt viðfarnir orsakað av fordómum móti teimum. Hesir fordómar kunnu vera grundaðir á eitt ella fleiri eyðkenni við persóninum ella bólkinum (108). Í hesum samanhanginum spyrja vit um mismun/vánaliga viðferð av persónum ella bólkum, sum er lýst við kyni, aldri, uppruna, átrúnaði, heilsustøðu ella kynsligari orientering í huga.

Granskingin peikar á, at mismunur/vánalig viðferð á arbeiðsplássinum millum annað hongur saman við lægri trivnaði millum arbeiðstakararnar og lægri nøgdsemi við sálarliga arbeiðsumhvørvið á arbeiðsplássinum (22). Ein nýggjari kanning hevur eisini staðfest, at mismunur/vánalig viðferð á arbeiðsplássinum øki um vandan fyri at menna hækkað eyðkenni upp á tunglyndi (94).

Vit máta títtleikan av mismuni/vánaligari viðferð við spurninginum í talvu 3.6.5.1. Talvan vísir býtið av svørum í prosentum fyri allar svarpersónar í føroyska kanningarbólkinum og fyri svarpersónarnir í danska tilvísingarbólkinum.

Úrslitini vísa, at tað samanlagt eru 11,0 prosent av svarpersónunum úr føroyska kanningarbólkinum, sum siga frá at hava upplivað mismun/vánaliga viðferð í sambandi við arbeiðið, meðan tað samanlagt eru 6,7 prosent av svarpersónunum úr donsku tilvísingarkanningini, sum hava sagt frá mismuni/vánaligari viðferð. Úrslitini benda sostatt á eina størri útbreiðslu av mismuni/vánaligari viðferð millum arbeiðstakarar í Føroyum enn millum arbeiðstakarar í Danmark.

**Talva 3.6.5.1: Býti av svørum í prosentum fyri spurningin 'Hevur tú seinastu 12 mánaðirnar verið fyri mismuni ella ert tú illa viðfarin á tínum starvsplássi (vegna t.d. kyn, aldur, uppruna, átrúnað, politiska sannføring, heilsu, brek ella kynsliga sannføring)?'**

| | Nei | Ja, men sjáldan | Ja, mánaðarliga | Ja, vikuliga | Ja, dagliga ella næstan dagliga |
|---|---|---|---|---|---|
| Partur av svarpersónum úr Føroyum | 89,0 | 7,4 | 1,8 | 0,8 | 1,0 |
| Partur av svarpersónum úr Danmark | 93,2 | 4,8 | 1,1 | 0,4 | 0,4 |

Tað eru tilsamans 586 svarpersónar úr føroyska kanningarbólkinum, sum hava svarað 'Ja' til at hava verið fyri mismuni/vánaligari viðferð á arbeiðsplássinum. Svarpersónar, sum søgdu seg hava verið fyri mismuni/vánaligari viðferð, fingu eisini henda spurningin 'Hvør gjørdi mismun ella fór illa við tær?'. Talva 3.6.5.2 vísir býtið av svørum upp á henda spurning.

Í hesum førinum benda úrslitini á, at mismunur/vánalig viðferð í mest mun tykist ganga fyri seg innanhýsis á arbeiðsplássinum, av tí at flest svarpersónar hava sagt seg vera fyri

vánaligari viðferð av ávikavist starvsfeløgum (44,4 prosent), nærmasta leiðara (35,0 prosent) og ovastu leiðslu (33,1 prosent). Aftur eru tað fægst, sum siga frá, at tey hava verið fyri neiligari atferð frá starvsfólki, tey eru leiðari hjá, har úrslitini benda á, at 3,8 prosent hava upplivað at vera fyri mismuni av einum starvsfólki, tey eru leiðari hjá. Av tí, at tað hevur verið møguligt at geva fleiri svør, er samlaða prosenttalið meira enn 100.

**Talva 3.6.5.2: Býti av svørum í prosentum fyri spurningin 'Hvør gjørdi mismun ella fór illa við tær?'**

| | Tal | Prosent |
|---|---|---|
| Ovasta leiðsla | 194 | 33,1 |
| Nærmasti leiðari | 205 | 35,0 |
| Starvsfelagar | 260 | 44,4 |
| Starvsfólk, eg eri leiðari hjá | 22 | 3,8 |
| Viðskiftafólk, klientar, sjúklingar, næmingar, avvarðandi við meira | 69 | 11,8 |

Í talvunum niðan fyri vera úrslitini víst fyri *Mismunur/vánalig viðferð* býtt upp í ávikavist kyn, aldur og starvsbólkar.

Talva 3.6.5.3 vísir úrslitini fyri *Mismunur/vánalig viðferð* býtt upp í kyn. Í hesum førinum benda úrslitini á, at tað er týðiliga meginparturin av kvinnuligum svarpersónum, sum hava sagt frá mismuni/vánaligari viðferð á arbeiðsplássinum, har 13,4 prosent hava svarað 'Ja' til spurningin um mismuni/vánaligari viðferð. Harafturímóti hava 8,4 prosent av mannligu svarpersónunum sagt frá, at teir hava verið fyri mismuni/vánaligari viðferð á arbeiðsplássinum. Ein ískoytisgreining vísir harafturat, at munurin millum menn og kvinnur er hagfrøðiliga signifikantur ($p<.0001$).

**Talva 3.6.5.3: Partur, sum gevur játtandi svar upp á spurningin 'Hevur tú seinastu 12 mánaðirnar verið fyri fyri mismuni, ella ert tú illa viðfarin á tínum arbeiðsplássi?' býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Prosent |
|---|---|---|
| Maður | 173 | 8,4 |
| Kvinna | 378 | 13,4 |

Talva 3.6.5.4 vísir úrslitini fyri *Mismunur/vánalig viðferð* býtt upp í teir ymisku aldursbólkarnar. Í hesum førinum benda úrslitini á, at ein størri partur av svarpersónum undir 25 ár hava sagt frá mismuni/vánaligari viðferð á arbeiðsplássinum samanborið við hinar aldursbólkarnar, har 22,2 prosent av svarpersónunum undir 25 ár hava svarað 'Ja' til spurningin um mismun/vánaliga viðferð. Úrslitini benda harumframt á, at tað eru fægst svarpersónar yvir 65 ár, sum hava sagt frá mismuni/vánaligari viðferð, har 6,0 prosent í hesum aldursbólkinum siga seg hava verið fyri mismuni/vánaligari viðferð. Úrslitini her vísa sama rák, sum úrslitini fyri *Harðskap* og *Kynsliga happing*, har ein týðiliga størri partur av teimum yngru svarpersónunum uppliva at hava verið fyri hesum neiligu gerðunum í sambandi við arbeiðið. Ein ískoytisgreining vísir, at munirnir millum aldursbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir ($p<.0001$).

**Talva 3.6.5.4: Partur, sum gevur játtandi svar upp á spurningin 'Hevur tú seinastu 12 mánaðirnar verið fyri fyri mismuni, ella ert tú illa viðfarin á tínum arbeiðsplássi?' býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Prosent |
|---|---|---|
| < 25 ár | 49 | 22,2 |
| 25 - 34 ár | 112 | 16,3 |
| 35 - 44 ár | 147 | 13,3 |
| 45 - 54 ár | 129 | 9,9 |
| 55 - 64 ár | 92 | 7,7 |
| > 65 ár | 22 | 6,0 |

Talva 3.6.5.5 vísir úrslitini fyri *Mismunur/vánalig viðferð* býtt upp í teir 11 ymisku starvsbólkarnar og vísir harumframt, hvar starvsbólkarnir liggja samanborið við úrslitið fyri allar svarpersónar í kanningini. Úrslitini benda á, at 16,7 prosent av svarpersónunum í 'Annað handaligt arbeiði' hava sagt seg vera fyri mismuni/vánaligari viðferð í arbeiðinum, og er soleiðis tann starvsbólkurin, har størst partur av svarpersónum hava sagt frá mismuni/vánaligari viðferð. Harnæst benda úrslitini á, at fægst svarpersónar innan fyri starvsbólkarnar 'Leiðsluarbeiði' (5,9 prosent) og 'Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap' (5,8 prosent) hava sagt frá mismuni/vánaligari viðferð á arbeiðsplássinum. Ískoytisgreining vísir, at munirnir millum starvsbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p=0.0003).

**Talva 3.6.5.5: Partur, sum gevur játtandi svar upp á spurningin 'Hevur tú seinastu 12 mánaðirnar verið fyri fyri mismuni, ella ert tú illa viðfarin á tínum arbeiðsplássi?' býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Prosent |
|---|---|---|
| 11 Annað handaligt arbeiði | 36 | 16,7 |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 25 | 14,9 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 46 | 14,2 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 114 | 13,9 |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 68 | 11,4 |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 64 | 11,0 |
| **Partur av svarpersónum úr Føroyum** | **586** | **11,0** |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 76 | 10,4 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 23 | 10,2 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 64 | 9,9 |
| 1 Leiðsluarbeiði | 28 | 5,9 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 4 | 5,8 |

Viðmerking: **Grøna markingin** merkir, at tað er ein heldur lítil partur av svarpersónum úr avvarðandi starvsbólki, sum sigur frá mismuni/vánaligari viðferð í arbeiðinum samanborið við partin av øllum svarpersónum úr Føroyum. **Reyðu markingarnar** merkja, at tað er ein størri partur av svarpersónum í avvarðandi starvsbólki, sum sigur frá mismuni/vánaligari viðferð í arbeiðinum samanborið við partin av øllum svarpersónum úr Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Mismuni/vánaligari viðferð***

Úrslitini fyri *Mismunur/vánalig viðferð* vístu, at 11,0 prosent av svarpersónunum siga frá at hava upplivað mismun/vánaliga viðferð í sambandi við arbeiðið. Úrslitini benda sostatt á eina størri útbreiðslu av mismuni/vánaligari viðferð millum arbeiðstakarar í Føroyum enn millum arbeiðstakarar í Danmark, har 6,7 prosent av svarpersónunum í danska tilvísingarbólkinum hava sagt seg verið fyri mismuni/vánaligari viðferð í arbeiðinum.

Úrslitini í hesari kanningini vístu harumframt, at mismunur/vánalig viðferð í arbeiðinum í mestan mun tykjast at koma fyri innanhýsis, har flest svarpersónar hava sagt seg vera fyri mismuni/vánaligari viðferð av einum starvsfelaga. Harnæst hevur ein stórur partur av svarpersónunum eisini sagt seg verið fyri mismuni/vánaligari viðferð av antin nærmastu ella ovastu leiðslu.

Úrslitini bendu harafturat á, at tað eru fleiri kvinnur enn menn, sum hava upplivað mismun/vánaliga viðferð í arbeiðinum. Harnæst bendu úrslitini á, at tað flestir svarpersónar undir 25 ár, sum hava upplivað mismun/vánaliga viðferð, meðan tað er tann minsti parturin av svarpersónum yvir 65 ár, sum hava upplivað mismun/vánaliga viðferð í arbeiðinum. Millum starvsbólkarnar, er tað størsti parturin av svarpersónum í 'Annað handaligt arbeiði', sum hava sagt frá at hava upplivað mismun/vánaliga viðferð í arbeiðinum, meðan tað er minsti parturin av svarpersónum í 'Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap', sum hava sagt frá mismuni/vánaligari viðferð í arbeiðinum.

### 3.6.6 Chikana

*Chikana* snýr seg um, hvørt arbeiðstakararnir, innan fyri 12 teir seinastu mánaðirnar undan luttøkuni í spurnakanningini, hava upplivað at verið fyri chikanu. Chikana er eitt slag av ósemju, sum hendir millum tveir ella fleiri persónar og kemur oftast fyri í arbeiðinum, har arbeiðstakarar hava samband við viðskiftafólk, klientar, sjúklingar ella næmingar. Chikana hendir, tá ein persónur er fyri ágangi, hóttanum ella forfylging av persónum, viðkomandi hevur havt samband við gjøgnum sítt arbeiði – t.d. viðskiftafólk, klientar, sjúklingar ella avvarðandi. Hetta slagið av chikanu snýr seg sostatt ikki um starvsfelagar, leiðslu ella starvsfólk, sum mann er leiðari fyri, men bara uttanhýsis sambond. Evnið *Chikana* hevur fingið nakað av uppmerksemi seinastu árini, har arbeiðstakarar hava upplivað chikanu, m.a. við at verða leitaðir upp uttan fyri teirra arbeiðspláss ella við at verða 'úthongdir' á sosialu miðlunum á netinum (22).

Vit máta títtleikan av chikanu við spurninginum í talvu 3.6.6.1. Talvan vísir býtið av svørum í prosentum fyri allar svarpersónar í føroyska kanningarbólkinum og fyri danskar svarpersónar í danska tilvísingarbólkinum.

Úrslitini benda á, at tað samanlagt eru 8,1 prosent av svarpersónunum úr føroysku kanningini, sum siga frá at hava upplivað chikanu í sambandi við arbeiðið, meðan tað samanlagt eru 10,6 prosent av svarpersónunum úr donsku tilvísingarkanningini, sum hava sagt frá chikanu. Úrslitini benda sostatt á eina minni útbreiðslu av chikanu millum arbeiðstakarar í Føroyum enn millum danskar arbeiðstakarar.

**Talva 3.6.6.1: Býti av svørum í prosentum fyri spurningin 'Hevur tú seinastu 12 mánaðirnar verið fyri ágangi (chikanu) av viðskiftafólki, sjúklingum, næmingum ella avvarðandi (at næmingum, viðskiftafólki ella sjúklingum) í samband við títt arbeiði?'**

| | Nei | Ja, men sjáldan | Ja, mánaðarliga | Ja, vikuliga | Ja, dagliga ella næstan dagliga |
|---|---|---|---|---|---|
| Partur av svarpersónum úr Føroyum | 92,0 | 6,5 | 0,8 | 0,5 | 0,3 |
| Partur av svarpersónum úr Danmark | 89,4 | 7,5 | 1,6 | 0,9 | 0,6 |

Tað eru tilsamans 426 svarpersónar úr føroyska kanningarbólkinum, sum hava svarað 'Ja' til at hava verið fyri chikanu í sambandi við arbeiðið. Teir svarpersónar, sum søgdu seg hava verið fyri chikanu, fingu eisini henda spurningin 'Hvussu er ágangurin farin fram?'.

Talva 3.6.6.2 vísir býtið av svørum á spurninginum um, hvussu chikanan fór fram. Úrslitini benda á, at 24,6 prosent av teimum 426 svarpersónunum, sum hava upplivað chikanu, hava sagt frá, at tey eru leitað upp á arbeiðsplássinum, meðan tað sum heild eru fægst, sum siga frá, at tey eru leitað upp uttan fyri arbeiðsplássið (7,7 prosent). Tað eru 13,6 prosent av svarpersónunum, sum siga frá, at tey hava upplivað chikanu á sosialu miðlunum á netinum, meðan 39,4 prosent siga frá, at tey hava upplivað chikanu á telefon, SMS-boðum, telduposti ella brævi. Sum heild eru tað flest, sum siga frá, at tey

hava upplivað chikanu á annan hátt (41,3 prosent). Av tí, at tað hevur verið møguligt at geva fleiri svør, er samlaða prosenttalið meira enn 100.

**Talva 3.6.6.2: Býti av svørum upp á spurningin 'Hvussu er ágangurin farin fram?'**

| | Tal | Prosent |
|---|---|---|
| Eg eri leitað/ur upp á mínum arbeiðsplássi | 105 | 24,6 |
| Eg eri leitað/ur upp uttan fyri mítt arbeiðspláss, t.d. heima ella úti í býnum | 33 | 7,7 |
| Eg havi verið fyri ágangi gjøgnum sosialar miðlar á internetinum | 58 | 13,6 |
| Eg havi verið fyri ágangi umvegis telefon, sms boð, teldubrøv ella brøv | 168 | 39,4 |
| Á annan hátt | 176 | 41,3 |

Í talvunum niðanfyri vera úrslitini víst fyri chikanu býtt upp í ávikavist kyn, aldur og starvsbólkar.

Talva 3.6.6.3 vísir úrslitini fyri chikanu býtt upp í kyn. Í hesum førinum benda úrslitini á, at tað er týðiliga størri partur av kvinnuligum svarpersónum, sum hava sagt frá chikanu í sambandi við arbeiðið (9,4 prosent), meðan 6,3 prosent av mannligum svarpersónum hava sagt frá, at teir hava verið fyri chikanu í sambandi við teirra arbeiði. Ein ískoytisgreining vísir harafturat, at munurin millum menn og kvinnur er hagfrøðiliga signifikantur (p<.0001).

**Talva 3.6.6.3: Partur, sum gevur játtandi svar upp á spurningin Hevur tú seinastu 12 mánaðirnar verið fyri ágangi (chikanu) av viðskiftafólki, sjúklingum, næmingum ella avvarðandi (at næmingum, viðskiftafólki ella sjúklingum) í samband við títt arbeiði?' býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Prosent |
|---|---|---|
| Maður | 129 | 6,3 |
| Kvinna | 263 | 9,4 |

Talva 3.6.6.4 vísir úrslitini fyri chikanu býtt upp í teir ymisku aldursbólkarnir. Í hesum førinum benda úrslitini á, at ein størri partur av svarpersónum í aldrinum 45 til 54 ár hava sagt frá chikanu í sambandi við arbeiðið samanborið við hinar aldursbólkarnar, har 9,6 prosent av svarpersónunum í hesum aldursbólkinum hava svarað 'Ja' til spurningin um chikanu. Úrslitini benda harumframt á, at tað eru fægst svarpersónar yvir 65 ár, sum hava sagt frá chikanu, har 4,7 prosent í hesum aldursbólkinum siga seg hava verið fyri chikanu. Ein ískoytisgreining vísir, at munirnir millum aldursbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p=0.0177).

**Talva 3.6.6.4: Partur, sum gevur játtandi svar upp á spurningin 'Hevur tú seinastu 12 mánaðirnar verið fyri ágangi (chikanu) av viðskiftafólki, sjúklingum, næmingum ella avvarðandi (at næmingum, viðskiftafólki ella sjúklingum) í samband við títt arbeiði?' býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Prosent |
|---|---|---|
| < 25 ár | 16 | 7,4 |
| 25 - 34 ár | 44 | 6,4 |
| 35 - 44 ár | 98 | 8,9 |
| 45 - 54 ár | 125 | 9,6 |
| 55 – 64 ár | 92 | 7,7 |
| > 65 ár | 17 | 4,7 |

Talva 3.6.6.5 vísir úrslitini fyri chikanu býtt upp í teir 11 ymisku starvsbólkarnar og vísir harumframt, hvar starvsbólkarnir liggja samanborið við úrslitið fyri allar svarpersónar í kanningini. Úrslitini benda á, at 13,3 prosent av svarpersónunum í 'Arbeiði á heilsuøkinum' hava sagt seg verið fyri chikanu í sambandi við arbeiðið og er soleiðis tann starvsbólkurin, har størst partur av svarpersónum hava sagt frá chikanu. Eisini ein størri partur av svarpersónum í 'Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði' hava sagt seg verið fyri chikanu (11,2 prosent). Hesi úrslitini koma ikki óvart, av tí at tað vanliga eru starvsbólkar við regluligum sambandi við viðskiftafólk, klientar, borgarar, næmingar, avvarðandi v.m., sum eru fyri hesum slagi av neiligum gerðum. Tað sæst t.d. eisini ein størri útbreiðsla millum svarpersónar í 'Tænastu- og søluarbeiði' (9,0 prosent) samanborið við hinar starvsbólkarnar. Øvut neiligum gerðum sum *Harðskapur, Happing, Kynslig happing* og *Mismunur/vánalig viðferð,* benda úrslitini her á, at eitt sindur størri partur av svarpersónum í 'Leiðsluarbeiði' siga frá chikanu (9,4 prosent).

Harnæst benda úrslitini á, at tað eru ov fá svør innan fyri starvsbólkarnar 'Handverkaraarbeiði' og 'Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap', og vit kunnu tí ikki greiða frá neyvu úrslitunum fyri hesar starvsbólkar. Tað sær sostatt út til, at chikana kemur minni fyri í teimum báðum starvsbólkunum. Ískoytisgreining vísir, at munirnir millum starvsbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir ($p<.0001$).

**Talva 3.6.6.5: Partur, sum gevur játtandi svar upp á spurningin 'Hevur tú seinastu 12 mánaðirnar verið fyri ágangi (chikanu) av viðskiftafólki, sjúklingum, næmingum ella avvarðandi (at næmingum, viðskiftafólki ella sjúklingum) í samband við títt arbeiði?' býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Prosent |
|---|---|---|
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 77 | 13,3 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 91 | 11,2 |
| 1 Leiðsluarbeiði | 45 | 9,4 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 29 | 9,0 |
| **Partur av svarpersónum úr Føroyum** | **426** | **8,1** |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 49 | 7,6 |
| 11 Annað handaligt arbeiði | 15 | 7,1 |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 36 | 6,0 |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 35 | 4,8 |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 8 | 4,8 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | <5 | * |
| 9 Handverkaraarbeiði | <5 | * |

Viðmerking: **Grønu markingarnar** merkja, at tað er ein heldur lítil partur av svarpersónum úr avvarðandi starvsbólki, sum sigur frá chikanu samanborið við partin av øllum svarpersónum úr Føroyum. **Reyðu markingarnar** merkja, at tað er ein størri partur av svarpersónum í avvarðandi starvsbólki, sum sigur frá chikanu samanborið við partin av øllum svarpersónum úr Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Chikanu***
Úrslitini fyri *Chikanu* vístu, at 8,1 prosent av svarpersónunum úr føroysku kanningini hava sagt seg hava upplivað chikanu í sambandi við arbeiðið, meðan 10,6 prosent av svarpersónunum í donsku tilvísingarkanningini hava sagt frá chikanu í sambandi við arbeiðið. Úrslitini merkja sostatt, at tað er minni útbreiðsla av chikanu millum arbeiðstakarar í Føroyum enn millum arbeiðstakarar í Danmark.

Harumframt bendu úrslitini á, at flest svarpersónar hava sagt frá, at chikanan er farin fram á annan hátt, og harnæst at chikanan er farin fram á telefon, SMS-boðum, telduposti ella brævi.
Harumframt siga uml. 25 prosent eisini frá, at tey eru leitað upp á arbeiðsplássinum.

Til endans bendu úrslitini á, at tað er ein størri partur av kvinnum, sum siga frá at hava upplivað chikanu á arbeiðsplássinum. Og harnæst bendu úrslitini á, at tað er størsti parturin av svarpersónum í aldrinum 45 til 54 ár, sum siga frá, at tey hava upplivað chikanu í sambandi við arbeiðið. Millum starvsbólkarnar bendu úrslitini á, at størsti parturin av svarpersónum, sum hava upplivað chikanu eru í 'Arbeiði á heilsuøkinum', og næststørsti parturin av svarpersónum eru í 'Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði', sum hava sagt frá chikanu í arbeiðinum.

Samanumtikið bendu úrslitini fyri *Neiliga atferð* á, at tað sum heild er ein stór útbreiðsla av øllum neiligum gerðum millum svarpersónar í ávikavist 'Arbeiði á heilsuøkinum' og

’Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði’, og serliga fyri *Hóttanir, Harðskapur* og *Chikana*. Samanumtikið bendu úrslitini eisini á, at svarpersónar í ’Tænastu- og søluarbeiði’ sum heild eisini tykjast at vera meira fyri neiligum gerðum samanborið við nógvar av hinum starvsbólkunum. Harumframt bendu úrslitini á, at tann størsta útbreiðslan av happing og chikanu sæst í starvsbólkunum 'Annað handaligt arbeiði' og 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði', meðan svarpersónarnir í ’Handverkaraarbeiði’ og ’Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap’ sum heild uppliva eina minni útbreiðslu av øllum neiligum gerðum fyriuttan happing, um samanborið verður við hinar starvsbólkarnar.

Harnæst bendu úrslitini á eina størri útbreiðslu av øllum neiligum gerðum millum kvinnuligar svarpersónar. Aftur kann frágreiðingin til hetta úrslitið vera, at kvinnuligir arbeiðstakarar í Føroyum ofta eru umboðaðar í arbeiði, har tað eru tøtt sambond við viðskiftafólk, klientar, næmingar, avvarðandi v.m., og har vandin fyri serliga harðskapi og hóttanum er hægri. Úrslitini vístu tó eisini, at kvinnuligir svarpersónar eisini í størri mun siga frá um hendingar sum *Happing, Kynsliga happing* og *Mismun/vánaliga viðferð*, sum kann sigast vera minni tengt at slagi av arbeiði. Úrslitini fyri *Neiliga atferð* vísa soleiðis, at kvinnuligir arbeiðstakarar í Føroyum sum heild tykjast vera í hægri vanda fyri at uppliva neiligar gerðir í sambandi við teirra arbeiði enn menn.

Úrslitini fyri økið *Neilig atferð* vístu upp á tvørs av aldursbólkunum eitt sindur meira skiftandi úrslit, men við einum ráki, sum í stóran mun vísti, at tað er ein yvirskipað størri útbreiðsla av neiligum gerðum millum yngri svarpersónar, og týðiliga minni útbreiðsla av neiligum gerðum millum teir elstu svarpersónarnar yvir 65 ár.

## 3.7 Trivnaður í arbeiðinum

Innan fyri økið *Trivnaður í arbeiðinum* er fokus á, hvussu arbeiðstakarar sum heild uppliva arbeiðið, harímillum tær reaksjónir teir kunnu hava orsakað av, hvussu teir uppliva arbeiðsstøðuna og sálarliga og sosiala arbeiðsumhvørvið á arbeiðsplássinum.

Upplivingin hjá arbeiðstakarum av trivnaði í arbeiðinum er tengt at viðurskiftum í sálarliga og sosiala arbeiðsumhvørvinum sum t.d. leiðslugóðsku, ávirkan, greidleika um leiklutir og kensluligum krøvum (25, 83) og hongur harumframt saman við m.a. drúgvari sjúkufráveru, arbeiðssteðgi og sálarligum heilsutrupulleikum (8, 24, 109-111).

Spurnakanningin lýsir hesi evnini, sum endurspegla ymisk sjónarmið í økinum *Trivnaður*:

- Uppliving av meining í arbeiðinum
- Hvussu arbeiðstakarin tekur lut á arbeiðsplássinum
- Hugbinding í arbeiðinum
- Óvissa í starvssetanini
- Strongd
- Nøgdsemi við arbeiðið
- Nøgdsemi við sálarliga arbeiðsumhvørvið
- Tvídráttir millum arbeiðslív og heimalív

### 3.7.1 Meining í arbeiðinum

Arbeiðstakarar uppliva *Meining í arbeiðinum*, tá teirra arbeiðsuppgávur hava eitt týðandi endamál, og tá tær kennast umráðandi fyri samleikan og sjálvsfatanina hjá arbeiðstakaranum (112, 113). *Meining í arbeiðinum* snýr seg eisini um, hvørt arbeiðstakararnir uppliva, at teirra arbeiðsuppgávur geva meining, eru áhugaverdar, geva íblástur og fremja motivatión, arbeiðsgleði og sjálvsálit.

Upplivingin av meining í arbeiðinum hongur saman við viðurskiftum í sálarliga arbeiðsumhvørvinum, sum t.d. leiðslugóðsku, ávirkan, greidleika um leiklutir og kenslulig krøv (25, 83). Kanningar hava áður eisini staðfest, at eitt høgt stigatal á stiganum fyri *Meining í arbeiðinum* hongur saman við tí, at vandin fyri drúgvari sjúkufráveru minkar (114), fyritíðareftirløn (115) og arbeiðssteðgi (24). Ein kanning hevur harafturat staðfest, at upplivingin av meining í arbeiðinum hongur saman við sálarligu heilsuni hjá arbeiðstakarunum (110). Til endans vísir ein nýliga gjørd donsk ritgerð, at arbeiðstakarar, sum uppliva høgt støði av meining í arbeiðinum, eru í minni vanda fyri drúgvari sjúkufráveru og fyri at fáa sálarligar heilsutrupulleikar (1).

Vit máta *Meining í arbeiðinum* við spurningunum í talvu 3.7.1.1. Talvan vísir býtið av svørum í prosentum fyri allar svarpersónar í kanningini.

**Talva 3.7.1.1: Býti av svørum í prosentum fyri stigan *Meining í arbeiðinum***

| | Í sera lítlan mun | Í lítlan mun | Partvíst | Í stóran mun | Í sera stóran mun |
|---|---|---|---|---|---|
| Kennir tú, at tú ert upptikin av og hugsavnað/ur um títt arbeiði? | 1,2 | 3,8 | 23,3 | 55,8 | 15,8 |
| Geva tínar arbeiðsuppgávur meining? | 1,2 | 2,3 | 18,1 | 52,6 | 25,8 |
| Heldur tú, at arbeiðsuppgávurnar geva íblástur og eru áhugaverdar? | 3,5 | 7,8 | 32,6 | 41,3 | 14,8 |
| Gevur títt arbeiði tær sjálvsálit og arbeiðsgleði? | 3,6 | 7,4 | 28,8 | 42,9 | 17,3 |

Svørini frá teimum fýra spurningunum í talvu 3.7.1.1 eru umgjørd til ein stiga frá 0-100, har 100 bendir á, at mann í sera stóran mun upplivir meining í arbeiðinum.

Talva 3.7.1.2 vísir, at føroysku svarpersónarnir hava eitt miðaltal upp á 68,7 á stiganum um *Meining í arbeiðinum,* meðan arbeiðstakarar úr danska tilvísingarbólkinum hava eitt miðaltal upp á 71,2. Føroysku svarpersónarnir meta tískil teirra uppliving av meining í arbeiðinum at vera eitt sindur lægri enn danski tilvísingarbólkurin.

**Talva 3.7.1.2: Miðaltal fyri stigan *Meining í arbeiðinum***

| Meining í arbeiðinum | Miðaltal |
|---|---|
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum | 68,7 |
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Danmark | 71,2 |

Í talvunum niðanfyri vera úrslitini víst fyri *Meining í arbeiðinum* býtt upp í ávikavist kyn, aldur og starvsbólk.

Talva 3.7.1.3 vísir úrslitini fyri stigan um *Meining í arbeiðinum* býtt upp í menn og kvinnur. Úrslitini benda á, at tað bert er ein lítil munur á, hvussu mannligir og kvinnuligir svarpersónar hava mett sína uppliving av meining í arbeiðinum. Ein ískoytisgreining vísir harumframt, at munurin millum menn og kvinnur ikki er hagfrøðiliga signifikantur (p=0.0620).

**Talva 3.7.1.3: Miðaltal fyri stigan *Meining í arbeiðinum* býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| Maður | 2257 | 68,4 |
| Kvinna | 3079 | 69,3 |

Talva 3.7.1.4 vísir úrslitini fyri stigan um *Meining í arbeiðinum* býtt upp í ymiskar aldursbólkar. Í hesum førinum benda úrslitini á, at elstu svarpersónarnir yvir 65 ár í stóran mun uppliva meining í arbeiðinum og hava harumframt hægsta miðaltalið á stiganum (71,0 stig) samanborið við hinar bólkarnar. Øvut hesum hava yngstu svarpersónarnir undir 25 ár tað lægsta miðaltalið á stiganum (63,6 stig), og meta sostatt teirra uppliving av meining í arbeiðinum at vera lægri enn hinir aldursbólkarnir. Ískoytisgreining vísir harafturat, at munirnir millum aldursbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 3.7.1.4: Miðaltal fyri stigan *Meining í arbeiðinum* býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| < 25 ár | 280 | 63,6 |
| 25 - 34 ár | 764 | 68,8 |
| 35 - 44 ár | 1181 | 67,8 |
| 45 - 54 ár | 1416 | 69,2 |
| 55 – 64 ár | 1282 | 70,0 |
| > 65 ár | 408 | 71,0 |

Talva 3.7.1.5 vísir úrslitini fyri stigan um *Meining í arbeiðinum* býtt upp í 11 ymiskar starvsbólkar og vísir harumframt, hvar á stiganum hesir starvsbólkar liggja í mun til miðaltalið fyri allar svarpersónar í kanningini. Úrslitini benda á, at svarpersónar í 'Leiðsluarbeiði' hava tað hægsta miðaltalið á stiganum (74,2 stig), og liggja harumframt í minsta lagi fimm stig betri enn miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini. Harnæst benda úrslitini á, at svarpersónar í 'Arbeiði á heilsuøkinum' eisini hava eitt høgt stigatal á stiganum um *Meining í arbeiðinum* (73,4 stig). Teir báðir starvsbólkarnir meta sostatt teirra uppliving av meining í arbeiðinum at vera hægri og meira jaliga enn hinir starvsbólkarnir.

Harafturímóti benda úrslitini á, at svarpersónar í 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' og 'Annað handaligt arbeiði' hava lægstu miðaltøl á stiganum við einum stigatali upp á 57,4. Arbeiðstakarar í hesum starvsbólkum tykjast sostatt at meta meining í arbeiðinum at vera lægri enn hinir starvsbólkarnir. Saman við

svarpersónum í 'Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap' hava hesir starvsbólkar mett teirra meining í arbeiðinum meira enn fimm stig verri enn miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini. Ein ískoytisgreining vísir harafturat, at munirnir millum starvsbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 3.7.1.4: Miðaltal fyri stigan *Meining í arbeiðinum* býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| 1 Leiðsluarbeiði | 520 | 74,2 |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 636 | 73,4 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 899 | 71,9 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 679 | 71,1 |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 782 | 69,1 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 260 | 68,9 |
| **Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum** | **6124** | **68,7** |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 366 | 65,6 |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 640 | 64,7 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 79 | 63,7 |
| 11 Annað handaligt arbeiði | 239 | 57,4 |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 204 | 57,4 |

Viðmerking: Grønu markingarnar merkja, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá betri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum. Reyðu markingarnar merkja, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá verri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Meining í arbeiðinum***
Úrslitini fyri *Meining í arbeiðinum* vístu, at føroysku svarpersónarnir meta teirra uppliving av meining í arbeiðinum at vera eitt sindur lægri enn svarpersónar úr danska tilvísingarbólkinum.

Úrslitini bendu harafturat á, at tað bert er ein lítil munur á, hvussu mannligir og kvinnuligir svarpersónar hava mett sína uppliving av meining í arbeiðinum. Úrslitini bendu harafturat á, at tað eru størri munir í upplivingini av meining í arbeiðinum upp á tvørs av aldursbólkunum, meðan elstu svarpersónarnir yvir 65 ár uppliva eitt høgt støði av meining í arbeiðinum, bendu úrslitini á, at yngstu svarpersónarnir undir 25 ár uppliva meining í arbeiðinum í lægri mun samanborið við hinar aldursbólkarnar.

Til endans bendu úrslitini á stórar munir í upplivingini av meining í arbeiðinum upp á tvørs av starvsbólkum. Her bendu úrslitini á, at svarpersónar í 'Leiðsluarbeiði' uppliva eitt høgt støði av meining í arbeiðinum, og eisini meira enn fimm stig betri enn miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini. Somuleiðis sást, at svarpersónar í 'Arbeiði á heilsuøkinum' meta seg hava meining í arbeiðinum í stóran mun. Harafturímóti bendu úrslitini á, at svarpersónar í FISCO-starvsbólkunum 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði', 'Annað handaligt arbeiði' og 'Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap' meta teirra uppliving av meining í arbeiðinum

meira enn fimm stig lægri (verri) enn miðaltalið av øllum svarpersónum í føroysku kanningini.

### 3.7.2 Hvussu arbeiðstakarin tekur lut á arbeiðsplássinum

*Hvussu arbeiðstakarin tekur lut á arbeiðsplássinum* leggur dent á kensluligt tilknýti til arbeiðsplássið og hvussu arbeiðstakarin sameinir seg við arbeiðsplássið. Í grundini snýr tað seg um, hvørt arbeiðstakararnir uppliva, at arbeiðsplássið hjá teimum er eitt gott stað at arbeiða. Arbeiðstakarar, sum uppliva at vera ein partur av teirra arbeiðsplássi, eru ofta meira motiverað í sínum arbeiði, og tað kann harafturat merkja, at mann hevur eina uppliving av, at tað – at vera ein partur av arbeiðsplássinum – er í sær sjálvum løn og eitt mál (116).

Hvussu arbeiðstakarin tekur lut á arbeiðsplássinum hevur bæði týdning fyri trivnaðin og heilsuna. T.d. hevur ein kanning staðfest, at eitt lágt støði av hvussu arbeiðstakarin tekur lut á arbeiðsplássinumhongur saman við øktum vanda fyri sjúkufráveru (114), meðan ein onnur kanning hevur staðfest, at eitt lágt støði av, hvussu arbeiðstakarin tekur lut á arbeiðsplássinum hongur saman við einum øktum vanda fyri at gevast á arbeiðsplássinum (24). Til endans vísir ein nýliga gjørd donsk ritgerð, at arbeiðstakarar, sum uppliva eitt høgt støði av meining í arbeiðinum, eru í minni vanda fyri drúgvari sjúkufráveru og sálarligum heilsutrupulleikum (1).

Vit máta *Hvussu arbeiðstakarin tekur lut á arbeiðsplássinum* við spurningunum í talvu 3.7.2.1. Talvan vísir býtið av svørum í prosentum fyri allar svarpersónar í kanningini.

**Talva 3.7.2.1: Býti av svørum í prosentum fyri stigan *Hvussu arbeiðstakarin tekur lut á arbeiðsplássinum***

| | Í sera lítlan mun | Í lítlan mun | Partvíst | Í stóran mun | Í sera stóran mun |
|---|---|---|---|---|---|
| Vilt tú mæla øðrum til at søkja arbeiði á tínum arbeiðsplássi? | 5,4 | 5,7 | 21,6 | 42,1 | 25,2 |
| Fortelur tú tínum vinum, at títt arbeiðspláss er eitt gott stað at arbeiða? | 5,2 | 7,0 | 17,6 | 40,3 | 29,9 |
| Ert tú errin av at arbeiða á tínum arbeiðsplássi? | 3,0 | 5,0 | 20,1 | 41,0 | 30,9 |
| Gevur títt arbeiðspláss tær íblástur til at gera títt besta? | 3,6 | 7,5 | 22,8 | 41,2 | 25,0 |

Svørini frá teimum fýra spurningunum í talvu 3.7.2.1 eru umgjørd til ein stiga frá 0-100, har 100 bendir á, at mann í sera stóran mun upplivir at taka lut á arbeiðsplássinum.

Talva 3.7.2.2 vísir, at føroysku svarpersónarnir hava eitt miðaltal upp á 70,4 á stiganum um *Hvussu arbeiðstakarin tekur lut á arbeiðsplássinum,* meðan svarpersónar úr danska tilvísingarbólkinum hava eitt miðaltal upp á 65,8. Føroysku svarpersónarnir sýnast sostatt í størri mun at taka lut á arbeiðsplássinum enn svarpersónarnir úr danska tilvísingarbólkinum.

**Talva 3.7.2.2: Miðaltal fyri stigan *Hvussu arbeiðstakarin tekur lut á arbeiðsplássinum***

| Hvussu arbeiðstakarin tekur lut á arbeiðsplássinum | Miðaltal |
|---|---|
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum | 70,4 |
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Danmark | 65,8 |

Í talvunum niðanfyri vera úrslitini víst fyri *Hvussu arbeiðstakarin tekur lut á arbeiðsplássinum* býtt upp í ávikavist kyn, aldur og starvsbólk.

Talva 3.7.2.3 vísir úrslitini fyri stigan um *Hvussu arbeiðstakarin tekur lut á arbeiðsplássinum* býtt upp í menn og kvinnur. Úrslitini vísa, at tað bert er ein lítil munur á, hvussu mannligir og kvinnuligir svarpersónar hava mett seg at taka lut á arbeiðsplássinum. Ein ískoytisgreining vísir harumframt, at munurin millum menn og kvinnur ikki er hagfrøðiliga signifikantur (p=0.0993).

**Talva 3.7.2.3: Miðaltal fyri stigan *Hvussu arbeiðstakarin tekur lut á arbeiðsplássinum* býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| Maður | 1992 | 69,8 |
| Kvinna | 2766 | 70,9 |

Talva 3.7.2.4 vísir úrslitini fyri stigan um *Hvussu arbeiðstakarin tekur lut á arbeiðsplássinum* býtt upp í ymiskar aldursbólkar. Her vísa úrslitini, at elstu svarpersónarnir yvir 65 ár hava eitt hægri miðaltal (75,2 stig) enn hinir aldursbólkarnir. Øvut hesum hava yngstu svarpersónarnir undir 25 ár tað lægsta miðaltalið á stiganum (64,9 stig), og vísa sostatt í týðiliga minni mun luttøku á arbeiðsplássinum samanborið við hinar aldursbólkarnar. Ein ískoytisgreining vísir harafturat, at munirnir millum aldursbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 3.7.2.4: Miðaltal fyri stigan *Hvussu arbeiðstakarin tekur lut á arbeiðsplássinum* býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| < 25 ár | 219 | 64,9 |
| 25 - 34 ár | 668 | 69,3 |
| 35 - 44 ár | 1079 | 69,4 |
| 45 - 54 ár | 1286 | 70,8 |
| 55 – 64 ár | 1159 | 71,5 |
| > 65 ár | 342 | 75,2 |

Talva 3.7.2.5 vísir úrslitini fyri stigan um *Hvussu arbeiðstakarin tekur lut á arbeiðsplássinum* býtt upp í 11 ymiskar starvsbólkar og vísir harumframt, hvar á stiganum hesir starvsbólkar liggja í mun til miðaltalið fyri allar svarpersónar í kanningini. Úrslitini benda á, at svarpersónar í 'Leiðsluarbeiði' hava tað hægsta miðaltalið á stiganum (78,6 stig).

Úrslitini benda eisini á, at svarpersónar í 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' og 'Annað handaligt arbeiði' hava lægstu miðaltøl á stiganum við stigatølum á ávikavist 62,8 og 62,7. Hesir svarpersónar vísa sostatt í lægri mun av luttøku á arbeiðsplássinum samanborið við hinar starvsbólkarnar. Ein ískoytisgreining vísir harafturat, at munirnir millum starvsbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 3.7.2.5: Miðaltal fyri stigan *Hvussu arbeiðstakarin tekur lut á arbeiðsplássinum* býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| 1 Leiðsluarbeiði | 453 | 78,6 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 634 | 72,7 |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 573 | 71,1 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 801 | 71,0 |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 594 | 70,5 |
| **Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum** | **5033** | **70,4** |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 709 | 69,0 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 67 | 68,7 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 216 | 68,1 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 314 | 66,8 |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 167 | 62,8 |
| 11 Annað handaligt arbeiði | 208 | 62,7 |

Viðmerking: Grøna markingin merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá betri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum. Reyðu markingarnar merkja, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá verri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Hvussu arbeiðstakarin tekur lut á arbeiðsplássinum***

Úrslitini fyri *Hvussu arbeiðstakarin tekur lut á arbeiðsplássinum* vístu, at føroysku svarpersónarnir í størri mun taka lut á arbeiðsplássinum enn svarpersónarnir úr danska tilvísingarbólkinum. Harnæst bendu úrslitini á, at tað ikki er nakar týðandi munur á, hvussu mannligir og kvinnuligir svarpersónar í kanningini hava mett teirra luttøku á arbeiðsplássinum.

Upp á tvørs av aldursbólkunum bendu úrslitini á, at elstu svarpersónarnir yvir 65 ár hava mett eitt høgt støði av luttøku á arbeiðsplássinum og eisini eitt sindur hægri enn hinir aldursbólkarnir. Øvut bendu úrslitini á, at yngstu svarpersónarnir undir 25 ár uppliva luttøkuna á arbeiðsplássinum at vera minni og harumframt eitt sindur lægri enn hinir aldursbólkarnir. Úrslitini fyri starvsbólkarnar vístu, at svarpersónar í 'Leiðsluarbeiði' uppliva eitt høgt støði av luttøku á arbeiðsplássinum og harumframt eitt sindur hægri enn hinir starvsbólkarnir og eisini meira enn fimm stig betri enn miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini. Harafturímóti bendu úrslitini á, at svarpersónar í FISCO-starvsbólkunum 10 og 11, 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' og 'Annað handaligt arbeiði' uppliva lægsta støði av luttøku á

arbeiðsplássinum samanborið við hinar bólkarnar og harumframt meira enn fimm stig lægri (verri) enn miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini.

### 3.7.3 Hugbinding í arbeiðinum

*Hugbinding í arbeiðinum* kann vera allýst sum ein jalig og nøktandi støða viðvíkjandi arbeiði, sum er eyðkend av orku, ágrýtni og at gloyma seg burtur í arbeiðinum (117). Hugbinding í arbeiðinum er áður kannað í fleiri kanningum. Í einari metagreining finnur Halbesleben (118) t.d. útav, at hugbinding í arbeiðinum hevur ein jaligan samanhang við, hvussu arbeiðstakarin tekur lut á arbeiðsplássinum, avrik og heilsu, og ein neiligan samanhang við ynski um at skifta arbeiði. Halbesleben (118) finnur harumframt útav, at sosialur stuðul og ávirkan í arbeiðinum hevur ein jaligan samanhang við hugbinding í arbeiðinum.

Vit máta *Hugbinding í arbeiðinum* við spurningunum í talvu 3.7.3.1. Talvan vísir harumframt býtið av svørum í prosentum fyri allar svarpersónar í kanningini.

**Talva 3.7.3.1: Býti av svørum í prosentum fyri stigan *Hugbinding í arbeiðinum***

| | Ongantíð | Næstan ongantíð | Sjáldan | Onkuntíð | Ofta | Sera ofta | Altíð |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Eg kenni meg fulla/n av orku, tá eg eri til arbeiðis | 1,1 | 3,0 | 6,3 | 18,3 | 37,7 | 24,8 | 8,7 |
| Eg eri eldhugað/ur í mínum arbeiði | 0,7 | 1,8 | 3,4 | 12,7 | 36,3 | 29,4 | 15,7 |
| Eg kenni meg glaða/n, tá eg arbeiði við ágrýtni | 0,7 | 1,2 | 3,0 | 9,6 | 35,7 | 31,2 | 18,7 |
| Eg kenni meg sterka/n og leggi alla orku í, tá eg eri til arbeiðis | 0,6 | 1,4 | 3,6 | 12,8 | 36,4 | 29,0 | 16,3 |
| Eg eri errin av tí arbeiði, eg geri | 0,6 | 1,1 | 2,1 | 11,3 | 31,7 | 31,7 | 21,6 |
| Eg gloymi meg burtur í mínum arbeiði | 3,3 | 3,5 | 11,2 | 26,7 | 28,1 | 19,5 | 7,8 |
| Tá ið eg vakni um morgunin, havi eg hug at fara til arbeiðis | 2,6 | 3,2 | 6,6 | 15,4 | 32,6 | 25,2 | 14,4 |
| Eg fái íblástur av mínum arbeiði | 2,8 | 4,4 | 9,7 | 24,0 | 31,0 | 20,5 | 7,6 |
| Tá ið eg arbeiði, gloymi eg tíð og stað | 4,5 | 4,8 | 14,5 | 28,9 | 25,0 | 15,9 | 6,3 |

Svørini frá teimum níggju spurningunum í talvu 3.7.3.1 eru umgjørd til ein stiga frá 0-100, har 100 bendir á, at mann altíð kennir seg hugbundnan í sínum arbeiði.

Talva 3.7.3.2 vísir, at føroysku svarpersónarnir hava eitt miðaltal upp á 67,4 á stiganum um *Hugbinding í arbeiðinum,* sum merkir, at tey meta teirra hugbinding í arbeiðinum lutfalsliga høga. Spurningarnir í mun til henda stigan vórðu ikki settir luttakarunum í

donsku kanningini, og tískil er ikki møguligt at samanbera úrslitini við ein danskan tilvísingarbólk.

**Talva 3.7.3.2: Miðaltal fyri stigan *Hugbinding í arbeiðinum***

| Hugbinding í arbeiðinum | Miðaltal |
|---|---|
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum | 67,4 |
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Danmark | * |

Í talvunum niðanfyri verða úrslitini víst fyri *Hugbinding í arbeiðinum* býtt upp í ávikavist kyn, aldur og starvsbólk.

Talva 3.7.3.3 vísir úrslitini fyri stigan um *Hugbinding í arbeiðinum* býtt upp í menn og kvinnur. Úrslitini benda á, at tað er heldur lítil munur á, hvussu mannligir og kvinnuligir svarpersónar hava mett seg at hava hugbinding í arbeiðinum. Ein ískoytisgreining vísir tó, at munurin millum menn og kvinnur er hagfrøðiliga signifikantur (p=0.0136).

**Talva 3.7.3.3: Miðaltal fyri stigan *Hugbinding í arbeiðinum* býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| Maður | 2023 | 66,8 |
| Kvinna | 2793 | 68,0 |

Talva 3.7.3.4 vísir úrslitini fyri stigan um *Hugbinding í arbeiðinum* býtt upp í ymiskar aldursbólkar. Í hesum førinum benda úrslitini á, at hugbinding stigvíst økist tvørtur um aldursbólkarnar, og at elstu svarpersónarnir yvir 65 ár hava eitt hægri miðaltal á stiganum (74,2 stig) enn hinir aldursbólkarnir, og úrslitið merkir harumframt, at hesin aldursbólkurin í sera stóran mun upplivir hugbinding í arbeiðinum. Øvut hesum hava yngstu svarpersónarnir undir 25 ár tað lægsta miðaltalið á stiganum (58,1 stig), og vísa soleiðis í minni mun hugbinding í arbeiðinum samanborið við hinar aldursbólkarnar. Ein ískoytisgreining vísir harafturat, at munirnir millum aldursbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 3.7.3.4: Miðaltal fyri stigan *Hugbinding í arbeiðinum* býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| < 25 ár | 221 | 58,1 |
| 25 - 34 ár | 670 | 63,1 |
| 35 - 44 ár | 1089 | 65,2 |
| 45 - 54 ár | 1293 | 68,0 |
| 55 – 64 ár | 1174 | 71,5 |
| > 65 ár | 364 | 74,2 |

Talva 3.7.3.5 vísir úrslitini fyri stigan um *Hugbinding í arbeiðinum* býtt upp í 11 ymiskar starvsbólkar og vísir harumframt, hvar á stiganum hesir starvsbólkar liggja í mun til miðaltalið fyri allar svarpersónar í kanningini. Úrslitini benda á, at svarpersónar í 'Leiðsluarbeiði' hava tað hægsta miðaltalið á stiganum (72,7 stig), og vísa soleiðis í størri

mun hugbinding  á arbeiðsplássinum enn hinir starvsbólkarnir. Úrslitið vísir harumframt, at svarpersónarnir í hesum starvsbólkinum hava mett seg at hava hugbinding í arbeiðinum meira enn fimm stig hægri enn miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini. Úrslitini benda eisini á, at svarpersónar í 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' og 'Annað handaligt arbeiði' hava lægstu miðaltøl á stiganum við stigatølum á ávikavist 63,2 og 62,2. Hesir svarpersónar vísa soleiðis í lægri mun hugbinding í arbeiðinum samanborið við hinar starvsbólkarnar. Ein ískoytisgreining vísir harafturat, at munirnir millum starvsbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 3.7.3.5: Miðaltal fyri stigan *Hugbinding í arbeiðinum* býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| 1 Leiðsluarbeiði | 458 | 72,7 |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 580 | 69,1 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 805 | 69,0 |
| **Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum** | **5078** | **67,4** |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 720 | 67,2 |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 597 | 67,1 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 68 | 67,0 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 644 | 66,6 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 219 | 65,9 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 320 | 65,1 |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 169 | 63,2 |
| 11 Annað handaligt arbeiði | 210 | 62,2 |

Viðmerking: Grøna markingin merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá betri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum. Reyðu markingarnar merkja, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá verri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Hugbinding í arbeiðinum***

Úrslitini fyri *Hugbinding í arbeiðinum* vístu, at svarpersónarnir úr føroyska kanningarbólkinum sum heild vísa eitt høgt støði av hugbinding í arbeiðinum. Harnæst bendu úrslitini á, at tað bert er ein lítil munur á, hvussu mannligir og kvinnuligir svarpersónar hava mett seg at hava Hugbinding í arbeiðinum.

Fyri aldursbólkarnar sæst sama mynstur sum í øðrum stigum, har elstu svarpersónarnir vísa eitt høgt støði av trivnaði í arbeiðinum, í hesum førinum *Hugbinding í arbeiðinum*, meðan yngstu svarpersónarnir í lægri mun meta seg at vera hugbundnar í sínum arbeiði. Tað sama ger seg galdandi upp á tvørs av starvsbólkum, har úrslitini aftur bendu á, at svarpersónar í 'Leiðsluarbeiði' í høgan mun uppliva hugbinding í arbeiðinum, meðan svarpersónar í FISCO-starvsbólkunum 10 og 11, 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' og 'Annað handaligt arbeiði' í lægri mun meta at vera hugbundin í arbeiðinum.

Fyri stigarnar *Meining í arbeiðinum, Hvussu arbeiðstakarin tekur lut á arbeiðsplássinum* og *Hugbinding í arbeiðinum,* benda úrslitini sostatt á somu rákini, har tað eru munir millum yngri og eldri svarpersónar og millum teir ymisku starvsbólkarnar.

### 3.7.4 Óvissa í starvssetanini

Uppliving av *Óvissu í starvssetanini* kann vera at rokna sum ein persónligur standur, har arbeiðstakarin metir um ymisk sjónarhorn, sum hava við trygdina í setanarstøðuni at gera (119). Óvissan kann geva seg til kennar sum ein stúran um at gerast arbeiðsleysur, ein stúran um, at tað henda stórar broytingar í arbeiðsuppgávunum hjá sær, ella at mann verður fluttur til annað arbeiði saman við eini stúran um, at tað kann gerast trupult at finna eitt nýtt starv, um mann gerst arbeiðsleysur (22). Kanningar vísa, at óvissa í starvssetanini hongur neiliga saman við sálarligu vælveruni hjá arbeiðstakaranum (75, 120), og at hesin samanhangurin serliga gevur seg til kennar millum menn (121).

Vit máta *Óvissu í starvssetanini* við spurningunum í talvu 3.7.4.1. Talvan vísir býtið av svørum í prosentum fyri allar svarpersónar í kanningini.

**Talva 3.7.4.1: Býti av svørum í prosentum fyri stigan *Óvissa í starvssetanini***

| | Í sera lítlan mun | Í lítlan mun | Partvíst | Í stóran mun | Í sera stóran mun |
|---|---|---|---|---|---|
| Stúrir tú fyri at gerast arbeiðsleys/ur? | 60,8 | 23,3 | 8,6 | 3,2 | 4,0 |
| Stúrir tú fyri, at tað kann verða trupult at finna eitt nýtt starv, um tú verður arbeiðsleys/ur? | 38,7 | 25,1 | 18,7 | 9,4 | 8,1 |
| Stúrir tú fyri, at tú móti tínum vilja verður flutt/ur í annað starv? | 57,4 | 28,2 | 9,5 | 2,8 | 2,0 |

Svørini frá teimum trimum spurningunum í talvu 3.7.4.1 eru umgjørd til ein stiga frá 0-100, har 100 bendir á, at mann í sera stóran mun upplivir óvissu í starvssetanini. Stigin vendir sostatt soleiðis, at eitt høgt miðaltal kann benda á uppliving av óvissu í starvssetanini.

Talva 3.7.4.2 vísir, at svarpersónarnir úr Føroyum hava eitt miðaltal upp á 21,1 á stiganum um *Óvissu í starvssetanini.* Hetta úrslitið vísir, at føroysku svarpersónarnir uppliva lágt støði av óvissu í mun til teirra setanarviðurskifti, og at teirra stigatal samsvarar við, at svarpersónarnir í miðal hava svarað 'Í lítlan mun'. Spurningarnir í mun til henda stigan vórðu ikki settir luttakarunum í donsku kanningini, og tískil er ikki møguligt at samanbera úrslitini við ein danskan tilvísingarbólk.

**Talva 3.7.4.2: Miðaltal fyri stigan *Óvissa í starvssetanini***

| Óvissa í starvssetanini | Miðaltal |
|---|---|
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum | 21,1 |
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Danmark | * |

Í talvunum niðanfyri vera úrslitini víst fyri *Óvissa í starvssetanini* býtt upp í ávikavist kyn, aldur og starvsbólk.

Talva 3.7.4.3 vísir úrslitini fyri stigan *Óvissa í starvssetanini* býtt upp í menn og kvinnur. Úrslitini benda á, at tað bert er ein lítil munur á, hvussu mannligir og kvinnuligir

svarpersónar hava mett seg at hava óvissu í starvssetanini. Ein ískoytisgreining vísir tó, at munurin millum menn og kvinnur er hagfrøðiliga signifikantur (p=0.0323).

**Talva 3.7.4.3: Miðaltal fyri stigan *Óvissa í starvssetanini* býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| Maður | 1996 | 20,2 |
| Kvinna | 2770 | 21,6 |

Talva 3.7.4.4 vísir úrslitini fyri stigan *Óvissa í starvssetanini* býtt upp í ymiskar aldursbólkar. Í hesum førinum benda úrslitini á, at svarpersónar millum 25 og 34 ár uppliva hægstu óvissuna í starvssetanini (23,2 stig) samanborið við hinar bólkarnar. Harumframt sæst eisini, at svarpersónar í aldrinum 55 til 64 ár uppliva eina 'hægri' óvissu í starvssetanini enn restin av aldursbólkunum við einum stigatalið á 22,9. Harafturímóti sæst, at elstu svarpersónarnir uppliva lægstu óvissuna í starvssetanini við einum stigatalið á 13,2. Ein ískoytisgreining vísir harafturat, at munirnir millum aldursbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 3.7.4.4: Miðaltal fyri stigan *Óvissa í starvssetanini* býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| < 25 ár | 219 | 19,3 |
| 25 - 34 ár | 669 | 23,2 |
| 35 - 44 ár | 1085 | 21,8 |
| 45 - 54 ár | 1286 | 19,7 |
| 55 – 64 ár | 1159 | 22,9 |
| > 65 ár | 343 | 13,2 |

Talva 3.7.4.5 vísir úrslitini fyri stigan *Óvissa í starvssetanini* býtt upp í 11 ymiskar starvsbólkar og vísir harumframt, hvar á stiganum hesir starvsbólkar liggja í mun til miðaltalið fyri allar svarpersónar í kanningini. Úrslitini benda á, at svarpersónar í 'Arbeiði á heilsuøkinum' hava lægsta miðaltalið á stiganum (13,5 stig), og tykjast sostatt í lægri mun at uppliva óvissu í starvssetanini samanborið við hinar starvsbólkarnar. Úrslitið merkir harumframt, at hesin starvsbólkurin upplivir munandi minni óvissu í starvssetanini samanborið við miðaltalið av øllum svarpersónunum í kanningini, av tí at tey liggja meira enn fimm stig lægri (betri) á stiganum *Óvissa í starvssetanini* – tað sama ger seg galdandi fyri starvsbólkinum 'Handverkaraarbeiði', hvørs miðaltal eisini er meira enn fimm stig lægri enn miðaltalið fyri allar svarpersónarnar.

Harafturímóti, benda úrslitini á, at svarpersónar í 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' og 'Annað handaligt arbeiði' hava hægstu miðaltølini á stiganum við stigatølum á ávikavist 30,0 og 29,1. Hesir svarpersónar vísa sostatt í størri mun óvissu í teirra starvssetan samanborið við hinar starvsbólkarnar. Eisini innan fyri 'Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði' sýnist óvissan at vera hægri enn miðaltalið (28,3 stig). Hesir tríggir starvsbólkarnir hava harafturat mett óvissuna í starvssetanini meira enn fimm stig hægri enn miðaltalið av øllum svarpersónunum í kanningini. Ein

ískoytisgreining vísir harafturat, at munirnir millum starvsbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 3.7.4.5: Miðaltal fyri stigan *Óvissa í starvssetanini* býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 166 | 30,0 |
| 11 Annað handaligt arbeiði | 207 | 29,1 |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 593 | 28,3 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 636 | 22,7 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 68 | 22,7 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 316 | 21,8 |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 711 | 21,8 |
| **Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum** | **5039** | **21,1** |
| 1 Leiðsluarbeiði | 455 | 17,8 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 803 | 17,5 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 216 | 16,0 |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 573 | 13,5 |

Viðmerking: Grønu markingarnar merkja, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá betri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum. Reyða markingin merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá verri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Óvissu í starvssetanini***
Úrslitini fyri *Óvissu í starvssetanini* vístu, at føroysku svarpersónarnir sum heild uppliva lága óvissu í starvssetanini, og at tað bert var ein lítil munur á metingunum hjá mannligum og kvinnuligum svarpersónum av óvissu í starvssetanini.

Býtt upp í aldursbólkarnar, bendu úrslitini á, at svarpersónar millum 25 og 34 ár uppliva hægstu óvissinua í starvssetanini, meðan elstu svarpersónarnir yvir 65 ár hava sagt seg uppliva eina lægri óvissu í starvssetanini samanborið við hinar aldursbólkarnar. Til endans bendu úrslitini upp á tvørs av starvsbólkunum á, at svarpersónar í 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði', 'Annað handaligt arbeiði' og 'Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði' í størri mun uppliva óvissu í starvssetanini, enn hinir starvsbólkarnir, og harumframt meira enn fimm stig hægri (verri) enn miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini. Harafturímóti bendu úrslitini á, at svarpersónar í 'Handverkaraarbeiði' og 'Arbeiði á heilsuøkinum' uppliva óvissu í starvssetanini í sera lágan mun samanborið við hinar bólkarnar, men eisini samanborið við miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini.

### 3.7.5 Strongd

*Strongd* snýr seg um, hvussu ofta (og orsøkina til), at arbeiðstakararnir hava kent seg strongdar í sambandi við teirra arbeiði tvær tær seinastu vikurnar undan luttøkuni í spurnakanningini.

Nøkur ástøði um strongd peika á, at strongd tekur seg upp sum ein avleiðing av eini ójavnvág millum einstaklingin og treytir í arbeiðsumhvørvinum, sum einstaklingurin er ein partur av (122). Ein av mongum ástøðum um strongd peikar t.d. á, at strongd í samband við arbeiði kann vera roknað sum avleiðingin av eini ójavnvág millum tey krøv, sum vera sett í einari arbeiðsstøðu, og rammurnar og tilfeingi, sum arbeiðstakarin hevur til taks í sambandi við útinningina av arbeiðsuppgávunum (32). Eitt annað ástøði heldur upp á, at strongd er avleiðingin av einari vantandi javnvág millum ta íløgu, sum arbeiðstakarin veitir, og ta løn, arbeiðsplássið gevur aftur. Henda ójavnvág kann sambært granskingini økja vandan fyri ymiskum neiligum aftursvørum og endaúrslitum viðvíkjandi heilsu, t.d. strongd (123). Ein kanning hevur t.d. víst á, at kenslan av órættvísi á arbeiðsplássinum kann vera ein kelda til strongd í samband við arbeiði (124). Harumframt finna kanningar, at strongd í samband við arbeiði kann taka seg upp í sambandi við ósemjur á arbeiðsplássinum t.d. í form av happing (125). Ein donsk kanning vísir á ein týðiligan samanhang millum høgt stigatal í mun til spurningin um strongd og ein øktan vanda fyri drúgvari sjúkufráveru og sálarligum heilsutrupulleikum (1).

Vit máta *Strongd* við hesum spurningi í talvu 3.7.5.1. Talvan vísir býtið av svørum í prosentum fyri allar svarpersónar í kanningini.

**Talva 3.7.5.1: Býti av svørum í prosentum fyri *Strongd***

| | Ongantíð | Sjáldan | Onkuntíð | Ofta | Alla tíðina |
|---|---|---|---|---|---|
| Hvussu ofta hevur tú seinastu 2 vikurnar kent teg strongda/n? | 33,2 | 25,8 | 25,0 | 13,1 | 3,0 |

Svørini frá spurninginum í talvu 3.7.5.1 eru umgjørd til ein stiga frá 0-100, har 100 bendir á, at mann innan fyri seinastu tvær vikurnar hevur kent seg strongdan alla tíðina. Her bendir eitt høgt miðaltal tí á eitt høgt støði av strongd sambært svarpersóninum sjálvum.

Talva 3.7.5.2 vísir, at svarpersónarnir úr Føroyum hava eitt miðaltal upp á 31,8 á stiganum um *Strongd,* har svarpersónarnir úr danska tilvísingarbólkinum afturímóti hava eitt miðaltal upp á 40,0. Harvið sær út til, at føroysku svarpersónarnir í týðiliga lægri mun siga frá um strongd, sum harumframt merkir hægri trivnað millum føroysku svarpersónarnar mátað við stiganum um *Strongd*.

**Talva 3.7.5.2: Miðaltal fyri stigan *Strongd***

| Strongd | Miðaltal |
|---|---|
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum | 31,8 |
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Danmark | 40,0 |

Tað eru tilsamans 3.277 svarpersónar, sum hava svarað ávikavist 'Alla tíðina', 'Ofta', 'Onkuntíð' ella 'Sjáldan', meðan 1.627 svarpersónar hava svarað 'Ongantíð' til spurningin um strongd. Niðan fyri í talvu 3.7.5.3 sæst býtið av svørum til spurningin: 'Hvørjum varð tú mest strongd/ur av?'. Í hesari talvuni hava vit strikað teir svarpersónar, sum hava svarað 'Ongantíð' til spurningin um strongd og teir svarpersónar, sum hava svarað 'Havi ikki kent meg strongda/n seinastu 2 vikurnar' til uppfylgjandi spurningin: 'Hvørjum varð tú mest strongd/ur av?'. Tað merkir, at tað tilsamans eru 3.032 svarpersónar eftir, sum hava sagt frá, at teir hava kent seg strongdar innan fyri seinastu tvær vikurnar.

Talva 3.7.5.3 vísir, at 43,2 prosent av teimum 3.032 svarpersónunum, sum hava sagt frá, at teir hava kent seg strongdar, siga frá, at arbeiðið hevur verið tann størsta orsøkin til strongd, meðan 14,8 prosent siga frá, at heimalívð hevur verið høvuðsorsøkin til strongd. Til seinast siga 41,9 prosent av teimum 3.032 svarpersónunum frá, at tað hevur verið ein blandingur av arbeiðslív og heimalív, sum hevur verið orsøk til strongd.

Líknandi rák síggast í úrslitunum úr donsku tilvísingarkanningini, har 'Arbeiði' eisini er tann oftast fráboðaða orsøkin til strongd (54,6 prosent), meðan 'Heimalív' er tann minst fráboðaða orsøkin til strongd (6,2 prosent). Fyri báðar kanningarbólkarnar hava uml. 40 prosent sagt frá, at tað bæði er heimalívð og arbeiðið, sum er høvuðsorsøkin til strongd. Um úrslitini verða samanborin upp á tvørs av teimum báðum bólkunum í kanningini, skilst, at ein eitt sindur minni partur av svarpersónum úr Føroyum hava sagt frá, at 'Arbeiði' er størsta orsøkin til strongd, men harafturímóti hevur ein størri partur av føroysku svarpersónunum sagt frá, at 'Heimalív' er størsta orsøkin til strongd samanborið við danskar arbeiðstakarar.

**Talva 3.7.5.3: Býti av svørum upp á spurningin 'Hvørjum varð tú mest strongd/ur av?'**

| | Tal | Prosent |
|---|---|---|
| Arbeiði | 1311 | 43,2 |
| Heimalív | 450 | 14,8 |
| Arbeiðslív og heimalív | 1271 | 41,9 |

Í talvunum niðanfyri vera úrslitini víst fyri *Strongd* býtt upp í ávikavist kyn, aldur og starvsbólk.

Talva 3.7.5.4 vísir úrslitini fyri stigan um *Strongd* býtt upp í menn og kvinnur. Úrslitini benda á, at kvinnuligir svarpersónar siga frá týðandi hægri støði av strongd enn mannligir svarpersónar. Ein ískoytisgreining vísir, at munurin millum menn og kvinnur er hagfrøðiliga signifikantur ($p<.0001$).

**Talva 3.7.5.4: Miðaltal fyri stigan *Strongd* býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| Maður | 2000 | 26,1 |
| Kvinna | 2735 | 35,6 |

Talva 3.7.5.5 vísir úrslitini fyri stigan um *Strongd* býtt upp í ymiskar aldursbólkar. Í hesum førinum benda úrslitini á, at svarpersónar millum 25 og 34 ár í størri mun uppliva

strongd (40,2 stig) samanborið við hinar bólkarnar. Harnæst hava svarpersónar undir 25 ár eisini eitt lutfalsliga høgt stigatal samanborið við hinar aldursbólkarnar (39,5 stig). Tað sæst harafturímóti, at elstu svarpersónarnir yvir 65 ár hava lægsta miðaltalið á stiganum um *Strongd* (16,2 stig), og bendir sostatt á, at hesir svarpersónar sjáldan uppliva at kenna seg strongd. Rákið í úrslitunum peika tískil á, at yngri svarpersónar í eitt sindur størri mun uppliva at vera strongdir samanborið við eldru svarpersónarnar. Ein ískoytisgreining vísir harafturat, at munirnir millum aldursbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 3.7.5.5: Miðaltal fyri stigan *Strongd* býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| < 25 ár | 209 | 39,5 |
| 25 - 34 ár | 657 | 40,2 |
| 35 - 44 ár | 1075 | 36,1 |
| 45 - 54 ár | 1275 | 31,5 |
| 55 – 64 ár | 1160 | 25,8 |
| > 65 ár | 354 | 16,2 |

Talva 3.7.5.6 vísir úrslitini fyri stigan um *Strongd* býtt upp í 11 ymiskar starvsbólkar og vísir harumframt, hvar á stiganum hesir starvsbólkar liggja í mun til miðaltalið fyri allar svarpersónar í kanningini. Úrslitini benda á, at svarpersónar í 'Annað handaligt arbeiði' hava tað hægsta stigatalið á stiganum um *Strongd* (36,0 stig). Svarpersónar í hesum starvsbólkinum siga sostatt frá einum hægri støði av strongd samanborið við hinar starvsbólkarnar í kanningini.

Svarpersónar í 'Arbeiði á heilsuøkinum' (35,4 stig) og 'Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði' (35,6 stig) hava somuleiðis hægri miðaltøl á stiganum um *Strongd* samanborið við miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini, sum eisini samsvarar við donsku tilvísingarkanningina, har hægri miðaltøl eisini eru at finna á strongdarstiganum millum arbeiðstakarar innan fyri bæði undirvísing og heilsuverkið.

Svarpersónar í 'Handverkaraarbeiði' hava harafturímóti lægsta miðaltalið á stiganum (25,7 stig). Svarpersónar í 'Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi' hava eisini eitt lágt miðaltal á stiganum (26,3 stig). Teir báðir starvsbólkarnir liggja harumframt meira enn fimm stig lægri (betri) á stiganum um *Strongd* samanborið við miðaltalið fyri allar svarpersónar í kanningini. Ein ískoytisgreining vísir harafturat, at munurin millum starvsbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 3.7.5.6: Miðaltal fyri stigan *Strongd* býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| 11 Annað handaligt arbeiði | 206 | 36,0 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 790 | 35,6 |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 570 | 35,4 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 311 | 33,0 |
| 1 Leiðsluarbeiði | 452 | 32,3 |
| **Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum** | **4904** | **31,8** |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 638 | 31,0 |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 582 | 30,1 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 67 | 29,9 |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 166 | 29,2 |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 712 | 26,3 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 215 | 25,7 |

Viðmerking: Grøna markingin merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá betri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum. Reyða markingin merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá verri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Strongd***

Úrslitini fyri *Strongd* vístu, at svarpersónarnir úr føroysku kanningini siga frá lægri støði av strongd samanborið við danska tilvísingarbólkin. Harnæst bendu úrslitini á, at svarpersónarnir fyrst og fremst høvdu sagt frá 'arbeiði' og 'arbeiðslív og heimalív' sum tann mest týðandi orsøkin til strongd.

Úrslitini vístu eisini, at kvinnuligir svarpersónar siga frá einum týðandi hægri støði av strongd enn mannligir svarpersónar. Tá hugt verður eftir, hvussu úrslitini vera býtt upp upp á tvørs av aldursbólkunum, eru tað aftur stórir munir á yngri og eldri svarpersónum, har elstu svarpersónarnir hava sagt frá einum týðandi lægri støði av strongd enn yngru svarpersónarnir.

Tá úrslitini vóru býtt upp í teir 11 ymisku starvsbólkarnar, bendu tey á, at svarpersónar í 'Annað handaligt arbeiði' hava hægsta miðaltalið á stiganum um *Strongd,* og bendu sostatt á, at hesin starvsbólkurin í størri mun upplivir strongd samanborið við hinar starvsbólkarnar. Sum eisini skilst í úrslitunum hava svarpersónar í 'Arbeiði á heilsuøkinum' og 'Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði' eisini hægri stigatøl á strongdarstiganum enn miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini.

### 3.7.6 Nøgdsemi við arbeiðið

*Nøgdsemi við arbeiðið* kann vera roknað sum ein yvirskipað ábending um trivnaðin hjá arbeiðstakarunum í arbeiðinum og snýr seg um, hvørt arbeiðstakararnir eru nøgdir við teirra arbeiði. Nøgdsemi við arbeiðið er ein yvirskipað persónlig meting av arbeiðinum hjá sær og arbeiðsstøðu sum heild, sum bæði byggir á nakrar kensluligar og kognitivar metingar av arbeiðsstøðuni (126).

Kanningar hava áður staðfest ein jaligan samanhang millum viðurskifti í sálarliga og sosiala arbeiðsumhvørvinum og nøgdsemi hjá arbeiðstakarunum við arbeiðið. T.d. vísa kanningar, at eitt høgt støði av rættvísi (22) og álit (73) hanga saman við høgum støði av nøgdsemi við arbeiðið, meðan ósemjur sum happing (125) hanga saman við lægri støði av nøgdsemi við arbeiðið. Harumframt hongur høgt støði av nøgdsemi við arbeiðið saman við betri avrikum í arbeiðinum (127), minkaðum vanda fyri tunglyndi (1), skerdum vanda fyri sjúkufráveru (1, 111) og ynskinum hjá arbeiðstakaranum at verða verandi í arbeiðinum (128).

Vit máta *Nøgdsemi við arbeiðið* við spurninginum 'Hvussu nøgd/ur ert tú við títt starv sum heild?'. Svarpersónarnir kundu svara spurninginum við einum stiga við 11 punktum, har 0 merkti 'Sera ónøgd/ur', og 10 merkti 'Sera nøgd/ur. Talva 3.7.6.1 vísir býtið av svørum fyri allar svarpersónar í kanningini.

**Talva 3.7.6.1: Býti av svørum upp á spurningin 'Hvussu nøgd/ur ert tú við títt starv sum heild?'**

| | Tal | Prosent |
|---|---|---|
| 0: Mest møguliga nøgdsemi við arbeiðið | 34 | 0,7 |
| 1 | 44 | 0,9 |
| 2 | 63 | 1,2 |
| 3 | 114 | 2,2 |
| 4 | 147 | 2,9 |
| 5 | 245 | 4,8 |
| 6 | 310 | 6,1 |
| 7 | 709 | 14,0 |
| 8 | 1478 | 29,1 |
| 9 | 1120 | 22,0 |
| 10: Minst møguliga nøgdsemi við arbeiðið | 819 | 16,1 |

Svørini frá spurninginum í talvu 3.7.6.1 eru umgjørd til ein stiga frá 0-100, har 100 bendir á mest møguliga nøgdsemi við arbeiðið, meðan 0 merkir minst møguliga nøgdsemi við arbeiðið.

Talva 3.7.6.2 vísir, hvussu svarpersónarnir úr føroysku kanningini í miðal hava svarað spurninginum um *Nøgdsemi við arbeiðið* samanborið miðaltalið í donsku tilvísingarkanningini. Úrslitini benda á, at føroysku svarpersónarnir hava eitt miðaltal upp á 77,2 á stiganum um *Nøgdsemi við arbeiðið,* meðan svarpersónar úr danska tilvísingarbólkinum hava eitt miðaltal upp á 71,7. Føroysku svarpersónarnir vísa soleiðis

í størri mun av nøgdsemi við teirra starv sum heild, enn svarpersónarnir úr danska tilvísingarbólkinum.

**Talva 3.7.6.2: Miðaltal fyri stigan *Nøgdsemi við arbeiðið***

| Nøgdsemi við arbeiðið | Miðaltal |
|---|---|
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum | 77,2 |
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Danmark | 71,7 |

Í talvunum niðanfyri vera úrslitini víst fyri *Nøgdsemi við arbeiðið* býtt upp í ávikavist kyn, aldur og starvsbólk.

Talva 3.7.6.3 vísir úrslitini fyri stigan um *Nøgdsemi við arbeiðið* býtt upp í menn og kvinnur. Úrslitini benda á, at menn siga frá eitt sindur hægri nøgdsemi við arbeiðið enn kvinnur. Ein ískoytisgreining vísir, at munurin millum menn og kvinnur er hagfrøðiliga signifikantur (p=0.0055).

**Talva 3.7.6.3: Miðaltal fyri stigan *Nøgdsemi við arbeiðið* býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| Maður | 2023 | 78,3 |
| Kvinna | 2796 | 76,7 |

Talva 3.7.6.4 vísir úrslitini fyri stigan um *Nøgdsemi við arbeiðið* býtt upp í ymiskar aldursbólkar. Í hesum førinum benda úrslitini á, at elstu svarpersónarnir yvir 65 ár hava eitt hægri miðal (85,9 stig) enn hinir aldursbólkarnir, og úrslitið merkir harumframt, at hesin aldursbólkurin upplivir sera høgt støði av nøgdsemi við arbeiðið. Øvut hesum hava yngstu svarpersónarnir undir 25 ár tað lægsta miðaltalið á stiganum (69,0 stig). Ein ískoytisgreining vísir harafturat, at munirnir millum aldursbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 3.7.6.4: Miðaltal fyri stigan *Nøgdsemi við arbeiðið* býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| < 25 ár | 221 | 69,0 |
| 25 - 34 ár | 670 | 72,4 |
| 35 - 44 ár | 1090 | 75,0 |
| 45 - 54 ár | 1293 | 77,7 |
| 55 – 64 ár | 1176 | 80,9 |
| > 65 ár | 364 | 85,9 |

Talva 3.7.6.5 vísir úrslitini fyri stigan um *Nøgdsemi við arbeiðið* býtt upp í 11 ymiskar starvsbólkar og vísir harumframt, hvar á stiganum hesir starvsbólkar liggja í mun til miðaltalið fyri allar svarpersónar í kanningini. Úrslitini benda á, at svarpersónar í 'Leiðsluarbeiði' hava tað hægsta miðaltalið (83,0 stig), og vísa seg soleiðis at hava hægri støði av nøgdsemi við arbeiðið enn hinir starvsbólkarnir. Úrslitið vísir harumframt, at svarpersónarnir í 'Leiðsluarbeiði' meta teirra nøgdsemi við arbeiðið meira enn fimm stig hægri (betri) enn miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini.

Aftur her benda úrslitini á, at svarpersónar í 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' og 'Annað handaligt arbeiði' hava lægstu miðaltøl við stigatølum upp á ávikavist 72,6 og 71,9. Hesir svarpersónar vísa soleiðis lægri støði av nøgdsemi við arbeiðið enn hinir starvsbólkarnir. Tó skal viðmerkjast, at allir starvsbólkar í miðal vísa eitt høgt støði av nøgdsemi við arbeiðið. Ein ískoytisgreining vísir harafturat, at munirnir millum starvsbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 3.7.6.5: Miðaltal fyri stigan *Nøgdsemi við arbeiðið* býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| 1 Leiðsluarbeiði | 458 | 83,0 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 644 | 78,9 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 68 | 78,2 |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 597 | 78,2 |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 720 | 78,2 |
| **Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum** | **5083** | **77,2** |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 581 | 76,9 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 219 | 76,3 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 806 | 76,3 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 321 | 74,2 |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 169 | 72,6 |
| 11 Annað handaligt arbeiði | 209 | 71,9 |

Viðmerking: Grøna markingin merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá betri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum. Reyðu markingarnar merkja, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá verri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Nøgdsemi við arbeiðið***

Úrslitini fyri *Nøgdsemi við arbeiðið* vístu, at svarpersónarnir úr føroyska kanningarbólkinum í størri mun vísa nøgdsemi við arbeiðið enn svarpersónarnir úr danska tilvísingarbólkinum. Harnæst bendu úrslitini á, at tað er ein lítil munur á, hvussu mannligir og kvinnuligir svarpersónar meta teirra nøgdsemi við arbeiðið, men at mannligir svarpersónar siga frá eitt sindur hægri støði av nøgdsemi við arbeiðið enn kvinnur. Tá hugt verður eftir, hvussu úrslitini vera býtt upp tvørtur um aldursbólkarnar, eru tað aftur stórir munir á yngri og eldri svarpersónum, har elstu svarpersónarnir hava mett nøgdsemi við arbeiðið týðiliga hægri enn yngstu svarpersónarnir. Grundað á hesi úrslitini, saman við úrslitunum fyri *Meining í arbeiðinum, Hvussu arbeiðstakarin tekur lut á arbeiðsplássinum, Hugbinding í arbeiðinum, Óvissa í starvssetanini* og *Strongd*, sær sum heild út til, at eldri arbeiðstakarar uppliva betri trivnað í arbeiðinum enn yngri arbeiðstakarar í Føroyum. Fyri starvsbólkarnar er tað aftur svarpersónar í 'Leiðsluarbeiði', sum hava hægsta stigatalið á stiganum, og sum soleiðis hava mett nøgdsemi við arbeiðið hægst. Samstundis bendu úrslitini á, at svarpersónar í 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' og 'Annað handaligt arbeiði' hava lægstu miðaltøl á stiganum, og soleiðis meta teirra nøgdsemi við arbeiðið lægri enn hinir starvsbólkarnir.

## 3.7.7 Nøgdsemi við sálarliga arbeiðsumhvørvið

*Nøgdsemi við sálarliga arbeiðsumhvørvið* snýr seg um, hvussu arbeiðstakarar uppliva sálarliga arbeiðsumhvørvið. Tað snýr seg sostatt ikki bert um nøgdsemi við arbeiðið sjálvt, men eisini rammurnar rundan um arbeiðið sum t.d. leiðslan, samstarvið við starvsfelagar, samskipan av arbeiðinum og møguleikarnir fyri at fáa ávirkan og at menna seg í sambandi við sítt arbeiði. Við hesum spurningi royna vit at spyrja arbeiðstakararnir um teirra nøgdsemi sum heild við sálarliga arbeiðsumhvørvið, tá øll viðurskifti eru tikin við (22).

Ein donsk kanning vísir, at arbeiðstakarar, sum siga frá høgum støði av nøgdsemi við sálarliga arbeiðsumhvørvið, eru í minni vanda fyri drúgvari sjúkufráveru og sálarligum heilsutrupulleikum (1).

Vit máta *Nøgdsemi við sálarliga arbeiðsumhvørvið* við spurninginum 'Hvussu nøgd/ur ert tú samanumtikið við sálarliga arbeiðsumhvørvið á tínum arbeiðsplássi?'. Svarpersónarnir kundu svara spurninginum við einum stiga við 11 punktum, har 0 merkti 'Sera ónøgd/ur', og 10 merkti 'Sera nøgd/ur. Talva 3.7.7.1 vísir býtið av svørum fyri allar svarpersónar í kanningini.

**Talva 3.7.7.1: Býti av svørum upp á spurningin 'Hvussu nøgd/ur ert tú samanumtikið við sálarliga arbeiðsumhvørvið á tínum arbeiðsplássi?'**

| | Tal | Prosent |
|---|---:|---:|
| 0: Minst møguliga nøgdsemi | 138 | 2,7 |
| 1 | 119 | 2,4 |
| 2 | 133 | 2,6 |
| 3 | 218 | 4,3 |
| 4 | 228 | 4,5 |
| 5 | 344 | 6,8 |
| 6 | 424 | 8,4 |
| 7 | 665 | 13,1 |
| 8 | 1143 | 22,5 |
| 9 | 961 | 19,0 |
| 10: Mest møguliga nøgdsemi | 697 | 13,8 |

Svørini frá spurninginum í talvu 3.7.7.1 eru umgjørd til ein stiga frá 0-100, har 100 bendir á mest møguliga nøgdsemi við sálarliga arbeiðsumhvørvið, meðan 0 merkir minst møguliga nøgdsemi við sálarliga arbeiðsumhvørvið.

Talva 3.7.7.2 vísir, at føroysku svarpersónarnir hava eitt miðaltal upp á 70,3 á stiganum um *Nøgdsemi við sálarliga arbeiðsumhvørvi,* sum merkir, at føroysku svarpersónarnir í miðal meta teirra nøgdsemi við sálarliga arbeiðsumhvørvið høgt. Spurningarnir í mun til henda stigan vórðu ikki settir luttakarunum í donsku kanningini, og tískil er ikki møguligt at samanbera úrslitini við ein danskan tilvísingarbólk.

**Talva 3.7.7.2: Miðaltal fyri stigan *Nøgdsemi við sálarliga arbeiðsumhvørvið***

| Nøgdsemi við sálarliga arbeiðsumhvørvið | Miðaltal |
|---|---|
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum | 70,3 |
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Danmark | * |

Í talvunum niðanfyri vera úrslitini víst fyri *Nøgdsemi við sálarliga arbeiðsumhvørvið* býtt upp í ávikavist kyn, aldur og starvsbólk.

Talva 3.7.7.3 vísir úrslitini fyri stigan um *Nøgdsemi við sálarliga arbeiðsumhvørvið* býtt upp í menn og kvinnur. Úrslitini benda á, at mannligir svarpersónar vísa eitt sindur hægri nøgdsemi við sálarliga arbeiðsumhvørvið enn kvinnuligir svarpersónar. Ein ískoytisgreining vísir, at munurin millum menn og kvinnur er hagfrøðiliga signifikantur ($p<.0001$).

**Talva 3.7.7.3: Miðaltal fyri stigan *Nøgdsemi við sálarliga arbeiðsumhvørvið* býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| Maður | 2017 | 72,5 |
| Kvinna | 2789 | 68,9 |

Talva 3.7.7.4 vísir úrslitini fyri stigan um *Nøgdsemi við sálarliga arbeiðsumhvørvið* býtt upp í ymiskar aldursbólkar. Í hesum førinum benda úrslitini á, at elstu svarpersónarnir yvir 65 ár í sera stóran mun eru nøgdir við teirra sálarliga arbeiðsumhvørvi (80,4 stig), og úrslitið merkir harumframt, at hesin aldursbólkurin metir teirra nøgdsemi við sálarliga arbeiðsumhvørvið munandi hægri enn hinir bólkarnir. Øvut hesum hava yngstu svarpersónarnir undir 25 ár lægsta miðaltalið (61,2 stig), og meta sostatt teirra nøgdsemi við sálarliga arbeiðsumhvørvið munandi lægri enn eldru svarpersónarnir. Ein ískoytisgreining vísir harafturat, at munirnir millum aldursbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir ($p<.0001$).

**Talva 3.7.7.4: Miðaltal fyri stigan *Nøgdsemi við sálarliga arbeiðsumhvørvi* býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| < 25 ár | 219 | 61,2 |
| 25 - 34 ár | 668 | 64,3 |
| 35 - 44 ár | 1090 | 67,6 |
| 45 - 54 ár | 1290 | 71,5 |
| 55 – 64 ár | 1173 | 74,0 |
| > 65 ár | 361 | 80,4 |

Talva 3.7.7.5 vísir úrslitini fyri stigan um *Nøgdsemi við sálarliga arbeiðsumhvørvið* býtt upp í 11 ymiskar starvsbólkar og vísir harumframt, hvar á stiganum hesir starvsbólkar liggja í mun til miðaltalið fyri allar svarpersónar í kanningini. Úrslitini benda á, at svarpersónar í 'Leiðsluarbeiði' hava tað hægsta miðaltalið (77,8 stig), og hava harafturat mett teirra

nøgdsemi við sálarliga arbeiðsumhvørvið sera høgt, og eisini hægri enn hinir starvsbólkarnir. Aftur benda úrslitini á, at svarpersónar í 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' og 'Annað handaligt arbeiði' hava lægstu miðaltøl á stiganum upp á ávikavist 62,3 og 65,2. Miðaltalið hjá teimum báðum starvsbólkunum liggur harumframt meira enn fimm stig undir (verri) enn miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini. Ein ískoytisgreining vísir, at munirnir millum starvsbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 3.7.7.5: Miðaltal fyri stigan *Nøgdsemi við sálarliga arbeiðsumhvørvið* býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| 1 Leiðsluarbeiði | 457 | 77,8 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 642 | 74,0 |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 596 | 73,3 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 68 | 72,1 |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 718 | 70,9 |
| **Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum** | **5070** | **70,3** |
| 9 Handverkaraarbeiði | 218 | 70,0 |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 579 | 68,0 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 320 | 67,8 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 806 | 66,6 |
| 11 Annað handaligt arbeiði | 209 | 65,2 |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 168 | 62,3 |

Viðmerking: Grønu markingarnar merkja, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá betri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum. Reyðu markingarnar merkja, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá verri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Nøgdsemi við sálarliga arbeiðsumhvørvið***

Úrslitini fyri *Nøgdsemi við sálarliga arbeiðsumhvørvið* vístu, at føroysku svarpersónarnir sum heild uppliva eitt høgt støði av nøgdsemi við teirra sálarliga arbeiðsumhvørvi. Úrslitini bendu harafturat á, at mannligir svarpersónar hava mett sítt nøgdsemi sum heild við sálarliga arbeiðsumhvørvið eitt sindur hægri enn kvinnuligu svarpersónarnir. Harnæst bendu úrslitini á, at tað aftur eru stórir munir á aldursbólkunum, og úrslitini benda serliga á, at tað eru stórir munir á, hvussu yngstu og elstu svarpersónarnir meta sítt nøgdsemi við sálarliga arbeiðsumhvørvið, har elstu svarpersónarnir yvir 65 ár hava mett tað at vera sera høgt, meðan yngstu svarpersónarnir hava mett tað at vera eitt sindur lægri. Upp á tvørs av starvsbólkunum bendu úrslitini aftur á, at tað eru svarpersónar í 'Leiðsluarbeiði', sum hava hægsta miðaltalið, og soleiðis í størri mun eru nøgdir við teirra sálarliga arbeiðsumhvørvi samanborið við hinar starvsbólkarnar. Úrslitini her vístu eisini, at tað eru svarpersónarnir í FISCO-starvsbólkunum 10 og 11, 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' og 'Annað handaligt arbeiði', sum hava lægstu stigatølini á stiganum, og eru sostatt teir starvsbólkarnir, sum vísa

lægsta støðið av nøgdsemi við sálarliga arbeiðsumhvørvið samanborið við restina av starvsbólkunum.

## 3.7.8 Tvídráttir millum arbeiðslív og heimalív

*Tvídráttir millum arbeiðslív og heimalív* snýr seg um, hvørt arbeiðstakararnir uppliva, at arbeiðslívið ávirkar teirra heimalív. Hetta kann t.d. vera, tá tað vil so til, at arbeiðstakararnir uppliva, at arbeiðið upptekur so nógva orku og/ella tíð, at tað gongur út yvir heimalívið.

Upplivingin av, at stríð kemur millum arbeiðslív og heimalív hongur saman við fleiri øðrum sálarligum og sosialum viðurskiftum í arbeiðsumhvørvinum. Ein kanning hevur áður staðfest, at stríð millum leiklutir og stór arbeiðsmongd hongur saman við øktum vanda fyri at uppliva stríð millum arbeiðslív og heimalív, meðan greidleiki um leiklutir hongur saman við minkaðum vanda fyri at uppliva stríð millum arbeiðslív og heimalív (129). Harumframt hevur ein kanning staðfest, at upplivingin av stríði millum arbeiðslív og heimalív hongur saman við bæði sálarligum og likamligum heilsutrupulleikum (109). Til endans vísir ein nýggjari donsk kanning, at arbeiðstakarar, sum siga frá um Tvídráttir millum arbeiðslív og heimalív, eru í øktum vanda fyri drúgvari sjúkufráveru og sálarligum heilsutrupulleikum (1).

Vit máta *Tvídráttir millum arbeiðslív og heimalív* við spurningunum í talvu 3.7.8.1. Talvan vísir býtið av svørum í prosentum fyri allar svarpersónar í kanningini.

**Talva 3.7.8.1: Býti av svørum í prosentum fyri stigan *Tvídráttir millum arbeiðslív og heimalív***

| | Í sera lítlan mun | Í lítlan mun | Partvíst | Í stóran mun | Í sera stóran mun |
|---|---|---|---|---|---|
| Krevur títt arbeiði so nógv av tínari orku, at tað gongur út yvir heimalívð? | 24,4 | 28,0 | 30,0 | 12,5 | 5,0 |
| Krevur títt arbeiði so nógv av tínari tíð, at tað gongur út yvir heimalívð? | 30,2 | 31,4 | 26,1 | 8,5 | 3,8 |
| Krevur títt arbeiði so nógv av tínum uppmerksemi, at tað gongur út yvir heimalívð? | 31,7 | 31,0 | 25,8 | 8,1 | 3,4 |

Svørini frá teimum trimum spurningunum í talvu 3.7.8.1 eru umgjørd til ein stiga frá 0-100, har 100 bendir á, at mann í sera stóran mun upplivir stríð millum arbeiðslív og heimalív. Stigin vendir sostatt soleiðis, at eitt høgt miðaltal kann benda á tynging og avbjóðing í sambandi við arbeiðið.

Talva 3.7.8.2 vísir, at svarpersónarnir úr Føroyum hava eitt miðaltal upp á 32,5 á stiganum um *Tvídráttir millum arbeiðslív og heimalív, har* ímóti svarpersónarnir úr danska tilvísingarbólkinum hava eitt miðaltal upp á 40,3. Harvið sær út til, at føroysku svarpersónarnir í lægri mun uppliva stríð millum arbeiðslív og heimalív, og kann harumframt vera ein ábending um betri trivnað millum føroysku arbeiðstakararnar.

**Talva 3.7.8.2: Miðaltal fyri stigan *Tvídráttir millum arbeiðslív og heimalív***

| Tvídráttir millum arbeiðslív og heimalív | Miðaltal |
|---|---|
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum | 32,5 |
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Danmark | 40,3 |

Í talvunum niðanfyri verða úrslitini víst fyri *Tvídráttir millum arbeiðslív og heimalív* býtt upp í ávikavist kyn, aldur og starvsbólk.

Talva 3.7.8.3 vísir úrslitini fyri stigan um *Tvídráttir millum arbeiðslív og heimalív* býtt upp í menn og kvinnur. Úrslitini benda á, at kvinnur í eitt sindur størri mun enn menn siga frá stríði millum arbeiðslív og heimalív. Ein ískoytisgreining vísir, at munurin millum menn og kvinnur er hagfrøðiliga signifikantur ($p=0.0035$).

**Talva 3.7.8.3: Miðaltal fyri stigan *Tvídráttir millum arbeiðslív og heimalív* býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| Maður | 1971 | 31,0 |
| Kvinna | 2686 | 33,3 |

Talva 3.7.8.4 vísir úrslitini fyri stigan um *Tvídráttir millum arbeiðslív og heimalív* býtt upp í ymiskar aldursbólkar. Í hesum førinum benda úrslitini á, at svarpersónar millum 25 og 34 ár í størri mun uppliva stríð millum arbeiðslív og heimalív (38,8 stig) samanborið við hinar bólkarnar. Tað sæst harafturímóti, at elstu svarpersónarnir yvir 65 ár hava lægsta miðaltalið (19,8 stig), og úrslitið bendir sostatt á, at hesir svarpersónar í sera lítlan mun uppliva stríð millum arbeiðslív og heimalív. Ein ískoytisgreining vísir harafturat, at munirnir millum aldursbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir ($p<.0001$).

**Talva 3.7.8.4: Miðaltal fyri stigan *Tvídráttir millum arbeiðslív og heimalív* býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| < 25 ár | 203 | 36,5 |
| 25 - 34 ár | 646 | 38,8 |
| 35 - 44 ár | 1062 | 37,1 |
| 45 - 54 ár | 1264 | 33,0 |
| 55 – 64 ár | 1140 | 26,3 |
| > 65 ár | 337 | 19,8 |

Talva 3.7.8.5 vísir úrslitini fyri stigan um *Tvídráttir millum arbeiðslív og heimalív* býtt upp í 11 ymiskar starvsbólkar og vísir harumframt, hvar á stiganum hesir starvsbólkar liggja í mun til miðaltalið fyri allar svarpersónar í kanningini. Úrslitini benda á, at svarpersónar í 'Leiðsluarbeiði' hava tað hægsta miðaltalið á stiganum (39,4 stig), og at hesir svarpersónar í størri mun uppliva stríð millum arbeiðslív og heimalív samanborið við hinar starvsbólkarnar. Úrslitini benda harumframt á, at svarpersónar í 'Leiðsluarbeiði' liggja fimm stig hægri (verri) enn miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini á

stiganum um *Tvídráttir millum arbeiðslív og heimalív*. Eisini sæst, at svarpersónar í 'Arbeiði á heilsuøkinum' hava eitt høgt miðaltal (37,2 stig) samanborið við hinar starvsbólkarnar. Svarpersónar í 'Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði' hava harafturímóti lægsta miðaltalið á stiganum (23,1 stig), og uppliva sostatt í minni mun stríð millum arbeiðslív og heimalív samanborið við restina av starvsbólkunum. Ein ískoytisgreining vísir harafturat, at munirnir millum starvsbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 3.7.8.5: Miðaltal fyri stigan *Tvídráttir millum arbeiðslív og heimalív* býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| 1 Leiðsluarbeiði | 446 | 39,4 |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 560 | 37,2 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 66 | 36,5 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 772 | 36,2 |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 165 | 33,2 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 628 | 32,6 |
| **Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum** | **4820** | **32,5** |
| 11 Annað handaligt arbeiði | 204 | 32,4 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 306 | 31,6 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 213 | 28,6 |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 701 | 28,0 |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 575 | 23,1 |

Viðmerking: Grønu markingarnar merkja, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá betri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum. Reyðu markingarnar merkja, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá verri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Tvídráttum millum arbeiðslív og heimalív***
Úrslitini fyri *Tvídráttir millum arbeiðslív og heimalív* vístu, at svarpersónar úr Føroyum í lægri mun uppliva stríð millum arbeiðslív og heimalív samanborið við svarpersónar úr donsku tilvísingarkanningini.

Upp á tvørs av kyni bendu úrslitini á, at kvinnuligir svarpersónar í eitt sindur størri mun siga frá stríði millum arbeiðslív og heimalív. Úrslitini fyri aldursbólkarnar vístu, at elstu svarpersónarnir yvir 65 ár hava mett eitt lágt støði av stríði millum arbeiðslív og heimalív, meðan svarpersónar í aldrinum 25 og 34 ár í størri mun uppliva stríð millum arbeiðslív og heimalív. Býtt upp í ymisku starvsbólkarnar, bendu úrslitini á, at svarpersónar í starvsbólkunum 'Leiðsluarbeiði' og 'Arbeiði á heilsuøkinum' í størri mun hava sagt frá stríði millum arbeiðslív og heimalív samanborið við restina av starvsbólkunum. Til endans bendu úrslitini á, at svarpersónar í starvsbólkinum 'Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði' í minni mun hava sagt frá stríði millum arbeiðslív og heimalív samanborið við hinar starvsbólkarnar, men eisini miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini.

# 4 Úrslit um likamligt og evnafrøðiligt arbeiðsumhvørvi, larm og ristingar, arbeiðsóhapp og trygd umframt heilsu og arbeiðsførleika

## 4.1 Likamligt arbeiðsumhvørvi

Tung og reglulig lyfting og likamliga tyngjandi arbeiðsstøður, har ryggurin verður boygdur, snaraður ella bendur hava ymiskar avleiðingar í mun til heilsu og arbeiði. T.d. er vandin øktur fyri pínu í ryggi, møði, sjúkufráveru og fyritíðareftirløn av hørðum likamligum og tyngjandi arbeiði.

Kanningar hava t.d. staðfest, at hart likamligt arbeiði øki um vandan fyri bæði drúgvari sjúkufráveru, fyritíðareftirløn, og at starvsfólk taka seg av arbeiðsmarknaðinum fyri tíð (10, 13, 14, 130). Ein onnur kanning hevur staðfest, at tað at vera fyri ymiskari likamligari tyngd í arbeiðinum hongur saman við øktari likamligari møði aftan á arbeiði. Henda kanningin fann harumframt, at tess fleiri likamliga hørðum og tyngjandi arbeiði, mann er fyri samstundis, tess sterkari var samanhangurin við likamliga møði aftan á arbeiði (131). Granskingin vísir eisini á, at likamlig tyngd í arbeiðinum, t.d. høg mongd at lyfta og reglulig lyfting økja um vandan fyri pínu í lendunum (9). Ein onnur kanning vísir á, at arbeiðstakarar, sum takast við lyfting meira enn helvtina av arbeiðsdegnum eru í øktum vanda fyri drúgvari sjúkufráveru (11).

### 4.1.1 Likamlig tyngd í arbeiðinum

*Likamlig tyngd í arbeiðinum* snýr seg um allar rørslur, aktivitetir og kropsstøður, sum arbeiðstakarin útinnir í arbeiðstíðini, og sum í teimum flestu førunum eru neyðugar fyri, at arbeiðstakarin kann útinna sítt arbeiði. Gransking vísir á, at starvsfelagar, sum siga frá høgari likamligari tyngd í arbeiðinum eru í øktum vanda fyri drúgvari sjúkufráveru (12, 130).

Vit máta *Likamlig tyngd í arbeiðinum* við einum spurningi um, hvussu likamliga hart, mann vanliga metir sítt núverandi arbeiði at vera á einum stiga frá 1-10. Býtið av svørum fyri allar svarpersónar í kanningini sæst í talvu 4.1.1.1.

**Talva 4.1.1.1: Býti av svørum upp á spurningin 'Hvussu likamliga hart fatar tú vanliga títt núverandi arbeiði?'**

| | Tal | Prosent |
|---|---|---|
| 1: Ikki hart | 1218 | 25,5 |
| 2 | 620 | 13,0 |
| 3 | 629 | 13,2 |
| 4 | 396 | 8,3 |
| 5 | 486 | 10,2 |
| 6 | 370 | 7,7 |
| 7 | 486 | 10,2 |
| 8 | 383 | 8,0 |
| 9 | 108 | 2,3 |
| 10: Verður ikki harðari | 86 | 1,8 |

Svørini frá spurninginum í talvu 4.1.1.1 um *Likamlig tyngd í arbeiðinum* eru umgjørd til ein stiga, sum gongur frá 10-100, har 100 bendir á, at arbeiðið likamliga ikki kann gerast harðari. Tað sama hava vit gjørt við dátur úr kanningini 'Arbeiðsumhvørvi og Heilsa 2018' (20), og harvið kunnu vit samanbera miðal-stigatøl upp á tvørs av teimum báðum bólkunum.

Talva 4.1.1.2 vísir miðal-stigatalið fyri *Likamliga tyngd í arbeiðinum* fyri svarpersónarnar úr Føroyum og fyri danskar arbeiðstakarar úr AH-kanningini. Úrslitini benda í hesum førinum á, at føroysku svarpersónarnir hava eitt hægri miðaltal á stiganum og benda sostatt á, at svarpersónarnir úr Føroyum í størri mun enn donsku svarpersónarnir meta teirra arbeiði at vera likamliga tyngjandi. Tó skal vera viðmerkt, at miðaltalið fyri donsku og føroysku svarpersónarnar liggur undir miðjuni av stiganum, sum bendir á, at likamliga tyngdin er moderat fyri báðar bólkar.

**Talva 4.1.1.2: Miðaltøl fyri stigan *Likamlig tyngd í arbeiðinum***

| Likamlig tyngd í arbeiðinum | Miðaltal |
|---|---|
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum | 39,5 |
| Miðaltalið fyri svarpersónar úr Danmark | 33,1 |

Í talvunum niðan fyri verða úrslitini víst fyri stigan um *Likamliga tyngd í arbeiðinum* býtt upp í ávikavist kyn, aldur og starvsbólkar.

Talva 4.1.1.3 vísir úrslitini fyri *Likamliga tyngd í arbeiðinum* býtt upp í menn og kvinnur. Úrslitini benda á, at mannligir svarpersónar í eitt sindur størri mun enn kvinnur meta teirra arbeiði at vera likamliga tyngjandi. Ein ískoytisgreining vísir, at munurin millum menn og kvinnur er hagfrøðiliga signifikantur (p=0.0020).

**Talva 4.1.1.3: Miðaltøl fyri stigan *Likamlig tyngd í arbeiðinum* býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Miðaltal |
|---|---:|---:|
| Maður | 1980 | 40,8 |
| Kvinna | 2697 | 38,5 |

Talva 4.1.1.4 vísir úrslitini fyri *Likamlig tyngd í arbeiðinum* býtt upp í ymiskar aldursbólkar. Úrslitini benda á, at yngstu svarpersónarnir undir 25 ár hava mett teirra arbeiði at vera meira tyngjandi likamliga samanborið við hinar aldursbólkarnar. Harafturímóti hava svarpersónar yvir 65 ár lægsta miðaltalið og hava tískil mett teirra arbeiði at vera minni tyngjandi likamliga enn hinir aldursbólkarnir. Ein ískoytisgreining vísir, at munirnir millum aldursbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 4.1.1.4: Miðaltøl fyri stigan *Likamlig tyngd í arbeiðinum* býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Miðaltal |
|---|---:|---:|
| < 25 ár | 203 | 52,6 |
| 25 - 34 ár | 648 | 43,9 |
| 35 - 44 ár | 1059 | 37,9 |
| 45 - 54 ár | 1262 | 38,3 |
| 55 - 64 ár | 1149 | 38,3 |
| > 65 ár | 351 | 37,0 |

Talva 4.1.1.5 vísir úrslitini fyri *Likamliga tyngd í arbeiðinum* býtt upp í ymisku starvsbólkarnar, og talvan vísir harumframt, hvar miðaltalið hjá starvsbólkinum liggur samanborið við miðaltalið fyri allar svarpersónar í kanningini. Úrslitini benda í hesum førinum á, at svarpersónar í starvsbólkunum 'Annað handaligt arbeiði' og 'Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap' meta teirra arbeiði at vera meira likamliga tyngjandi enn hinir bólkarnir og eisini eitt sindur meira tyngjandi enn miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini. Úrslitini benda eisini á, at svarpersónar í starvsbólkunum 'Handverkaraarbeiði' og 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' meta teirra arbeiði at vera likamliga tyngjandi samanborið við hinar bólkarnar. Til endans vísa úrslitini, at svarpersónar í 'Leiðsluarbeiði', 'Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði' og 'Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði' meta teirra arbeiði at vera minni hart likamliga enn miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini. Ein ískoytisgreining vísir, at munirnir millum starvsbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 4.1.1.5: Miðaltøl fyri stigan *Likamlig tyngd í arbeiðinum* býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| 11 Annað handaligt arbeiði | 205 | 65,1 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 66 | 63,3 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 210 | 59,8 |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 164 | 57,8 |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 561 | 51,0 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 301 | 50,3 |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 701 | 39,9 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 783 | 39,9 |
| **Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum** | **4782** | **39,5** |
| 1 Leiðsluarbeiði | 450 | 29,3 |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 576 | 25,1 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 634 | 21,6 |

Viðmerking: Grøna markingin merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá betri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum. Reyða markingin merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá verri psykososialum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Likamligari tyngd í arbeiðinum***
Samanumtikið vístu úrslitini fyri *Likamliga tyngd í arbeiðinum*, at føroyskir svarpersónar hava mett teirra arbeiði at vera eitt sindur meira likamliga tyngjandi enn miðaltalið av donskum arbeiðstakarum.

Úrslitini vístu harumframt, at mannligir svarpersónar í eitt sindur størri mun hava mett teirra arbeiði at vera likamliga tyngjandi samanborið við kvinnuligar svarpersónar. Upp á tvørs av aldursbólkunum vístu úrslitini, at yngstu svarpersónarnir undir 25 ár hava mett teirra arbeiði at vera likamliga tyngjandi í týðiliga størri mun enn hinir aldursbólkarnir. Til endans vístu úrslitini upp á tvørs av starvsbólkunum, at ein partur av starvsbólkunum í týðiliga størri mun enn miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini uppliva arbeiðið at vera likamliga tyngjandi. Her hava serliga svarpersónar úr 'Annað handaligt arbeiði' og 'Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap' mett teirra arbeiði at vera likamliga tyngjandi, samanborið við hinar starvsbólkarnar. Harafturat vístu úrslitini, at svarpersónar úr starvsbólkinum 'Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði' hava mett teirra arbeiði at vera minni likamliga tyngjandi samanborið við hinar bólkarnar.

### 4.1.2 Arbeiði til gongu, standandi ella sitandi arbeiði

Kanningar úr Danmark vísa, at 60 prosent av allari arbeiðsfjøldini í Danmark stendur og/ella gongur í minsta lagi helvtina av arbeiðsdegnum, og ein fjórðingur stendur og/ella gongur næstan allan arbeiðsdagin. Hetta ger seg galdandi millum annað, tá tað kemur til starvsfelagar, sum eru í arbeiði innan fyri reingerð, flutning og ídnað, har tað somuleiðis sæst stór útbreiðsla av trupulleikum við vødda- og beinagrindarlagnum, sjúkufráveru og at starvsfólk taka seg aftur av arbeiðsmarknaðinum fyri tíð (20).

Granskingin vísir millum annað á, at arbeiðstakarar, sum siga frá, at tey standa uppi í minst 30 minuttir av arbeiðsdegnum, eru í øktum vanda fyri at fáa lendapínu (132, 133). Ein onnur kanning hevur eisini víst á, at arbeiðstakarar, sum standa uppi sama stað meira enn 50 prosent av samlaðu arbeiðstíðini eru í øktum vanda fyri drúgvari sjúkufráveru (10).

Vit máta *Arbeiði til gongu, standandi ella sitandi arbeiði* við spurningi um, hvussu stóran part av arbeiðstíðini, mann ávikavist gongur, stendur ella situr. Býtið av svørum fyri allar svarpersónar í kanningini sæst í talvu 4.1.2.1.

**Talva 4.1.2.1: Býti av svørum í prosentum fyri stigan *Arbeiði til gongu, standandi ella sitandi arbeiði***

| | Ongantíð | Sjáldan | Uml. 1/4 av tíðini | Uml. 1/2 av tíðini | Uml. 3/4 av tíðini | Næstan alla tíðina |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Situr tú? | 5,0 | 20,2 | 14,3 | 17,3 | 19,3 | 23,9 |
| Gongur ella stendur tú? | 1,4 | 25,0 | 20,0 | 19,5 | 14,2 | 19,9 |

Vit samanbera úrslitini frá hesari kanningini við úrslitini úr kanningini av arbeiðsumhvørvinum hjá donskum arbeiðstakarum frá 2018 (20). Vit samanbera úrslitini grundað á hesi parametur:

- Gongur ella stendur í minsta lagi 3/4 av tíðini
- Gongur ella stendur í minsta lagi 1/4 av tíðini
- Situr niðri í minsta lagi 3/4 av tíðini

Talva 4.1.2.2 vísir býtið av svørum fyri tey trý parametrini, nevnd omanfyri, býtt upp í ávikavist danskar og føroyskar svarpersónar. Her vísa úrslitini, at tað eru 43,2 prosent av svarpersónunum úr Føroyum, sum siga frá, at tey sita niðri í minsta lagi 3/4 av tíðini í teirra arbeiði, har 38,7 prosent av svarpersónunum í donsku tilvísingarkanningini afturímóti hava sagt seg sita niðri í minsta lagi 3/4 av tíðini í teirra arbeiði. Tá samanborið verður við danskar svarpersónar, benda úrslitini sostatt á, at tað er ein størri partur av føroyskum svarpersónum, sum situr niðri í minsta lagi 3/4 av tíðini í sambandi við teirra arbeiði.

Úrslitini vísa harumframt, at 73,6 prosent av svarpersónunum úr Føroyum hava sagt frá, at tey ganga ella standa í minsta lagi 1/4 av tíðini í teirra arbeiði, meðan 83,2 prosent av

svarpersónunum í donsku tilvísingarkanningini siga frá, at tey ganga ella standa í minsta lagi 1/4 av tíðini í arbeiðinum. Her benda úrslitini tískil á, at tað er ein minni partur av føroyskum svarpersónum, sum gongur ella stendur í minsta lagi 1/4 av tíðini samanborið við danskar svarpersónar. Sama úrslitið sæst fyri 'Gongur ella stendur í minsta lagi 3/4 av tíðini' – her er tað eisini ein eitt sindur minni partur av svarpersónum úr Føroyum, sum siga seg ganga ella standa í minsta lagi 3/4 av tíðini (34,1 prosent), meðan samsvarandi parturin ljóðar upp á 39,6 prosent fyri svarpersónarnar úr Danmark.

**Talva 4.1.2.2: Býti av svørum í prosentum fyri stigan *Arbeiði til gongu, standandi ella sitandi arbeiði***

| | Situr niðri í minsta lagi 3/4 av tíðini | Gongur ella stendur í minsta lagi 3/4 av tíðini | Gongur ella stendur í minsta lagi 1/4 av tíðini |
|---|---|---|---|
| Partur av svarpersónum úr Føroyum | 43,2 | 34,1 | 73,6 |
| Partur av svarpersónum úr Danmark | 38,7 | 39,6 | 83,2 |

Fyri at kunna samanbera úrslitini fyri arbeiði til gongu, standandi ella sitandi arbeiði upp á tvørs av kyni, aldri og starvsbólkum, hava vit umkotað spurningarnar úr talvu 4.1.2.1 til tveir stigar, ávikavist fyri *Arbeiði til gongu/standandi arbeiði* og *Sitandi arbeiði*. Báðir stigar ganga frá 0 til 100, og eitt stigatal upp á 100 bendir á, at mann 'Næstan alla tíðina' gongur/stendur ella situr niðri í arbeiðinum. Vit hava umkotað spurningarnar til tveir stigar fyri at gera tað lættari at samanbera úrslit upp á tvørs av bólkunum, men eisini fyri at halda fast við sama formatið gjøgnum alla frágreiðingina.

Niðan fyri leggja vit fyrst úrslitini fram fyri stigan *Sitandi arbeiði* býtt upp í ávikavist kyn, aldur og starvsbólkar. Úrslitini fyri stigan *Arbeiði til gongu/standandi arbeiði* vera løgd fram eftirfylgjandi.

### Sitandi arbeiði

Miðaltalið fyri *Sitandi arbeiði* fyri allar svarpersónar í kanningini er 59,5, og svarar tí til, at svarpersónarnir í miðal sita niðri eitt sindur yvir helvtina av tíðini í teirra arbeiði.

Talva 4.1.2.3 vísir úrslitini fyri *Sitandi arbeiði* býtt upp í kyn. Úrslitini benda á, at tað bert er lítil munur á, hvussu nógv menn og kvinnur sita niðri í teirra arbeiði. Ein ískoytisgreining vísir harafturat, at munurin millum menn og kvinnur ikki er hagfrøðiliga signifikanturur (p=0.2121).

**Talva 4.1.2.3: Miðaltøl fyri stigan *Sitandi arbeiði* býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| Maður | 1972 | 60,1 |
| Kvinna | 2688 | 58,9 |

Talva 4.1.2.4 vísir úrslitini fyri *Sitandi arbeiði* býtt upp í aldursbólkar. Úrslitini benda á, at yngstu svarpersónarnir undir 25 ár sita týðiliga minni niðri í arbeiðinum (35,6 stig) enn hinir bólkarnir. Harafturímóti vísa úrslitini, at teir elstu svarpersónarnir yvir 65 ár sita

meira niðri í arbeiðinum enn hinir aldursbólkarnir. Ein ískoytisgreining vísir harumframt, at munirnir millum aldursbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 4.1.2.4: Miðaltøl fyri stigan *Sitandi arbeiði* býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| < 25 ár | 201 | 35,6 |
| 25 - 34 ár | 645 | 54,7 |
| 35 - 44 ár | 1056 | 61,4 |
| 45 - 54 ár | 1258 | 61,2 |
| 55 - 64 ár | 1144 | 61,2 |
| > 65 ár | 351 | 63,5 |

Talva 4.1.2.5 vísir úrslitini fyri *Sitandi arbeiði* býtt upp í teir 11 starvsbólkarnar. Talvan vísir harumframt, hvar ymisku starvsbólkarnir liggja samanborið við miðaltalið fyri allar svarpersónar í kanningini. Úrslitini benda á, at svarpersónar í 'Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði' og 'Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði' liggja týðiliga hægst á stiganum við stigatølum upp á ávikavist 86,7 og 86,1. Hesir báðir starvsbólkarnir sita sostatt niðri í arbeiðinum meira enn 3/4 av tíðini og tætt við 'Næstan alla tíðina'. Harafturímóti liggja svarpersónar í 'Annað handaligt arbeiði' og 'Handverkaraarbeiði' týðiliga lægst á stiganum við stigatølum upp á ávikavist 28,7 og 28,3. Svarpersónar í hesum báðum starvsbólkunum sita sostatt týðiliga minni niðri í arbeiðinum enn hinir starvsbólkarnir. Ein ískoytisgreining vísir eisini, at munirnir millum bólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 4.1.2.5: Miðaltøl fyri stigan *Sitandi arbeiði* býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 575 | 86,7 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 633 | 86,1 |
| 1 Leiðsluarbeiði | 448 | 73,8 |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 698 | 63,9 |
| **Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum** | **4747** | **59,5** |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umfram flutningsarbeiði | 163 | 51,7 |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 560 | 45,0 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 780 | 44,2 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 299 | 38,7 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 66 | 35,5 |
| 11 Annað handaligt arbeiði | 205 | 28,7 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 208 | 28,3 |

Viðmerking: Grøna markingin merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá einum minni tyngjandi likamligum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum. Reyðu markingarnar merkja, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá einum meira tyngjandi likamligum arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av arbeiðstakarum í Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Sitandi arbeiði***

Úrslitini fyri *Sitandi arbeiði* vístu, at tað er ein eitt sindur størri partur av svarpersónum úr Føroyum, sum situr niðri í arbeiðinum í minsta lagi 3/4 av tíðini samanborið við danskar arbeiðstakarar. Upp á tvørs av kyni, vístu úrslitini, at tað bert var lítil munur á, hvussu nógv mannligir og kvinnuligir svarpersónar sita niðri í arbeiðinum. Umframt hetta vístu úrslitini, at yngstu svarpersónarnir undir 25 ár sita týðiliga minni niðri í arbeiðinum samanborið við hinar aldursbólkarnar, meðan teir elstu svarpersónarnir yvir 65 ár síggja út til at vera tann bólkurin, sum situr mest niðri. Upp á tvørs av starvsbólkunum vístu úrslitini, at 'Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði' og 'Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði' eru teir báðir starvsbólkarnir, har svarpersónarnir í størstan mun siga frá, at teir sita niðri í arbeiðstíðini og eisini týðiliga meira enn miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini. Harnæst vístu úrslitini, at fleiri starvsbólkar sita minni niðri samanborið við miðaltalið av øllum svarpersónum. Her vístu úrslitini millum annað, at svarpersónar í 'Annað handaligt arbeiði' og 'Handverkaraarbeiði' sjáldan sita niðri í arbeiðstíðini, og siga seg harvið sita minni niðri samanborið við hinar starvsbólkarnar.

**Arbeiði til gongu/standandi arbeiði**

Miðaltalið fyri *Arbeiði til gongu/standandi arbeiði* fyri allar svarpersónar í kanningini er 56,0, og samsvarar tí næstan við, at svarpersónarnir í miðal ganga ella standa uppi uml. helvtina av teirra arbeiðstíð.

Talva 4.1.2.6 vísir úrslitini fyri *Arbeiði til gongu/standandi arbeiði* býtt upp í kyn. Úrslitini benda á, at kvinnuligir svarpersónar ganga ella standa meira í teirra arbeiði enn menn. Ein ískoytisgreining vísir eisini, at munurin millum menn og kvinnur er hagfrøðiliga signifikantur (p<.0001).

**Talva 4.1.2.6: Miðaltøl fyri stigan *Arbeiði til gongu/standandi arbeiði* býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| Maður | 1972 | 53,9 |
| Kvinna | 2688 | 57,6 |

Talva 4.1.2.7 vísir úrslitini fyri *Arbeiði til gongu/standandi arbeiði* býtt upp í aldur. Úrslitini benda á, at yngstu svarpersónarnir undir 25 ár ganga ella standa uppi í arbeiðinum í týðiliga størri mun enn hinir bólkarnir. Hesir svarpersónarnir hava eitt miðaltal á stiganum upp á 77,3, sum næstan samsvarar við, at teir ganga ella standa uppi 3/4 av tíðini í teirra arbeiði. Hetta úrslitið samsvarar harumframt við úrslitini um *Sitandi arbeiði* (talva 4.1.2.4), og úrslitini benda sostatt á, at yngstu svarpersónarnir í kanningini í nógv størri mun hava størv, har teir ganga ella standa uppi nógv av tíðini í teirra arbeiði. Harnæst vísa úrslitini, at teir elstu svarpersónarnir yvir 65 ár hava lægsta miðaltalið (51,6 stig), og eru harvið tann aldursbólkurin, sum gongur ella stendur minst í arbeiðinum. Hetta samsvarar annars eisini við úrslitini um *Sitandi arbeiði* (talva 4.1.2.4). Ein ískoytisgreining vísir harumframt, at munirnir millum bólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 4.1.2.7: Miðaltøl fyri stigan *Arbeiði til gongu/standandi arbeiði* býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| < 25 ár | 201 | 77,3 |
| 25 - 34 ár | 645 | 61,5 |
| 35 - 44 ár | 1056 | 54,5 |
| 45 - 54 ár | 1258 | 53,8 |
| 55 - 64 ár | 1144 | 54,5 |
| > 65 ár | 351 | 51,6 |

Talva 4.1.2.8 vísir úrslitini fyri *Arbeiði til gongu/standandi arbeiði* býtt upp í starvsbólkar. Úrslitini benda á, at svarpersónar í 'Annað handaligt arbeiði', 'Handverkaraarbeiði' og 'Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap' ganga ella standa uppi í arbeiðinum í týðiliga størri mun enn hinir bólkarnir. Harnæst vísa úrslitini, at svarpersónar í 'Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði' og 'Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði' liggur týðiliga lægst á stiganum, og benda sostatt á, at teir í týðiliga minni mun ganga ella standa uppi í arbeiðinum. Úrslitini samsvara harvið eisini við úrslitini um *Sitandi arbeiði* (talva 4.1.2.5), og geva ábendingar um, hvørjir starvsbólkar ávikavist sita ella ganga/standa nógv uppi gjøgnum teirra arbeiðsdag. Ein ískoytisgreining vísir harafturat, at munirnir millum bólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 4.1.2.8: Miðaltøl fyri stigan *Arbeiði til gongu/standandi arbeiði* býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| 11 Annað handaligt arbeiði | 205 | 83,0 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 208 | 79,5 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 66 | 78,8 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 299 | 75,9 |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 560 | 69,8 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 780 | 69,7 |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 163 | 61,7 |
| **Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum** | **4746** | **56,0** |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 698 | 51,9 |
| 1 Leiðsluarbeiði | 448 | 43,4 |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 575 | 32,6 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 633 | 32,6 |

Viðmerking: Grønu markingarnar merkja, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá um eitt likamliga minni tyngjandi arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av øllum svarpersónum úr Føroyum. Reyða markingin merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá einum likamliga meira tyngjandi arbeiðsumhvørvi enn miðaltalið av øllum svarpersónum úr Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Arbeiði til gongu/standandi arbeiði***

Úrslitini fyri *Arbeiði til gongu/standandi arbeiði* vístu, at svarpersónar úr Føroyum ganga ella standa uppi í arbeiðinum í eitt sindur minni mun enn danskir arbeiðstakarar úr AH-kanningini. Úrslitini vístu harumframt, at miðaltalið fyri allar svarpersónar úr Føroyum,

samsvarar við, at svarpersónarnir ganga ella standa uppi í arbeiðinum umleið helvtina av tíðini.

Harnæst vístu úrslitini, at kvinnuligir svarpersónar ganga ella standa eitt sindur meira í arbeiðinum enn mannligir svarpersónar. Upp á tvørs av aldursbólkunum vístu úrslitini, at yngstu svarpersónarnir undir 25 ár ganga ella standa uppi í arbeiðinum í týðiliga størri mun enn hinir bólkarnir. Upp á tvørs av starvsbólkunum vístu úrslitini, at ein partur av starvsbólkunum ganga ella standa uppi í arbeiðinum í størri mun enn miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini. Serliga svarpersónar úr starvsbólkunum 'Annað handaligt arbeiði', 'Handverkaraarbeiði' og 'Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap' siga seg ganga ella standa uppi í arbeiðinum uml. 3/4 av tíðini. Harafturímóti vísa úrslitini, at svarpersónar í 'Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði' og 'Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði' ganga ella standa uppi í minni mun enn hinir starvsbólkarnir.

### 4.1.3 Tyngjandi arbeiðsstøður

Tyngjandi arbeiðsstøður verða mátaðar við einari røð av spurningum, ið lýsa hvussu stóran part av arbeiðstíðini, mann ávikavist hevur armarnar lyftar upp til ella yvir akslahædd, ger endurtakandi armrørslur fleiri ferðir um minuttin, situr og hýkur ella á knæ, ella arbeiðir við snaraðum ryggi ella bend/ur framav uttan at kunna stuðla sær við hondunum og ørmunum. Granskingin vísir á, at arbeiðstakarar, sum siga frá, at teir arbeiða við snaraðum ryggi ella bendir framav, at teir arbeiða við ørmunum lyftum í ella yvir akslahædd, og at teir sita og húka ella liggja á knøunum, tá ið teir arbeiða, eru í øktum vanda fyri drúgvari sjúkufráveru. Og hesin økti vandin er galdandi fyri starvsfelagar, ið svara, at teir arbeiða í hesum tyngjandi arbeiðsstøðunum í 25 prosent av teirra arbeiðstíð ella meira. Granskingin vísir eisini á, at teir arbeiðstakarar, ið gera tær somu armrørslurnar fleiri ferðir um minuttin, eru í øktum vanda fyri drúgvari sjúkufráveru (10).

Talva 4.1.3.1 vísir teir fýra spurningarnar, sum verða settir innan fyri evnið *Tyngjandi arbeiðsstøður*. Talvan vísir eisini býtið av svørum í prosentum fyri allar svarpersónar í kanningini.

**Talva 4.1.3.1: Býti av svørum í prosentum fyri stigan *Tyngjandi arbeiðsstøður***

| | Ongantíð | Sjáldan | Uml. 1/4 av tíðini | Uml. 1/2 av tíðini | Uml. 3/4 av tíðini | Næstan alla tíðina |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Arbeiðir tú við snaraðum ryggi ella bend/ur frameftir uttan at kunna stuðla tær við hondum og ørmum? | 37,7 | 34,8 | 11,3 | 7,4 | 4,6 | 4,3 |
| Lyftir tú armarnar í ella upp um akslahædd? | 36,3 | 41,9 | 12,1 | 5,3 | 2,6 | 1,9 |
| Gert tú endurtakandi armrørslur fleiri ferðir um minuttin (t.d. pakkiarbeiði, montering ella útskering)? | 61,3 | 21,7 | 6,0 | 4,1 | 2,7 | 4,2 |
| Situr tú og hýkur ella liggur á knæ, meðan tú arbeiðir? | 54,2 | 27,3 | 10,8 | 4,4 | 1,9 | 1,4 |

Vit samanbera úrslitini í talvu 4.1.3.2 við úrslit úr AH-kanningini í Danmark grundað á hesi mál:

- Rygginum snaraðum í minsta lagi 1/4 av tíðini
- Ørmunum lyftum í minsta lagi 1/4 av tíðini
- Somu armrørslur í minsta lagi 1/4 av tíðini
- Húkandi ella á knæ í minsta lagi 1/4 av tíðini

Úrslitini í talvu 4.1.3.2 vísa, at 21,8 prosent av svarpersónunum úr Føroyum hava armarnar lyftar upp í arbeiðinum í minsta lagi 1/4 av tíðini, meðan 19,3 prosent av donsku svarpersónunum úr AH-kanningini arbeiða við ørmunum lyftum í minsta lagi

1/4 av tíðini. Harnæst vísa úrslitini, at ein eitt sindur størri partur av arbeiðstakarum í Danmark (25 prosent) uppliva, at teir gera endurtakandi armrørslur í minsta lagi 1/4 av tíðini, har tað hin vegin 'einans' eru 17 prosent av svarpersónunum úr Føroyum, sum siga frá tí sama. Harumframt vísa úrslitini, at tað er minni munur á, hvussu stórur partur av ávikavist føroyskum og donskum arbeiðstakarum, sum sita og húka ella liggja á knæ í minsta lagi 1/4 av tíðini og hava ryggin snaraðan í minsta lagi 1/4 av tíðini. Úrslitini benda á, at ein lutfalsliga stórur partur av bæði donskum og føroyskum svarpersónum svara, at teir arbeiða við snaraðum ryggi ella bendir framav.

**Talva 4.1.3.2: Býti av svørum í prosentum fyri stigan *Tyngjandi arbeiðsstøður***

| | Ørmunum lyftum í minsta lagi 1/4 av tíðini | Somu armrørslur í minsta lagi 1/4 av tíðini | Húkandi ella á knæ í minsta lagi 1/4 av tíðini | Rygginum snaraðum í minsta lagi 1/4 av tíðini |
|---|---|---|---|---|
| Partur av svarpersónum úr Føroyum | 21,8 | 17,0 | 18,5 | 27,5 |
| Partur av svarpersónum úr Danmark | 19,3 | 25,0 | 16,9 | 30,9 |

Fyri at samanbera úrslitini um *Tyngjandi arbeiðsstøður* upp á tvørs av bólkum (kyni, aldri og starvsbólkum) í Føroyum hava vit umgjørt teir fýra spurningarnar úr talvu 4.1.3.1 til ein stiga frá 0-100, har 100 bendir á, at svarpersónarnir hava svarað 'Næstan alla tíðina' upp á teir fýra spurningarnar. Eitt høgt miðaltal er sostatt ein ábending um eina tynging í likamliga arbeiðsumhvørvinum, sum í hesum førinum kann merkja, at mann ofta upplivir at arbeiða í tyngjandi arbeiðsstøðum.

Vit hava umgjørt teir fýra spurningarnar fyri at gera tað lættari at samanbera úrslit upp á tvørs av bólkunum. En korrelasjónsgreining vísir harumframt, at tað er høg korrelasjón millum teir fýra spurningarnar og rættvísger tískil at vit umgjørdu stigan, sum vit kalla *Tyngjandi arbeiðsstøður.*

Miðaltalið fyri *Tyngjandi arbeiðsstøður* fyri svarpersónarnar úr Føroyum er 18,8 og samsvarar tí næstan við, at svarpersónarnir í miðal hava svarað 'Sjáldan' upp á teir fýra spurningarnar um tyngjandi arbeiðsstøður, ið eru umfevndir í stiganum.

Í talvunum niðan fyri samanbera vit úrslitini fyri stigan um *Tyngjandi arbeiðsstøður* býtt upp í kyn, aldur og starvsbólkar.

Talva 4.1.3.3 vísir úrslitini fyri stigan um *Tyngjandi arbeiðsstøður* býtt upp í menn og kvinnur. Úrslitini benda á, at kvinnur eitt sindur oftari enn menn siga seg arbeiða í tyngjandi arbeiðsstøðum. Ein ískoytisgreining vísir tó, at munurin millum menn og kvinnur er hagfrøðiliga signifikantur ($p<.0001$).

**Talva 4.1.3.3: Miðaltøl fyri stigan *Tyngjandi arbeiðsstøður* býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| Maður | 1972 | 17,6 |
| Kvinna | 2687 | 20,5 |

Talva 4.1.3.4 vísir úrslitini fyri stigan um *Tyngjandi arbeiðsstøður* býtt upp í aldursbólkar. Her vísa úrslitini, at yngru svarpersónarnir oftari uppliva at arbeiða í tyngjandi arbeiðsstøðum. T.d. sæst, at svarpersónar undir 25 ár hava hægsta miðaltalið á stiganum (33,6 stig), sum bendir á, at hesir svarpersónarnir oftari arbeiða í tyngjandi arbeiðsstøðum enn eldri svarpersónar. Harafturímóti hava svarpersónar millum 55 og 64 ár lægsta miðaltalið (16,2 stig), og siga seg sostatt meira sjáldan arbeiða í tyngjandi arbeiðsstøðum. Ein ískoytisgreining vísir harumframt, at munirnir millum bólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir ($p<.0001$).

**Talva 4.1.3.4: Miðaltøl fyri stigan *Tyngjandi arbeiðsstøður* býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| < 25 ár | 201 | 33,6 |
| 25 - 34 ár | 645 | 23,4 |
| 35 - 44 ár | 1056 | 18,2 |
| 45 - 54 ár | 1258 | 17,2 |
| 55 - 64 ár | 1143 | 16,2 |
| > 65 ár | 351 | 18,2 |

Talva 4.1.3.5 vísir úrslitini fyri stigan um *Tyngjandi arbeiðsstøður* býtt upp í starvsbólkar og vísir harumframt, hvar miðaltalið hjá ymisku starvsbólkunum liggur á stiganum samanborið við miðaltalið fyri allar svarpersónar í kanningini. Her vísa úrslitini, at starvsbólkarnir 7, 8, 9, 10 og 11 allir hava eitt miðaltal á stiganum um *Tyngjandi arbeiðsstøður,* ið er í minsta lagi fimm stig hægri enn miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini. Úrslitini vísa harumframt, at svarpersónar í 'Handverkaraarbeiði' og 'Annað handaligt arbeiði' hava eitt miðaltal á stiganum, sum samsvarar við, at teir uppliva tyngjandi arbeiðsstøður í minsta lagi 1/4 av tíðini. Harafturímóti liggur starvsbólkur 1, 2, 3 og 6 meira enn fimm stig undir miðaltalinum av øllum svarpersónum í kanningini og vísir harumframt, at hesir svarpersónarnir sjáldan uppliva at arbeiða í tyngjandi arbeiðsstøðum. Svarpersónar í 'Arbeiði á heilsuøkinum' hava lægsta miðaltalið upp á 2,4. Ein ískoytisgreining vísir, at munirnir millum bólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir ($p<.0001$).

**Talva 4.1.3.5: Miðaltøl fyri stigan *Tyngjandi arbeiðsstøður* býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| 9 Handverkaraarbeiði | 208 | 42,5 |
| 11 Annað handaligt arbeiði | 205 | 39,8 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 66 | 33,0 |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 163 | 32,9 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 299 | 27,6 |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 698 | 19,4 |
| **Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum** | **4746** | **18,8** |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 780 | 17,2 |
| 1 Leiðsluarbeiði | 448 | 11,5 |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 575 | 8,1 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 633 | 7,0 |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 559 | 2,4 |

Viðmerking: Grøna markingin merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá um færri tyngjandi arbeiðsstøður enn miðaltalið av øllum svarpersónum úr Føroyum. Reyða markingin merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum í størri mun siga frá tyngjandi arbeiðsstøðu enn miðaltalið av øllum svarpersónum úr Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Tyngjandi arbeiðsstøum***

Úrslitini fyri *Tyngjandi arbeiðsstøður* vístu, at svarpersónarnir úr Føroyum hava eitt miðaltal á stiganum upp á 18,8 og samsvarar tí næstan við, at svarpersónarnir í miðal hava svarað 'Sjáldan' upp á teir fýra spurningarnar, ið eru umfevndir í stiganum um tyngjandi arbeiðsstøður.

Upp á tvørs av kyni vístu úrslitini, at kvinnuligir svarpersónar siga frá, at tær eitt sindur oftari arbeiða í tyngjandi arbeiðsstøðum samanborið við mannligir svarpersónar. Harnæst vístu úrslitini, at yngstu svarpersónarnir undir 25 ár siga frá, at teir oftari enn hinir aldursbólkarnir arbeiða í tyngjandi arbeiðsstøðum. Upp á tvørs av starvsbólkunum vístu úrslitini, at svarpersónar í 'Handverkaraarbeiði' og 'Annað handaligt arbeiði' í størri mun uppliva at arbeiða í tyngjandi arbeiðsstøðum samanborið við hinar starvsbólkarnar og eisini týðiliga meira enn miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini. Til endans vístu úrslitini, at svarpersónar í 'Arbeiði á heilsuøkinum' hava lægsta miðaltalið á stiganum, og miðaltalið bendir harumframt á, at teir tætt við 'Ongantíð' uppliva at arbeiða í tyngjandi arbeiðsstøðum.

### 4.1.4 Lyfting, skump ella togan av byrðum

*Lyfting, skump ella togan av byrðum* verður mátað við spurningi um, hvussu stóran part av arbeiðstíðini, mann ávikavist ber ella lyftir umframt um vektin av einum vanligum lyfti (minst 16 ella í minsta lagi 30 kg) ella skumpar ella togar. Granskingin vísir á, at starvsfelagar, sum skumpa ella toga (10) og starvsfelagar, sum í teirra arbeiði lyfta ella bera tungar byrðar í 25 prosent av tíðini ella meira (10, 11) eru í øktum vanda fyri drúgvari sjúkufráveru. Granskingin vísir eisini á, at vandin fyri sjúkufráveru økist samstundis sum vektin á byrðunum, sum starvsfelagarnir skulu lyfta ella bera (11).

Talva 4.1.4.1 vísir teir fýra spurningarnar, sum verða settir innan fyri evnið *Lyfting, skump ella togan av byrðum.* Talvan vísir eisini býtið av svørum í prosentum fyri allar svarpersónar í kanningini.

**Talva 4.1.4.1: Býti av svørum í prosentum fyri stigan *Lyfting, skump ella togan av byrðum***

| | Ongantíð | Sjáldan | Uml. 1/4 av tíðini | Uml. 1/2 av tíðini | Uml. 3/4 av tíðini | Næstan alla tíðina |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Skumpar ella togar tú? | 55,7 | 27,7 | 9,7 | 3,5 | 1,6 | 1,8 |
| Ber ella lyftir tú? | 40,7 | 33,1 | 13,2 | 6,4 | 3,7 | 3,0 |
| | **Ongantíð** | **Sjáldan** | **Onkuntíð** | **Ofta** | **Alla tíðina** | **Lyfti ikki í mínum arbeiði** |
| Heldur tú, at tað er strævið at lyfta tað, ið tú vanliga lyftir? | 22,5 | 22,7 | 19,6 | 7,5 | 2,1 | 25,6 |
| | **Minni enn 5 kg** | **5 - 15 kg** | **16 - 29 kg** | **30 kg ella meira** | **Beri ella lyfti ikki í mínum arbeiði** | |
| Hvussu nógv vigar tað, sum tú ber ella lyftir, vanliga? | 21,3 | 23,5 | 12,2 | 7,8 | 35,3 | |

Vit samanbera úrslitini í talvu 4.1.4.2 við úrslit úr AH-kanningini grundað á hesi mál:

- Ber ella lyftir í minsta lagi 1/4 av tíðini
- Vanlig lyfting upp á 16 kg ella omanfyri
- Vanlig lyfting upp á 30 kg ella omanfyri
- Skumpar ella togar í minsta lagi 1/4 av tíðini

Úrslitini í talvu 4.1.4.2 vísa, at 26,3 prosent av svarpersónunum úr Føroyum bera ella lyfta í minsta lagi 1/4 av tíðini, meðan 31,1 prosent av svarpersónunum úr donsku AH-kanningini bera ella lyfta í minsta lagi 1/4 av tíðini. Tað er harvið ein størri partur av arbeiðstakarum í Danmark, sum lyftir ella ber í minsta lagi 1/4 av tíðini. Harnæst vísa úrslitini, at tað er minni munur á, hvussu stórur partur av svarpersónum úr ávikavist

Føroyum og Danmark vanliga lyfta 16 kg ella omanfyri. Harafturímóti vísa úrslitini, at ein størri partur av arbeiðstakarum **í** Føroyum lyftir 30 kg ella omanfyri í teirra arbeiði (7,8 prosent), har 'einans' 5,7 prosent av svarpersónunum úr Danmark vanliga lyfta 30 kg ella omanfyri. Til endans vísa úrslitini, at tað er eitt sindur størri partur av arbeiðstakarum í Danmark, sum skumpa ella toga í minsta lagi 1/4 av tíðini (21,0 prosent), har 16,6 prosent av svarpersónunum úr Føroyum siga frá, at teir skumpa ella toga í minsta lagi 1/4 av tíðini í teirra arbeiði.

**Talva 4.1.4.2: Býti av svørum í prosentum fyri stigan *Lyfting, skump ella togan av byrðum***

| | Ber ella lyftir í minsta lagi 1/4 av tíðini | Vanlig lyfting upp á 16 - 29 kg | Vanlig lyfting upp á 30 kg ella meira | Skumpar ella togar í minsta lagi 1/4 av tíðini |
|---|---|---|---|---|
| Partur av svarpersónum úr Føroyum | 26,2 | 12,2 | 7,8 | 16,6 |
| Partur av svarpersónum úr Danmark | 31,1 | 10,3 | 5,7 | 21,0 |

Fyri at samanbera úrslitini viðvíkjandi *Lyfting, skump ella togan* upp á tvørs av bólkum (kyn, aldur og starvsbólkar) hava vit umgjørt teir fyrstu tveir spurningarnar úr talvu 4.1.4.1 til ein stiga frá 0-100, har 100 bendir á, at svarpersónarnir hava svarað 'Næstan alla tíðina' til teir báðar spurningarnar um lyfting, skump og togan. Ein korrelasjónsgreining vísir harumframt, at teir báðir spurningarnir korrelera høgt (r= 0.72), og rættvísger tí okkara umgerð av stiganum, sum vit kalla *Lyfting og skump.* Eitt høgt miðaltal er ein ábending um eina tynging í arbeiðinum, har sum tað í hesum førinum bendir á, at mann ofta upplivir at skula lyfta/bera , skumpa ella toga byrðar í sínum arbeiði.

Miðaltalið fyri *Lyfting og skumpan* fyri svarpersónarnar úr Føroyum er 18,1 og samsvarar tí næstan við, at svarpersónarnir í miðal hava svarað 'Sjáldan' upp á spurningarnar viðvíkjandi hesum stiganum. Tað bendir tískil á, at svarpersónarnir í miðal sjáldan uppliva at lyfta/bera  ella skumpa/toga í sambandi við teirra arbeiði.

Í talvunum niðan fyri samanbera vit úrslitini fyri stigan um *Lyfting og skump* býtt upp í kyn, aldur og starvsbólkar.

Talva 4.1.4.3 vísir úrslitini fyri *Lyfting og skump* býtt upp í kyn. Her vísa úrslitini, at mannligir svarpersónar hava eitt sindur hægri miðaltal (19,9 stig) á stiganum samanborið við kvinnuligar svarpersónar (16,8 stig). Tað sær harvið út til, at mannligir svarpersónar eitt sindur oftari lyfta/bera ella skumpa/toga í arbeiðinum. Bæði úrslit benda tó á, at svarpersónarnir 'Sjáldan' uppliva at skula lyfta/skumpa í arbeiðinum. Ein ískoytisgreining vísir, at munurin millum menn og kvinnur er hagfrøðiliga signifikantur (p<.0001).

**Talva 4.1.4.3: Miðaltøl fyri stigan *Lyfting og skump* býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| Maður | 1972 | 19,9 |
| Kvinna | 2686 | 16,8 |

Talva 4.1.4.4 vísir úrslitini fyri *Lyfting og skump* býtt upp í aldursbólkar. Her vísa úrslitini, at yngru svarpersónarnir oftari uppliva at skula lyfta/bera og skumpa/toga í arbeiðinum. T.d. sæst, at svarpersónar undir 25 ár hava eitt týðiliga hægri miðaltal á stiganum enn hinir bólkarnir (37,4 stig), og benda harumframt á, at hesir svarpersónarnir oftari uppliva at skula lyfta/bera ella skumpa/toga í arbeiðinum. Ein ískoytisgreining vísir, at munirnir millum bólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 4.1.4.4: Miðaltøl fyri stigan *Lyfting og skump* býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| < 25 ár | 201 | 37,4 |
| 25 - 34 ár | 645 | 22,7 |
| 35 - 44 ár | 1056 | 18,6 |
| 45 - 54 ár | 1257 | 16,3 |
| 55 - 64 ár | 1143 | 14,4 |
| > 65 ár | 351 | 15,6 |

Talva 4.1.4.5 vísir úrslitini fyri *Lyfting og skump* býtt upp í starvsbólkar. Her vísa úrslitini, at ein partur av starvsbólkunum, sum liggja í minst fimm stig hægri (verri) enn miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini. Teir starvsbólkar við hægstu miðaltølunum á stiganum eru ávikavist svarpersónar í 'Handverkaraarbeiði' (42,1 stig) og 'Annað handaligt arbeiði' (42,0 stig). Harafturímóti vísa úrslitini, at svarpersónar í 'Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði' og 'Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði' hava lægstu miðaltølini á stiganum, sum bendir á, at hesir svarpersónarnir næstan 'Ongantíð' lyfta ella skumpa í teirra arbeiði. Ein ískoytisgreining vísir, at munirnir millum bólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 4.1.4.5: Miðaltøl fyri stigan *Lyfting og skump* býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| 9 Handverkaraarbeiði | 208 | 42,1 |
| 11 Annað handaligt arbeiði | 205 | 42,0 |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 163 | 37,2 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 66 | 34,4 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 299 | 29,5 |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 559 | 24,2 |
| **Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum** | **4745** | **18,1** |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 698 | 17,8 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 779 | 17,4 |
| 1 Leiðsluarbeiði | 448 | 10,1 |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 575 | 4,9 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 633 | 4,0 |

Viðmerking: Grøna markingin merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá færri lyftingum/skumpum enn miðaltalið av øllum svarpersónum úr Føroyum. Reyða markingin merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum í størri mun siga frá lyftingum/skumpum enn miðaltalið av øllum svarpersónum úr Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Lyfting, skumpum ella togan av byrðum***
Úrslitini fyri *Lyfting, skump ella togan av byrðum* vístu, at svarpersónar úr Føroyum hava eitt miðaltal á stiganum um *Lyfting og skump* upp á 18,1, sum samsvarar við, at svarpersónarnir í miðal hava svarað, at teir 'Sjáldan' lyfta, skumpa ella toga byrðar í sambandi við arbeiðið.

Úrslitini vístu, at mannligir svarpersónar høvdu eitt sindur hægri miðaltal á stiganum um *Lyfting og skump* enn kvinnuligir svarpersónar. Upp á tvørs av aldursbólkunum vísa úrslitini, at yngstu svarpersónarnir undir 25 ár hava sagt frá, at teir oftari uppliva at skula lyfta, skumpa ella toga byrðar í arbeiðinum samanborið við hinar aldursbólkarnar. Miðaltalið hjá yngstu svarpersónunum samsvarar harumframt við, at svarpersónarnir í miðal hava svarað, at teir lyfta ella skumpa uml. 1/4 av tíðini. Innan fyri hetta økið, benda úrslitini tískil á, at tað er stórur munur á aldursbólkunum.

Úrslitini vístu harumframt, at svarpersónar í 'Handverkaraarbeiði' og 'Annað handaligt arbeiði' siga frá, at teir í miðal lyfta, skumpa ella toga byrðar í arbeiðinum uml. 1/4 av tíðini, og eru tí teir starvsbólkarnir, sum lyfta, skumpa ella toga oftast samanborið við hinar starvsbólkarnar. Harafturímóti, vístu úrslitini, at svarpersónar í 'Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði' og 'Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði' meira sjáldan og tætt upp at 'Ongantíð' lyfta, skumpa ella toga byrðar í arbeiðinum.

## 4.2 Evnafrøðiligt arbeiðsumhvørvi

*Evnafrøðiligt arbeiðsumhvørvi* skal skiljast breitt og fevnir yvirskipað um arbeiði við natúrligum og mannagjørdum evnafrøðiligum tilfari. Framvegis koma nógvar og víðfevndar evnafrøðiligar eksponeringar fyri í fleiri starvsgreinum, og eitt stórt tal av menniskjum eru framhaldandi í teirra arbeiði fyri skaðiligum tilfari so sum veskum, partiklum, støvi, royki, dampi og gassum frá arbeiðsháttum sum t.d. sveising, mekanisk tilgerð, brenning og framleiðsla og niðurbróting av polymerum (17). At anda partiklar í seg av t.d. frá avbrenning, brýning, útblástri ella øðrum støvandi arbeiðsháttum kann økja deyðleikan, serliga deyða elvdur av hjarta/æðra- og lungasjúkum. Harafturat kann húðsamband við kemisk evni (t.d. reingerðarevni og sóttreinsanarevni) ella arbeiði við vátum hondum hava við sær millum annað húðsjúkur vegna arbeiðskorini (134).

### 4.2.1 Húðárin og trupulleikar við húðini

Húðsjúkur, ið standast orsaka av arbeiðskorum eru nakrar av teimum mest vanligu líðingunum vegna arbeiðskor, og nógv tann størsti parturin av hesum húðsjúkunum eru hondeksem (17). Hvørt ár fáa uml. 1.700 arbeiðstakarar í Danmark viðurkent eina húðsjúku vegna arbeiðskor, og talið av húðsjúkum vegna arbeiðskor hevur verið støðugt vaksandi seinastu 10 árini. Hondeksem vegna arbeiðskor hevur stórar avleiðingar og øki um sambandið við heilsuverkið, minkar um lívsgóðskuna og kann í ringasta føri hava við sær sjúkufráveru, starvsskifti og fyritíðareftirløn (17). Eksem á hondunum er húðsjúkan vegna arbeiðskor, sum oftast kemur fyri, og hon rakar serliga ung fólk, og sum oftast verða eisini fleiri kvinnur enn menn raktar (135).

*Húðárin* og *trupulleikar við húðini* verða mátaðar við spurningi um, hvørt mann hevur havt trupulleikar við húðini á hondunum innan fyri seinastu 12 mánaðirnar, húðsamband við kemisk evni umframt vátar hendur. Talva 4.2.1.1 vísir býtið av svørum upp á hesar spurningarnar fyri allar svarpersónar í kanningini.

**Talva 4.2.1.1: Býti av svørum í prosentum fyri stigan *Húðárin* og *trupulleikar við húðini***

| | | | | Ja - eina viku ella meira | Ja - nakrar dagar | Nei |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Hevur tú seinastu 12 mánaðirnar havt húðtrupulleikar á hondunum | | | | 8,5 | 14,0 | 77,6 |
| | **Ongantíð** | **Sjáldan** | **Uml. 1/4 av tíðini** | **Uml. 1/2 av tíðini** | **Uml. 3/4 av tíðini** | **Næstan alla tíðina** |
| Hevur tú vátar hendur? | 59,5 | 23,9 | 7,7 | 4,3 | 2,3 | 2,4 |
| Hevur tú beinleiðis húðsamband við kemikaliir (t.d. reingerðingarevni og sóttreinsingarevni)? | 68,5 | 20,5 | 5,2 | 2,2 | 1,2 | 2,4 |

Talva 4.2.1.2 vísir úrslitini fyri *Trupulleikar við húðini* og *Húðárin* býtt upp í føroyskar og danskar svarpersónar. Úrslitini verða samanborið grundað á hesi punktini:

- Partur (prosent), sum hevur havt vátar hendur í minsta lagi 1/4 av tíðini, og
- Partur (prosent), sum hevur havt húðsamband við kemisk evni í minsta lagi 1/4 av tíðini, og
- Partur (prosent), sum hevur havt trupulleikar við húðini á hondunum innan fyri seinastu 12 mánaðirnar

Úrslitini í talvu 4.2.1.2 vísa, at ein størri partur av donskum arbeiðstakarum úr AH-kanningini hava sagt frá um vátar hendur og húðsamband við kemisk evni enn føroyskir svarpersónar. Fyri báðar bólkarnar sæst, at vátar hendur oftari kemur fyri enn húðsamband við kemisk evni. Úrslitini benda eisini á, at 22,4 prosent av svarpersónunum úr Føroyum hava sagt frá, at teir hava havt trupulleikar við húðini á hondunum seinastu 12 mánaðirnar, meðan úrslit úr donsku AH-kanningini vísa, at 21,3 prosent av donskum arbeiðstakarum siga seg hava havt trupulleikar við húðini. Tað er harvið minni munur á, hvussu teir báðir bólkarnir hava svarað upp á spurningin um *Trupulleikar við húðini.*

**Talva 4.2.1.2: Býti av svørum í prosentum fyri stigan *Trupulleikar við húðini***

| | Húðsamband við kemisk evni í minsta lagi 1/4 av tíðini | Vátar hendur í minsta lagi 1/4 av tíðini | Trupulleikar við húðini á hondunum |
|---|---|---|---|
| Partur av svarpersónum úr Føroyum | 11,0 | 16,7 | 22,4 |
| Partur av svarpersónum úr Danmark | 16,5 | 23,6 | 21,3 |

Í talvunum niðan fyri leggja vit úrslitini fram fyri *Trupulleikar við húðini* býtt upp í ávikavist kyn, aldur og starvsbólkur.

Talva 4.2.1.3 vísir úrslitini fyri *Trupulleikar við húðini* býtt upp í menn og kvinnur. Úrslitini benda á, at tað er ein størri partur av kvinnuligum svarpersónum, sum siga seg hava havt trupulleikar við húðini á hondunum, enn mannligir svarpersónar. Úrslitini benda eisini á, at tað er uml. ein fjórðingur av øllum kvinnuligum svarpersónum, sum hava sagt seg uppliva trupulleikar við húðini á hondunum. Ein ískoytisgreining vísir, at munurin millum menn og kvinnur er hagfrøðiliga signifikantur (p<.0001).

**Talva 4.2.1.3: Partur, sum játtar spurningin 'Hevur tú seinastu 12 mánaðirnar havt húðtrupulleikar á hondunum' býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Prosent |
|---|---|---|
| Maður | 348 | 18,1 |
| Kvinna | 670 | 25,7 |

Talva 4.2.1.4 vísir úrslitini fyri *Trupulleikar við húðini* býtt upp í aldursbólkar. Úrslitini benda á, at 40,9 prosent av svarpersónunum undir 25 ár siga frá, at teir hava havt trupulleikar við húðini á hondunum seinastu 12 mánaðirnar. Tað er harvið ein størri partur av svarpersónum í hesum aldursbólkinum, sum uppliva trupulleikar við húðini samanborið við hinar aldursbólkarnar. Harnæst vísa úrslitini, at tað eru fægst svarpersónar yvir 65 ár, sum siga frá, at teir hava havt trupulleikar við húðini (12,1 prosent). Parturin, sum sigur frá trupulleikum við húðini, fellur støðugt tvørtur um aldursbólkarnar, og ein ískoytisgreining vísir, at munirnir millum bólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 4.2.1.4: Partur, sum játtar spurningin 'Hevur tú seinastu 12 mánaðirnar havt húðtrupulleikar á hondunum' býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Prosent |
|---|---|---|
| < 25 ár | 79 | 40,9 |
| 25 - 34 ár | 229 | 36,9 |
| 35 - 44 ár | 272 | 26,2 |
| 45 - 54 ár | 235 | 19,3 |
| 55 - 64 ár | 162 | 14,5 |
| > 65 ár | 41 | 12,1 |

Talva 4.2.1.5 vísir úrslitini fyri *Trupulleikar við húðini* býtt upp í starvsbólkar. Úrslitini benda á, at tað er størst partur av svarpersónum við trupulleikum við húðini í starvsbólkinum 'Arbeiði á heilsuøkinum', har 33,2 prosent øllum svarpersónum í hesum starvsbólkinum hava sagt frá, at teir hava upplivað trupulleikar við húðini á hondunum. Harnæst er tað eisini ein størri útbreiðsla av trupulleikum við húðini í starvsbólkunum 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði', 'Annað handaligt arbeiði' og 'Tænastu- og søluarbeiði'. Tað eru harafturímóti minst partur av svarpersónum innan fyri starvsbólkin 'Leiðsluarbeiði', sum siga seg hava havt trupulleikar við húðini á hondunum. Ein ískoytisgreining vísir, at munirnir millum starvsbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 4.2.1.5: Partur, sum játtar spurningin 'Hevur tú seinastu 12 mánaðirnar havt húðtrupulleikar á hondunum' býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Prosent |
|---|---|---|
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 181 | 33,2 |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 51 | 31,9 |
| 11 Annað handaligt arbeiði | 64 | 31,8 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 88 | 30,1 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 18 | 27,7 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 55 | 27,1 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 181 | 23,8 |
| **Partur av svarpersónum úr Føroyum** | **1025** | **22,4** |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 134 | 19,6 |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 94 | 16,9 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 90 | 14,7 |
| 1 Leiðsluarbeiði | 60 | 13,8 |

Viðmerking: Grøna markingin merkir, at tað er ein minni partur av svarpersónum úr avvarðandi starvsbólkinum, sum siga frá trupulleikum við húðini á hondunum samanborið við partin av øllum svarpersónum úr Føroyum. Reyðu markingarnar merkja, at tað er ein størri partur av svarpersónum úr avvarðandi starvsbólkinum, sum siga frá trupulleikum við húðini á hondunum samanborið við partin av øllum svarpersónum úr Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Húðárini***

Úrslitini fyri *Húðárin* vístu, at føroysku svarpersónarnir í minni mun siga frá um húðárin (tvs. vátar hendur og húðsamband við kemisk evni) enn danskir svarpersónar. Fyri *Trupulleikar við húðini* var tað minni munur á føroyskum og donskum svarpersónum, har uml. ein fimtingur av svarpersónunum úr báðum bólkunum siga frá, at teir hava havt trupulleikar við húðini á hondunum seinastu 12 mánaðirnar.

Upp á tvørs av bólkunum í kanningini, vístu úrslitini, at ein størri partur av kvinnuligum svarpersónum siga seg hava havt trupulleikar við húðini. Upp á tvørs av aldursbólkunum vóru harafturat stórir munir, har ein týðiliga størri partur av ungum svarpersónum undir 25 ár, hava sagt frá, at teir hava havt trupulleikar við húðini á hondunum (uml. 40 prosent). Tað vóru harafturímóti færri svarpersónar yvir 65 ár, sum hava sagt frá, at teir hava havt trupulleikar við húðini (uml. 12 prosent). Hetta úrslitið koma ikki óvart á, av tí, at kanningar úr Danmark eisini vísa, at næstan dupult so nógv ung samanborið við eldri arbeiðstakarar siga frá um húðsamband við kemisk evni í minsta lagi 25 prosent av arbeiðstíðini, og nógv fleiri yngri arbeiðstakarar siga seg hava trupulleikar við húðini (17). Úrslit úr Danmark vísa eisini, at fleiri yngri kvinnur fáa viðurkent, at tær hava húðsjúkur vegna arbeiðskor samanborið við yngri menn (17). Kanningin úr Danmark peikar millum annað á, at ein av orsøkunum til tað omanfyri nevnda kann vera, at ungir arbeiðstakarar sum oftast arbeiða niðast í hierarkinum, og av hesi orsøk kanska í størri mun fáa uppgávur álagdar, har tað í høgan mun verður brúkt evnafrøðiligt tilfar og tilfar, sum kunnu vera heilsuskaðilig – eisini sum frá líður.

Úrslitini fyri starvsbólkarnar vístu harumframt, at størsti parturin av svarpersónum, sum siga seg hava havt trupulleikar við húðini (uml. 33 prosent) vóru í 'Arbeiði á heilsuøkinum'. Umframt hetta vístu úrslitini, at tað innan fyri starvsbólkarnir 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði', 'Annað handaligt arbeiði' og 'Tænastu- og søluarbeiði' eisini var ein hægri útbreiðsla av trupulleikum við húðini samanborið við partin av øllum svarpersónum úr kanningini. Til endans vístu úrslitini, at tað eru fægst svarpersónar innan fyri starvsbólkin 'Leiðsluarbeiði', sum siga frá, at teir hava havt trupulleikar við húðini.

## 4.3 Larmur og ristingar

Órógvandi larmur er ljóð, sum er plágandi, av tí at hann órógvar eina samrøðu ella evni at hugsavna seg (larmur, sum órógvar ávikavist samskifti og hugsavning). Gransking bendir á, at serliga tos órógvar evnini til bæði at samskifta og hugsavning. Ljóð nýtist ikki neyðturviliga at vera hart fyri at órógva. Tað er væl kent, at harður larmur kann skaða hoyrnina, umframt at nógv hart ljóð er serstakliga skaðiligt fyri hoyrnina. Tað er minni væl kent, at vandin fyri at fáa skaðar í hoyrnina hongur saman við samlaðu ljóðorkuni, sum rakar oyrað undir einum heilum arbeiðsdegi – dagligi larmurin. Tað er eisini minni væl kent, at góður bakgrundstónleikur kann vera eins skaðiligur fyri hoyrnina sum larmur frá einum flutningsbandi ella einari maskinu, um so er, at samlaða dagliga tyngdin av larmi gerst ov høg. Granskingin vísir á, at arbeiðstakarar, ið svara, at teir eru fyri hørðum larmi (15) ella órógvandi larmi (16) í sambandi við teirra arbeiði, eru í øktum vanda fyri drúgvari sjúkufráveru. Hesin vandin er serliga týðiligur millum kvinnur (15, 16).

At vera fyri hørðum ristingum, sum raka allan kroppin, øki um vandan fyri ryggtrupulleikum. Hevur setrið ikki ein ordiligan stoytdoyvara, kunnu ristingarnar spjaðast úr setrinum upp gjøgnum kroppin sum ristingar og belasta ryggin, tá ið mann t.d. koyrir við arbeiðsmaskinum, traktorum, trukkum og lastbilum. Tað kann sum frá líður hava við sær ryggtrupulleikar, serliga lendapínu, men eisini diskusprolaps og slit. Tá menniskju eru fyri ristingum saman við fastløstum arbeiðsstøðum og regluliga snara rygginum, økist vandin fyri at pínan tekur til.

### 4.3.1 Larmur og ristingar

*Larmur og ristingar* verða mátaðar við spurningi um, hvussu stóran part av arbeiðstíðini, mann er fyri ávikavist órógvandi larmi (t.d. at onnur tosa, útlufting, ferðsla), hørðum larmi (larmur, sum er so harður, at mann er noyddur at rópa fyri at tosa saman við onkran, sum stendur beint undir liðini) og/ella harðar ristingar, sum raka allan kroppin, t.d. frá traktori, trukki ella líknandi.

Talva 4.3.1.1 vísir býtið av svørum í prosentum fyri allar svarpersónar í kanningini.

**Talva 4.3.1.1: Býti av svørum í prosentum fyri stigan *Larmur og ristingar***

| | Ongantíð | Sjáldan | Uml. 1/4 av tíðini | Uml. 1/2 av tíðini | Uml. 3/4 av tíðini | Næstan alla tíðina |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Ert tú fyri larmi, sum órógvar teg í tínum arbeiði (t.d. at onnur fólk tosa, útlufting, ferðsla)? | 27,9 | 33,2 | 15,4 | 9,3 | 6,5 | 7,7 |
| Ert tú fyri larmi, sum er so harður, at tú noyðist at rópa fyri at tosa við tann, ið stendur undir liðini á tær? | 46,9 | 31,4 | 8,8 | 5,9 | 3,2 | 3,7 |
| Ert tú fyri sterkum ristingum, ið raka allan kroppin (t.d. frá traktori, trukki ella líknandi)? | 76,9 | 14,4 | 3,3 | 2,2 | 1,3 | 2,0 |

Vit samanbera úrslitini frá hesarí kanningini við úrslitini úr kanningini av arbeiðsumhvørvi og heilsu hjá donskum arbeiðstakarum frá 2018 (20). Úrslitini verða samanborin grundað á hesi parametrini:

- Órógvandi larmur í minsta lagi 1/4 av tíðini
- Harður larmur í minsta lagi 1/4 av tíðini
- Harðar ristingar í minsta lagi 1/4 av tíðini

Talva 4.3.1.2 vísir býtið av svørum fyri tey trý parametrini omanfyri býtt upp í ávikavist danskar og føroyskar svarpersónar. Her vísa úrslitini, at tað eru færri svarpersónar úr Føroyum, sum siga frá, at teir eru fyri órógvandi larmi í minsta lagi 1/4 av tíðini, enn danskir svarpersónar. Harafturímóti, vísa úrslitini, at ein størri partur av føroyskum svarpersónum siga frá, at teir eru fyri hørðum larmi í minsta lagi 1/4 av tíðini samanborið við danskar svarpersónar. Til endans vísa úrslitini, at tað er eitt sindur minni munur á, hvussu ofta ávikavist danskir og føroyskir svarpersónar siga seg vera fyri hørðum ristingum í arbeiðinum.

**Talva 4.3.1.2: Býti av svørum í prosentum fyri stigan *Larmur og ristingar***

| | Órógvandi larmur í minsta lagi 1/4 av tíðini | Harður larmur í minsta lagi 1/4 av tíðini | Harðar ristingar í minsta lagi 1/4 av tíðini |
|---|---|---|---|
| Partur av svarpersónum úr Føroyum | 38,9 | 21,7 | 8,8 |
| Partur av svarpersónum úr Danmark | 54,5 | 17,0 | 7,8 |

Fyri at kunna samanbera úrslitini fyri *Larmur og ristingar* upp á tvørs av kyni, aldri og starvsbólkum, hava vit broytt spurningarnar úr talvu 4.3.1.1 til tríggjar ymiskar stigar – ávikavist fyri *Órógvandi larm, Harðan larm og Ristingar.* Stigarnir ganga frá 0 til 100, har 100 bendir á, at mann 'Næstan alla tíðina' er fyri ávikavist larmi og/ella ristingum í sínum arbeiði.

Í talvunum niðan fyri samanbera vit úrslitini fyri stigarnar um *Órógvandi larm, Harðan larm og Ristingar* býtt upp í kyn, aldur og starvsbólkar. Vit leggja fyrst úrslitini fyri stigan um *Órógvandi larm* fram, og síðani leggja vit úrslitini fyri stigan um *Harðan larm* fram, og til seinast í hesum partinum vera úrslit fyri stigan um *Ristingar* løgd fram.

### Órógvandi larmur

Miðaltalið fyri *Órógvandi larm* er 31,3 og samsvarar tí við, at svarpersónarnir í miðal hava svarað millum 'Sjáldan' og '1/4 av tíðini' upp á spurningin um órógvandi larm.

Talva 4.3.1.3 vísir úrslitini fyri stigan um *Órógvandi larm* býtt upp í menn og kvinnur. Úrslitini benda á, at kvinnuligir svarpersónar í eitt sindur størri mun uppliva órógvandi larm í arbeiðinum enn mannligir svarpersónar. Ein ískoytisgreining vísir, at munurin millum menn og kvinnur er hagfrøðiliga signifikantur ($p<.0001$).

**Talva 4.3.1.3: Miðaltøl fyri stigan *Órógvandi larmur* býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| Maður | 1897 | 28,8 |
| Kvinna | 2541 | 33,1 |

Talva 4.3.1.4 vísir úrslitini fyri stigan um *Órógvandi larm* býtt upp í aldur. Her vísa úrslitini, at teir báðir yngstu aldursbólkarnir hava svarað, at teir oftari eru fyri órógvandi larmi í arbeiðinum enn hinir aldursbólkarnir. Harafturímóti hava teir elstu svarpersónarnir yvir 65 ár svarað, at teir í minni mun eru fyri órógvandi larmi í arbeiðinum samanborið við hinar aldursbólkarnar. Ein ískoytisgreining vísir, at munirnir millum bólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir ($p<.0001$).

**Talva 4.3.1.4: Miðaltøl fyri stigan *Órógvandi larmur* býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| < 25 ár | 193 | 38,4 |
| 25 - 34 ár | 616 | 38,4 |
| 35 - 44 ár | 1019 | 34,4 |
| 45 - 54 ár | 1208 | 30,6 |
| 55 - 64 ár | 1082 | 26,7 |
| > 65 ár | 315 | 20,6 |

Talva 4.3.1.5 vísir úrslitini fyri stigan um *Órógvandi larm* býtt upp í starvsbólkar, og vísir harumframt, hvar starvsbólkarnir liggja í mun til miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini. Úrslitini benda á, at svarpersónar í 'Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði' oftari uppliva at vera fyri órógvandi larmi í arbeiðinum samanborið við hinar starvsbólkarnar. Úrslitini vísa harumframt, at tað eru fleiri starvsbólkar (markaðir við reyðum og ljósareyðum), sum oftari uppliva at vera fyri órógvandi larmi enn miðaltalið av øllum svarpersónum, og annars eisini samanborið við hinar starvsbólkarnar. Harafturímóti, eru eisini fleiri starvsbólkar, sum uppliva at vera minni fyri órógvandi larmi í arbeiðinum enn miðaltalið. Hesir starvsbólkar eru markaðir við grønum og ljósagrønum í talvuni, og harumframt sæst, at svarpersónar í 'Leiðsluarbeiði' hava lægsta stigatalið á stiganum. Ein ískoytisgreining vísir harumframt, at munirnir millum bólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 4.3.1.5: Miðaltøl fyri stigan *Órógvandi larmur* býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 728 | 39,8 |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 160 | 37,9 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 65 | 36,3 |
| 11 Annað handaligt arbeiði | 195 | 35,6 |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 672 | 34,6 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 208 | 33,6 |
| **Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum** | **4538** | **31,3** |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 552 | 29,6 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 600 | 27,9 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 280 | 27,9 |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 529 | 25,1 |
| 1 Leiðsluarbeiði | 430 | 22,2 |

Viðmerking: Grønu markingarnar merkja, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá minni órógvandi larmi enn miðaltalið av øllum svarpersónum úr Føroyum. Reyðu markingarnar merkja, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá um meira órógvandi larm enn miðaltalið av øllum svarpersónum úr Føroyum.

### Harður larmur

Miðaltalið fyri stigan um *Harðan larm* fyri allar svarpersónar í kanningini er 19,6, sum samsvarar við, at luttakararnir í miðal hava svarað 'Sjáldan' upp á spurningin um, hvørt teir uppliva harðan larm í arbeiðinum.

Í talvunum niðan fyri verða úrslitini víst fyri stigan um harðan larm býtt upp í kyn, aldur og starvsbólkar.

Talva 4.3.1.6 vísir úrslitini fyri *Harðan larm* býtt upp í menn og kvinnur. Úrslitini benda á, at mannligir svarpersónar siga frá, at teir oftari eru fyri hørðum larmi samanborið við kvinnuligar svarpersónar. Tað skal tó viðmerkjast, at bæði miðaltøl samsvara við, at svarpersónarnir hava svarað tætt upp at svarbólkingini 'Sjáldan' upp á spurningin um harðan larm. Ein ískoytisgreining vísir, at munurin millum menn og kvinnur er hagfrøðiliga signifikantur (p<.0001).

**Talva 4.3.1.6: Miðaltøl fyri stigan *Harður larmur* býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Miðaltal |
|---|---:|---:|
| Maður | 1898 | 24,4 |
| Kvinna | 2537 | 16,3 |

Talva 4.3.1.7 vísir úrslitini fyri harðan larm býtt upp í aldur. Úrslitini benda á, at yngstu svarpersónarnir undir 25 ár oftari uppliva at vera fyri hørðum larmi samanborið við hinar aldursbólkarnar, har teir elstu svarpersónarnir yvir 65 ár siga seg uppliva harðan larm meira sjáldan enn hinir bólkarnir. Ein ískoytisgreining vísir, at munirnir millum bólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 4.3.1.7: Miðaltøl fyri stigan *Harður larmur* býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Miðaltal |
|---|---:|---:|
| < 25 ár | 193 | 32,4 |
| 25 - 34 ár | 614 | 23,9 |
| 35 - 44 ár | 1020 | 18,5 |
| 45 - 54 ár | 1209 | 18,9 |
| 55 - 64 ár | 1078 | 18,3 |
| > 65 ár | 316 | 16,5 |

Talva 4.3.1.8 vísir úrslitini fyri harðan larm býtt upp í starvsbólkar. Úrslitini benda á, at svarpersónar í 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' uppliva týðiliga meira harðan larm í arbeiðinum samanborið við hinar starvsbólkarnar, men eisini samanborið við miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini. Umframt hetta vísa úrslitini, at tað er ein partur av starvsbólkunum, sum týðiliga upplivir at vera fyri meira hørðum larmi (markað við reyðum) enn miðaltalið av øllum svarpersónum. Úrslitini benda á, at svarpersónar í 'Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði' hava sagt frá, at teir meira sjáldan uppliva harðan larm í arbeiðinum. Ein ískoytisgreining vísir, at munirnir millum bólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 4.3.1.8: Miðaltøl fyri stigan *Harður larmur* býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 160 | 44,9 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 209 | 39,1 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 66 | 37,3 |
| 11 Annað handaligt arbeiði | 194 | 31,3 |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 671 | 27,0 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 727 | 26,4 |
| **Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum** | **4534** | **19,6** |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 280 | 17,6 |
| 1 Leiðsluarbeiði | 432 | 12,4 |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 528 | 10,3 |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 553 | 9,9 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 596 | 8,2 |

Viðmerking: Grøna markingin merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá minni hørðum larmi enn miðaltalið av øllum svarpersónum úr Føroyum. Reyða markingin merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá meira hørðum larmi enn miðaltalið av øllum svarpersónum úr Føroyum.

### Harðar ristingar

Miðaltalið fyri stigan um *Ristingar* fyri allar svarpersónar í kanningini er 8,5, og svarar tí til, at svarpersónarnir í miðal hava svarað millum 'Ongantíð' og 'Sjáldan' upp á spurningin um harðar ristingar í arbeiðinum.

Í talvunum niðan fyri vera úrslitini víst fyri stigan um *Ristingar* býtt upp í kyn, aldur og starvsbólkur.

Talva 4.3.1.9 vísir úrslitini fyri *Ristingar* býtt upp í menn og kvinnur. Úrslitini benda á, at tað er týðiliga munur á, hvussu mannligir og kvinnuligir svarpersónar hava svarað upp á spurningin viðvókjandi hørðum ristingum í arbeiðinum, har kvinnur í miðal svara tætt upp at 'Ongantíð' í mun til, hvussu ofta tær eru fyri hørðum ristingum í arbeiðinum. Ein ískoytisgreining vísir harafturat, at munurin millum menn og kvinnur er hagfrøðiliga signifikantur ($p<.0001$).

**Talva 4.3.1.9: Miðaltøl fyri stigan *Ristingar* býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| Maður | 1895 | 15,9 |
| Kvinna | 2526 | 3,2 |

Talva 4.3.1.10 vísir úrslitini fyri *Ristingar* býtt upp í aldur. Úrslitini vísa, at yngstu svarpersónarnir undir 25 ár, men eisini svarpersónar millum 25 og 34 ár, hava sagt frá, at teir eitt sindur oftari uppliva harðar ristingar í arbeiðinum samanborið við hinar bólkarnar, har elstu svarpersónarnir yvir 65 ár hava lægsta miðaltalið á stiganum. Aftur, skal viðmerkjast, at øll úrslitini benda á, at yvirskipað uppliva svarpersónarnir 'Sjáldan'

og tætt upp at 'Ongantíð' harðar ristingar í arbeiðinum. Ein ískoytisgreining vísir, at munirnir millum bólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 4.3.1.10: Miðaltøl fyri stigan *Ristingar* býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| < 25 ár | 193 | 12,3 |
| 25 - 34 ár | 612 | 11,5 |
| 35 - 44 ár | 1018 | 8,2 |
| 45 - 54 ár | 1206 | 8,5 |
| 55 - 64 ár | 1073 | 7,5 |
| > 65 ár | 314 | 6,6 |

Talva 4.3.1.11 vísir úrslitini fyri *Ristingar* býtt upp í starvsbólkar. Her vísa úrslitini størri munir millum bólkarnar. T.d. sæst, at svarpersónar í 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' siga frá, at teir týðiliga eru fyri hørðum ristingum í arbeiðinum oftari enn hinir starvsbólkarnir. Harafturat eru tað fleiri starvsbólkar, sum siga seg í týðiliga størri mun vera fyri hørðum ristingum í arbeiðinum enn miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini. Harnæst eru tað eisini fleiri av starvsbólkunum, har úrslitini benda á, at hesir svarpersónarnir næstan ongantíð uppliva harðar ristingar í arbeiðinum. T.d. sæst í úrslitunum, at svarpersónar í 'Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði' hava lægsta stigatalið upp á 1,9. Ein ískoytisgreining vísir eisini, at munirnir millum bólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 4.3.1.11: Miðaltøl fyri stigan *Ristingar* býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 161 | 36,6 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 66 | 22,7 |
| 11 Annað handaligt arbeiði | 194 | 18,9 |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 670 | 18,8 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 208 | 18,8 |
| **Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum** | **4520** | **8,5** |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 278 | 7,4 |
| 1 Leiðsluarbeiði | 432 | 6,2 |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 547 | 3,5 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 596 | 2,4 |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 526 | 2,1 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 724 | 1,9 |

Viðmerking: Grøna markingin merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá færri hørðum ristingum í arbeiðinum enn miðaltalið av øllum svarpersónum úr Føroyum. Reyða markingin merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga seg oftari vera fyri fyri hørðum ristingum í arbeiðinum enn miðaltalið av øllum svarpersónum úr Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Larmi og ristingum***

Úrslitini fyri *Larm og ristingar* vístu, at føroyskir svarpersónar uppliva minni órógvandi larm enn svarpersónar úr donsku tilvísingarkanningini. Hinvegin vístu úrslitini, at føroyskir svarpersónar í eitt sindur størri mun uppliva harðan larm samanborið við danskar svarpersónar. Fyri harðar ristingar var ikki týðandi munur á teimum báðum bólkunum.

Fyri *Órógvandi larm* vístu úrslitini, at kvinnuligir svarpersónar oftari uppliva órógvandi larm enn mannligir svarpersónar. Harnæst vístu úrslitini, at yngri svarpersónar siga frá, at teir oftari uppliva órógvandi larm í arbeiðinum enn eldru svarpersónarnir. Upp á tvørs av starvsbólkunum, vóru tað svarpersónar í 'Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði', sum høvdu hægsta miðaltalið á stiganum um *Órógvandi larm*, meðan svarpersónar í 'Leiðsluarbeiði' høvdu lægsta miðaltalið.

Fyri *Harðan larm* vístu úrslitini, at mannligir svarpersónar oftari uppliva harðan larm í arbeiðinum samanborið við kvinnuligar svarpersónar. Tó skal viðmerkjast, at báðir bólkar uppliva harðan larm tætt upp at 'Sjáldan'. Úrslitini vístu aftur, at tað eru yngstu svarpersónarnir undir 25 ár, sum hava hægsta miðaltalið, og hava tískil oftari sagt seg uppliva harðan larm í arbeiðinum enn hinir aldursbólkarnir. Upp á tvørs av starvsbólkunum vóru tað svarpersónar í 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði', sum høvdu hægsta miðaltalið á stiganum um harðan larm.

Fyri *Ristingar* vístu úrslitini sum heild lág miðaltøl á stiganum, og benda tískil á, at harðar ristingar í arbeiðinum sum heild koma sjáldan fyri hjá arbeiðstakarum í Føroyum. Upp á tvørs av bólkum vístu úrslitini á stórar munir millum kyn, har kvinnuligir svarpersónar hava svarað tætt upp at 'Ongantíð' upp á spurningin um ristingar í arbeiðinum. Fyri aldursbólkarnar vóru miðaltølini eisini lág, men kortini vóru munir millum bólkarnar, har yngstu svarpersónarnir undir 25 ár høvdu hægsta miðaltalið. Úrslitini upp á tvørs av starvsbólkunum vístu harafturat stórar munir, og her høvdu einstakir starvsbólkar eisini eitt sindur hægri miðaltal á stiganum, sum kundi bent á eina størri útbreiðslu av hørðum ristingum í arbeiðinum. Her høvdu svarpersónar í 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' t.d. hægsta miðaltalið, sum harafturat samsvaraði við, at svarpersónarnir í hesum starvsbólkinum í miðal hava svarað tætt upp at '1/4 av tíðini' til spurningin um harðar ristingar. Her høvdu svarpersónar í 'Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði' lægsta miðaltalið.

Samanumtikið, kann vera ført fram, at úrslitini upp á tvørs av starvsbólkunum fyri *Larmur og Ristingar* ikki koma óvart, tá ið hugt verður eftir sløgunum av arbeiðsuppgávum, ymisku starvsbólkarnir útinna. Tað kemur t.d. ikki óvart, at harðar ristingar kunnu koma fyri í arbeiðinum fyri svarpersónar í 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði', 'Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap' umframt 'Annað handaligt arbeiði', meðan tað heldur ikki kemur óvart á, at harður og órógvandi larmur eisini kemur fyri í hesum sløgum av størvum.

## 4.4 Arbeiðsóhapp og trygd

Eitt arbeiðsóhapp er 'ein knapplig og óvæntað hending í sambandi við arbeiðið, sum hevur við sær, at arbeiðstakarin fær likamligan ella sálarligan skaða'.[6] Hóast eitt óhapp er nakað, sum kemur knappliga og óvæntað, kann orsøkin til hendingina standast av viðurskiftum, sum antin henda frammanundan, ella treytaðar av avgerðum tiknar hægri uppi í skipanini ella uttan fyri virkið. Trygdarmentanin á einum arbeiðsplássi er tí ein týðandi fyribyrgjandi liður fyri varðveitsluna av einum høgum og langskygdum trygdarstøði á arbeiðsplássum, sum eru undir lagaligum og dynamiskum viðurskiftum (136).

[6] Allýsing og upplýsingar eru frá *Arbejdstilsynet* (www.at.dk) á undirsíðuni 'Hvad er en arbejdsulykke?'

### 4.4.1 Arbeiðsóhapp

Ynskir ein fyritøka at fyribyrgja arbeiðsóhappum, krevur tað góð trygdarviðurskifti. Hetta hevur við sær, at leiðarar og starvsfelagar mugu vera jaligir og forvirknir í sínum hugburði til trygd í gerandisdegnum. Tað er ein hugburður, sum hevur við sær, at man tekur virknan lut rættaður mótvegis tøkniligum loysnum, hvussu arbeiðið er skipað umframt at tosa ítøkiligt í mun til trygd. Í gerandisdegnum kunnu framleiðslumál hjá fyritøkum tykjast hava størri týdning enn teirra mál um eitt høgt støði av trygd. Bæði leiðarar og starvsfelagar kunnu tí hava ilt við at raðfesta trygdina høgt í tí fult pakkaða gerandisdegnum við høgum krøvum til framleiðslu og strømmum arbeiðsætlanum (136).

Vit máta *Arbeiðsóhapp* við spurningi um, hvørt mann seinastu 12 mánaðirnar hevur verið út fyri einum ella fleiri arbeiðsóhappum, sum høvdu meira enn ein dag burtur frá arbeiði við sær. Talva 4.4.1.1 vísir býtið av svørum upp á spurningin fyri allar svarpersónar í kanningini.

**Talva 4.4.1.1: Býti av svørum í prosentum fyri spurningin 'Hevur tú seinastu 12 mánaðirnar verið fyri einum ella fleiri óhappum, sum høvdu við sær, at tú vart burtur úr arbeiði meiri enn ein dag?'**

| | Einki óhapp | 1 óhapp | 2 óhapp | 3 óhapp | 4 ella fleiri óhapp |
|---|---|---|---|---|---|
| Hevur tú seinastu 12 mánaðirnar verið fyri einum ella fleiri óhappum, sum høvdu við sær, at tú vart burtur úr arbeiði meiri enn 1 dag? | 92,2 | 6,2 | 1,1 | 0,1 | 0,3 |

Talva 4.4.1.2 vísir partin av ávikavist føroyskum og donskum svarpersónum, sum svara játtandi upp á, at teir hava verið úti fyri í minsta lagi einum arbeiðsóhappi. Tað eru tilsamans 375 svarpersónar úr føroysku kanningini, sum hava sagt seg verið úti fyri í minsta lagi einum arbeiðsóhappi seinastu 12 mánaðirnar, sum hava havt við sær meira enn ein dag burtur úr arbeiði. Tað vil siga, at 7,8 prosent av svarpersónunum hava verið úti fyri í minsta lagi einum arbeiðsóhappi, meðan úrslitini úr donsku kanningini *Arbeiðsumhvørvi og Heilsa 2018* vísa, at 7,3 prosent av donskum arbeiðstakarum siga frá at hava verið úti fyri í minsta lagi einum arbeiðsóhappi seinastu 12 mánaðirnar, sum hava havt við sær í minsta lagi ein dag burtur úr arbeiði. Úrslitini benda sostatt á, at parturin av svarpersónum, sum hevur verið úti fyri í minsta lagi einum arbeiðsóhappi seinastu 12 mánaðirnar er umleið tann sami fyri Danmark og Føroyar.

**Talva 4.4.1.2: Partur av svarpersónum, sum hevur verið úti fyri í minsta lagi einum arbeiðsóhappi, sum hevur havt sjúkufráveru við sær**

| | Minst eitt arbeiðsóhapp |
|---|---|
| Partur av svarpersónum úr Føroyum | 7,8 |
| Partur av svarpersónum úr Danmark | 7,3 |

Talvurnar niðan fyri vísa úrslitini viðvíkjandi *Arbeiðsóhapp* býtt upp í kyn, aldur og starvsbólkar.

Talva 4.4.1.3 vísir partin av mannligum og kvinnuligum svarpersónum, sum hevur verið úti fyri í minsta lagi einum arbeiðsóhappi seinastu 12 mánaðirnar, sum hevur havt við sær í minsta lagi ein dag burtur úr arbeiði. Úrslitini benda á, at tað eru 8,0 prosent av mannligum svarpersónum og 7,5 prosent av kvinnuligum svarpersónum, sum hava verið úti fyri í minsta lagi einum arbeiðsóhappi. Tað er sostatt minni munur á partinum av *Arbeiðsóhappum* upp á tvørs av kyni. Ein ískoytisgreining vísir harumframt, at munurin millum menn og kvinnur ikki er hagfrøðiliga signifikanturur (p=0.5038).

**Talva 4.4.1.3: Partur av svarpersónum, sum hevur verið úti fyri í minsta lagi einum arbeiðsóhappi, sum hevur havt sjúkufráveru við sær, býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Prosent |
|---|---|---|
| Maður | 159 | 8,0 |
| Kvinna | 203 | 7,5 |

Talva 4.4.1.4 vísir úrslitini fyri *Arbeiðsóhapp* býtt upp í aldursbólkar. Úrslitini benda á, at tann aldursbólkurin við størst parti av svarpersónum, sum hava verið úti fyri einum arbeiðsóhappi seinastu 12 mánaðirnar, eru yngstu svarpersónarnir undir 25 ár, har 19,4 prosent hava svarað, at teir hava verið úti fyri í minsta lagi einum arbeiðsóhappi. Sostatt vísa úrslitini, at tað er týðiliga hægri útbreiðsla av arbeiðsóhappum millum yngstu svarpersónarnir. Harnæst vísa úrslitini, at minsti parturin av svarpersónum, sum hava sagt frá at hava verið úti fyri einum arbeiðsóhappi, eru teir elstu svarpersónarnir yvir 65 ár (5,4 prosent). Ein ískoytisgreining vísir eisini, at munirnir millum aldursbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 4.4.1.4: Partur av svarpersónum, sum hevur verið úti fyri í minsta lagi einum arbeiðsóhappi, sum hevur havt sjúkufráveru við sær, býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Prosent |
|---|---|---|
| < 25 ár | 40 | 19,4 |
| 25 - 34 ár | 62 | 9,5 |
| 35 - 44 ár | 86 | 8,0 |
| 45 - 54 ár | 84 | 6,6 |
| 55 - 64 ár | 71 | 6,2 |
| > 65 ár | 19 | 5,4 |

Talva 4.4.1.5 vísir úrslitini fyri *Arbeiðsóhapp* býtt upp í starvsbólkar. Talvan vísir harumframt, hvar starvsbólkarnir liggja samanborið við úrslitið fyri allar svarpersónar í kanningini. Úrslitini benda á, at største útbreiðsla av arbeiðsóhappum henda í starvsbólkunum 'Annað handaligt arbeiði' (16,5 prosent), 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' (13,9 prosent) og 'Handverkaraarbeiði' (13,7 prosent). Harnæst vísa úrslitini, at tann minsti parturin av teimum svarpersónum, sum hava verið úti fyri í minsta lagi einum arbeiðsóhappi eru í starvsbólkinum 'Leiðsluarbeiði', har 3,8 prosent hava svarað, at tey hava verið úti fyri í minsta lagi einum arbeiðsóhappi, sum hevði við sær meira enn ein dag burtur frá arbeiðinum. Ein ískoytisgreining vísir harafturat, at munirnir millum starvsbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 4.4.1.5: Partur av svarpersónum, sum hevur verið úti fyri í minsta lagi einum arbeiðsóhappi, sum hevur havt við sær sjúkufráveru, býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Prosent |
|---|---|---|
| 11 Annað handaligt arbeiði | 34 | 16,5 |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 23 | 13,9 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 29 | 13,7 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 34 | 11,2 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 6 | 9,0 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 69 | 8,8 |
| **Partur av svarpersónum úr Føroyum** | **375** | **7,8** |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 44 | 7,8 |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 47 | 6,7 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 29 | 4,6 |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 26 | 4,5 |
| 1 Leiðsluarbeiði | 17 | 3,8 |

Viðmerking: Grøna markingin merkir, at tað er ein minni partur av svarpersónum úr avvarðandi starvsbólkinum, sum sigur frá í minsta lagi 1 arbeiðsóhappi samanborið við partin av øllum svarpersónum úr Føroyum. Reyðu markingarnar merkja, at tað er ein størri partur av svarpersónum úr avvarðandi starvsbólkinum, sum sigur frá í minsta lagi 1 arbeiðsóhappi samanborið við partin av øllum svarpersónum úr Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Arbeiðsóhappum***

Úrslitini fyri *Arbeiðsóhapp* vístu, at 7,8 prosent av svarpersónunum úr Føroyum hava verið úti fyri í minsta lagi einum arbeiðsóhappi, meðan úrslitini frá einari danskari kanning vísa, at 7,3 prosent av donskum arbeiðstakarum siga frá at hava verið úti fyri í minsta lagi einum arbeiðsóhappi seinastu 12 mánaðirnar. Úrslitini benda harvið á ein eitt sindur størri títtleika av arbeiðsóhappum í Føroyum enn í Danmark.

Harnæst vístu úrslitini, at ein størri partur av mannligum svarpersónum hava sagt frá arbeiðsóhappum enn kvinnuligir svarpersónar. Upp á tvørs av aldursbólkunum vístu úrslitini, at ein týðiliga størri partur av ungum svarpersónum undir 25 ár hava upplivað í minsta lagi eitt arbeiðsóhapp samanborið við hinar aldursbólkarnar. Til endans vístu úrslitini eisini, at ein týðiliga størri partur av svarpersónum í starvsbólkunum 'Annað

handaligt arbeiði', 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' og 'Handverkaraarbeiði' hevur verið úti fyri í minsta lagi einum arbeiðsóhappi samanborið við restina av starvsbólkunum og annars eisini samanborið við partin av øllum svarpersónum í kanningini.

### 4.4.2 Trygd á arbeiðsplássinum

Gransking vísir á, at góð trygdarviðurskifti á arbeiðsplássinum er ein umráðandi faktorur í at fyribyrgja arbeiðsóhappi. Hugtakið 'trygdarviðurskifti' vísir til hugsanina hjá starvsfólkunum av handfaringini og raðfestingini av trygdini á arbeiðsplássinum í gerandisdegnum (136).

Gransking vísir eisini á, at leiðslan skal ganga fremst og veita góð trygdarviðurskifti. Hetta kann t.d. vera gjørt við at vísa starvsfeløgum, hvussu virkið raðfestir trygd í gerandisdegnum, og við at taka starvsfelagar uppí í avgerðir um trygd. Arbeiðsplássið skal eisini tryggja, at starvsfelagar serliga tey ungu og nýsettu fáa eina týðandi innleiðslu og leypandi vegleiðing í at útinna arbeiðið á tryggan hátt. Harafturat er regluligt samskifti um trygd millum leiðslu og starvsfelagar ein avgerandi liður í at varðveita góð trygdarviðurskifti, sum fyribyrgir óhappum (136).

Vit máta *Trygd á arbeiðsplássinum* við teimum fimm spurningunum í talvu 4.4.2.1. Talvan vísir eisini býtið av svørum fyri allar svarpersónar.

**Talva 4.4.2.1: Býti av svørum í prosentum**

| | Sera ósamd/ur | Ósamd/ur | Hvørki samd/ur ella ósamd/ur | Samd/ur | Sera samd/ur | Ikki relevant |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Smá óhapp eru ikki vanligur partur av dagliga arbeiðinum | 28,9 | 26,0 | 17,5 | 10,3 | 3,7 | 13,6 |
| Vit hjálpa hvørjum øðrum við at arbeiða trygt, eisini tá ið vit hava nógv at gera | 2,8 | 6,3 | 19,1 | 37,4 | 22,4 | 12,1 |
| Leiðslan eggjar starvsfólkinum til at arbeiða trygt, eisini tá ið vit hava nógv at gera | 4,5 | 8,2 | 17,9 | 32,7 | 25,1 | 11,5 |
| Leiðslan tekur starvsfólkini við í avgerðir um trygd | 6,8 | 12,0 | 24,2 | 28,2 | 17,7 | 11,0 |
| Eg fái neyðuga leiðbeining og upplæring til trygt at útinna mítt arbeiði | 4,7 | 8,5 | 18,3 | 32,3 | 22,6 | 13,5 |

Tað hevur ikki verið møguligt at samanbera úrslitini í talvu 4.4.2.1 við úrslitini úr donsku tilvísingarkanningini *Arbeiðsumhvørvi og Heilsa 2018* (20), við tað at ymiskar svarbólkingar eru brúktar í teimum báðum kanningunum.

Fyri at kunna samanbera úrslitini upp á tvørs av kyni, aldri og starvsbólkum, hava vit lagt fýra av spurningunum úr talvu 4.4.2.1 saman í ein stiga, sum vit kalla *Trygdarviðurskifti*. Stigin gongur frá 0 til 100, har eitt stigatal upp á 100 bendir á høgt støði

av trygd á arbeiðsplássinum. Spurningurin/útsøgnin 'Smá óhapp eru ikki vanligur partur av dagliga arbeiðinum' er ikki partur av stiganum, við tað, at henda útsøgnin ikki korreleraði við hinar fýra spurningarnar. Hinir fýra spurningarnir korreleraðu annars høgt. Umframt hetta er svarbólkingin 'Ikki relevant' ikki roknað uppí í stiganum.

Miðaltalið fyri stigan *Trygdarviðurskifti* fyri allar svarpersónar í kanningini er 66,8. Talvurnar niðan fyri vísa úrslitini fyri stigan býtt upp í kyn, aldur og starvsbólkar.

Talva 4.4.2.2 vísir úrslitini fyri *Trygdarviðurskifti* býtt upp í kyn. Úrslitini benda á, at mannligir svarpersónar hava mett teirra trygd á arbeiðsplássinum at vera betri enn kvinnuligir svarpersónar. Ein ískoytisgreining vísir eisini, at munurin millum menn og kvinnur er hagfrøðiliga signifikantur (p<.0001).

**Talva 4.4.2.2: Miðaltalið fyri *Trygdarviðurskifti* býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Miðaltal |
|---|---:|---:|
| Maður | 1728 | 70,1 |
| Kvinna | 2252 | 64,5 |

Talva 4.4.2.3 vísir úrslitini fyri *Trygdarviðurskifti* býtt upp í aldursbólkar. Úrslitini benda á, at svarpersónar í aldrinum 25 til 34 ár hava lægsta miðaltalið á stiganum (64,4 stig), meðan teir elstu svarpersónarnir yvir 65 ár hava hægsta miðaltalið (69,5 stig). Teir elstu svarpersónarnir meta harvið síni trygdarviðurskifti at vera betri enn hinir bólkarnir. Ein ískoytisgreining vísir, at munirnir millum aldursbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (=0.0006).

**Talva 4.4.2.3: Miðaltalið fyri *Trygdarviðurskifti* býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Miðaltal |
|---|---:|---:|
| < 25 ár | 178 | 65,4 |
| 25 - 34 ár | 547 | 64,4 |
| 35 - 44 ár | 928 | 65,1 |
| 45 - 54 ár | 1092 | 67,9 |
| 55 - 64 ár | 975 | 68,6 |
| > 65 ár | 256 | 69,5 |

Talva 4.4.2.4 vísir úrslitini fyri *Trygdarviðurskifti* býtt upp í starvsbólkar. Úrslitini benda á, at svarpersónar í 'Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap' og 'Leiðsluarbeiði' hava mett teirra trygdarviðurskifti at vera betri enn miðaltalið fyri allar svarpersónar í kanningini. Harafturímóti vísa úrslitini, at svarpersónar í 'Annað handaligt arbeiði' hava mett lægsta støðið av trygd í arbeiðinum (58,8 stig). Tað er annars eisini størst partur av svarpersónum úr hesum starvsbólkinum, sum siga frá, at teir hava verið úti fyri einum arbeiðsóhappi seinastu 12 mánaðirnar (sjá kapittul 4.4.1). Úrslitini benda sostatt á, at tað innan fyri økið *Arbeiðsóhapp og Trygd* eru fleiri avbjóðingar fyri starvsbólkin 'Annað handaligt arbeiði' enn fyri hinar starvsbólkarnar. Til endans vísa úrslitini, at svarpersónar í 'Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði' eisini hava lægri miðaltal á stiganum (62,2 stig) enn miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini. Ein

ískoytisgreining vísir, at munirnir millum starvsbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 4.4.2.4: Miðaltalið fyri *Trygdarviðurskifti* býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 64 | 75,4 |
| 1 Leiðsluarbeiði | 372 | 74,9 |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 627 | 71,7 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 470 | 68,7 |
| **Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum** | **4079** | **66,8** |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 460 | 66,6 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 198 | 65,9 |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 156 | 65,0 |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 515 | 64,7 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 251 | 63,9 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 669 | 62,2 |
| 11 Annað handaligt arbeiði | 185 | 58,8 |

Viðmerking: Grønu markingarnar merkja, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá betri trygdarviðurskiftum á arbeiðsplássinum enn miðaltalið av øllum svarpersónum úr Føroyum. Reyðu markingarnar merkja, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá verri trygdarviðurskiftum á arbeiðsplássinum enn miðaltalið av øllum svarpersónum úr Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Trygdarviðurskiftum***

Úrslitini fyri *Trygdarviðurskifti* vístu, at svarpersónarnir sum heild meta sína trygd á arbeiðsplássinum at vera góða. Umframt hetta vístu úrslitini, at mannligir svarpersónar meta teirra trygdarviðurskifti á arbeiðsplássinum at vera betri enn kvinnuligir svarpersónar. Upp á tvørs av aldursbólkunum vóru munirnir eitt sindur minni, tó var munur á, hvussu ávikavist yngri og eldri svarpersónar hava mett síni trygdarviðurskifti. Her hava yngstu svarpersónarnir mett trygdarviðurskiftini at vera minni góð samanborið við hinar aldursbólkarnar. Úrslitini upp á tvørs av starvsbólkunum vístu, at svarpersónar í 'Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap' og 'Leiðsluarbeiði' hava mett teirra trygdarviðurskifti at vera betri enn miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini. Til endans vístu úrslitini, at svarpersónar í 'Annað handaligt arbeiði' hava mett teirra trygd á arbeiðsplássinum at vera lægri enn miðaltalið av øllum svarpersónum.

## 4.5 Heilsa og arbeiðsførleiki

### 4.5.1 Sjálvmett heilsa

Sjálvsmeting av heilsuni sum heild verður brúkt sum eitt yvirskipað heilsumál í fólkaheilsukanningum og sum eitt ískoyti til onnur heilsumál.

Vit máta *Sjálvmetta heilsu* við einum altjóða nýttum og valideraðum spurningi um, hvussu mann sjálv/ur alt tilsamans heldur heilsuna hjá sær vera á einum stiga frá 1-5, har 5 er besta sjálvmetta heilsan. Talva 4.5.1.1 vísir býtið av svørum í prosentum fyri allar svarpersónar í kanningini.

**Talva 4.5.1.1: Býti av svørum í prosentum**

| | Vánaliga | Minni góða | Góða | Ógvuliga góða | Framúrskarandi |
|---|---|---|---|---|---|
| Hvussu metir tú sum heild tína heilsu at vera? | 1,5 | 13,3 | 59,5 | 21,9 | 3,9 |

Í kanningini eru luttakararnir eisini spurdir, um teir eru í viðgerð fyri ymiskar líðingar ella sjúkur. Talva 4.5.1.2 vísir býtið av svørum fyri ymiskar viðgerðir. Úrslitini benda á, at flest eru í viðgerð fyri ávikavist tunglyndi, angist ella aðra sálarliga sjúku, og sjúku í rygginum. Tínæst eru eisini fleiri, sum siga seg vera í viðgerð fyri aðra langtíðar sjúku og í viðgerð fyri eksem.

**Talva 4.5.1.2: Býti av svørum í prosentum**

| Í viðgerð fyri…. | Tal | Prosent |
|---|---|---|
| Í viðgerð fyri tunglyndi, angist ella aðra sálarliga sjúku | 326 | 7,0 |
| Í viðgerð fyri astma | 205 | 4,4 |
| Í viðgerð fyri sukursjúku | 151 | 3,3 |
| Í viðgerð fyri æðrakálking ella blóðtøpp í hjartanum | 72 | 1,6 |
| Í viðgerð fyri blóðtøpp í heilanum (heilabløðing) | 11 | 0,2 |
| Í viðgerð fyri krabbamein | 56 | 1,2 |
| Í viðgerð fyri niðursetta hoyrn | 135 | 2,9 |
| Í viðgerð fyri eksem | 245 | 5,3 |
| Í viðgerð fyri sjúku í rygginum | 284 | 6,1 |
| Í viðgerð fyri migrenu | 205 | 4,4 |
| Í viðgerð fyri giktasjúku | 202 | 4,4 |
| Í viðgerð fyri tarmsjúku | 186 | 4,0 |
| Í viðgerð fyri aðra drúgva sjúku? | 261 | 5,6 |

Viðmerking: Prosentini eru roknað við at deila talið av svarpersónum, sum hava svarað, at teir eru í viðgerð fyri sjúkurnar, nevndar omanfyri, við teir 4.634 svarpersónarnar, sum hava svarað spurninginum í talvu 4.5.1.1.

Fyri at kunna samanbera úrslitini fyri *Sjálvmetta heilsu* upp á tvørs av kyni, aldri og starvsbólki, hava vit broytt spurningin í talvu 4.5.1.1 til ein stiga frá 0 til 100, har 100 bendir á eina 'Framúrskarandi' sjálvmetta heilsu. Sama stigan hava vit gjørt við støði í svørunum í donsku tjóðarkanningini *Arbeiðsumhvørvi og Heilsa 2018*, og soleiðis kunnu vit tí samanbera teir báðir bólkarnar. Talva 4.5.1.3 vísir miðaltalið fyri *Sjálvmetta heilsu* fyri svarpersónarnar í føroysku kanningini og fyri danskar arbeiðstakarar úr kanningini *Arbeiðsumhvørvi og Heilsa 2018*.

Á einum stiga frá 0 til 100, har 100 er tann besta sjálvmetta heilsan samsvarandi við 'Framúrskarandi', sæst í talvu 4.5.1.2, at svarpersónarnir úr Føroyum hava eitt miðaltal upp á 53,4, meðan svarpersónar úr donsku tilvísingarkanningini hava eitt miðaltal upp á 62,7. Svarpersónarnir úr føroysku kanningini hava tískil mett teirra heilsu sum heild lægri enn miðaltalið av svarpersónum úr donsku tilvísingarkanningini.

**Talva 4.5.1.3: Miðaltalið fyri *Sjálvmetta heilsu***

| Sjálvmett heilsa | Miðaltal |
|---|---|
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum | 53,4 |
| Miðaltalið fyri svarpersónar úr Danmark | 62,7 |

Í talvunum niðan fyri vera úrslitini víst fyri stigan um *Sjálvmetta heilsu* býtt upp í ávikavist kyn, aldur og starvsbólk.

Talva 4.5.1.4 vísir úrslitini fyri *Sjálvmetta heilsu* býtt upp í menn og kvinnur. Úrslitini benda á, at tað bert er sera lítil munur á, hvussu mannligir og kvinnuligir svarpersónar hava mett teirra heilsu alt í alt. Ein ískoytisgreining vísir harumframt, at munurin millum menn og kvinnur ikki er hagfrøðiliga signifikantur (p=0.2251).

**Talva 4.5.1.4: Miðaltalið fyri *Sjálvmetta heilsu* býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| Maður | 1954 | 53,8 |
| Kvinna | 2646 | 53,1 |

Talva 4.5.1.5 vísir úrslitini fyri *Sjálvmetta heilsu* býtt upp í aldur. Her vísa úrslitini, at yngstu svarpersónarnir undir 25 ár hava mett teirra heilsu sum heild at vera verri enn hinir aldursbólkarnir, har munirnir yvirskipað eru minni. Ískoytisgreiningar vísa tó, at munirnir millum aldursbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 4.5.1.5: Miðaltalið fyri *Sjálvmetta heilsu* býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| < 25 ár | 199 | 48,0 |
| 25 - 34 ár | 638 | 53,7 |
| 35 - 44 ár | 1048 | 52,1 |
| 45 - 54 ár | 1235 | 54,6 |
| 55 - 64 ár | 1133 | 54,1 |
| > 65 ár | 342 | 53,2 |

Talva 4.5.1.6 vísir úrslitini fyri *Sjálvmetta heilsu* býtt upp í starvsbólkar og vísir harumframt, hvussu miðaltalið liggur fyri ymisku starvsbólkarnar samanborið við miðaltalið fyri allar svarpersónar í kanningini. Úrslitini benda á, at tað yvirskipað eru minni munir millum starvsbólkarnar, og at svarpersónar í 'Leiðsluarbeiði' hava mett teirra heilsu sum heild hægri enn hinir starvsbólkarnir. Harnæst vísa úrslitini, at svarpersónar í 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' og 'Annað handaligt arbeiði' hava mett teirra heilsu sum heild at vera verri enn hinir starvsbólkarnir. Ein ískoytisgreining vísir harumframt, at munirnir millum starvsbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 4.5.1.6: Miðaltalið fyri *Sjálvmetta heilsu* býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| 1 Leiðsluarbeiði | 444 | 56,5 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 65 | 55,4 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 620 | 55,3 |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 548 | 55,1 |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 692 | 53,5 |
| **Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum** | **4634** | **53,4** |
| 9 Handverkaraarbeiði | 205 | 53,2 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 770 | 52,9 |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 566 | 52,9 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 299 | 50,7 |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 163 | 48,2 |
| 11 Annað handaligt arbeiði | 203 | 47,9 |

Viðmerking: Grøn marking í talvuni merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá betri sjálvmettari heilsu enn miðaltalið av øllum svarpersónum úr Føroyum. Reyð marking merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá verri sjálvmettari heilsu enn miðaltalið av øllum svarpersónunum úr Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Sjálvmetta heilsu***

Samanumtikið vístu úrslitini fyri *Sjálvmetta heilsu*, at svarpersónar úr Føroyum meta teirra heilsu sum heild at vera minni góða samanborið við svarpersónar úr einari danskari tilvísingarkanning.

Úrslitini vístu harumframt, at tað ikki er munur á, hvussu mannligir og kvinnuligir svarpersónar hava mett teirra heilsu sum heild. Upp á tvørs av aldursbólkum, vístu úrslitini aftur minni munir. Tó skilti miðaltalið hjá yngstu svarpersónunum seg frá hinum aldursbólkunum, og bendu sostatt á, at yngstu svarpersónarnir undir 25 ár yvirskipað uppliva teirra heilsu at vera verri enn hinir bólkarnir.

Upp á tvørs av starvsbólkunum vístu úrslitini fyri *Sjálvmetta heilsu*, at tað yvirskipað eru eitt sindur minni munir upp á tvørs av bólkunum. Tó vístu úrslitini, at svarpersónar í 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' og 'Annað handaligt arbeiði' meta teirra heilsu sum heild at vera verri enn hjá hinum starvsbólkunum og eisini minst fimm stig verri enn miðaltalið av øllum svarpersónum.

### 4.5.2 Arbeiðsførleiki

*Sjálvmettur arbeiðsførleiki* er tann metingin hjá tí einstaka av sínum egnu førleikum at liva upp til likamligu og sálarligu krøvini, sum arbeiðið setur viðkomandi. Arbeiðsførleiki endurspeglar metingina hjá tí einstaka av javnvágini millum heilsu og annað persónligt tilfeingi og krøvini, sum arbeiðið setur (137). Ein lágur sjálvmettur arbeiðsførleiki hongur saman við øktum vanda fyri drúgvari sjúkufráveru (138) og hugsanum um at taka seg av arbeiðsmarknaðinum í ótíð (139).

Vit máta *Arbeiðsførleika* við teimum báðum spurningunum um ávikavist likamligan og sálarligan arbeiðsførleika í talvu 4.5.2.1. Talvan vísir eisini býtið av svørum fyri allar svarpersónar í kanningini.

**Talva 4.5.2.1: Býti av svørum í prosentum**

| | Vánaligan | Minni góðan | Góðan | Ógvuliga góðan | Framúrskarandi |
|---|---|---|---|---|---|
| Hvussu metir tú tín núverandi arbeiðsførleika í mun til kropsligu krøvini í tínum arbeiði? | 1,6 | 8,8 | 40,4 | 31,2 | 18,1 |
| Hvussu metir tú tín núverandi arbeiðsførleika í mun til sálarligu krøvini í tínum arbeiði? | 1,7 | 9,5 | 39,5 | 35,5 | 13,9 |

Fyri at kunna samanbera úrslitini fyri *Arbeiðsførleika* broyta vit spurningarnar fyri ávikavist likamligan og sálarligan arbeiðsførleika til tveir ymiskar stigar, sum ganga frá 0 til 100, har 100 bendir á besta sjálvmetta arbeiðsførleikan. Tað sama gera vit fyri svørini frá *Arbeiðsumhvørvi og Heilsa 2018* (20), og á tann hátt kunnu vit eisini samanbera úrslitini við danskar arbeiðstakarar. Talva 4.5.2.2 vísir miðaltalið fyri ávikavist likamligan og sálarligan arbeiðsførleika fyri svarpersónarnar í føroysku kanningini og fyri danskar arbeiðstakarar frá *Arbeiðsumhvørvi og Heilsa 2018*.

Á einum stiga frá 0-100, har 100 er besti sjálvmetti arbeiðsførleikin í samsvar við 'Framúrskarandi', sæst tað í talvu 4.5.2.2, at svarpersónarnir úr Føroyum hava eitt miðaltal upp á 63,8, meðan svarpersónarnir úr donsku tilvísingarkanningini hava eitt miðaltal upp á 73,6 á stiganum um *Likamligan arbeiðsførleika*. Harnæst vísa úrslitini, at føroysku svarpersónarnir hava eitt miðaltal upp á 62,6, meðan svarpersónar úr donsku tilvísingarkanningini hava eitt miðaltal upp á 69,9 á stiganum um *Sálarligan arbeiðsførleika.* Úrslitini benda sostatt á, at svarpersónarnir úr Føroyum liggja undir danska miðaltalið fyri bæði likamligan og sálarligan arbeiðsførleika. Úrslitini fyri Føroyar samsvara tó við, at svarpersónarnir í miðal liggja millum svarbólkingarnar 'Góðan' og 'Ógvuliga góðan', tá teir svara spurnablaðnum, og úrslitini benda sostatt á, at svarpersónarnir úr Føroyum yvirskipað meta sín arbeiðsførleika at vera góðan.

**Talva 4.5.2.2: Miðaltalið fyri *Likamligan* og *Sálarligan arbeiðsførleika***

| Sjálvmettur arbeiðsførleiki | Likamligur | Sálarligur |
|---|---|---|
| Miðaltalið fyri arbeiðstakarar í Føroyum | 63,8 | 62,6 |
| Miðaltalið fyri arbeiðstakarar í Danmark | 73,6 | 69,9 |

Í talvunum niðan fyri vera úrslitini víst fyri *Arbeiðsførleika* býtt upp í ávikavist kyn, aldur og starvsbólk. Vit leggja fyrst úrslitini fram fyri *Likamligan arbeiðsførleika,* og síðani vera úrslitini fyri *Sálarligan arbeiðsførleika* løgd fram.

**Likamligur arbeiðsførleiki**

Talva 4.5.2.3 vísir úrslitini fyri *Likamligan arbeiðsførleika* býtt upp í menn og kvinnur. Úrslitini benda á, at mannligir svarpersónar hava mett teirra likamliga arbeiðsførleika at vera betri enn kvinnuligir svarpersónar. Ein ískoytisgreining vísir harumframt, at munurin millum menn og kvinnur er hagfrøðiliga signifikantur ($p<.0001$).

**Talva 4.5.2.3: Miðaltalið fyri *Likamligan arbeiðsførleika* býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| Maður | 1962 | 65,9 |
| Kvinna | 2657 | 62,3 |

Talva 4.5.2.4 vísir úrslitini fyri *Likamligan arbeiðsførleika* býtt upp í ymiskar aldursbólkar. Úrslitini benda á, at svarpersónar í aldrinum 25 til 34 ár hava mett teirra likamliga arbeiðsførleika at vera betri enn hinir aldursbólkarnir, meðan svarpersónar yvir 65 ár hava mett teirra likamliga arbeiðsførleika at vera verri enn hinir bólkarnir. Allir aldursbólkarnir hava tó í minsta lagi mett teirra likamliga arbeiðsførleika at vera 'Góðan'. Ein ískoytisgreining vísir, at munirnir millum aldursbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir ($p<.0001$).

**Talva 4.5.2.4: Miðaltalið fyri *Likamligan arbeiðsførleika* býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| < 25 ár | 200 | 62,0 |
| 25 - 34 ár | 640 | 66,5 |
| 35 - 44 ár | 1049 | 64,9 |
| 45 - 54 ár | 1242 | 64,7 |
| 55 - 64 ár | 1137 | 62,2 |
| > 65 ár | 346 | 58,7 |

Talva 4.5.2.5 vísir úrslitini fyri *Likamligan arbeiðsførleika* býtt upp í starvsbólkar og vísir harumframt, hvar ymisku starvsbólkarnir liggja í mun til miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini. Her vísa úrslitini, at svarpersónar í starvsbólkunum 'Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði' og 'Leiðsluarbeiði' hava mett teirra likamliga arbeiðsførleika at vera lutfalsliga høgan, og harumframt hægri enn hinir starvsbólkarnir og miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini. Harafturímóti hava svarpersónar í 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' mett teirra likamliga arbeiðsførleika at vera verri enn hinir bólkarnir og eisini eitt sindur verri enn

miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini. Ein ískoytisgreining vísir, at munirnir millum starvsbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 4.5.2.5: Miðaltalið fyri *Likamligan arbeiðsførleika* býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 624 | 73,0 |
| 1 Leiðsluarbeiði | 445 | 72,9 |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 567 | 66,0 |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 696 | 64,9 |
| **Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum** | **4673** | **63,8** |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 773 | 61,0 |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 553 | 59,5 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 65 | 58,5 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 299 | 58,4 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 206 | 58,1 |
| 11 Annað handaligt arbeiði | 203 | 54,8 |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 163 | 52,6 |

Viðmerking: Grøna markingin merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá betri likamligum arbeiðsførleika enn miðaltalið av øllum svarpersónum úr Føroyum. Reyðu markingarnar merkja, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá verri likamligum arbeiðsførleika enn miðaltalið av øllum svarpersónum úr Føroyum.

**Sálarligur arbeiðsførleiki**

Talva 4.5.2.6 vísir úrslitini fyri *Sálarligan arbeiðsførleika* býtt upp í menn og kvinnur. Úrslitini benda á, at mannligir svarpersónar meta teirra sálarliga arbeiðsførleika týðiliga hægri enn kvinnuligir svarpersónar. Ein ískoytisgreining vísir eisini, at munurin millum menn og kvinnur er hagfrøðiliga signifikantur (p<.0001).

**Talva 4.5.2.6: Miðaltalið fyri *Sálarligan arbeiðsførleika* býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| Maður | 1962 | 66,8 |
| Kvinna | 2657 | 59,7 |

Talva 4.5.2.7 vísir úrslitini fyri *Sálarligan arbeiðsførleika* býtt upp í aldur. Úrslitini vísa yvirskipað, at tað eru eitt sindur minni munir upp á tvørs av aldursbólkunum. Tó sæst, at svarpersónar í teimum báðu yngstu aldursbólkunum hava tey lægstu miðaltølini á stiganum, og hava tískil mett teirra sálarliga arbeiðsførleika at vera verri enn hinir bólkarnir. Úrslitini benda á, at svarpersónar í aldrinum 45 til 54 ár og teir elstu svarpersónarnir yvir 65 ár hava hægstu miðaltølini á stiganum, og hava tískil mett teirra sálarliga arbeiðsførleika at vera betri enn hinir bólkarnir. Ein ískoytisgreining vísir, at munirnir millum bólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p=0.0017).

**Talva 4.5.2.7: Miðaltalið fyri *Sálarligur arbeiðsførleiki* býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| < 25 ár | 200 | 60,0 |
| 25 - 34 ár | 640 | 60,1 |
| 35 - 44 ár | 1049 | 62,0 |
| 45 - 54 ár | 1242 | 64,2 |
| 55 - 64 ár | 1137 | 63,2 |
| > 65 ár | 346 | 64,0 |

Talva 4.5.2.8 vísir úrslitini fyri *Sálarligan arbeiðsførleika* býtt upp í starvsbólkar, og vísir harumframt, hvar ymisku starvsbólkarnir liggja í mun til miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini. Her vísa úrslitini, at svarpersónar í 'Leiðsluarbeiði' meta teirra sálarliga arbeiðsførleika at vera betri enn hinir starvsbólkarnir, og liggja harafturat minst fimm stig betri enn miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini. Harafturímóti hava svarpersónar í 'Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði' mett teirra sálarliga arbeiðsførleika at vera verri enn hinir bólkarnir, og harafturat tætt upp at fimm stigum lægri (verri) enn miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini. Ein ískoytisgreining vísir, at munirnir millum starvsbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 4.5.2.8: Miðaltalið fyri *Sálarligan arbeiðsførleika* býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| 1 Leiðsluarbeiði | 445 | 69,3 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 624 | 66,9 |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 696 | 65,1 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 206 | 64,0 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 65 | 63,8 |
| **Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum** | **4672** | **62,6** |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 567 | 62,5 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 299 | 61,5 |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 163 | 59,8 |
| 11 Annað handaligt arbeiði | 203 | 59,1 |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 553 | 59,0 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 773 | 57,9 |

Viðmerking: Grønu markingarnar merkja, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá betri sálarligum arbeiðsførleika enn miðaltalið av øllum svarpersónum úr Føroyum. Reyða markingin merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá verri sálarligum arbeiðsførleika enn miðaltalið av øllum svarpersónum úr Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Arbeiðsførleika***

Samanumtikið vístu úrslitini fyri *Arbeiðsførleika*, at svarpersónar úr føroysku kanningini sum heild hava mett teirra arbeiðsførleika at vera góðan, men at sjálvmetti arbeiðsførleikin er eitt sindur lægri, tá samanborið verður við donsku arbeiðstakararnar úr AH-kanningini í 2018 (20).

Samanumtikið vístu úrslitini, at mannligir svarpersónar hava mett bæði teirra likamliga og sálarliga arbeiðsførleika at vera betri enn kvinnuligir svarpersónar í kanningini. Úrslitini upp á tvørs av ymisku aldursbólkunum var eitt sindur meira skiftandi. Her vístu úrslitini, at svarpersónar í aldrinum 25 til 34 ár meta teirra likamliga arbeiðsførleika at vera betri enn hinir bólkarnir, meðan teir elstu svarpersónarnir yvir 65 ár hava mett teirra likamliga arbeiðsførleika at vera verri enn hinir starvsbólkarnir. Teir elstu svarpersónarnir yvir 65 ár mettu afturfyri at hava ein betri sálarligan arbeiðsførleika enn yngstu svarpersónarnir, sum mettu teirra sálarliga arbeiðsførleika at vera verri enn hinir bólkarnir.

Upp á tvørs av starvsbólkunum, vístu úrslitini, at svarpersónar í 'Leiðsluarbeiði' bæði hava mett teirra likamliga og sálarliga arbeiðsførleika at vera betri enn hinir starvsbólkarnir. Eisini svarpersónar í 'Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði' hava mett bæði teirra likamliga og sálarliga arbeiðsførleika at vera betri enn hinir starvsbólkarnir.

Úrslitini vístu eisini, at tað er ein partur av starvsbólkunum, sum meta teirra likamliga arbeiðsførleika at vera verri enn miðaltalið av øllum svarpersónum. Hesir starvsbólkar eru 'Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap', 'Tænastu- og søluarbeiði', 'Handverkaraarbeiði', 'Annað handaligt arbeiði' og 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði'. Til endans vístu úrslitini, at svarpersónar í 'Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði' hava mett teirra sálarliga arbeiðsførleika at vera verri enn miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini.

## 4.5.3 Pína

Pína í vøddum og liðum eru upplivingar hjá tí einstaka, men tá ið svør frá fleiri túsund persónum verða savnað inn, er møguligt at síggja munir í útbreiðsluni av pínu millum ymiskar bólkar (20). Tað kunnu vera ymiskar avleiðingar av at uppliva pínu í sambandi við arbeiðið, bæði stuttar og langtíðar.

Ein kanning hevur t.d. staðfest, at tað millum kvinnuligar starvsfelagar í eldrarøktini er samband millum styrkina av pínu í økjum sum lendum, ryggi/akslum og knøum og vandin fyri fyritíðareftirløn (140). Kanningar vísa eisini, at tað er samband millum styrkina av pínu í nakka/akslum og lendum og vandanum fyri drúgvari sjúkufráveru (12). Miðal-ring pína til hægsta styrki av pínu kann tí vera ein vansi fyri í mun til at gevast á arbeiðsmarknaðinum fyribils í sambandi við drúgva sjúkufráveru og varandi við fyritíðareftirløn (12, 140).

Vit máta *Pínu* við tveimum spurningum. Í tí eina spurninginum spyrja vit um, hvussu ofta mann hevur havt pínu seinastu tríggjar mánaðirnar. Í hinum spurninginum spyrja vit í hvønn mun, mann hevur verið avmarkaður í arbeiðinum vegna pínu. Talva 4.5.3.1 vísir býtið av svørum til báðar spurningarnar fyri allar svarpersónar í kanningini.

**Talva 4.5.3.1: Býti av svørum í prosentum**

| | Dagliga | Einaferð ella fleiri ferðir um vikuna | Tvær ferðir um mánaðin | Viðhvørt | Als ikki |
|---|---|---|---|---|---|
| Hvussu ofta hevur tú havt pínu seinastu 3 mánaðirnar? | 16,5 | 14,6 | 5,5 | 35,5 | 28,0 |
| | | **Nei** | **Ja – eitt sindur** | **Ja – nakað** | **Ja - nógv** |
| Hevur pína avmarkað teg í tínum arbeiði seinastu 3 mánaðirnar? | | 67,0 | 20,3 | 8,7 | 4,0 |

Í kanningini hava vit eisini spurt luttakararnar um, hvar teir hava havt pínu seinastu tríggjar mánaðirnar. Talva 4.5.3.2 vísir, hvussu svarpersónarnir hava svarað upp á hesar spurningarnar. Úrslitini benda á, at en stórur partur av svarpersónunum siga frá, at teir hava havt pínu í nakka og/ella akslum (59,4 prosent) umframt lendum (49,3 prosent). Tað eru harafturímóti fægst svarpersónar, sum siga frá, at teir hava havt pínu í bringuni (14,5 prosent).

**Talva 4.5.3.2: Býti av svørum í prosentum upp á spurningin 'Hevur tú seinastu 3 mánaðirnar havt pínu í....'**

| | Ja |
|---|---|
| Nakkanum og/ella akslunum | 59,4 |
| Lendunum | 49,3 |
| Knøunum | 39,2 |
| Ørmunum og/ella handliðunum | 38,7 |
| Aðrastaðni | 36,1 |
| Mjødnini | 26,0 |
| Búkinum | 25,7 |
| Bringuni | 14,5 |

Vit samanbera úrslitini við úrslitini úr donsku kanningini *Arbeiðsumhvørvi og Heilsa 2018* (20). Vit samanbera úrslitini grundað á hesi eyðkenni:

- Partur (prosent) av svarpersónum, sum hava sagt frá, at teir uppliva pínu eina ella fleiri ferðir um vikuna, og
- Partur (prosent) av svarpersónum, sum hava havt pínu einstakar ferðir ella oftari seinastu 3 mánaðirnar, og sum vóru 'eitt sindur' ella 'nógv' avmarkað í teirra arbeiði í sama tíðarskeiði

Talva 4.5.3.3 vísir úrslitini fyri *Pínu* fyri ávikavist føroyskar og danskar svarpersónar. Her vísa úrslitini, at ein eitt sindur størri partur av donsku svarpersónunum í eitt tíðarskeið upp á tríggjar mánaðir hava upplivað pínu eina ella fleiri ferðir um vikuna samanborið við svarpersónar úr føroysku kanningini. Afturfyri vísa úrslitini, at en týðiliga størri partur av teimum føroysku svarpersónunum siga frá, at pínan hevur avmarkað teir 'eitt sindur' ella 'nógv' í teirra arbeiði. Her hava 17,6 prosent sagt frá, at teir kenna seg avmarkaðan í arbeiðinum orsaka av pínu, meðan bert 5,1 prosent úr donsku tilvísingarkanningini siga frá, at teir eru avmarkaðir av pínu í arbeiðinum (20).

**Talva 4.5.3.3: Partur av svarpersónum, sum hava havt pínu seinastu 3 mánaðirnar**

| | Pínu einaferð ella fleiri ferðir um vikuna | Avmarkað/ur í arbeiðinum vegna pínu |
|---|---|---|
| Partur av svarpersónum úr Føroyum | 31,1 | 17,6 |
| Partur av svarpersónum úr Danmark | 32,5 | 5,1 |

Talva 4.5.3.4 vísir úrslitini fyri *Pínu* býtt upp í kyn. Úrslitini vísa millum annað, at tað er ein størri partur av kvinnuligum svarpersónum, sum siga seg uppliva pínu fleiri ferðir um vikuna (33,9 prosent) samanborið við mannligar svarpersónar (27,3 prosent). Ein ískoytisgreining vísir, at munurin millum menn og kvinnur er hagfrøðiliga signifikantur ($p<.0001$).

Úrslitini vísa harumframt, at uml. 17-18 prosent av bæði mannligum og kvinnuligum svarpersónum, sum hava sagt frá um pínu í einum tíðarskeiði av trimum mánaðum, uppliva, at hendan pínan hevur avmarkað tey 'eitt sindur' ella 'nógv' í arbeiðinum í

sama tíðarskeiði. Úrslitið bendir sostatt á, at tað bert er ein minni munur á, hvussu avmarkaðan menn og kvinnur kenna seg í arbeiðinum vegna pínu. Ein ískoytisgreining vísir harumframt, at munurin ikki er hagfrøðiliga signifikantur (p=0.8081).

**Talva 4.5.3.4: Partur av monnum og kvinnum, sum hava havt pínu seinastu 3 mánaðirnar**

| | Pínu einaferð ella fleiri ferðir um vikuna | Avmarkað/ur í arbeiðinum vegna pínu |
|---|---|---|
| Partur av mannligum svarpersónum | 27,3 | 17,5 |
| Partur av kvinnuligum svarpersónum | 33,9 | 17,9 |

Viðmerking: Úrslitini viðv. 'Avmarkað/ur í arbeiðinum vegna pínu' eru uppgjørd eftir bólkingini mannligir og kvinnuligir svarpersónar, sum hava sagt seg havt pínu minst eina ferð seinastu 3 mánaðirnar, og, sum um somu tíð hava upplivað, at verið avmarkaðir 'eitt sindur' ella 'nógv' av pínuni hetta tíðarskeiðið.

Talva 4.5.3.5 vísir úrslitini fyri *Pínu* býtt upp í ymiskar aldursbólkar. Her vísa úrslitini, at ein størri partur av svarpersónum undir 25 ár hava sagt seg í minsta lagi uppliva pínu fleiri ferðir um vikuna (46,0 prosent). Harafturímóti er tað ein minni partur av svarpersónum yvir 65 ár, sum siga seg uppliva pínu í minst fleiri ferðir um vikuna (24,4 prosent). Ein ískoytisgreining vísir, at munirnir millum aldursbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

Úrslitini vísa harumframt, at tað eisini er ein størri partur av svarpersónunum undir 25 ár, sum upplivir at vera avmarkaður av pínuni í arbeiðinum (29,2 prosent) enn hinir aldursbólkarnir. Úrslitini benda eisini á, at en minni partur av svarpersónunum yvir 65 ár kenna seg avmarkaðar í arbeiðinum vegna pínu (12,2 prosent). Ískoytisgreining vísir eisini í hesum førinum, at munirnir millum aldursbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p=0.0007).

**Talva 4.5.3.5: Partur av svarpersónum, sum hevur havt pínu seinastu 3 mánaðirnar, býtt upp í aldursbólkar**

| | Pínu einaferð ella fleiri ferðir um vikuna | Avmarkað/ur í arbeiðinum vegna pínu |
|---|---|---|
| Partur av svarpersónum undir 25 ár | 46,0 | 29,2 |
| Partur av svarpersónum millum 25 og 34 ár | 34,3 | 17,0 |
| Partur av svarpersónum millum 35 og 44 ár | 31,6 | 18,7 |
| Partur av svarpersónum millum 45 og 54 ár | 32,8 | 18,1 |
| Partur av svarpersónum millum 55 og 64 ár | 26,6 | 16,0 |
| Partur av svarpersónum yvir 65 ár | 24,4 | 12,2 |

Viðmerking: Úrslitini viðv. 'Avmarkaður í arbeiðinum vegna pínu' eru uppgjørd grundað á svarpersónar, sum hava sagt seg havt pínu í minsta lagi eina ferð seinastu 3 mánaðirnar, og, sum um somu tíð hava upplivað, at teir hava verið avmarkaðir 'eitt sindur' ella 'nógv' av pínuni hetta tíðarskeiðið.

Talvurnar niðanfyri vísa úrslitini fyri *Pínu* býtt upp í starvsbólkar. Fyri at fáa betri yvirlit vera hesi úrslitini løgd fram í tveimum talvum fyri ávikavist títtleikan av pínu og uppliving av avmarking í arbeiðinum vegna pínu.

Talva 4.5.3.6a vísir úrslitini fyri títtleikan av pínu býtt upp í starvsbólkar, og talvan vísir harumframt, hvar starvsbólkarnir liggja samanborið við úrslitið fyri allar svarpersónar í kanningini. Her vísa úrslitini, at tað er ein størri partur av svarpersónum innan fyri starvsbólkarnir 'Annað handaligt arbeiði' og 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði', sum hava sagt seg uppliva pínu minst fleiri ferðir um vikuna. Úrslitini vísa øvut, at tað er ein minni partur av svarpersónum í starvsbólkinum 'Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði', sum sigur seg uppliva pínu einaferð ella fleiri ferðir um vikuna. Ein ískoytisgreining vísir, at munirnir millum starvsbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 4.5.3.6a: Partur av svarpersónum við *pínu einaferð ella fleiri ferðir um vikuna* býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Prosent |
|---|---|---|
| 11 Annað handaligt arbeiði | 95 | 46,3 |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 75 | 46,0 |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 230 | 41,5 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 83 | 40,1 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 26 | 39,4 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 106 | 35,5 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 267 | 34,4 |
| **Partur av svarpersónum úr Føroyum** | **1464** | **31,1** |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 149 | 26,1 |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 170 | 24,4 |
| 1 Leiðsluarbeiði | 103 | 23,0 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 130 | 20,7 |

Viðmerking: Grøna markingin merkir, at tað eru færri svarpersónar í avvarðandi starvsbólki, sum hava sagt frá pínu einaferð ella fleiri ferðir um vikuna samanborið við partin av øllum svarpersónum úr Føroyum. Reyðu markingarnar merkja, at tað eru fleiri svarpersónar í avvarðandi starvsbólki, sum hava sagt frá pínu einaferð ella fleiri ferðir um vikuna samanborið partin av øllum svarpersónum úr Føroyum.

Talva 4.5.3.6b vísir, hvussu úrslitini eru uppbýtt upp á tvørs av starvsbólkunum viðvíkjandi spurninginum um, hvussu nógv svarpersónarnir uppliva, at teir er avmarkaðir í arbeiðinum vegna pínu. Eisini her vísa úrslitini, at ein størri partur av svarpersónum í starvsbólkunum 'Annað handaligt arbeiði' og 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' siga frá, at pínan er avmarkandi í arbeiðinum. Og somuleiðis vísa úrslitini, at en minni partur av svarpersónum úr starvsbólkinum 'Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði', siga frá, at pínan er avmarkandi í arbeiðinum. Ein ískoytisgreining vísir harafturat, at munirnir millum bólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 4.5.3.6b: Partur av svarpersónum, sum kenna seg *avmarkaðan í arbeiðinum vegna pínu* býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Prosent |
|---|---|---|
| 11 Annað handaligt arbeiði | 57 | 32,2 |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 43 | 30,3 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 39 | 23,1 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 48 | 21,2 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 11 | 20,4 |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 89 | 19,2 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 104 | 18,1 |
| **Partur av svarpersónum úr Føroyum** | **598** | **17,6** |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 69 | 13,9 |
| 1 Leiðsluarbeiði | 37 | 13,1 |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 46 | 12,2 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 43 | 11,8 |

Viðmerking*: Úrslitini viðv. 'Avmarkaður í arbeiðinum vegna pínu' eru gjørd upp grundað á svarpersónar, sum hava sagt frá, at teir hava havt pínu í minsta lagi eina ferð seinastu 3 mánaðirnar, og sum um somu tíð hava upplivað 'eitt sindur' ella 'nógva' avmarking av pínuni hetta tíðarskeiðið.

Viðmerking**: Grønu markingarnar merkja, at tað eru færri svarpersónar í avvarðandi starvsbólki, sum hava sagt seg kenna seg avmarkaðan av pínu í arbeiðinum samanborið við partin av øllum svarpersónum úr Føroyum. Reyðu markingarnar merkja, at tað eru fleiri svarpersónar í avvarðandi starvsbólki, sum hava sagt seg kenna seg avmarkaðan av pínu í arbeiðinum samanborið við partin av øllum svarpersónum úr Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Pínu***

Samanumtikið vístu úrslitini fyri *Pínu*, at tað ikki vóru stórir munir á títtleikanum av pínu býtt upp í danskar og føroyskar svarpersónar. Tó vístu úrslitini, at ein týðiliga størri partur av føroyskum svarpersónum uppliva, at pínan er ein avmarking í arbeiðinum samanborið við danskar svarpersónar.

Harnæst vístu úrslitini, at ein størri partur av kvinnuligum svarpersónum uppliva pínu einaferð ella fleiri ferðir um vikuna, meðan eingin munur var millum menn og kvinnur á, hvørt tey kendu seg avmarkað í arbeiðinum vegna pínu. Býtt upp í aldursbólkarnar, vóru tað serliga yngstu svarpersónarnir undir 25 ár, sum uppliva pínu í minsta lagi fleiri ferðir um vikuna, og sum eisini uppliva, at pínan er avmarkandi í arbeiðinum. Býtt upp í starvsbólkarnar vístu úrslitini, at ein størri partur av svarpersónum í starvsbólkunum 'Annað handaligt arbeiði' og 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' bæði uppliva pínu einaferð ella fleiri ferðir um vikuna, og uppliva eisini, at pínan er avmarkandi í arbeiðinum.

## 4.5.4 Møði og svøvntrupulleikar

At fáa nóg nógvan og góðan svøvn er neyðugt fyri, at kroppurin kann koma fyri seg aftur frá einum degi til annan. Tá ið mann svevur ov lítið ella ov illa, gerst mann troyttur. Hetta kann økja um vandan fyri arbeiðsóhappum umframt minka um dygdina og produktivitetin í arbeiðinum. Nógvar orsøkir kunnu vera til, at mann er troyttur aftan á ein arbeiðsdag. Tað kunnu vera viðurskifti í ella uttan fyri arbeiðið, t.d. kann náttararbeiði og tað at møta til arbeiðis tíðliga hava ávirkan á møðina. Samstundis ávirkar náttararbeiði svøvnin (141). Vánalig svøvndygd vísir seg við, at mann svevur ov lítið, at mann svevur ov illa, at mann ikki kennir seg úthvíldan, tá ið mann vaknar, ella at mann er troyttur um dagin.

Kanningar vísa eisini, at tað at vera fyri likamliga tyngjandi arbeiði økir um møðina hjá arbeiðstakaranum uttan fyri arbeiðstíð (131). T.d. hevur ein onnur kanning víst, at møði vegna arbeiðið ávirkar, hvussu virkin arbeiðstakarin er likamliga í frítíðini. T.d. sæst, at longdin av høgari intensivari likamligari venjing í frítíðini minkar, tá ið arbeiðstakarar uppliva økta møði í sambandi við arbeiðið sum ein avleiðing av likamliga hørðum og krevjandi arbeiði (142). Granskingin vísir eisini á, at ein røð av viðurskiftum í sálarliga arbeiðsumhvørvinum, sum t.d. harðskapur í sambandi við arbeiði, hava samband við dygdina av svøvni (34).

Vit máta *Møði og svøvntrupulleikar* við teimum fýra spurningunum í talvu 4.5.4.1. Í kanningini blivu luttakararnir eisini spurdir um, hvussu nógvar tímar teir í miðal hava sovið um samdøgrið seinastu fýra vikurnar. Her svara uml. 40 prosent av svarpersónunum, at teir hava sovið uml. 7 tímar, meðan uml. 34 prosent svara uml. 6 tímar um samdøgrið.

**Talva 4.5.4.1: Býti av svørum í prosentum**

| | Ikki móð/ur | Eitt sindur móð/ur | Nokk so móð/ur | Sera móð/ur | Útlúgvað/ur |
|---|---|---|---|---|---|
| Hvussu móð/ur ert tú eftir ein vanligan arbeiðsdag? | 5,1 | 29,1 | 39,9 | 21,6 | 4,3 |
| | **Ongantíð** | **Sjáldan** | **Av og á** | **Ofta** | **Altíð** |
| Ert tú vaknað/ur fleiri ferðir og hevur havt trupult við at sovna aftur seinastu 4 vikurnar? | 18,1 | 32,3 | 29,6 | 16,5 | 3,5 |
| Hevur tú kent, at tú ikki vart úthvíld/ur, tá ið tú vaknaði seinastu 4 vikurnar? | 6,7 | 24,6 | 32,5 | 28,1 | 8,1 |
| Hevur tú kent teg móða/n gjøgnum dagin seinastu 4 vikurnar? | 5,3 | 23,9 | 37,6 | 26,8 | 6,5 |

Fyri at kunna samanbera úrslitini við danskar arbeiðstakarar og upp á tvørs av bólkum í kanningini, hava vit broytt spurningarnar í talvu 4.5.4.1 til tveir ymiskar stigar, ávikavist fyri *Møði* og fyri *Svøvntrupulleikar, sum* báðir ganga frá 0 til 100.

Stigin um *Møði* er grundaður á spurningin 'Hvussu móð/ur ert tú eftir ein vanligan arbeiðsdag?', har eitt stigatal upp á 100 bendir á, at mann kennir seg 'Útlúgvaðan' aftan á ein vanligan arbeiðsdag. Stigin um *Svøvntrupulleikar* er grundaður á hinar spurningarnar í talvu 4.5.4.1, har ein korrelasjónsgreining hevur víst, at spurningarnir korrelera so mikið væl, at tað er nóg gott grundarlag at leggja hesar spurningarnar saman í ein stiga. Eitt stigatal upp á 100 á stiganum um *Svøvntrupulleikar* merkir tískil, at mann hevur svarað 'Altíð' upp á teir tríggjar spurningarnar. Eitt høgt stigatal í teimum báðum stigunum merkir sostatt, at mann í stóran mun upplivir møði og/ella at hava svøvntrupulleikar. Hesir somu stigar hava vit gjørt grundað á svørini í 'Arbeiðsumhvørvi og Heilsa 2018', og tískil kunnu vit samanbera úrslitini við danskar arbeiðstakarar.

Úrslitini fyri stigan um *Møði* vera løgd fram í næstu fýra talvunum, og síðani vera úrslitini fyri stigan um *Svøvntrupulleikar* løgd fram.

**Møði**

Talva 4.5.4.2 vísir úrslitini fyri *Møði* fyri svarpersónarnar í føroysku kanningini og fyri danskar arbeiðstakarar úr AH-kanningini (20). Úrslitini benda á, at føroysku svarpersónarnir hava eitt sindur hægri miðaltal á stiganum um *Møði* samanborið við svarpersónar úr donsku tilvísingarkanningini.

**Talva 4.5.4.2: Miðaltøl fyri stigan *Møði***

| Møði | Miðaltal |
|---|---|
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum | 47,7 |
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Danmark | 45,9 |

Í talvunum niðan fyri vera úrslitini víst fyri *Møði* býtt upp í ávikavist kyn, aldur og starvsbólkar.

Talva 4.5.4.3 vísir úrslitini fyri stigan um *Møði* býtt upp í menn og kvinnur. Úrslitini benda á, at kvinnuligir svarpersónar uppliva meira møði enn mannligir svarpersónar, og meta harvið í størri mun, at tær kenna seg troyttar aftan á ein vanligan arbeiðsdag. Ein ískoytisgreining vísir harafturat, at munurin millum menn og kvinnur er hagfrøðiliga signifikantur (p<.0001).

**Talva 4.5.4.3: Miðaltøl fyri stigan *Møði* býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| Maður | 1959 | 44,1 |
| Kvinna | 2651 | 50,3 |

Talva 4.5.4.4 vísir úrslitini fyri stigan um *Møði* býtt upp í aldur. Úrslitini benda á, at yngstu svarpersónarnir undir 25 ár í størri mun meta seg vera troyttar aftan á ein vanligan arbeiðsdag, samanborið verður við hinar bólkarnar. Harafturímóti vísa

úrslitini, at teir elstu svarpersónarnir yvir 65 ár uppliva møði í týðiliga minni mun enn hinir bólkarnir. Ein ískoytisgreining vísir eisini, at munirnir millum bólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 4.5.4.4: Miðaltøl fyri stigan *Møði* býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| < 25 ár | 199 | 53,6 |
| 25 - 34 ár | 640 | 51,8 |
| 35 - 44 ár | 1047 | 50,4 |
| 45 - 54 ár | 1239 | 48,4 |
| 55 - 64 ár | 1134 | 44,6 |
| > 65 ár | 346 | 35,7 |

Talva 4.5.4.5 vísir úrslitini fyri stigan um *Møði* býtt upp í starvsbólkar. Úrslitini benda á, at svarpersónar í starvsbólkunum 'Annað handaligt arbeiði', 'Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði' og 'Arbeiði á heilsuøkinum' í størri mun uppliva møði aftan á ein vanligan arbeiðsdag enn hinir starvsbólkarnir, og annars eisini minst fimm stig hægri enn miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini. Hetta úrslitið kann vera ábending um, at tað eru viðurskifti í arbeiðinum, t.d. likamliga strævin og sálarliga tyngjandi krøv í hesum slagi av størvum, sum eru útlúgvandi, og sum ikki finnast í sama mun í hinum starvsbólkunum. Øvut vísa úrslitini, at svarpersónar í 'Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði' umframt 'Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði' í minni mun uppliva møði samanborið við restina starvsbólkunum. Ein ískoytisgreining vísir, at munirnir millum starvsbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 4.5.4.5: Miðaltøl fyri stigan *Møði* býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| 11 Annað handaligt arbeiði | 203 | 54,2 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 771 | 53,4 |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 552 | 53,2 |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 163 | 51,4 |
| **Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum** | **4656** | **47,7** |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 298 | 47,3 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 65 | 46,2 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 206 | 46,1 |
| 1 Leiðsluarbeiði | 445 | 45,1 |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 694 | 44,4 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 622 | 43,4 |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 566 | 43,3 |

Viðmerking: Grøna markingin merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá minni møði enn miðaltalið av øllum svarpersónum úr Føroyum. Reyðu markingarnar merkja, at luttakararnir úr starvsbólkinum siga frá meira møði enn miðaltalið av øllum svarpersónum úr Føroyum.

**Svøvntrupulleikar**
Talva 4.5.4.6 vísir úrslitini fyri *Svøvntrupulleikar* fyri svarpersónarnar í føroysku kanningini og fyri danskar arbeiðstakarar í *Arbeiðsumhvørvi og Heilsa 2018* (20). Úrslitini benda á, at svarpersónar úr Føroyum hava eitt sindur lægri miðaltal enn svarpersónarnir úr donsku tilvísingarkanningini. Tað sær sostatt út til, at føroyskir svarpersónar í eitt sindur minni mun hava svøvntrupulleikar.

**Talva 4.5.4.6: Miðaltøl fyri stigan *Svøvntrupulleikar***

| Svøvntrupulleikar | Miðaltal |
|---|---|
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum | 47,2 |
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Danmark | 51,1 |

Talvurnar niðan fyri vís úrslitini fyri stigan *Svøvntrupulleikar* býtt upp í ávikavist kyn, aldur og starvsbólkar.

Talva 4.5.4.7 vísir úrslitini fyri *Svøvntrupulleikar* býtt upp í kyn. Úrslitini benda á, at kvinnuligir svarpersónar í størri mun siga frá svøvntrupulleikum enn mannligir svarpersónar. Ein ískoytisgreining vísir, at munurin millum menn og kvinnur er hagfrøðiliga signifikantur ($p<.0001$).

**Talva 4.5.4.7: Miðaltøl fyri stigan *Svøvntrupulleikar* býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| Maður | 1945 | 43,3 |
| Kvinna | 2629 | 50,0 |

Talva 4.5.4.8 vísir úrslitini fyri *Svøvntrupulleikar* býtt upp í aldur. Úrslitini benda á, at yngstu svarpersónarnir undir 25 ár hava hægsta miðaltalið á stiganum, og meta seg tí oftari uppliva svøvntrupulleikar samanborið við hinar aldursbólkarnar. Teir elstu svarpersónarnir yvir 65 ár siga harafturímóti frá, at teir meira sjáldan enn aðrir aldursbólkar uppliva svøvntrupulleikar. Ein ískoytisgreining vísir, at munirnir millum bólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir ($p<.0001$).

**Talva 4.5.4.8: Miðaltøl fyri stigan *Svøvntrupulleikar* býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| < 25 ár | 197 | 55,0 |
| 25 - 34 ár | 631 | 52,3 |
| 35 - 44 ár | 1041 | 49,1 |
| 45 - 54 ár | 1234 | 46,9 |
| 55 - 64 ár | 1130 | 44,4 |
| > 65 ár | 337 | 36,9 |

Talva 4.5.4.9 vísir úrslitini fyri *Svøvntrupulleikar* býtt upp í starvsbólkar. Úrslitini benda á, at tað eru eitt sindur minni munir millum starvsbólkarnar, sum liggja ovast í talvuni (oman fyri miðaltalið fyri allar svarpersónar). Tó sæst, at svarpersónar í 'Annað handaligt arbeiði' hava hægsta miðaltalið á stiganum, og meta seg sostatt í størri mun

hava svøvntrupulleikar enn hinir starvsbólkarnir. Svarpersónar í 'Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap' hava harafturímóti lægsta stigatalið á stiganum, og tað bendir sostatt á, at hesin starvsbólkurin í minni mun upplivir at hava svøvntrupulleikar enn hinir bólkarnir. Ein ískoytisgreining vísir, at munirnir millum starvsbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 4.5.4.9: Miðaltøl fyri stigan *Svøvntrupulleikar* býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| 11 Annað handaligt arbeiði | 200 | 50,8 |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 547 | 49,8 |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 163 | 49,5 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 768 | 49,1 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 297 | 48,9 |
| **Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum** | **4613** | **47,2** |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 564 | 47,2 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 613 | 45,3 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 204 | 45,2 |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 686 | 45,0 |
| 1 Leiðsluarbeiði | 443 | 44,6 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 65 | 42,6 |

Viðmerking: Grøna markingin merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum í minni mun siga frá svøvntrupulleikum enn miðaltalið av øllum svarpersónum úr Føroyum. Reyða markingin merkir, at luttakararnir úr starvsbólkinum í størri mun siga frá svøvntrupulleikum enn miðaltalið av øllum svarpersónum úr Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Møði og svøvntrupulleikum***
Samanumtikið vístu úrslitini fyri *Møði og svøvntrupulleikar,* at svarpersónar úr Føroyum í eitt sindur størri mun siga frá møði aftan á arbeiði, meðan teir í eitt sindur minni mun siga frá svøvntrupulleikum samanborið við miðaltalið av donskum arbeiðstakarum.

Fyri stigan *Møði* vístu úrslitini, at kvinnuligir svarpersónar uppliva meira møði enn mannligir svarpersónar, og meta harvið í størri mun, at teir kenna seg troyttan aftan á ein vanligan arbeiðsdag. Upp á tvørs av aldursbólkunum vístu úrslitini, at yngstu svarpersónarnir undir 25 ár í størri mun meta seg vera troyttan aftan á ein vanligan arbeiðsdag, tá samanborið verður við hinar aldursbólkarnar. Fyri starvsbólkarnar, vístu úrslitini, at tað serliga eru svarpersónar í 'Annað handaligt arbeiði', 'Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði' og 'Arbeiði á heilsuøkinum', sum uppliva at kenna seg troyttan aftan á ein vanligan arbeiðsdag, meðan svarpersónar í 'Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði' umframt 'Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði' uppliva at vera minni troytt aftan á ein vanligan arbeiðsdag samanborið við hinar starvsbólkarnar og miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini.

Fyri stigan *Svøvntrupulleikar* vístu úrslitini, at kvinnuligir svarpersónar í størri mun siga frá svøvntrupulleikum enn mannligir svarpersónar. Kvinnuligir svarpersónar úr

Føroyum siga sostatt frá bæði at vera meira troyttar aftan á ein vanligan arbeiðsdag og oftari at hava svøvntrupulleikar enn mannligir svarpersónar.

Fyri stigan *Svøvntrupulleikar* vóru tað aftur yngstu svarpersónarnir undir 25 ár, sum høvdu hægsta stigatalið, og er harvið tann aldursbólkurin, sum tykist oftast at uppliva svøvntrupulleikar, meðan svarpersónar undir 65 ár høvdu lægsta miðaltalið í hesum stiganum. Tað er sostatt aftur stórur munur á úrslitunum hjá ungum og eldri svarpersónum, har úrslitini í hesum kapitlinum benda á, at tað millum ungu svarpersónarnar eru nakrar avbjóðingar, sum hava samband við møði og svøvn, sum ikki sæst millum eldru svarpersónarnar.

Upp á tvørs av starvsbólkunum, vístu úrslitini, at svarpersónar í 'Annað handaligt arbeiði' í størri mun meta seg hava svøvntrupulleikar samanborið við hinar starvsbólkarnar og miðaltalið av øllum svarpersónum í kanningini. Harafturímóti hava svarpersónar í 'Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap' mett seg hava svøvntrupulleikar í minni mun enn hinir starvsbólkarnir í kanningini.

Bæði fyri *Møði* og *Svøvntrupulleikar* var det starvsbólkurin 'Annað handaligt arbeiði', sum fekk hægsta stigatalið, og úrslitini benda sostatt á, at hesin starvsbólkurin upplivir størri avbjóðingar, tá tað kemur til møði og svøvn, tá samanborið verður við hinar starvsbólkarnar.

### 4.5.5 Heilsufremjandi tilboð

*Heilsufremjan* í arbeiðinum snýr seg um at økja heilsu, trivnað og arbeiðsførleika hjá starvsfeløgum. Hetta kann t.d. vera gjøgnum likamligt virksemi, sum øki likamliga førleikan, fyribyrgir pínu og minkar um vandan fyri sjúkufráveru. Heilsufremjandi tilboð gera tað møguligt við jaligum broytingum í heilsuatburðinum hjá starvsfeløgunum, og á nógvum donskum arbeiðsplássum fáa starvsfelagarnir í boði heilsufremjandi tilboð sum t.d. rørslutilboð, sunnan kost, hjálp til at gevast við at roykja og heilsuskanning. Granskingin vísir, at smærri rørslur í arbeiðstíðini t.d. venjingar við elastikki, kunnu minka um pínu og fyribyrgja sjúkufráveru, bæði hjá starvsfeløgum við sitandi arbeiði og likamliga hørðum arbeiði. Kanningar vísa harumframt, at um øll donsk arbeiðspláss settu smærri rørslur í arbeiðstíðini í verk, hevði mann møguliga kunna fyribyrgt 13 prosentum av langtíðar sjúkufráveru (frávera meira enn 30 dagar) í Danmark. Venjingarpass til stuttar venjingar í arbeiðstíðini kann tískil vera ein sera góð íløga fyri donsk arbeiðspláss.[7]

*Heilsufremjandi tilboð* verða mátað við teimum fimm spurningunum í talvu 4.5.5.1. Talvan vísir eisini býtið av svørum í prosentum fyri allar svarpersónar í kanningini.

**Talva 4.5.5.1: Býti av svørum í prosentum**

| | Nei | Ja – í arbeiðstíð | Ja – uttan fyri arbeiðstíð |
|---|---|---|---|
| Hevur arbeiðsplássið seinasta árið bjóðað tær hjálp til at gevast við at roykja? | 97,3 | 1,8 | 1,0 |
| Hevur arbeiðsplássið seinasta árið bjóðað tær kostvegleiðing? | 98,1 | 1,3 | 0,6 |
| Hevur arbeiðsplássið seinasta árið bjóðað tær umstøður at íðka, t.d. venjingarhøli, rennibólk, innandura fótbólt ella annað? | 70,1 | 7,9 | 22,1 |
| Hevur arbeiðsplássið seinasta árið bjóðað tær smærri rørslur í gerandisdegnum so sum útstrekkingar ella annað? | 83,5 | 13,6 | 2,9 |
| Hevur arbeiðsplássið seinasta árið bjóðað tær viðgerðartilboð (fysioterapi, sálarfrøðing ella annað)? | 90,6 | 6,5 | 2,8 |

Vit samanbera partin av svarpersónum úr Føroyum, sum hava svarað játtandi upp á spurningarnar omanfyri, við svarpersónar úr donsku *Arbeiðsumhvørvi og Heilsa 2018* kanningini (20). Úrslitini kunnu síggjast í talvu 4.5.5.2.

Úrslitini benda á, at tað sum heild eru fleiri danskir svarpersónar, sum siga seg hava fingið í boði ymisk heilsufremjandi tilboð frá sínum arbeiðsplássi. Tað eru serliga stórir munir á tilboðum um hjálp til at gevast at roykja, kostvegleiðing og viðgerðartilboð (t.d.

[7] Les meira á https://nfa.dk/da/fysisk_arbejdsmiljo/sundhedsfremme_og_traning_i_arbejdstiden

sálarfrøðing, fysioterapi v.m.), har ein týðiliga minni partur av svarpersónum úr Føroyum siga seg hava fingi slík tilboð.

**Talva 4.5.5.2: Partur av svarpersónum, sum játtar at hava fingið tilboð upp á ymiskar heilsufremjandi tænastur frá arbeiðsplássinum**

| | DK | Føroyar |
|---|---|---|
| Hevur arbeiðsplássið seinasta árið bjóðað tær hjálp til at gevast við at roykja? | 12,3 | 1,8 |
| Hevur arbeiðsplássið seinasta árið bjóðað tær kostvegleiðing? | 12,4 | 1,9 |
| Hevur arbeiðsplássið seinasta árið bjóðað tær umstøður at íðka, t.d. venjingarhøli, rennibólk, innandura fótbólt ella annað? | 30,5 | 29,9 |
| Hevur arbeiðsplássið seinasta árið bjóðað tær smærri rørslur í gerandisdegnum so sum útstrekkingar ella annað? | 21,7 | 16,5 |
| Hevur arbeiðsplássið seinasta árið bjóðað tær viðgerðartilboð (fysioterapi, sálarfrøðing ella annað)? | 40,2 | 9,4 |

Í kanningini eru luttakararnir eisini spurdir um, hvørt teir hava gagnnýtt nøkur av tiboðunum omanfyri. Til hetta svara 16,7 prosent av luttakararunum 'Ja', meðan 22,7 prosent hava svarað 'Nei'. Til endans hava 60,5 prosent svarað 'Arbeiðsplássið hevur ikki bjóðað mær heilsutiltøk seinasta árið'.

Samanumtikið hava 1.866 (19,8 prosent) luttakarar svarað játtandi upp á eitt av heilsufremjandi tilboðunum omanfyri. Fyri at kunna samanbera úrslitini fyri *Heilsufremjandi tilboð* upp á tvørs av bólkum (kyni, aldri og starvsbólki), hava vit gjørt ein variabul, sum hevur svarpersónar í sær, sum hava svarað játtandi uppá, at teir hava fingið í boði eitt ella fleiri heilsufremjandi tilboð. Í úrslitunum niðanfyri sæst sostatt ikki, hvørji tey heilsufremjandi tilboðini eru, sum eru bjóðað upp á tvørs av bólkunum, men bert um tað er givið eitt heilsufremjandi tilboð í bólkinum.

Talva 4.5.5.3 vísir úrslitini fyri *Heilsufremjandi tilboð* býtt upp í menn og kvinnur. Úrslitini benda á, at tað er ein størri partur av mannligum svarpersónum, sum siga seg hava fingið heilsufremjandi tilboð frá arbeiðsplássinum enn kvinnuligir svarpersónar. Ein ískoytisgreining vísir, at munurin millum menn og kvinnur er hagfrøðiliga signifikantur ($p=0.0007$).

**Talva 4.5.5.3: Partur av svarpersónum, sum játtar at hava fingið *Heilsufremjandi tilboð* frá arbeiðsplássinum, býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Prosent |
|---|---|---|
| Maður | 827 | 34,2 |
| Kvinna | 996 | 30,0 |

Talva 4.5.5.4 vísir úrslitini fyri *Heilsufremjandi tilboð* býtt upp í aldursbólkar. Úrslitini benda á, at tað eru flest svarpersónar í aldursbólkunum 35 til 44 ár, 45 til 54 ár og 55 til 64 ár, sum siga seg hava fingið tilboð upp á heilsufremjan frá arbeiðsplássinum. Úrslitini vísa harumframt, at tað eru týðiliga fægst svarpersónar undir 25 ár, sum hava fingið heilsufremjandi tilboð frá arbeiðsplássinum. Ein ískoytisgreining vísir, at munirnir millum bólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 4.5.5.4: Partur av svarpersónum, sum játtar at hava fingið *Heilsufremjandi tilboð* frá arbeiðsplássinum, býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Prosent |
|---|---|---|
| < 25 ár | 56 | 17,0 |
| 25 - 34 ár | 220 | 26,6 |
| 35 - 44 ár | 425 | 34,0 |
| 45 - 54 ár | 517 | 34,3 |
| 55 - 64 ár | 474 | 34,7 |
| > 65 ár | 129 | 28,2 |

Talva 4.5.5.5 vísir úrslitini fyri *Heilsufremjandi tilboð* býtt upp í starvsbólkar. Úrslitini benda í hesum førinum á, at tað er størst partur av svarpersónum í 'Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi', sum hevur móttikið heilsufremjandi tilboð frá sínum arbeiðsplássi. Harafturímóti, eru tað fægst svarpersónar í 'Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap', sum siga seg hava móttikið okkurt slag av heilsufremjandi tilboði frá arbeiðinum. Ein ískoytisgreining vísir, at munirnir millum bólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 4.5.5.5: Partur av svarpersónum, sum játtar at hava fingið *Heilsufremjandi tilboð* frá arbeiðsplássinum, býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Prosent |
|---|---|---|
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 349 | 42,2 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 282 | 40,2 |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 251 | 36,3 |
| 1 Leiðsluarbeiði | 188 | 34,1 |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 218 | 32,0 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 105 | 26,4 |
| 11 Annað handaligt arbeiði | 67 | 25,1 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 70 | 24,1 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 226 | 23,2 |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 48 | 21,4 |
| **Partur av svarpersónum úr Føroyum** | **1866** | **19,8** |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 13 | 15,1 |

Viðmerking: Grønu markingarnar merkja, at tað er ein størri partur av svarpersónum úr avvarðandi starvsbólkinum, sum sigur frá, at teir hava fingið heilsufremjandi tilboð samanborið við partin av øllum svarpersónum úr Føroyum. Reyða markingin merkir, at tað er ein minni partur av svarpersónum, sum sigur frá, at teir hava fingið heilsufremjandi tilboð samanborið við partin av øllum svarpersónum úr Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Heilsufremjandi tilboðum***

Úrslitini fyri *Heilsufremjandi tilboð* vístu, at sum heild eru færri svarpersónar úr Føroyum, sum siga seg hava fingið heilsufremjandi tilboð samanborið við partin av svarpersónum frá donsku tilvísingarkanningini, undantikið tilboð um venjingarhentleikar, har tað ikki var munur á teimum báðum bólkunum.

Harnæst vístu úrslitini, at ein størri partur av mannligum svarpersónum sigur frá, at teir hava fingið heilsufremjandi tilboð frá arbeiðsplássinum enn kvinnuligir svarpersónar. Upp á tvørs av aldursbólkunum vístu úrslitini, at tað eru fægst svarpersónar undir 25 ár, sum hava fingið heilsufremjandi tilboð frá arbeiðsplássinum. Úrslitini fyri *Heilsufremjandi tilboð* býtt upp í starvsbólkar vístu, at tað er størst partur av svarpersónum í starvsbólkinum 'Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi', sum siga frá, at teir hava fingið heilsufremjandi tilboð, meðan fægst í starvsbólkinum í 'Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap' siga seg hava fingið heilsufremjandi tilboð frá arbeiðsplássinum.

## 4.5.6 Sjúkufrávera sambært luttakaranum sjálvum

*Sjúkufrávera sambært luttakaranum sjálvum* er kannað við at spyrja luttakararnar, hvussu nógvar arbeiðsdagar við sjúkufráveru, teir tilsamans hava havt seinastu 12 mánaðirnar.

Danskar kanningar vísa, at kvinnur sum heild hava meira sjúkufráveru enn menn. Hetta ger seg galdandi serliga í mun til drúgva sjúkufráveru, har kvinnur hava dupult so nógva sum menn.[8] Í granskingini sæst, at danskir løntakarar, sum siga frá einum ringum psykososialum arbeiðsumhvørvi, í miðal hava meira sjúkufráveru enn tey, sum siga frá góðum psykososialum arbeiðsumhvørvi. Henda gransking hevur millum annað víst, at viðurskifti sum lágt støði av leiðsludygd og lágt støði av ávirkan í arbeiðinum hongur saman við øktum vanda fyri drúgvari sjúkufráveru (7, 60). Umframt hetta vísir granskingin, at neiligar gerðir so sum harðskapur, happing og kynslig happing øki um vandan fyri drúgvari sjúkufráveru (143).

Talva 4.5.6.1 vísir talið av arbeiðsdøgum í miðal við sjúkufráveru fyri allar svarpersónar í kanningini. Úrslitið vísir, at svarpersónarnir úr Føroyum í miðal hava havt 7,4 sjúkufráverudagar seinastu 12 mánaðirnar. Danskar kanningar vísa, at talið av sjúkufráverudøgum í miðal hjá donskum arbeiðstakarum var 8,5 dagar í 2020.[9] Svarpersónar úr føroysku kanningini siga seg sostatt hava færri sjúkufráverudagar enn danskir arbeiðstakarar.

**Talva 4.5.6.1: Tal av arbeiðsdøgum í miðal við sjúkufráveru**

| Arbeiðsdagar við sjúkufráveru | Miðaltal |
|---|---|
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum | 7,4 |
| Miðaltal fyri svarpersónar úr Danmark | 8,5 |

Í talvunum niðan fyri verða úrslitini víst fyri *Sjúkufráveru* býtt upp í ávikavist kyn, aldur og starvsbólk.

Talva 4.5.6.2 vísir úrslitini fyri *Sjúkufráveru* býtt upp í menn og kvinnur. Úrslitini benda á, at kvinnuligir svarpersónar siga seg í miðal hava uml. tveir sjúkufráverudagar meira enn mannligir svarpersónar. Ein ískoytisgreining vísir, at munurin millum menn og kvinnur er hagfrøðiliga signifikantur ($p=0.0045$).

**Talva 4.5.6.2: Tal av arbeiðsdøgum í miðal við sjúkufráveru býtt upp í kyn**

| Kyn | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| Maður | 1959 | 6,3 |
| Kvinna | 2655 | 8,2 |

Talva 4.5.6.3 vísir úrslitini fyri *Sjúkufráveru* býtt upp í ymiskar aldursbólkar. Her vísa úrslitini, at yngstu svarpersónarnir undir 25 ár er tann bólkurin, sum hevur sagt frá flest sjúkufráverudøgum seinastu 12 mánaðirnar við einum miðaltalið upp á 9,2 dagar. Teir elstu svarpersónarnir yvir 65 ár hava harafturímóti sagt frá fægst sjúkufráverudøgum

[8] Upplýsingin tikin frá Danmarks Statistik (www.dst.dk) á síðuni 'Nyt fra Danmarks Statistik – Enlige har højere sygefravær'
[9] Upplýsingin tikin frá Danmarks Statistikbank (www.statistikbanken.dk) á síðuni 'Fravær efter fraværsindikator, arbejdsfunktion, fraværsårsag, køn, sektor og tid'

við einum miðaltalið upp á 4,8 dagar. Yngstu svarpersónarnir hava sostatt í miðal 4,4 fleiri sjúkufráverudagar um árið samanborið við teir elstu svarpersónarnar. Tað er harafturímóti minni munur á, hvussu nógvir sjúkufráverudagar restin av aldursbólkunum hava sagt seg hava, har allir hava sagt frá 7 til 8 fráverudøgum í miðal. Ein ískoytisgreining vísir harumframt, at munirnir millum aldursbólkarnar ikki eru hagfrøðiliga signifikantir (p=0.2477).

**Talva 4.5.6.3: Tal av arbeiðsdøgum í miðal við sjúkufráveru býtt upp í aldur**

| Aldur | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| < 25 ár | 200 | 9,2 |
| 25 - 34 ár | 640 | 7,0 |
| 35 - 44 ár | 1049 | 7,7 |
| 45 - 54 ár | 1239 | 7,2 |
| 55 – 64 ár | 1137 | 7,9 |
| > 65 ár | 344 | 4,8 |

Talva 4.5.6.4 vísir úrslitini fyri *Sjúkufráveru* býtt upp í teir 11 ymisku starvsbólkarnar og vísir harumframt, hvussu starvsbólkarnir liggja í mun til miðaltalið fyri allar svarpersónar í kanningini. Úrslitini benda á, at svarpersónar í 'Leiðsluarbeiði' hava sagt frá fægst sjúkufráverudøgum við einum miðal upp á 3,9 dagar. Harafturímóti eru tað fleiri av starvsbólkunum, sum siga frá fleiri sjúkufráverudøgum enn miðaltalið fyri allar svarpersónar. T.d. sæst, at svarpersónar í 'Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap' í miðal hava havt 11,1 sjúkufráverudagar tað seinasta árið, meðan svarpersónar í 'Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði' hava sagt seg havt 10,1 sjúkufráverudagar. Til endans vísa úrslitini, at svarpersónar í 'Annað handaligt arbeiði' hava sagt frá flest sjúkufráverudøgum við einum miðal upp á 12,4 dagar tað seinasta árið. Ein ískoytisgreining vísir, at munirnir millum starvsbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 4.5.6.4: Tal av arbeiðsdøgum í miðal við sjúkufráveru býtt upp í starvsbólkar**

| Starvsbólkar | Tal | Miðaltal |
|---|---|---|
| 11 Annað handaligt arbeiði | 203 | 12,4 |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 65 | 11,1 |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 162 | 10,1 |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 552 | 9,5 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 299 | 8,8 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 773 | 8,7 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 206 | 8,1 |
| **Miðaltal fyri svarpersónar úr Føroyum** | **4665** | **7,4** |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 693 | 6,3 |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 567 | 6,1 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 624 | 5,2 |
| 1 Leiðsluarbeiði | 445 | 3,9 |

Viðmerking: Reyðu markingarnar merkja, at svarpersónarnir í avvarðandi starvsbólki í miðal siga frá einum størri tali av sjúkufráverudøgum enn miðaltalið av øllum svarpersónum úr Føroyum. Grøna markingin merkir, at svarpersónarnir í avvarðandi starvsbólki í miðal siga frá einum minni tali av sjúkufráverudøgum enn miðaltalið av øllum svarpersónum úr Føroyum.

Í kanningini blivu luttakararnir eisini spurdir um, hvørt teir seinastu 12 mánaðirnar høvdu verið sjúkir vegna teirra arbeiði. Her svaraðu 4,5 prosent av svarpersónunum, at teir høvdu verið sjúkir í eina viku ella longri vegna teirra arbeiði. Umframt hetta vóru tað 5,2 prosent, sum svaraðu, at tey høvdu verið sjúk nakrar dagar vegna teirra arbeiði. Til endans svaraðu 90,3 prosent av svarpersónunum 'Nei' til spurningarnar omanfyri. Samanlagt hava 9,7 prosent av svarpersónunum svarað 'Ja' til, at teir hava verið sjúkir, vegna teirra arbeiði. Tøl úr donsku kanningini *Arbeiðsumhvørvi og Heilsa 2018* (20) vísa, at 10,7 prosent av donskum arbeiðstakarum svara 'Ja' til somu spurningarnar. Tað er sostatt ein eitt sindur minni partur av svarpersónum úr Føroyum, sum siga frá, at teir hava verið sjúkir vegna arbeiðið samanborið við danskar arbeiðstakarar. Harafturat vórðu luttakararnir í kanningini spurdir, um teir tað seinasta árið høvdu verið sjúkraskrivaðir vegna strongd. Her svaraðu 5,8 prosent 'Ja', meðan 94,2 svaraðu 'Nei'.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Sjúkufrávera sambært luttakaranum sjálvum***

Úrslitini fyri *Sjúkufrávera sambært luttakaranum sjálvum* vístu, at svarpersónarnir úr Føroyum í miðal hava havt 7,4 sjúkufráverudagar seinastu 12 mánaðirnar, og harvið siga teir frá eitt sindur lægri sjúkufráveru samanborið við miðaltalið av donskum arbeiðstakarum. Upp á tvørs av kyni vístu úrslitini, at kvinnuligir svarpersónar í miðal hava fleiri sjúkufráverudagar uppá eitt ár samanborið við mannligar svarpersónar. Harnæst vístu úrslitini, at teir elstu svarpersónarnir yvir 65 ár hava lægri sjúkufráveru enn hinir aldursbólkarnir, har yngstu svarpersónarnir undir 25 ár er tann aldursbólkurin við mest sjúkufráveru. Býtt upp í starvsbólkarnar vísa úrslitini hægsta støði av sjúkufráveru í starvsbólkinum 'Annað handaligt arbeiði' og lægsta støði av sjúkufráveru í starvsbólkinum 'Leiðsluarbeiði'.

## 4.5.7 Tunglyndiseyðkenni

Vit hava mátað *Tunglyndiseyðkenni* við einum kliniskt valideraðum spurnablaði (Major Depression Inventory; MDI), sum mátar, hvussu álvarsamt støðið av kliniskum tunglyndi er á einum diagnostiskum stiga yvir tunglyndiseyðkenni (144). Tunglyndi er ein sálarlig støða, har mann upplivir, at hýrurin er lækkaður, og hetta hevur ein neiligan týdning fyri lívsgóðskuna hjá viðkomandi og sálarligu vælveruna sum heild. Vanlig eyðkenni upp á tunglyndi eru sinnistyngd, orkuloysi, gleðiloysi og uppliving av manglandi orku og førleika at virka í gerandisdegnum. Tunglyndi kann vera lætt, miðalsvárt ella svárt, og verður avgjørt alt eftir hvussu umfatandi eyðkenninini eru (144, 145).

Samlingin av spurningum, lýst omanfyri, sum finnur fram til støðið av tunglyndi, spyr vanliga um 10 eyðkenni við 12 spurningum. Í upprunaligu útgávuni av spurnablaðnum verður bæði spurt um, hvørt mann hevur kent seg stillan/fámæltan, ella um mann hevur kent seg rastleysan. í hesi útgávuni av spurnablaðnum, hevur mann bara spurt um, hvørt luttakararnir hava kent seg stillan ella fámæltan. Hendan kanningin kemur tískil ikki inn á eyðkenni upp á rastloysi. Umframt hetta eru eyðkenni í mun til matarlyst í sambandi við tunglyndi samlað í ein spurning. Í spurnablaðnum í kanningini eru tí settir 10 spurningar um tunglyndiseyðkenni.

Spurnablaðið spyr um títtleikan av 10 eyðkennum í einum tíðarskeiði tvær tær seinastu vikurnar frá tí mundinum, luttakarin svarar spurnablaðnum. Svarar mann t.d., at mann hevur upplivað eyðkenni 'Eitt sindur yvir helvtina av tíðini', 'Tað mesta av tíðini' ella 'Alla tíðina', fær mann eitt høgt stigatal. Eitt høgt stigatal merkir tískil, at avvarðandi eyðkenni hevur tíðum verið til staðar, og samanlagda úrslitið av teimum 10 spurningunum siga frá støðinum av tunglyndi. Tað væntaða samlaða stigatalið gongur tí frá 0 (einki tunglyndi) til 50 (hægst møguliga tunglyndi). Eitt stigatal undir 20 bendir á ein normalan stand í mun til tunglyndi. Eitt stigatal frá 21 til 25 bendir á lætt tunglyndi, meðan eitt stigatal frá 26 til 30 bendir á miðalsvárt tunglyndi. Til endans bendir eitt stigatal yvir 31 á svárt tunglyndi (145). Tosað verður um, at ábending er um kliniskt tunglyndi, liggur stigatalið á 21 ella omanfyri á MDI-stiganum, og tí verður skeripunktið ≥ 21 vanliga nýtt sum ábending um tunglyndi. Í hesi frágreiðingini leggja vit stigatøl fram í intervallum upp á fimm stig fyri at kunna vísa eina fjølbroyttari mynd av, hvussu býtið av svørum sær út upp á tvørs av øllum stiganum. Intervallini ganga frá 0-5, 5-10, 11-15, 15-20 og 21 ella omanfyri. Upp á henda mátan kunnu úrslitini vísa, hvussu stórur prosentpartur av svarpersónunum, liggja í ymisku intervallunum.

Talva 4.5.7.1 vísir býtið av svørum í prosentum fyri allar svarpersónar. Tað eru til samans 4.814 luttakarar, sum hava svarað spurningunum í mun til tunglyndiseyðkenni. Úrslitini benda á, at tað eru 11,0 prosent av svarpersónunum, sum hava eitt MDI-stigatal upp á 21 ella omanfyri. Hetta merkir, at 11,0 prosent hava svarað spurningunum um tunglyndiseyðkenni soleiðis, at teirra MDI-stigatal bendir á kliniskt tunglyndi. Sambært seinastu kanningini av *Arbeiðsumhvørvi og heilsu* í Danmark (20), eru tað 9,0 prosent av donsku íbúgvunum, sum hava eitt MDI-stigatal upp á 21 ella omanfyri. Hetta merkir tískil, at tað í hesi kanning av føroyskum arbeiðstakarum í eitt sindur størri mun er

ábending um kliniskt tunglyndi millum svarpersónarnir, enn millum teir 35.000 donsku løntakararnar, sum AH-kanningin í 2018 byggir á.

**Talva 4.5.7.1: Býti av svarprosentum fyri allar svarpersónar (prosent)**

| MDI-stigatal | 0-5 | 5-10 | 10-15 | 15-20 | ≥21 |
|---|---|---|---|---|---|
| Svarpersónar í kanningini | 38,8 | 25,8 | 14,5 | 9,9 | 11,0 |

Talva 4.5.7.2 vísir býtið av svørum av MDI-stigatølum býtt upp í mannligar og kvinnuligar svarpersónar í kanningini. Her vísa úrslitini, at 9,3 prosent av øllum mannligum svarpersónum hava eitt MDI-stigatal upp á 21 ella omanfyri, meðan 12,0 prosent av øllum kvinnuligum svarpersónum hava eitt MDI-stigatal upp á 21 ella omanfyri. Tað eru harvið fleiri kvinnuligir svarpersónar, sum hava ábendingar um tunglyndiseyðkenni. Ein ískoytisgreining vísir, at munurin millum menn og kvinnur er hagfrøðiliga signifikantur ($p<.0001$).

**Talva 4.5.7.2: Býti av svarprosentum býtt upp í kyn (prosent)**

| MDI-stigatal | 0-5 | 5-10 | 10-15 | 15-20 | ≥21 |
|---|---|---|---|---|---|
| Maður | 44,0 | 23,1 | 14,8 | 8,9 | 9,3 |
| Kvinna | 35,5 | 27,7 | 14,3 | 10,4 | 12,0 |

Talva 4.5.7.3 vísir býtið av svørum av MDI-stigatølum býtt upp í ymiskar aldursbólkar. Her vísa úrslitini, at 33,0 prosent av svarpersónunum undir 25 ár hava eitt MDI-stigatal upp á 21 ella omanfyri og hava harvið ábending upp á tunglyndiseyðkenni. Harafturímóti vísa úrslitini, at 2,7 prosent av svarpersónunum yvir 65 ár hava eitt MDI-stigatal upp á 21 ella omanfyri. Sum heild, vísa úrslitini, at parturin av svarpersónum við einum MDI-stigatalið upp á 21 ella omanfyri fellur saman við aldursbólkunum, og tað er sostatt eitt týðiligt rák, ið vísir, at parturin av svarpersónum við ábending um tunglyndiseyðkenni er størstur millum yngru arbeiðstakararnar í felagsbólkinum. Ein ískoytisgreining vísir, at munirnir millum aldursbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir ($p<.0001$).

**Talva 4.5.7.3: Býti av svarprosentum býtt upp í aldursbólkar (prosent)**

| MDI-stigatal | 0-5 | 5-10 | 10-15 | 15-20 | ≥21 |
|---|---|---|---|---|---|
| < 25 ár | 15,8 | 16,3 | 16,8 | 18,2 | 33,0 |
| 25-34 ár | 24,7 | 25,0 | 15,9 | 14,6 | 19,9 |
| 35-44 ár | 33,9 | 25,6 | 16,2 | 9,9 | 14,4 |
| 45-54 ár | 43,4 | 25,0 | 13,6 | 9,9 | 8,1 |
| 55-64 ár | 45,8 | 29,8 | 13,8 | 6,7 | 4,0 |
| > 65 ár | 58,3 | 22,8 | 11,1 | 5,1 | 2,7 |

Talva 4.5.7.4 vísir býtið av svørum av MDI-stigatølum býtt upp í teir 11 ymisku starvsbólkarnar. Hesi úrslitini vísa, at tað í starvsbólkinum 'Annað handaligt arbeiði' er størstur partur av svarpersónum við ábending um tunglyndiseyðkenni (25,8 prosent).

Umframt hetta vísa úrslitini, at vit finna tann minsta partin av svarpersónum við ábending um tunglyndiseyðkenni í starvsbólkinum 'Leiðsluarbeiði'. Talvan vísir harafturat, hvar ymisku starvsbólkarnir liggja samanborið við allar svarpersónar í kanningini, har 11,0 prosent hava eitt MDI-stigatal upp á 21 ella omanfyri. Ein ískoytisgreining vísir, at munirnir millum starvsbólkarnar eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

**Talva 4.5.7.4: Býti av svarprosentum býtt upp í starvsbólkar (prosent)**

| MDI-stigatal | 0-5 | 5-10 | 10-15 | 15-20 | ≥21 |
|---|---|---|---|---|---|
| 11 Annað handaligt arbeiði | 33,3 | 13,1 | 17,2 | 10,6 | 25,8 |
| 7 Tænastu- og søluarbeiði | 34,6 | 20,9 | 14,7 | 11,4 | 18,3 |
| 9 Handverkaraarbeiði | 42,4 | 20,5 | 13,8 | 9,5 | 13,8 |
| 10 Operatør- og monteringsarbeiði umframt flutningsarbeiði | 35,6 | 19,6 | 17,8 | 14,7 | 12,3 |
| 4 Undirvísing og námsfrøðiligt arbeiði | 37,3 | 27,0 | 15,2 | 8,5 | 12,0 |
| **Partur av svarpersónum úr Føroyum** | **38,8** | **25,8** | **14,5** | **9,9** | **11,0** |
| 8 Arbeiði innan landbúnað, skógrøkt og fiskiskap | 51,6 | 14,1 | 14,1 | 9,4 | 10,9 |
| 3 Arbeiði á heilsuøkinum | 34,8 | 30,3 | 15,0 | 10,1 | 9,8 |
| 6 Vanligt kontór- og kundatænastuarbeiði | 39,7 | 24,5 | 17,7 | 9,0 | 9,0 |
| 5 Arbeiði, ið er treytað av vitan á millumstigi | 44,3 | 26,6 | 10,9 | 9,8 | 8,5 |
| 2 Arbeiði, ið er treytað av vitan á hægsta støði | 39,1 | 28,3 | 13,6 | 11,2 | 7,8 |
| 1 Leiðsluarbeiði | 41,7 | 30,0 | 13,7 | 7,6 | 7,0 |

Viðmerking: Grøna markingin merkir, at tað er ein minni partur av svarpersónum úr avvarðandi starvsbólki, sum hevur ábending um kliniskt tunglyndi enn parturin av øllum svarpersónum úr Føroyum. Reyða markingin merkir, at tað er ein størri partur av svarpersónum úr avvarðandi starvsbólki, sum hevur ábending um kliniskt tunglyndi enn parturin av øllum svarpersónum úr Føroyum.

**Samanumtøka av úrslitunum viðvíkjandi *Tunglyndiseyðkennum***

Úrslitini fyri tunglyndiseyðkenni vístu, at 11,0 prosent av svarpersónunum úr Føroyum hava ábendingar um tunglyndiseyðkenni, við tað at tey hava eitt MDI-stigatal upp á 21 ella omanfyri. Úrslitini benda sostatt á, at tað millum svarpersónarnar í hesi kanningini í eitt sindur størri mun er ábending um kliniskt tunglyndi enn millum danskar arbeiðstakarar, har 9,0 prosent hava ábending um kliniskt tunglyndi. Harnæst vístu úrslitini, at tað er ein størri partur av kvinnuligum svarpersónum, sum hava ábending um kliniskt tunglyndi samanborið við mannligar svarpersónar. Upp á tvørs av aldursbólkunum vístu úrslitini, at tað er ein størri útbreiðsla av tunglyndiseyðkennum millum yngstu svarpersónarnar undir 25 ár, meðan tað er ein nógv minni útbreiðsla av tunglyndiseyðkennum millum teir elstu svarpersónarnar yvir 65 ár. Til endans, um hugt verður eftir tunglyndiseyðkennum upp á tvørs av starvsbólkunum, vístu úrslitini, at tað er ein størri útbreiðsla av ábendingum um kliniskt tunglyndi millum svarpersónar í starvsbólkinum 'Annað handaligt arbeiði'.

# 5 Samanhangir millum arbeiðsumhvørvisviðurskifti og heilsu millum arbeiðstakarar í Føroyum

Granskingarbókmentirnar benda á, at ymisk viðurskifti í arbeiðsumhvørvinum hanga saman við heilsuni og trivnaðinum hjá arbeiðstakaranum (11, 14, 16, 60, 65, 97, 134, 143, 146). Í hesum kapitlinum hyggja vit nærri at, hvussu viðurskifti í arbeiðsumhvørvinum ávirka hesar indikatorarnar niðanfyri upp á heilsu og trivnað hjá svarpersónunum í arbeiðinum:

- Tunglyndiseyðkenni (MDI)
- Sjúkufrávera sambært luttakaranum sjálvum.

## 5.1 Háttalag

Niðanfyri lýsa vit tey háttaløg, sum vit hava nýtt til at greina samanhangir millum arbeiðsumhvørvisviðurskifti og tey bæði úrslitini viðvíkjandi heilsu,tunglyndiseyðkenni og sjúkufráveru.

### 5.1.1 Tunglyndiseyðkenni

Tunglyndiseyðkenni eru mátað við hjálp av Major Depression Inventory (MDI), sum er eitt kliniskt validerað spurnablað til at máta tunglyndiseyðkenni (145). MDI er sett saman av 12 spurningum, sum máta hjáveruna av eyðkennum upp á tunglyndi í tveimum teimum undanfarnu vikunum (144), og hevur ein svarpersónur eitt samlað MDI-stigatal upp á ≥ 21, verður svarpersónurin flokkaður sum hann hevur økt tunglyndiseyðkenni. Hygg møguliga part 4.5.7 fyri greidligari lýsing av mátingini av tunglyndiseyðkennum.

### 5.1.2 Sjúkufrávera sambært luttakaranum sjálvum

Í kanningini hava vit sett luttakararnum hesar spurningarnar: 'Hvussu nógvar dagar seinasta árið hevur tú verið frá arbeiði vegna sjúku?', og svarpersónarnir hava eftirfylgjandi havt møguleika at siga frá, hvussu nógvar dagar, tey hava verið burtur frá teirra arbeiði vegna sjúku. Í parti 4.5.6 funnu vit útav, at svarpersónarnir í miðal svaraðu, at teir høvdu havt 7,4 sjúkudagar seinastu 12 mánaðirnar. Av hesi orsøk hava vit valt at deila sjúkufráveruvariabulin upp í tveir bólkar. Ein bólk, sum hevur sagt frá minni enn sjey sjúkudøgum seinastu 12 mánaðirnar, og ein bólk, sum hevur sagt frá meira enn sjey sjúkudøgum seinastu 12 mánaðirnar. Tá ið vit kanna sambandið millum ymisku arbeiðsumhvørvisviðurskiftini og sjúkufráveru, kanna vit vandan fyri at hava ≥ 7 sjúkudagar.

### 5.1.3 Greining

Vit greina samanhangir millum mátaðu viðurskiftini í arbeiðsumhvørvinum og teir eftirfylgjandi úrslitsvariblarnar við hjálp av hagfrøðiligari greining av samanhangum: tunglyndiseyðkenni (MDI-stigatal) og sjúkufrávera sambært luttakaranum sjálvum. Vit nýta hetta háttalag, av tí, at teir báðir úrslitsvariablarnir eru dikotomir variablar. Við hjálp av hagfrøðiligu greiningini av samanhangum, kanna vit, um tað er samband millum ein vøkstur av stigatalinum av indikatorunum fyri arbeiðsumhvørvi og vandanum fyri tunglyndiseyðkennum (eitt MDI stigatal upp á 21 ella omanfyri) og ≥ 7 sjúkudagar. Í komandi greiningum kanna vit, hvussu ein vøkstur upp á 10 stig í stigatalinum øki ella minkar um vandin fyri teir báðar dikotomu úrslitsvariablarnar: tunglyndiseyðkenni og sjúkufráveru.

Hesin vandin vísir seg við einum sonevndum odds ratio (OR). Eitt odds ratio, ið er størri enn 1, bendir á ein øktan vanda fyri tí úrslitinum, mann mátar, meðan eitt odds ratio, ið er lægri enn 1, bendir á ein minkaðan vanda fyri tí úrslitinum, mann mátar. Í sambandi við metingina av einum odds ratio verður eisini eitt sonevnt p-virði roknað og eitt 95 % konfidensintervall rundan um tað metta odds ratio. Er p-virðið minni enn 0,05 og konfidensintervallið skilir seg frá 1, er tað eygleidda sambandið hagfrøðiliga signifikant.

Vit hava í okkara greiningum av samanhangum millum arbeiðsumhvørvisviðurskifti og ábendingar upp á heilsu justerað fyri hesar variablar: Kyn, aldur, útbúgvingarstøði, starvsbólk og arbeiðstíð vikuliga.

## 5.2 Samanhangir millum arbeiðsumhvørvisviðurskifti og vanda fyri tunglyndiseyðkennum

### 5.2.1 Samanhangurin millum viðurskifti í psykososiala arbeiðsumhvørvinum og vanda fyri tunglyndiseyðkennum

Talva 5.2.1.1 vísir samanhangir millum eina røð av viðurskiftum í psykososiala arbeiðsumhvørvinum og vandanum fyri øktum tunglyndiseyðkennum.

Innan fyri økið *Skipan av arbeiðinum* vísa úrslitini í talvu 5.2.1.1, at eitt økt stigavirði upp á hesar stigar 'ávirkan í arbeiðinum', 'ávirkan á arbeiðstíðir', 'menningarmøguleikar', 'greidleiki um leiklutir', 'uppliving av møguleikunum fyri at loysa arbeiðsuppgávurnar' og 'forsøgni í arbeiðinum' hongur saman við minkaðum vanda fyri tunglyndiseyðkennum. Umframt hetta vísir talvan, at ein øking á stigunum 'óneyðugar arbeiðsuppgávur' og 'tvídráttir um leiklutir' hongur saman við øktum vanda fyri tunglyndiseyðkennum. Allir samanhangir eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

Innan fyri økið *Krøv í arbeiðinum* vísir talvan, at ein øking í øllum seks stigunum innan fyri økið hongur saman við øktum vanda fyri tunglyndiseyðkennum, har allir seks samanhangirnir harafturat eru hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001). Sambært úrslitunum er 'arbeiðsmongd' tað kravið í arbeiðinum, har tað er størstur vandi fyri øktum tunglyndiseyðkennum (OR: 1,36) samanborið við hinar stigarnar innan fyri økið *Krøv í arbeiðinum*. Harafturat skal vera viðmerkt, at OR fyri ávikavist 'krøv um at fjala kenslur' (OR: 1,18), 'kognitiv krøv' (OR: 1,13) og 'markleyst arbeiði' (OR: 1,13) er lítið, og talan er um ein smávegis øktan vanda fyri tunglyndiseyðkennum.

Tá ið hugt verður eftir økinum *Samstarv*, vísa úrslitini eisini á signifikantar neiligar samanhangir millum teir tríggjar stigarnar og vandanum fyri øktum tunglyndiseyðkennum (p<.0001). Tað hevur sostatt við sær, at ein hækking á stigunum fyri ávikavist 'sosialur stuðul frá starvsfeløgum', 'sambond við nærmastu starvsfelagar' og 'álit á starvsfeløgum', hongur saman við einum minkaðum vanda fyri økt tunglyndiseyðkenni.

Innan fyri økið *Leiðsla* vísa úrslitini, at eitt hækkað stigavirði á øllum seks stigum hongur hagfrøðiliga signifikant saman við einum minkaðum vanda fyri tunglyndi (p<.0001). Tað merkir sostatt, at tess hægri luttakararnir hava mett ávikavist teirra 'samband við nærmasta leiðara', 'leiðslugóðsku', 'sosialur stuðul frá nærmasta leiðara', 'rættvísi', 'hvussu leiðslan tekur starvsfólk uppí' og 'viðurkenning', jú lægri er vandin fyri at hava eitt MDI-stigatal upp á 21 ella omanfyri. Innan fyri økið *Broytingar* vísa úrslitini eisini, at tess betri luttakararnir hava mett 'handfaring av broytingum á arbeiðsplássinum' á teirra arbeiðsplássi, jú lægri er vandin fyri øktum tunglyndiseyðkennum.

Innan fyri økið *Trivnaður* vísa úrslitini eisini signifikantar samanhangir millum teir átta stigarnar og vandanum fyri tunglyndiseyðkennum. Úrslitini benda á, at hægri stigatøl á stigunum 'uppliving av meining í arbeiðinum', 'hvussu arbeiðstakarin tekur lut í arbeiðsplássinum', 'hugbinding', 'nøgdsemi við arbeiði' og 'yvirskipað meting av psykososiala arbeiðsumhvørvinum' hanga signifikant saman við minkaðum vanda fyri

tunglyndiseyðkennum (p<.0001). Harafturímóti vísa úrslitini, at ein øking á stigunum 'óvissa í starvssetanini', 'strongd' og 'tvídráttir millum arbeiðslív og heimalív' øki signifikant um vandan fyri økt tunglyndiseyðkenni (p<.0001). Úrslitini benda eisini á, at vandin fyri tunglyndiseyðkennum serliga er øktur, jú hægri stigatølini eru á stiganum 'strongd' (OR: 1,79).

**Talva 5.2.1: Samanhangir millum viðurskifti í psykososiala arbeiðsumhvørvinum og ábending um tunglyndiseyðkenni**

| Stigi | OR | 95% CI | P-virði |
|---|---|---|---|
| **Hvussu arbeiðið er skipað** | | | |
| Ávirkan í arbeiðinum | 0,73 | 0,70-0,77 | <.0001* |
| Ávirkan á arbeiðstíðir | 0,87 | 0,83-0,91 | <.0001* |
| Menningarmøguleikar | 0,81 | 0,77-0,86 | <.0001* |
| Greidleiki um leiklutir | 0,72 | 0,69-0,76 | <.0001* |
| Tvídráttir um leiklutir | 1,45 | 1,38-1,53 | <.0001* |
| Uppliving av møguleikunum fyri at loysa arbeiðsuppgávurnar | 0,69 | 0,66-0,73 | <.0001* |
| Óneyðugar arbeiðsuppgávur | 1,43 | 1,36-1,50 | <.0001* |
| Forsøgni í arbeiðinum | 0,79 | 0,76-0,83 | <.0001* |
| **Krøv í arbeiðinum** | | | |
| Arbeiðsferð | 1,27 | 1,21-1,33 | <.0001* |
| Arbeiðsmongd | 1,36 | 1,29-1,43 | <.0001* |
| Kenslulig krøv | 1,29 | 1,22-1,35 | <.0001* |
| Krøv um at fjala kenslur | 1,18 | 1,13-1,23 | <.0001* |
| Kognitiv krøv | 1,13 | 1,07-1,19 | <.0001* |
| Markleyst arbeiði | 1,13 | 1,07-1,19 | <.0001* |
| **Samstarv** | | | |
| Sosialur stuðul frá starvsfeløgum | 0,73 | 0,70-0,77 | <.0001* |
| Sambond við nærmastu starvsfelagar | 0,73 | 0,69-0,77 | <.0001* |
| Álit á starvsfeløgum | 0,71 | 0,68-0,75 | <.0001* |
| **Leiðsla** | | | |
| Samband við nærmasta leiðara | 0,80 | 0,76-0,83 | <.0001* |
| Leiðslugóðska | 0,81 | 0,78-0,84 | <.0001* |
| Sosialur stuðul frá nærmasta leiðara | 0,81 | 0,78-0,84 | <.0001* |
| Rættvísi | 0,73 | 0,70-0,76 | <.0001* |
| Hvussu leiðslan tekur starvsfólk uppí | 0,79 | 0,76-0,82 | <.0001* |
| Viðurkenning | 0,78 | 0,75-0,81 | <.0001* |
| **Broytingar** | | | |
| Handfaring av broytingum á arbeiðsplássinum | 0,79 | 0,76-0,83 | <.0001* |
| **Trivnaður** | | | |
| Uppliving av meining í arbeiðinum | 0,68 | 0,65-0,73 | <.0001* |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Hvussu arbeiðstakarin tekur lut í arbeiðsplássinum | 0,73 | 0,70-0,76 | <.0001* |
| Hugbinding | 0,59 | 0,55-0,62 | <.0001* |
| Óvissa í starvssetanini | 1,25 | 1,20-1,30 | <.0001* |
| Strongd | 1,79 | 1,70-1,88 | <.0001* |
| Nøgdsemi við arbeiðið | 0,68 | 0,65-0,71 | <.0001* |
| Yvirskipað meting av psykososiala arbeiðsumhvørvinum | 0,72 | 0,69-0,74 | <.0001* |
| Tvídráttir millum arbeiðslív og heimalív | 1,54 | 1,47-1,61 | <.0001* |

Viðmerking: *Hagfrøðiliga signifikant (P-virði < 0.05). Greiningarnar eru rættaðar eftir kyni, aldri, starvsbólki, útbúgvingarstøði og vikuligari arbeiðstíð.
Viðmerking: Tey nevndu Odds Ratios (OR) vísa sambandið millum eina øking upp á 10 stig á teimum einstøku stigunum og vandanum fyri øktum tunglyndiseyðkennum.

Talva 5.2.2 vísir, at luttakarar, ið svara, at teir hava verið fyri hóttanum, harðskapi, happing, kynsligari happing, mismuni og chikanu eru í signifikant øktum vanda fyri at hava tunglyndiseyðkenni. Úrslitini vísa harumframt, at hesin vandi er týðiliga hækkaður, um mann hevur verið fyri happing (OR: 3,10) og mismuni (OR: 3,02).

**Talva 5.2.2: Samanhangir millum neiliga atferð og ábending um tunglyndiseyðkenni**

| Neilig atferð | OR | 95% CI | P-virði |
|---|---|---|---|
| Hóttanir | 2,52 | 2,03-3,12 | <.0001* |
| Harðskapur | 2,51 | 1,79-3,50 | <.0001* |
| Happing | 3,10 | 2,44-3,93 | <.0001* |
| Kynslig happing | 1,87 | 1,36-2,58 | 0.0001* |
| Mismunur | 3,02 | 2,38-3,84 | <.0001* |
| Chikana | 2,55 | 1,90-3,42 | <.0001* |

Viðmerking: *Hagfrøðiliga signifikant (P-virði < 0.05). Greiningarnar eru rættaðar eftir kyni, aldri, starvsbólki, útbúgvingarstøði og vikuligari arbeiðstíð.
Viðmerking: Tey nevndu Odds Ratios (OR) vísa vandan fyri at hava økt tunglyndiseyðkenni fyri svarpersónar, sum hava verið fyri hvørjum av teimum seks neiligu gerðunum samanborið við svarpersónar, sum ikki hava verið fyri hvørjum av teimum seks neiligu gerðunum.

**Samanumtøka av úrslitunum fyri samanhangir millum psykososialt arbeiðsumhvørvi og tunglyndi**

Samanumtikið týða úrslitini á, at tað eru nakrir greiðir samanhangir millum viðurskifti í psykososiala arbeiðsumhvørvinum og vandanum fyri at hava tunglyndiseyðkenni. Allir teir kannaðu samanhangirnir vóru hagfrøðiliga signifikantir, hóast vit rættaðu eftir kyni, aldri, útbúgvingarstøði, starvsbólki og vikuligari arbeiðstíð. Úrslitini vístu serliga nakrir greiðir samanhangir millum øll seks sløgini av neiligari atferð og vanda fyri tunglyndiseyðkennum, har vandin fyri tunglyndi var serliga høgur fyri ávikavist happing og mismuni. Úrslitini vístu harumframt, at øll seks sløgini av *Krøv í arbeiðinum* øktu um vandan fyri tunglyndiseyðkennum, meðan øll tey jaligu psykososialu viðurskiftini í mun til *Samstarv* og *Leiðslu* minkaðu um vandan fyri tunglyndiseyðkennum. Til endans vístu úrslitini eisini, at eitt høgt støði av uppliving av meining í arbeiðinum, hugbinding og nøgdsemi við arbeiðið minkar um vandan fyri tunglyndiseyðkennum.

## 5.2.2 Sambandið millum arbeiðsumhvørvisviðurskifti og vanda fyri tunglyndiseyðkennum

Talva 5.2.2.1 vísir samanhangir millum eina røð av viðurskiftum í mun til arbeiðsumhvørvið og heilsu og vandanum fyri øktum tunglyndiseyðkennum.

Innan fyri økið *Likamligt arbeiðsumhvørvi* vísa úrslitini í talvu 5.2.2.1, at tað eru signifikantir samanhangir millum allar fýra stigarnar og vandanum fyri tunglyndiseyðkennum. Úrslitini benda á, at eitt økt stigavirði upp á stigarnar 'likamlig tyngd í arbeiðinum', 'tyngjandi arbeiðsstøður' og 'arbeiði til gongu' hongur saman við einum hagfrøðiliga signifikantum øktum vanda fyri tunglyndiseyðkennum. Tað skal viðmerkjast, at OR fyri 'arbeiði til gongu' (OR: 1,05) og 'likamlig tyngd í arbeiðinum' (OR: 1,12) eru lutfalsliga lítil, og tað er tí tos um ein lítlan øktan vanda. Harnæst vísa úrslitini, at eitt økt stigavirði fyri stigan 'sitandi arbeiði' hongur saman við einum lítlum minkaðum vanda fyri tunglyndiseyðkennum.

Innan fyri økið *Evnafrøðiligt arbeiðsumhvørvi* vísa úrslitini, at svarpersónar, sum siga seg hava trupulleikar við húðini eru í einum signifikant øktum vanda (OR: 2,22) fyri at hava tunglyndiseyðkenni (p<.0001).

Innan fyri økið *Larmur og ristingar* vísa úrslitini eisini, at tað eru signifikantir samanhangir millum teir tríggjar stigarnar og vandanum fyri tunglyndiseyðkennum. OR fyri teir tríggjar stigarnar 'órógvandi larmur', 'harður larmur' og 'harðar ristingar' eru lutfalsliga smáir, og tí er talan um ein lítlan øktan vanda fyri tunglyndiseyðkennum.

Innan fyri økið *Arbeiðsóhapp og trygd* vísa úrslitini eisini signifikantar samanhangir millum tað at vera fyri fyri 'Arbeiðsóhapp, sum hava sjúkufráveru við sær' og 'trygd á arbeiðsplássinum' á einu síðuni og vandanum fyri tunglyndiseyðkennum á hinari síðuni (p<.0001). Úrslitini benda á, at svarpersónar, sum siga frá, at teir hava verið fyri í minsta lagi einum arbeiðsóhappi, sum hevur havt sjúkufráveru við sær, eru í signifikant øktum vanda (OR: 2,16) fyri at hava tunglyndis-eyðkenni. Samstundis vísa úrslitini, at ein øking á stiganum 'trygd á arbeiðsplássinum' minkar um vandan fyri tunglyndiseyðkenni.

Innan fyri økið *Heilsa og arbeiðsførleiki* vísa úrslitini, at tað eru signifikantir samanhangir millum seks heilsuindikatorar og vandanum fyri tunglyndiseyðkennum (p<.0001). Úrslitini vísa millum annað, at svarpersónar, sum siga frá, at teir hava 'pínu' eru í signifikant øktum vanda (OR: 2,95) fyri at uppliva tunglyndiseyðkenni. Somuleiðis vísa úrslitini, at eitt økt stigavirði á stigunum 'møði aftan á arbeiði' (OR: 1,48) og 'svøvntrupulleikar' (OR: 2,09) hongur signifikant saman við øktum vanda fyri tunglyndiseyðkennum. Harnæst vísa úrslitini eisini, at eitt økt stigavirði á stigunum 'sjálvmett heilsa', 'sálarligur arbeiðsførleiki' og 'likamligur arbeiðsførleiki' hongur saman við minkaðum vanda fyri tunglyndiseyðkennum, sum heldur ikki kemur óvart á. Til endans vísa úrslitini, at svarpersónar, sum siga frá, at teir hava fingið heilsufremjandi tilboð á arbeiðsplássinum eru í minkaðum vanda fyri tunglyndiseyðkennum. Hetta samband er tó ikki hagfrøðiliga signifikant (p=0.0638).

**Talva 5.2.2.1: Samanhangir millum viðurskifti í arbeiðsumhvørvinum og ábending um tunglyndiseyðkenni**

| Stigi | OR | 95% CI | P-virði |
|---|---|---|---|
| **Likamligt arbeiðsumhvørvi** | | | |
| Likamlig tyngd í arbeiðinum | 1,12 | 1,07-1,17 | <.0001* |
| Tyngjandi arbeiðsstøður | 1,22 | 1,15-1,28 | <.0001* |
| Sitandi arbeiði | 0,96 | 0,92-1,00 | 0.0326* |
| Arbeiði til gongu | 1,05 | 1,00-1,09 | 0.0409* |
| **Evnafrøðiligt arbeiðsumhvørvi** | | | |
| Trupulleikar við húðini** | 2,22 | 1,80-2,74 | <.0001* |
| **Larmur og ristingar** | | | |
| Órógvandi larmur | 1,15 | 1,12-1,19 | <.0001* |
| Harður larmur | 1,13 | 1,09-1,18 | <.0001* |
| Harðar ristingar | 1,06 | 1,01-1,12 | 0.0281* |
| **Arbeiðsóhapp og trygd** | | | |
| Arbeiðsóhapp, sum hava sjúkufráveru við sær** | 2,16 | 1,62-2,87 | <.0001* |
| Trygd á arbeiðsplássinum | 0,79 | 0,76-0,83 | <.0001* |
| **Heilsa og arbeiðsførleiki** | | | |
| Pína** | 2,95 | 2,19-3,98 | <.0001* |
| Møði aftan á arbeiði | 1,48 | 1,41-1,55 | <.0001* |
| Svøvntrupulleikar | 2,09 | 1,95-2,24 | <.0001* |
| Heilsufremjandi tilboð** | 0,82 | 0,66-1,01 | 0.0638 |
| Sjálvmett heilsa | 0,64 | 0,60-0,68 | <.0001* |
| Likamligur arbeiðsførleiki | 0,75 | 0,71-0,78 | <.0001* |
| Sálarligur arbeiðsførleiki | 0,58 | 0,55-0,62 | <.0001* |

Viðmerking: *Hagfrøðiliga signifikant (P-virði < 0.05). Greiningarnar er rættaðar eftir kyni, aldri, starvsbólki, útbúgvingarstøði og vikuligari arbeiðstíð.
Viðmerking: **Merkir, at tey frásøgdu Odds Ratio (OR) vísa vandan fyri at hava hækkað tunglyndiseyðkenni fyri svarpersónar, sum hava sagt frá, at teir hava ávikavist trupulleikar við húðini, pínu, fingið tilboð um heilsufremjan ella verið fyri einum arbeiðsóhappi samanborið við svarpersónar, sum ikki siga frá at hava trupulleikar við húðini, pínu, fingið tilboð um heilsufremjan ella hava verið fyri arbeiðsóhappi.

**Samanumtøka av úrslitum fyri samanhangir millum arbeiðsumhvørvisviðurskifti og tunglyndi**

Samanumtikið týða úrslitini upp á, at tað er eitt greitt samband millum eina langa røð av ymiskum arbeiðsumhvørvisviðurskiftum og heilsuindikatorum og vanda fyri at hava tunglyndiseyðkenni. Úrslitini bendu á, at tað serliga er øktur vandi fyri tunglyndiseyðkennum, um mann hevur trupulleikar við húðini, upplivir pínu ella hevur verið fyri í minsta lagi einum arbeiðsóhappi, sum hava sjúkufráveru við sær. Vandin fyri tunglyndiseyðkennum var eisini signifikant øktur, um mann í høgan mun upplivir møði aftan á arbeiði og svøvntrupulleikar. Hetta úrslitið kemur ikki óvart, av tí at møði og svøvntrupulleikar eru vanlig eyðkenni við tunglyndi. Til endans skal viðmerkjast, at OR

fyri eina langa røð av øðrum samanhangum vóru lutfalsliga smá, og merkir tí, at talan er um ein lítlan øktan ella lítlan minkaðan vanda fyri tunglyndiseyðkennum hjá avvarðandi eksponeringum/stigum.

## 5.3 Sambandið millum arbeiðsumhvørvisviðurskifti og sjúkufráveru sambært luttakaranum sjálvum

I hesum partinum leggja vit fram greiningar av samanhangum millum eina røð av viðurskiftum í arbeiðsumhvørvinum og vandanum fyri at hava meira enn sjey dagar sjúkufráveru.

### 5.3.1 Sambandið millum viðurskifti í psykososiala arbeiðsumhvørvinum og sjúkufrávera sambært luttakaranum sjálvum

Talva 5.3.1.1 vísir samanhangir millum eina røð av viðurskiftum í psykososiala arbeiðsumhvørvinum og vandanum fyri at hava ≥ 7 dagar við sjúkufráveru.

Innan fyri økið *Hvussu arbeiðið er skipað* vísa úrslitini, at tað eru signifikantir samanhangir millum allar átta stigarnar innan fyri økið og vandanum fyri sjúkufráveru. Úrslitini vísa millum annað, at vandin fyri at hava meira enn sjey sjúkudagar verður minkaður, tá ið hesir stigarnir økjast við 10 stigum: Ávirkan í arbeiðinum, ávirkan á arbeiðstíðir, menningarmøguleikar, greidleiki um leiklutir, uppliving av møguleikunum fyri at loysa arbeiðsuppgávurnar og forsøgni í arbeiðinum í arbeiðinum. Tað skal tó vera viðmerkt, at nakrir av samanhangunum bert vísa ein lítlan minkaðan vanda fyri sjúkufráveru. Tað ger seg galdandi fyri stigarnar 'ávirkan á arbeiðstíðir' (OR: 0,95), 'menningarmøguleikar' (OR: 0,93) og 'forsøgni í arbeiðinum' (OR: 0,91). Øvut vísa úrslitini, at við hægri stigatølum á stigunum 'tvídráttir um leiklutir' og 'óneyðugar arbeiðsuppgávur' økist vandin signifikant fyri at hava meira enn sjey dagar við sjúkufráveru (p<.0001).

Innan fyri økið *Krøv í arbeiðinum* vísa úrslitini, at tað eru signifikantir samanhangir millum fimm av seks stigum og vandanum fyri at hava meira enn sjey sjúkudagar. Úrslitini benda harumframt á, at tað bara er ein lítil øktur vandi fyri sjúkufráveru fyri hesar stigarnar: 'Kenslulig krøv' (OR: 1,10), 'krøv um at fjala kenslur' (OR: 1,06), 'kognitiv krøv' (OR: 1,07) umframt 'markleyst arbeiði' (OR: 1,04). Tann síðstnevndi stigin 'markleyst arbeiði' er annars ikki hagfrøðiliga signifikantur (p=0.0614). Tað sær harafturímóti út til, at vandin fyri sjúkufráveru er størri, jú hægri krøvini eru til ávikavist 'arbeiðsferð' (OR: 1,15) og 'arbeiðsmongd' (OR: 1,17).

Tá ið mann hyggur eftir økinum *Samstarv*, vísa úrslitini ein minkaðan vanda fyri sjúkufráveru við einari øking á øllum trimum stigunum innan fyri økið. Samanhangirnir eru allir hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001).

Innan fyri økið *Leiðsla* vísa úrslitini eisini ein minkaðan vanda fyri sjúkufráveru, tá ið allir stigar innan fyri hetta økið eru øktir. Samanhangirnir eru eisini allir hagfrøðiliga signifikantir (p<.0001). Innan fyri økið *Broytingar* sæst eisini eitt hagfrøðiliga signifikant samband millum handfaring av broytingum á arbeiðsplássinum og vandanum fyri sjúkufráveru (p<.0001). Úrslitið vísir, at tess betri luttakararnir hava mett handfaring av broytingum á arbeiðsplássinum á teirra arbeiðsplássi, jú lægri er vandin fyri sjúkufráveru (p<.0001).

Til endans vísa úrslitini innan fyri økið *Trivnað,* at tað eru signifikantir samanhangir millum allar átta stigarnar og vandanum fyri sjúkufráveru (p<.0001). Úrslitini benda á, at ein øking á stigunum 'uppliving av meining í arbeiðinum', 'hvussu arbeiðstakarin tekur lut í arbeiðsplássinum', 'hugbinding', 'nøgdsemi við arbeiði' og 'yvirskipað meting av psykososiala arbeiðsumhvørvinum' minkar um vandan fyri sjúkufráveru. Øvut vísa úrslitini, at ein øking á stigunum 'óvissa í starvssetanini', 'strongd' og 'tvídráttir millum arbeiðslív og heimalív' øki um vandan fyri sjúkufráveru.

**Talva 5.3.1.1: Samanhangir millum viðurskifti í psykososiala arbeiðsumhvørvinum og vandi fyri sjúkufráveru**

| Stigi | OR | 95% CI | P-virði |
|---|---|---|---|
| **Hvussu arbeiðið er skipað** | | | |
| Ávirkan í arbeiðinum | 0,86 | 0,83-0,89 | <.0001* |
| Ávirkan á arbeiðstíðir | 0,95 | 0,92-0,98 | 0.0005* |
| Menningarmøguleikar | 0,93 | 0,89-0,97 | 0.0002* |
| Greidleiki um leiklutir | 0,89 | 0,86-0,92 | <.0001* |
| Tvídráttir um leiklutir | 1,19 | 1,14-1,23 | <.0001* |
| Uppliving av møguleikunum fyri at loysa arbeiðsuppgávurnar | 0,82 | 0,79-0,85 | <.0001* |
| Óneyðugar arbeiðsuppgávur | 1,16 | 1,12-1,20 | <.0001* |
| Forsøgni í arbeiðinum | 0,91 | 0,88-0,94 | <.0001* |
| **Krøv í arbeiðinum** | | | |
| Arbeiðsferð | 1,15 | 1,11-1,19 | <.0001* |
| Arbeiðsmongd | 1,17 | 1,13-1,22 | <.0001* |
| Kenslulig krøv | 1,10 | 1,06-1,14 | <.0001* |
| Krøv um at fjala kenslur | 1,06 | 1,03-1,09 | <.0001* |
| Kognitiv krøv | 1,07 | 1,02-1,11 | 0.0027* |
| Markleyst arbeiði | 1,04 | 1,00-1,08 | 0.0614 |
| **Samstarv** | | | |
| Sosialur stuðul frá starvsfeløgum | 0,89 | 0,86-0,93 | <.0001* |
| Sambond við nærmastu starvsfelagar | 0,87 | 0,84-0,91 | <.0001* |
| Álit á starvsfeløgum | 0,87 | 0,84-0,91 | <.0001* |
| **Leiðsla** | | | |
| Samband við nærmasta leiðara | 0,90 | 0,87-0,92 | <.0001* |
| Leiðslugóðska | 0,90 | 0,88-0,93 | <.0001* |
| Sosialur stuðul frá nærmasta leiðara | 0,90 | 0,87-0,92 | <.0001* |
| Rættvísi | 0,87 | 0,84-0,90 | <.0001* |
| Hvussu leiðslan tekur starvsfólk uppí | 0,89 | 0,86-0,91 | <.0001* |
| Viðurkenning | 0,90 | 0,87-0,92 | <.0001* |
| **Broytingar** | | | |
| Handfaring av broytingum á arbeiðsplássinum | 0,91 | 0,88-0,94 | <.0001* |

| Trivnaður | | | |
|---|---|---|---|
| Uppliving av meining í arbeiðinum | 0,88 | 0,85-0,92 | <.0001* |
| Hvussu arbeiðstakarin tekur lut í arbeiðsplássinum | 0,88 | 0,85-0,90 | <.0001* |
| Hugbinding | 0,83 | 0,79-0,86 | <.0001* |
| Óvissa í starvssetanini | 1,12 | 1,08-1,15 | <.0001* |
| Strongd | 1,19 | 1,16-1,22 | <.0001* |
| Nøgdsemi við arbeiðið | 0,85 | 0,82-0,88 | <.0001* |
| Yvirskipað meting av psykososiala arbeiðsumhvørvinum | 0,86 | 0,84-0,89 | <.0001* |
| Tvídráttir millum arbeiðslív og heimalív | 1,18 | 1,14-1,22 | <.0001* |

Viðmerking: *Hagfrøðiliga signifikant (P-virði < 0.05). Greiningarnar eru rættaðar eftir kyni, aldri, starvsbólki, útbúgvingarstøði og vikuligari arbeiðstíð.
Viðmerking: Tey frásøgdu Odds Ratios (OR) vísa sambandið millum eina øking upp á 10 stig á teimum einstøku stigunum og sannlíkindunum fyri at hava ≥ 7 dagar við sjúkufráveru.

Talva 5.3.1.2 vísir, at luttakarar, ið svara, at teir hava verið fyri 'hóttanum', 'harðskapi', 'happing', 'kynsligari happing', 'mismuni' og 'chikanu' hava ein signifikant øktan vanda fyri sjúkufráveru. Úrslitið vísir harumframt, at hesin vandin er týðiliga øktur, hevur mann upplivað happing (OR: 2,16) og mismun (OR: 2,16).

**Talva 5.3.1.2: Samanhangir millum neiliga atferð og vanda fyri sjúkufráveru**

| Neilig atferð | OR | 95% CI | P-virði |
|---|---|---|---|
| Hóttanir | 1,78 | 1,48-2,06 | <.0001* |
| Harðskapur | 1,75 | 1,34-2,30 | <.0001* |
| Happing | 2,16 | 1,78-2,63 | <.0001* |
| Kynslig happing | 1,44 | 1,09-1,90 | 0.0102* |
| Mismunur | 2,16 | 1,76-2,65 | <.0001* |
| Chikana | 1,61 | 1,26-2,06 | 0.0001* |

Viðmerking: *Hagfrøðiliga signifikant (P-virði < 0.05). Greiningarnar er rættaðar eftir kyni, aldri, starvsbólki, útbúgvingarstøði og vikuligari arbeiðstíð.
Viðmerking: Tey frásøgdu Odds Ratios (OR) vísa sannlíkindini fyri at hava ≥ 7 sjúkudagar fyri svarpersónar, sum hava verið fyri hvørjari av teimum seks neiligu gerðunum samanborið við svarpersónar, sum ikki hava verið fyri hvørjari av teimum seks neiligu gerðunum

**Samanumtøka av úrslitum fyri samanhangir millum psykososialt arbeiðsumhvørvi og sjúkufráveru**

Samanumtikið týða úrslitini uppá, at tað er eitt greitt samband millum psykososial arbeiðsumhvørvisviðurskifti og vandan fyri at hava meira enn sjey dagar við sjúkufráveru. Allir teir kannaðu samanhangirnir vóru hagfrøðiliga signifikantir, tó undantikið sambandið millum markleyst arbeiði og vandanum fyri sjúkufráveru, har vandin fyri sjúkufráveru bæði var lágur og ikki hagfrøðiliga signifikantur. Úrslitini vístu harumframt, at tað vóru hagfrøðiliga signifikantir samanhangir millum øll seks sløgini av neiligari atferð og vandanum fyri sjúkufráveru. Her vístu úrslitini eisini, at vandin fyri sjúkufráveru økist munandi, hevur mann verið fyri happing og mismuni.

## 5.3.2 Sambandið millum arbeiðsumhvørvisviðurskifti og vanda fyri sjúkufráveru

Talva 5.3.2.1 vísir samanhangir millum eina røð av viðurskiftum í arbeiðsumhvørvinum og vandanum fyri at hava ≥ 7 sjúkudagar.

Innan fyri økið *Likamligt arbeiðsumhvørvi* vísa úrslitini í talvu 5.3.2.1, at tað eru signifikantir samanhangir millum allar fýra stigar og vandanum fyri sjúkufráveru. Tað er aftur talan um lutfalsliga smá OR, og harvið benda úrslitini á, at tað bert er ein lítil øktur vandi fyri sjúkufráveru, tá ein øking sæst á stigunum 'likamlig tyngd í arbeiðinum', 'tyngjandi arbeiðsstøður' og 'arbeiði til gongu'. Umframt hetta vísa úrslitini, at tað er ein lítil minkaður vandi fyri sjúkufráveru, tá øking er á stiganum 'sitandi arbeiði'.

Innan fyri økið *Evnafrøðiligt arbeiðsumhvørvi* vísa úrslitini, at svarpersónar, sum siga frá, at teir hava trupulleikar við húðini hava ein signifikant øktan vanda (OR: 1,38) fyri at hava meira enn sjey dagar við sjúkufráveru (p=0.0001).

Innan fyri økið *Larmur og ristingar* vísa úrslitini eisini, at tað eru signifikantir samanhangir millum teir tríggjar stigarnar og vandanum fyri sjúkufráveru. OR fyri allar tríggjar stigarnar 'órógvandi larmur', 'harður larmur' og 'harðar ristingar' eru lutfalsliga smá, og tí er talan um ein lítlan øktan vanda fyri sjúkufráveru.

Innan fyri økið *Arbeiðsóhapp og trygd* vísa úrslitini eisini signifikantar samanhangir millum tað at vera fyri 'arbeiðsóhapp, sum hevur havt sjúkufráveru við sær' og 'trygd á arbeiðsplássinum' á einu síðuni og vandanum fyri sjúkufráveru á hinari (p<.0001). Úrslitini benda á, at svarpersónar, sum siga frá, at teir hava verið fyri í minsta lagi einum arbeiðsóhappi, sum hevur havt sjúkufráveru við sær eru í signifikant øktum vanda (OR: 4,55) fyri at hava meira enn sjey dagar við sjúkufráveru. Samstundis vísa úrslitini, at ein øking á stiganum 'trygd á arbeiðsplássinum' minkar um vandan fyri sjúkufráveru.

Innan fyri økið *Heilsa og arbeiðsførleiki* vísa úrslitini, at tað eru signifikantir samanhangir millum allar seks heilsuindikatorarnar og vandanum fyri sjúkufráveru (p<.0001). Úrslitini vísa millum annað, at svarpersónar, sum siga seg hava 'pínu' eru í signifikant øktum vanda (OR: 2,28) fyri at hava meira enn sjey dagar við sjúkufráveru. Somuleiðis vísa úrslitini, at eitt økt stigavirði á stigunum 'møði aftan á arbeiði' (OR: 1,21) og 'svøvntrupulleikar' (OR: 1,32) hongur signifikant saman við øktum vanda fyri sjúkufráveru í meira enn sjey dagar. Úrslitini vísa harumframt, at eitt økt stigavirði á stigunum 'sjálvmett heilsa', 'sálarligur arbeiðsførleiki' og 'likamligur arbeiðsførleiki' hongur saman við minkaðum vanda fyri sjúkufráveru. Til endans benda úrslitini á, at tað ikki er nakað hagfrøðiliga signifikant samband millum vandan fyri sjúkufráveru og heilsufremjandi tilboð á arbeiðsplássinum (p=0.7145).

**Talva 5.3.2.1: Samanhangir millum arbeiðsumhvørvisviðurskifti og vanda fyri sjúkufráveru**

| Stigi | OR | 95% CI | P-virði |
|---|---|---|---|
| **Likamligt arbeiðsumhvørvi** | | | |
| Likamlig tyngd í arbeiðinum | 1,10 | 1,06-1,13 | <.0001* |
| Tyngjandi arbeiðsstøður | 1,13 | 1,09-1,18 | <.0001* |
| Sitandi arbeiði | 0,97 | 0,94-0,99 | 0.0199* |
| Arbeiði til gongu | 1,04 | 1,01-1,08 | 0.0061* |
| **Evnafrøðiligt arbeiðsumhvørvi** | | | |
| Trupulleikar við húðini** | 1,38 | 1,17-1,64 | 0.0001* |
| **Larmur og ristingar** | | | |
| Órógvandi larmur | 1,11 | 1,08-1,13 | <.0001* |
| Harður larmur | 1,08 | 1,04-1,11 | <.0001* |
| Harðar ristingar | 1,04 | 1,00-1,09 | 0.0485* |
| **Arbeiðsóhapp og trygd** | | | |
| Arbeiðsóhapp, sum hava sjúkufráveru við sær** | 4,55 | 3,62-5,74 | <.0001* |
| Trygd á arbeiðsplássinum | 0,89 | 0,86-0,92 | <.0001* |
| **Heilsa og arbeiðsførleiki** | | | |
| Pína** | 2,28 | 1,88-2,76 | <.0001* |
| Møði aftan á arbeiði | 1,21 | 1,17-1,25 | <.0001* |
| Svøvntrupulleikar | 1,31 | 1,27-1,36 | <.0001* |
| Heilsufremjandi tilboð** | 1,03 | 0,89-1,20 | 0.7145 |
| Sjálvmett heilsa | 0,75 | 0,72-0,78 | <.0001* |
| Likamligur arbeiðsførleiki | 0,78 | 0,76-0,81 | <.0001* |
| Sálarligur arbeiðsførleiki | 0,80 | 0,76-0,83 | <.0001* |

Viðmerking: *Hagfrøðiliga signifikant (P-virði < 0.05). Greiningarnar eru rættaðar eftir kyni, aldri, starvsbólki, útbúgvingarstøði og vikuligari arbeiðstíð.
Viðmerking: **Merkir, at tey frásøgdu Odds Ratio (OR) vísa sannlíkindini fyri at hava ≥ 7 sjúkudagar fyri svarpersónar, sum hava sagt frá, at teir ávikavist hava trupulleikar við húðini, pínu, fingið heilsufremjandi tilboð ella hava verið fyri einum arbeiðsóhappi samanborið við svarpersónar, sum ikki hava sagt frá at hava trupulleikar við húðini, pínu, fingið heilsufremjandi tilboð ella hava verið fyri arbeiðsóhappi.

**Samanumtøka av úrslitum fyri samanhangir millum arbeiðsumhvørvisviðurskifti og sjúkufráveru**

Samanumtikið týða úrslitini á, at tað er eitt greitt samband millum eina langa røð av ymiskum arbeiðsumhvørvisviðurskiftum og heilsuindikatorar og vanda fyri at hava meira enn sjey dagar við sjúkufráveru. Úrslitini bendu á, at tað serliga er øktur vandi fyri sjúkufráveru, um mann hevur verið fyri einum arbeiðsóhappi ella sigur seg hava upplivað pínu. Harnæst vístu úrslitini, at tað eisini var ein hagfrøðiliga signifikantur øktur vandi fyri meira enn sjey dagar við sjúkufráveru, um mann hevur trupulleikar við húðini, upplivir møði aftan á arbeiðið og svøvntrupulleikar. Til endans vístu úrslitini ein

minkaðan vanda fyri sjúkufráveru, jú betri mann sum heild hevur mett sína heilsu, likamliga og sálarliga arbeiðsførleika.
Her skal eisini viðmerkjast, at OR fyri eina røð av samanhangunum vóru lutfalsliga lítil og merkir tí, at talan er um ein lítlan øktan ella lítlan minkaðan vanda fyri sjúkufráveru við avvarðandi eksponeringum/stigum í arbeiðsumhvørvinum.

## 5.4 Samanumtøka og hugleiðingar um háttalagið

Vit hava í kapittul 5 kannað samanhangin millum eina langa røð av teimum kannaðu viðurskiftunum í mun til arbeiðsumhvørvi, heilsu og trivnað og vandanum fyri ávikavist tunglyndiseyðkennum og sjúkufráveru.

Samanumtikið týða úrslitini uppá, at viðurskifti í arbeiðsumhvørvinum hanga saman við vandanum fyri bæði tunglyndiseyðkennum og sjúkufráveru. Úrslitini benda serliga á, at viðurskifti í psykososiala arbeiðsumhvørvinum, og tað at vera fyri neiligari atferð í arbeiðinum, hanga saman við vandanum fyri at hava tunglyndiseyðkenni og meira enn sjey dagar við sjúkufráveru. Úrslitini benda harumframt á, at vandin fyri tunglyndiseyðkennum og sjúkufráveru er øktur fyri luttakarar, sum siga frá, at teir hava trupulleikar við húðini, uppliva pínu og hava verið fyri í minsta lagi einum arbeiðsóhappi, sum hevur havt sjúkufráveru við sær.

Tó eru ávísar avmarkingar við háttalagnum í kanningini, sum umráðandi er at geva gætur í hesum sambandi. T.d. eru teir variablar, sum eru við í greiningini, innsavnaðir í sama tíðarskeiði og við sama háttalagi (spurnablaði). Tað hevur sostatt við sær nakrar natúrligar avmarkinger í mun til hvørjar niðurstøður kunnu takast grundað á greiningarnar í frágreiðingini.

At okkara greiningarvariablar eru innsavnaðir í sama tíðarskeiði, merkir, at vit ikki kunnu skilja millum variablarnar í tíð (tvs. árin av eksponering í arbeiðsumhvørvinum á tunglyndiseyðkenni og sjúkufráveru). Tað merkir harumframt, at vit ikki kunnu gera niðurstøður um, hvønn veg teir eygleiddu samanhangirnir venda, og at vit á henda hátt bert kunnu koma til ta niðurstøðu, at tað *eru* samanhangir í teimum førunum, har teir eygleiddu samanhangirnir vóru hagfrøðiliga signifikantir. Á hesum grundarlagi kunnu vit tískil ikki, við støði í gjørdu greiningum, koma til nakra niðurstøðu um, hvørt viðurskifti í arbeiðsumhvørvinum í roynd og veru *leiða* til hægri ella lægri vanda fyri tunglyndiseyðkennum og sjúkufráveru. Tað kann eins væl vera tað, at tunglyndiseyðkenni eru til staðar, tá ið mann svaraði spurnablaðnum, sum hava ávirkað upplivingina av arbeiðsumhvørvinum hjá tí einstaka svarpersóninum.

Ein annar veikleiki við, at allir variablarnir eru innsavnaðir um somu tíð, er, at tað hevur við sær vanda fyri, at sambandið millum hesar variablarnar kann vera ávirkað av øðrum variablum. Tað kann t.d. vera hýrurin hjá svarpersóninum um tað mundið, hann hevur svarað spurnakanningini, sum møguliga kann vera ein vandi fyri kunstig hækkað virði (OR) fyri eygleiddu samanhangirnar millum frágreiðingarvariablarnar og úrslitsvariablarnar (147).

Ein triðja avbjóðing í mun til háttalagið er, at í fimta kapitli verður gjørd ein long røð hagfrøðiligum greiningum, ið økja um vandan fyri, at nakrar av hesum greiningum vísa sonevnd *følsk positiv* úrslit. Umframt hetta tykist spurdómurin viðvíkjandi *massasignifikansi* minni týðandi, av tí at okkara niðurstøður í størri mun byggja á yvirskipaðu rákini í greiningunum fram um tey ávísu úrslitini fyri einstøk arbeiðsumhvørvisviðurskifti.

Hóast avmarkingarnar í háttalagnum, umrøddar omanfyri, vísa úrslitini kortini greiðar samanhangir millum viðurskifti í arbeiðsumhvørvinum og ábendingar um heilsu og trivnað millum arbeiðstakarar úr Føroyum. Hesi úrslit vera harumframt stuðlað av øðrum hugsandi kanningum, sum ikki eru eyðkendar við teimum nevndu avmarkingunum í háttalagnum (143, 146), og á hesum grundarlagi fyrikemur tað eisini hóskandi at taka ta niðurstøðu, at viðurskifti í arbeiðsumhvørvinum hava týdning fyri heilsu hjá arbeiðstakarum í Føroyum.

# 6 Endaligar viðmerkingar og hugleiðingar um háttalag

Henda kanning hevur fevnt um og kortlagt arbeiðsumhvørvið og trivnaðin millum føroyskar arbeiðstakarar. Vit hava í hesi frágreiðing hugt nærri at, hvussu arbeiðsumhvørvið og trivnaðurin sær út fyri allar svarpersónar í kanningini, men eisini hvussu tað sær út upp á tvørs av kyni, aldri og starvsbólkum. Í frágreiðingini hava vit kannað arbeiðsumhvørvið innan fyri hesi økini:

- Psykososialt arbeiðsumhvørvi og trivnaður
- Likamligt arbeiðsumhvørvi
- Evnafrøðiligt arbeiðsumhvørvi
- Larmur og ristingar
- Arbeiðsóhapp og trygd
- Heilsa og arbeiðsførleiki

Umframt hetta hava vit kannað, hvussu ymisk arbeiðsumhvørvisviðurskifti hanga saman við ávikavist vandanum fyri tunglyndiseyðkennum og sjúkufráveru.

## 6.1 Kjak um úrslitini í kanningini

Frágreiðingin hevur skjalprógvað eina víðfevnda mongd av úrslitum úr kanningini, og úrslitini benda á, at tað serliga eru munir í arbeiðsumhvørvinum, tá ið hugt verður upp á tvørs av aldursbólkum og starvsbólkum.

Tá hugt verður eftir aldursbólkunum, vísa úrslitini, at tað serliga eru yngru arbeiðstakararnir, sum uppliva avbjóðingar, tá tað kemur til arbeiðsumhvørvi, heilsu og trivnað og hesar avbjóðingar koma til sjóndar innan fyri flestu økini av arbeiðsumhvørvinum. Hesi úrslit samsvara við úrslit frá einari danskari kanning, sum eisini hugdi nærri eftir arbeiðsumhvørvinum hjá teimum ungu, og har eisini varð staðfest, at yngri arbeiðstakarar hava eitt meira tyngjandi arbeiðsumhvørvi enn eldri arbeiðstakarar (17).

Upp á tvørs av aldursbólkunum sást sostatt, at teir yngru arbeiðstakararnir høvdu meira tyngjandi arbeiðstreytir enn eldru. Men hvørt hetta kemst av, at tað eru munir á teimum sløgunum av størvum, ávikavist yngru og eldru arbeiðstakararnir hava, ella um hesin munur kemur av einum sonevndum *healthy worker effect* kann ikki fáast greiði á við støði í tí dátugrundarlagi, henda frágreiðing er bygt á.

Úrslitini vístu harumframt, at stórir munir eru í arbeiðsumhvørvi, heilsu og trivnaði upp á tvørs av teimum 11 starvsbólkunum, ið eru umfevndir í kanningini. Hetta úrslitið samsvarar eisini við eina áður gjørda kanning av psykososiala arbeiðsumhvørvinum millum danskar arbeiðstakarar, sum eisini vísti á týðiligar munir í psykososiala arbeiðsumhvørvinum upp á tvørs av 19 ymiskum starvsgreinum (19).

Samanumtikið vísa úrslitini í hesi frágreiðing á nøkur greið átaksøki, sum eiga at verða tikin við framyvir, í átøk at styrkja arbeiðsumhvørvi, heilsu og trivnað í Føroyum. Mett verður, at tað liggja stórir menningarmøguleikar í tílíkum átaki, við tað at altjóða granskingin bendir á, at viðurskifti í arbeiðsumhvørvinum hava stóran týdning fyri trivnað og heilsu hjá arbeiðstakaranum umframt møguleikarnar fyri at fyribyrgja sjúkufráveru og frákoyring av arbeiðsmarknaðinum.

## 6.2 Hugleiðingar um háttalag

Tey úrslit, ið eru løgd fram í hesari frágreiðingini, taka støði í einari spurnakanning. Háttalagið í spurnakanningini hóskar seg væl í mun til at savna inn data við atliti til at lýsa viðurskifti viðvíkjandi arbeiðsumhvørvi, heilsu og trivnað í størri bólkum.

Háttalagið hevur kortini eisini við sær eina røð av avmarkingum, sum vit stutt umrøða niðanfyri.

Fyrsta møguliga avmarkingin snýr seg um tey, sum kanningin umboðar. Sum áður nevnt í kapitli 2, hevur Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu bjóðað øllum arbeiðstakarum í Føroyum at luttaka í kanningini, og hesin kanningarbólkurin er uml. 22.000 persónar. 42,8 prosent av hesum persónunum svaraðu øllum spurnablaðnum ella lutvíst, og tá úrslitini vórðu gjøllari eftirkannað vísti hetta, at nógvir svarpersónar ikki høvdu svarað týðandi spurningum viðvíkjandi arbeiðsumhvørvinum, sum hevur við sær, at tað munagóða svarprosentið fyri kanningina má verða mett at vera eitt sindur lægri enn 42,8 prosent.

Tá ið spurnakanningar verða avgreiddar, verður ofta gjørd ein sonevnd burturfallsgreining, sum kann útvega eina vitan um, hvørt tað eru nakrir systematiskir skeivleikar í mun til hvørjir demografiskir bólkar hava luttikið í kanningini, og hvørjir bólkar hava havt minni lyndi til at svara spurnablaðnum.

Sum fylgja av háttinum, sum dátuinnsavnanin til hesa verkætlan er farin fram uppá, hevur kortini ikki verið møguligt at gera eina burturfallsgreining. Sambært sannroyndum vita vit tó, at menn, meira enn kvinnur, hava lyndi til at lata vera við at luttaka, og, at yngri arbeiðstakarar, meira enn eldri arbeiðstakarar, hava lyndi til at lata vera við at luttaka. Hesi viðurskifti mugu umhugsast í sambandi við tulkingina av kanningarúrslitunum. Av tí at ikki hevur verið møguligt at gera eina burturfallsgreining, er heldur ikki møguligt at gera nakra niðurstøðu um, hvørt teir persónarnir, sum í grundini hava luttikið í kanningini, eisini líkjast veruliga bólkinum av arbeiðstakarum – t.d. tá kanningarbólkurin verður samanborin við veruliga bólkin í mun til kyn, aldur, útbúgving og starvsgrein.

Tað er sostatt ikki møguligt at siga nakað um, um kanningarbólkurin er umboðandi fyri allar arbeiðstakarar í Føroyum, og hetta má hugsast at vera ein avmarking í kanningini. Á hinari síðuni skal eisini viðmerkjast, at kanningin byggir á svørini frá einum stórum parti av arbeiðstakarunum í Føroyum, sum má hugsast at vera ein týðandi styrki við kanningini. Fyri flestu arbeiðsumhvørvisviðurskiftini, sum vit hava kannað, hava vit svar frá millum 5.500 og 6.000 persónum, sum hevur við sær, at kanningarúrslitini byggja upp á svør frá millum 25 og 27 prosent av veruliga bólkinum, sum verður mettur at telja um 22.000 persónar. Hóast vit ikki kunnu gera haldgóðar niðurstøður um umboðanina í kanningini, kann niðurstøða kortini gerast um, at kanningarúrslitini byggja á eitt sterkt grundarlag, av tí at ein stórur partur av samlaðu arbeiðsmegini í Føroyum hevur verið við í dátugrundarlagnum í kanningini.

Ein annar spurdómur viðvíkjandi umboðanini í kanningarbólkinum er, at ein stórur partur av svarpersónunum arbeiða í heilsu- og undirvísingarøkinum umframt akademiskum arbeiði, meðan ein lutfalsliga lítil partur av svarpersónunum siga seg

arbeiða innan t.d. landbúnað og fiskiskap. Hesir møguligu trupulleikarnir viðvíkjandi umboðanini í kanningarbólkinum mugu umhugsast í sambandi við tulkingina av kanningarúrslitunum, og kunnu millum annað standast av, at kanningin er gjørd við hjálp av einum spurnablaði á netinum. Hugsast kann, at hetta ger tað meira atkomuligt fyri svarpersónar í heilsu- og undivísingarøkinum umframt akademiskum arbeiði enn fyri svarpersónar, sum arbeiða innan fyri fiskiskap og landbúnað.

I hesum sambandi kann tað vera ein fyrimunur, at vit lýsa úrslitini á bólkastøði (kyn, aldur og starvsbólkur), sum merkir, at tað er møguligt at eyðmerkja bólkar og øki við sermerktum styrkjum ella avbjóðingum í arbeiðsumhvørvinum. Á henda hátt kunnu vit, við at hyggja eftir úrslitum á bólkastøði, lutvíst fáa eyga á møguligar skeivleikar í umboðanini av kanningarbólkinum frammanundan. Harumframt skal viðmerkjast, at sundurbýtið av starvsbólkum er grundað á nógv nýttu, altjóða flokkingarskipanini FISCO, sum verður nýtt til at flokka størv í bólkar, grundað á tær uppgávur, sum eru í starvinum.[10] Nýtslan av FISCO-kotunum er partvíst ein fyrimunur, tí tað ber til at samanbera persónar í sama starvi uttan mun til heiti og útbúgving. Tó eru FISCO-koturnar og flokkarnir eisini breitt skilmarkað og kunnu umfata størv frá ymiskum vinnum, sum ikki altíð eru samanbærilig. Av hesi orsøk vóru vit eisini noydd at gera nakrar tillagingar í FISCO-kotunum. Hesar tillagingar eru nærri lýstar í kapittul 2.

Framhaldandi skal viðmerkjast, at tað sjálvsagt kemur fjølbroytni fyri í úrslitunum, og hetta merkir sostatt, at mann væl kann hava eitt 'gott og sunt' arbeiðsumhvørvi, hóast mann hoyrir til ein bólk, sum sambært úrslitunum hevur nógvar avbjóðingar í arbeiðsumhvørvinum. Øvut kann mann eisini væl hava eitt 'vánaligt og tyngjandi' arbeiðsumhvørvi, hóast mann hoyrir til ein bólk, sum sambært einari yvirskipaðari meting av kanningarúrslitunum hevur nógvar styrkir í arbeiðsumhvørvinum.

Úrslitini kunnu tískil ikki siga frá um arbeiðsumhvørvi, heilsu og trivnað á ítøkiligum arbeiðsplássum, og eisini kunnu væntast stórir munir á arbeiðsumhvørvinum upp á tvørs av arbeiðsplássum og deildum enntá innan fyri somu starvsbólkar. Tí er umráðandi, at mann á einstøkum arbeiðsplássum hevur leypandi uppmerksemi á arbeiðsumhvørvið og trivnaðin, umframt at mann setur átøk í verk, gerst mann varugur við avbjóðingar.

Til endans skal viðmerkjast, at allar kanningardátur eru innsavnaðir sama tíðarskeið. Úrslitini frá spurnakanningini kunnu sostatt ikki nýtast til at eyðmerkja sambond millum orsøkir og avleiðingar, t.d. millum viðurskifti í arbeiðsumhvørvinum og trivnað hjá starvsfeløgunum í arbeiðinum, sum vit kannaðu í kapitli 5. Úrslitini kunnu tó nýtast til at lýsa samanhangir millum arbeiðsumhvørvisviðurskifti á tí einu síðuni og viðurskifti í mun til heilsu og trivnað á hinari, og henda vitanin kann eisini vera eitt týdningarmikið byrjanarstøði í mun til at eyðmerkja vansar og átaksøki í arbeiðsumhvørvinum.

---

[10] Les meira om ISCO-flokkingarskipanina her: [International Standard Classification of Occupations (ISCO) | ESCO (europa.eu)]

# Keldur

1. Clausen T, Christensen KB, Sørensen JK, Bjorner JB, Madsen IEH, Borg V, et al. The Predictive Validity of the Danish Psychosocial Work Environment Questionnaire With Regard to Onset of Depressive Disorders and Long-Term Sickness Absence. Ann Work Expo Health. 2023;67(2):195-207.
2. Nieuwenhuijsen K, Bruinvels D, Frings-Dresen M. Psychosocial work environment and stress-related disorders, a systematic review. Occup Med (Lond). 2010;60(4):277-86.
3. Clausen T, Hogh A, Carneiro IG, Borg V. Does psychological well-being mediate the association between experiences of acts of offensive behaviour and turnover among care workers? A longitudinal analysis. J Adv Nurs. 2013;69(6):1301-13.
4. Clausen T, Burr H, Borg V. Do psychosocial work conditions predict risk of disability pensioning? An analysis of register-based outcomes using pooled data on 40,554 observations. Scand J Public Health. 2014;42(4):377-84.
5. Clausen T, Burr H, Borg V. Do psychosocial work conditions predict risk of disability pensioning? An analysis of register-based outcomes using pooled data on 40,554 observations. Scand J Public Health. 2014;42(4):377-84.
6. Framke E, Sørensen JK, Alexanderson K, Farrants K, Kivimäki M, Nyberg ST, et al. Emotional demands at work and risk of long-term sickness absence in 1·5 million employees in Denmark: a prospective cohort study on effect modifiers. Lancet Public Health. 2021;6(10):e752-e9.
7. Sørensen JK, Framke E, Clausen T, Garde AH, Johnsen NF, Kristiansen J, et al. Leadership quality and risk of long-term sickness absence among 53,157 employees of the Danish workforce. J Occup Environ Med. 2020;62(8):557-65.
8. Clausen T, Burr H, Borg V. Do psychosocial job demands and job resources predict long-term sickness absence? An analysis of register-based outcomes using pooled data on 39,408 individuals in four occupational groups. Int Arch Occup Environ Health. 2014;87(8):909-17.
9. Coenen P, Gouttebarge V, van der Burght AS, van Dieën JH, Frings-Dresen MH, van der Beek AJ, et al. The effect of lifting during work on low back pain: a health impact assessment based on a meta-analysis. Occup Environ Med. 2014;71(12):871-7.
10. Andersen LL, Fallentin N, Thorsen SV, Holtermann A. Physical workload and risk of long-term sickness absence in the general working population and among blue-collar workers: prospective cohort study with register follow-up. Occup Environ Med. 2016;73(4):246-53.
11. Bláfoss R, Skovlund SV, Skals S, Sundstrup E, López-Bueno R, Calatayud J, et al. Duration and intensity of occupational lifting and risk of long-term sickness absence: Prospective cohort study with register follow-up among 45 000 workers. Scand J Work Environ Health. 2023(4):283-92.
12. Skovlund SV, Bláfoss R, Calatayud J, López Bueno R, Sundstrup E, Andersen LL. Musculoskeletal pain intensity and risk of long-term sickness absence in the general working population: A prospective cohort study with register follow-up. Prev Med. 2023;174:107636.
13. Sundstrup E, Hansen Å M, Mortensen EL, Poulsen OM, Clausen T, Rugulies R, et al. Cumulative occupational mechanical exposures during working life

and risk of sickness absence and disability pension: prospective cohort study. Scand J Work Environ Health. 2017;43(5):415-25.
14. Sundstrup E, Hansen ÅM, Mortensen EL, Poulsen OM, Clausen T, Rugulies R, et al. Retrospectively assessed physical work environment during working life and risk of sickness absence and labour market exit among older workers. Occup Environ Med. 2018;75(2):114-23.
15. Clausen T, Christensen KB, Lund T, Kristiansen J. Self-reported noise exposure as a risk factor for long-term sickness absence. Noise & health. 2009;11(43):93-7.
16. Clausen T, Kristiansen J, Hansen JV, Pejtersen JH, Burr H. Exposure to disturbing noise and risk of long-term sickness absence among office workers: a prospective analysis of register-based outcomes. Int Arch Occup Environ Health. 2013;86(7):729-34.
17. Dyreborg J, Sundstrup E, Jørgensen A, Kristiansen J, Hougaard KS, Johnsen NF. Unges arbejdsmiljø og helbred. København: Det Nationale Forskningscenter for Arbejdsmiljø; 2018.
18. Helgadóttir A, Clausen T, Bak ML, Netterstrøm B, Weihe P. Psykosocialt arbejdsmiljø blandt arbejdstagere på Færøerne. København: Det Nationale Forskningscenter for Arbejdsmiljø; 2023.
19. Bruun JE, Clausen T. Dansk Psykosocialt Spørgeskema (DPQ). En undersøgelse af det psykosociale arbejdsmiljø på danske arbejdspladser. København: Det Nationale Forskningscenter for Arbejdsmiljø (NFA); 2022.
20. Fakta om Arbejdsmiljø og Helbred 2018. København: Det Nationale Forskningscenter for Arbejdsmiljø (NFA); 2019.
21. DISCO-08 i lønstatistikken, v2:2012 København: Danmarks Statistik (dst.dk); 2012 [Available from: https://www.dst.dk/da/Statistik/dokumentation/nomenklaturer/disco-loen.
22. Clausen T, Madsen IEH, Christensen K, Bjørner J, Poulsen O, Maltesen T, et al. Dansk Psykosocialt Spørgeskema - Et spørgeskema om psykosocialt arbejdsmiljø. Dokumentationsrapport. København: Det Nationale Forskningscenter for Arbejdsmiljø; 2017.
23. Clausen T, Madsen IIEH, Christensen KB, Bjorner JB, Poulsen OM, Maltesen T, et al. The Danish Psychosocial Work Environment Questionnaire (DPQ): Development, content, reliability and validity. Scand J Work Environ Health. 2019(4):356-69.
24. Clausen T, Borg V. Do positive work-related states mediate the association between psychosocial work characteristics and turnover? A longitudinal analysis. Int J Stress Manag. 2010;17:308-24.
25. Clausen T, Borg V. Job demands, job resources and meaning at work. J Manag Psychol. 2011;26:665-81.
26. Meyer JP, Stanley DJ, Herscovitch L, Topolnytsky L. Affective, Continuance, and Normative Commitment to the Organization: A Meta-analysis of Antecedents, Correlates, and Consequences. J Vocat Behav. 2002;61(1):20-52.
27. Nielsen K, Daniels K. Does shared and differentiated transformational leadership predict followers' working conditions and well-being? Leadership Q. 2012;23(3):383-97.

28. Sasser M, Sørensen OH. Doing a Good Job - the Effect of Primary Task Quality on Well-Being and Job Satisfaction. Hum Factors Ergonomics Manuf. 2016;26(3):323-36.
29. Svane-Petersen AC, Holm A, Burr H, Framke E, Melchior M, Rod NH, et al. Psychosocial working conditions and depressive disorder: disentangling effects of job control from socioeconomic status using a life-course approach. Soc Psychiatry Psychiatr Epidemiol. 2020;55(2):217-28.
30. Madsen IE, Tripathi M, Borritz M, Rugulies R. Unnecessary work tasks and mental health: a prospective analysis of Danish human service workers. Scand J Work Environ Health. 2014;40(6):631-8.
31. Framke E, Svane-Petersen AC, Holm A, Burr H, Melchior M, Sivertsen B, et al. Cumulated and most recent job control and risk of disability pension in the Danish Work Life Course Cohort (DaWCo). Eur J Public Health. 2020;30(6):1212-8.
32. Bakker AB, Demerouti E. The Job Demands-Resources model: state of the art. J Manag Psychol. 2007;22(3):309-28.
33. Bakker AB, Demerouti E, Euwema MC. Job resources buffer the impact of job demands on burnout. J Occup Health Psychol. 2005;10(2):170-80.
34. Gluschkoff K, Elovainio M, Hintsa T, Pentti J, Salo P, Kivimäki M, et al. Organisational justice protects against the negative effect of workplace violence on teachers' sleep: a longitudinal cohort study. Occup Environ Med. 2017;74(7):511-6.
35. Hobfoll SE. The Influence of Culture, Community, and the Nested-Self in the Stress Process: Advancing Conservation of Resources Theory. J Appl Psychol. 2001;50:337-421.
36. Wilkinson A, Gollan PJ, Marchington M, Lewin D. 3 Conceptualizing Employee Participation in Organizations. In: Wilkinson A, Gollan PJ, Marchington M, Lewin D, editors. The Oxford Handbook of Participation in Organizations: Oxford University Press; 2010. p. 0.
37. Andersen MF, Svendsen PA, Nielsen K, Brinkmann S, Rugulies R, Madsen IEH. Influence at work is a key factor for mental health – but what do contemporary employees in knowledge and relational work mean by "influence at work"? Int J Qual Stud Health Well-being. 2022;17(1):2054513.
38. Madsen IEH, Nyberg ST, Magnusson Hanson LL, Ferrie JE, Ahola K, Alfredsson L, et al. Job strain as a risk factor for clinical depression: Systematic review and meta-analysis with additional individual participant data. Psychol Med. 2017;47(8):1342-56.
39. Clausen T, Borg V. Psychosocial work characteristics as predictors of affective organisational commitment: A longitudinal multi-level analysis of occupational well-being. Appl Psychol Health Well Being. 2010;2:182-203.
40. Clausen T, Pedersen LRM, Andersen MF, Theorell T, Madsen IEH. Job autonomy and psychological well-being: A linear or a non-linear association? Eur J Work Organ Psychol. 2022;31(3):395-405.
41. Skakon J, Kristensen TS, Christensen KB, Lund T, Labriola M. Do managers experience more stress than employees? Results from the Intervention Project on Absence and Well-being (IPAW) study among Danish managers and their employees. Work (Reading, Mass). 2011;38(2):103-9.
42. Nabe-Nielsen K. Shift work, health, and well-being among eldercare workers. København: Det Nationale Forskningscenter for Arbejdsmiljø; 2011.

43. Ala-Mursula L, Vahtera J, Linna A, Pentti J, Kivimäki M. Employee worktime control moderates the effects of job strain and effort-reward imbalance on sickness absence: the 10-town study. J Epidemiol Community Health. 2005;59(10):851-7.
44. Karasek RA. Job demands, job decision latitude, and mental strain: Implications for job redesign. Adm Sci Q. 1979;24(2):285-308.
45. Gardell B. Department of Psychology University of Stockholm Technology, Alienation and Mental Health. Summary of a Social Psychological Study of Technology and the Worker. Acta Sociol. 1976;19(1):83-93.
46. Borritz M, Bültmann U, Rugulies R, Christensen KB, Villadsen E, Kristensen TS. Psychosocial work characteristics as predictors for burnout: findings from 3-year follow up of the PUMA Study. J Occup Environ Med. 2005;47(10):1015-25.
47. Li J, Fu H, Hu Y, Shang L, Wu Y, Kristensen TS, et al. Psychosocial work environment and intention to leave the nursing profession: Results from the longitudinal Chinese NEXT study. Scand J Public Health. 2010;38(3 Suppl):69-80.
48. Thorsen S, Rugulies R, Løngaard K, Borg V, Thielen K, Bjorner JB. The association between psychosocial work environment, attitudes towards older workers (ageism) and planned retirement. Int Arch Occup Environ Health. 2012;85(4):437-45.
49. Rizzo JR, House RJ, Lirtzman SI. Role conflict and ambiguity in complex organizations. Adm Sci Q. 1970;15(2):150–63.
50. Notelaers G, Vermunt JK, Baillien E, Einarsen S, De Witte H. Exploring risk groups workplace bullying with categorical data. Ind Health. 2011;49(1):73-88.
51. Rugulies R, Aust B, Pejtersen JH. Do psychosocial work environment factors measured with scales from the Copenhagen Psychosocial Questionnaire predict register-based sickness absence of 3 weeks or more in Denmark? Scand J Public Health. 2010;38(3 Suppl):42-50.
52. Edwards D, Burnard P, Coyle D, Fothergill A, Hannigan B. Stress and burnout in community mental health nursing: a review of the literature. J Psychiatr Ment Health Nurs. 2000;7(1):7-14.
53. Semmer NK, Jacobshagen N, Meier LL, Elfering A, Beehr TA, Kälin W, et al. Illegitimate tasks as a source of work stress. Work Stress. 2015;29(1):32-56.
54. Semmer NK, Tschan F, Meier LL, Facchin S, Jacobshagen N. Illegitimate tasks and counterproductive work behavior. Appl Psychol. 2010;59(1):70-96.
55. Björk L, Bejerot E, Jacobshagen N, Härenstam A. I shouldn't have to do this: Illegitimate tasks as a stressor in relation to organizational control and resource deficits. Work Stress. 2013;27.
56. Semmer N, Jacobshagen N, Meier L, Elfering A. Occupational stress research: The "Stress-as-Offense-to-Self" perspective. In: Houdmont J, Scott M, editors. Occupational Health Psychology: European Perspectives on Research, Education and Practice. 2. Nottingham: Nottingham University Press; 2007.
57. Podsakoff NP, LePine JA, LePine MA. Differential challenge stressor-hindrance stressor relationships with job attitudes, turnover intentions, turnover, and withdrawal behavior: a meta-analysis. J Appl Psychol. 2007;92(2):438-54.
58. Crawford E, Lepine J, Rich B. Linking job demands and resources to employee engagement and burnout: A theoretical extension and meta-analytic test. J Appl Psychol. 2010;95:834-48.

59. Bowling NA, Alarcon GM, Bragg CB, Hartman MJ. A meta-analytic examination of the potential correlates and consequences of workload. Work Stress. 2015;29(2):95-113.
60. Clausen T, Burr H, Borg V. Do psychosocial job demands and job resources predict long-term sickness absence? An analysis of register-based outcomes using pooled data on 39,408 individuals in four occupational groups. Int Arch Occup Environ Health. 2014;87(8):909-17.
61. Schaufeli WB, Bakker AB. Job demands, job resources, and their relationship with burnout and engagement: a multi-sample study. J Organ Behavior. 2004;25(3):293-315.
62. Macdonald W. The Impact of Job Demands and Workload on Stress and Fatigue. Aust Psychol. 2003;38:102-17.
63. Notelaers G, De Witte H, Einarsen S. A job characteristics approach to explain workplace bullying. Eur J Work Organ Psychol. 2010;19:487-504.
64. de Jonge J, Le Blanc PM, Peeters MCW, Noordam H. Emotional job demands and the role of matching job resources: A cross-sectional survey study among health care workers. Int J Nurs Stud. 2008;45(10):1460-9.
65. Madsen IEH, Sørensen JK, Bruun JE, Framke E, Burr H, Melchior M, et al. Emotional demands at work and risk of hospital-treated depressive disorder in up to 1.6 million Danish employees: A prospective nationwide register-based cohort study. Scand J Work Environ Health. 2022;48(4):302-11.
66. Brotheridge CM, Lee RT. Development and validation of the Emotional Labour Scale. J Occup Organ Psychol. 2003;76(3):365-79.
67. Kinman G, Wray S, Strange C. Emotional labour, burnout and job satisfaction in UK teachers: the role of workplace social support. Educ Psychol. 2011;31(7):843-56.
68. Stokes SL. A line in the sand - Maintaing work-life balance. Inf Sys Manag. 1996(13).
69. Hill EJ, Miller BC, Weiner SP, Colihan J. Influences of the virtual office on aspects of work and work/life balance. Pers Psychol. 1998(51).
70. Waller AD, Ragsdell G. The impact of e-mail on work-life balance. Aslib Proc. 2012(64).
71. Clausen T, Meng A, Borg V. Does social capital in the workplace predict job performance, work engagement, and psychological well-being? A prospective analysis. J Occup Environ Med. 2019;61(10):800-5.
72. Edmondson AC, Lei Z. Psychological safety: The history, renaissance, and future of an interpersonal construct. Annu Rev. 2014;1(1):23-43.
73. Guinot J, Chiva R, Roca-Puig V. Interpersonal trust, stress and satisfaction at work: An empirical study. Pers Rev. 2014;43.
74. Grynderup MB, Mors O, Hansen ÅM, Andersen JH, Bonde JP, Kærgaard A, et al. Work-unit measures of organisational justice and risk of depression—a 2-year cohort study. Occup Environ Med. 2013;70(6):380-5.
75. Stansfeld S, Candy B. Psychosocial work environment and mental health - a meta-analytic review. Scand J Work Environ Health. 2006;32(6):443-62.
76. Sinokki M, Hinkka K, Ahola K, Gould R, Puukka P, Lönnqvist J, et al. Social support as a predictor of disability pension: the Finnish Health 2000 study. J Occup Environ Med. 2010;52(7):733-9.

77. Häusser J, Mojzisch A, Niesel M, Schulz-Hardt S. Ten years on: A review of recent research on the Job Demand–Control (-Support) model and psychological well-being. Work Stress. 2010;24:1-35.
78. Albertsen K, Lund T, Christensen KB, Kristensen TS, Villadsen E. Predictors of disability pension over a 10-year period for men and women. Scand J Public Health. 2007;35(1):78-85.
79. Meng A, Clausen T, Borg V. The association between team-level social capital and individual-level work engagement: Differences between subtypes of social capital and the impact of intra-team agreement. Scand J Psychol. 2018;59(2):198-205.
80. Borg V, Mateu NC, Clausen T. Udvikling af en ny metode til undersøgelse af social kapital på arbejdspladsen. Dokumentationsrapport. København: Det Nationale Forskningscenter for Arbejdsmiljø; 2014.
81. Oksanen T, Kouvonen A, Vahtera J, Virtanen M, Kivimäki M. Prospective study of workplace social capital and depression: are vertical and horizontal components equally important? J Epidemiol Community Health. 2010;64(8):684-9.
82. Graen GB, Uhl-Bien M. Relationship-based approach to leadership: Development of leader-member exchange (LMX) theory of leadership over 25 years: Applying a multi-level multi-domain perspective. Leadership Q. 1995;6:219-47.
83. Arnold KA, Turner N, Barling J, Kelloway EK, McKee MC. Transformational leadership and psychological well-being: the mediating role of meaningful work. J Occup Health Psychol. 2007;12(3):193-203.
84. Thoits PA. Mechanisms linking social ties and support to physical and mental health. J Health Soc Behav. 2011;52(2):145-61.
85. Connell J, Ferres N, Travaglione T. Engendering trust in manager-subordinate Relationships: Predictors and outcomes. Pers Rev. 2003;32:569-87.
86. Clark AJ, Aust B, Bonde JPE, Hoffmann SH, Jensen J, Laursen L, et al. Psykosocialt arbejdsmiljø på de regionale arbejdspladser. København: Københavns Stressforskningscenter; 2017.
87. Colquitt JA, Conlon DE, Wesson MJ, Porter COLH, Ng KY. Justice at the millennium: A meta-analytic review of 25 years of organizational justice research. J Appl Psychol. 2001;86:425-45.
88. Aalto AM, Heponiemi T, Väänänen A, Bergbom B, Sinervo T, Elovainio M. Is working in culturally diverse working environment associated with physicians' work-related well-being? A cross-sectional survey study among Finnish physicians. Health Policy. 2014;117(2):187-94.
89. Elovainio M, Heponiemi T, Jokela M, Hakulinen C, Presseau J, Aalto AM, et al. Stressful work environment and wellbeing: What comes first? J Occup Health Psychol. 2015;20(3):289-300.
90. Bambra C, Egan M, Thomas S, Petticrew M, Whitehead M. The psychosocial and health effects of workplace reorganisation. 2. A systematic review of task restructuring interventions. J Epidemiol Community Health. 2007;61(12):1028-37.
91. Pahkin K, Matilla-Holappa P, Nielsen KM, Wiezer N, Widerszal-Bazyl M, de Jong T, et al. Steps towards sound change - initiatives for ensuring employee well-being during restructuring. Warsaw: Central Institute for labour Protection/ National Research Institute; 2011.
92. Pahkin K, Mattila-Holappa P, Nielsen K, Widerszal-Bazyl M, Wiezer N. A Sound Change: Ways to Support Employees' Well-Being during Organizational

Restructuring. In: Leka S, Sinclair RR, editors. Contemporary Occupational Health Psychology: Global Perspectives on Research and Practice. 32014. p. 165-80.
93. Clausen T, Hogh A, Borg V. Acts of offensive behaviour and risk of long-term sickness absence in the Danish elder-care services: a prospective analysis of register-based outcomes. Int Arch Occup Environ Health. 2012;85(4):381-7.
94. Clausen T, Rugulies R, Li J. Workplace discrimination and onset of depressive disorders in the Danish workforce: A prospective study. J Affect Disord. 2022.
95. Conway PM, Erlangsen A, Grynderup MB, Clausen T, Rugulies R, Bjorner JB, et al. Workplace bullying and risk of suicide and suicide attempts: A register-based prospective cohort study of 98 330 participants in Denmark. Scand J Work Environ Health. 2022;48(6):425-34.
96. Hoffmann SH, Bjorner JB, Xu T, Mortensen J, Török E, Westerlund H, et al. Workplace violence and long-term sickness absence: Assessment of the potential buffering effect of social support in two occupational cohort studies. J Occup Environ Med. 2020;62(10):830-8.
97. Rugulies R, Madsen IEH, Hjarsbech PU, Hogh A, Borg V, Carneiro IG, et al. Bullying at work and onset of a major depressive episode among Danish female eldercare workers. Scand J Work Environ Health. 2012(3):218-27.
98. Rugulies R, Sørensen K, Aldrich PT, Folker AP, Friborg MK, Kjær S, et al. Onset of workplace sexual harassment and subsequent depressive symptoms and incident depressive disorder in the Danish workforce. J Affect Disord. 2020;277:21-9.
99. Clausen T, Hogh A, Carneiro IG, Borg V. Does psychological well-being mediate the association between experiences of acts of offensive behaviour and turnover among care workers? A longitudinal analysis. J Adv Nurs. 2013;69(6):1301-13.
100. Madsen IEH, Burr H, Diderichsen F, Pejtersen JH, Borritz M, Bjorner JB, et al. Work-related violence and incident use of psychotropics. Am J Epidemiol. 2011;174(12):1354-62.
101. Xu T, Magnusson Hanson LL, Lange T, Starkopf L, Westerlund H, Madsen IEH, et al. Workplace bullying and violence as risk factors for type 2 diabetes: a multicohort study and meta-analysis. Diabetologia. 2018;61(1):75-83.
102. Xu T, Magnusson Hanson LL, Lange T, Starkopf L, Westerlund H, Madsen IEH, et al. Workplace bullying and workplace violence as risk factors for cardiovascular disease: a multi-cohort study. Eur Heart J. 2019;40(14):1124-34.
103. Einarsen S, Hoel H, Zapf D, Cooper C. The concept of bullying and harassment at work: The European tradition. Bullying and harassment in the workplace Developments in theory, research, and practice: CRC Press; 2011. p. 3-39.
104. Hoegh A, Hansen Å M, Bloch C, Mikkelsen EG, Maier CM, Persson R, et al. Mobning og negativ adfærd på arbejdspladsen. København: Det Nationale Forskningscenter for Arbejdsmiljø; 2009.
105. Larsson NP, Udby LH, Madsen IEH. Undersøgelse af Uønsket Seksuel Opmærksomhed og chikane på arbejdspladser i Danmark (USO-DK). København: Det Nationale Forskningscenter for Arbejdsmiljø 2023.
106. Magnusson Hanson LL, Nyberg A, Mittendorfer-Rutz E, Bondestam F, Madsen IEH. Work related sexual harassment and risk of suicide and suicide attempts: Prospective cohort study. BMJ. 2020;370:m2984.

107. Hogh A, Conway PM, Clausen T, Madsen IEH, Burr H. Unwanted sexual attention at work and long-term sickness absence: a follow-up register-based study. BMC Public Health. 2016;16(1):678.
108. Williams DR, Lavizzo-Mourey R, Warren RC. The concept of race and health status in America. Public Health Rep. 1994;109(1):26-41.
109. Amstad FT, Meier LL, Fasel U, Elfering A, Semmer NK. A meta-analysis of work-family conflict and various outcomes with a special emphasis on cross-domain versus matching-domain relations. J Occup Health Psychol. 2011;16(2):151-69.
110. Burr H, Albertsen K, Rugulies R, Hannerz H. Do dimensions from the Copenhagen Psychosocial Questionnaire predict vitality and mental health over and above the job strain and effort-reward imbalance models? Scand J Public Health. 2010;38(3 Suppl):59-68.
111. Davey MM, Cummings G, Newburn-Cook CV, Lo EA. Predictors of nurse absenteeism in hospitals: a systematic review. J Nurs Manag. 2009;17(3):312-30.
112. Pratt M, Ashforth B, Cameron K, Dutton J, Quinn R. Fostering meaningfulness in working and at work. In: Cameron KS, Dutton JE, Quinn RE, editors. Positive Organizational Scholarship: Foundations of A New Discipline. San Francisco, Calif.: Berrett-Koehler Publishers, Inc.; 2003. p. 309-27.
113. Wrzesniewski A. Finding positive meaning in work. In: Cameron KS, Dutton JE, Quinn RE, editors. Positive Organizational Scholarship: Foundations of a New Discipline. San Francisco, Calif.: Berett-Kohler Publishers, Inc.; 2003. p. 296-308.
114. Clausen T, Burr H, Borg V. Does affective organizational commitment and experience of meaning at work predict long-term sickness absence? An analysis of register-based outcomes using pooled data on 61,302 observations in four occupational groups. J Occup Environ Med. 2014;56(2):129-35.
115. Clausen T, Burr H, Borg V. Does affective organizational commitment and experience of meaning at work predict risk of disability pensioning? An analysis of register-based outcomes using pooled data on 40,554 observations in four occupational groups. Am J Ind Med. 2014;57(6):709-17.
116. Meyer J, Allen N. Commitment in the Workplace: Theory, Research, and Application. Thousand Oaks, California: Sage Publications, Inc.; 1997.
117. Schaufeli WB, Bakker AB, Salanova M. The Measurement of Work Engagement With a Short Questionnaire: A Cross-National Study. Educ Psychol Meas. 2006;66(4):701-16.
118. Halbesleben J. A meta-analysis of work engagement: Relationships with burnout, demands, resources and consequences. In: Bakker AB, Leiter MP, editors. Work Engagement: A Handbook of Essential Theory and Research. 8: Psychology Press; 2010. p. 102–17.
119. Sverke M, Hellgren J, Naswall K. No Security: A Meta-Analysis and Review of Job Insecurity and Its Consequences. J Occup Health Psychol. 2002;7:242-64.
120. De Cuyper N, Bernhard-Oettel C, Berntson E, De Witte H, Alarco B. Employability and Employees' Well-Being: Mediation by Job Insecurity. Appl Psychol. 2008;57:488-509.
121. Witte HD. Job Insecurity and Psychological Well-being: Review of the Literature and Exploration of Some Unresolved Issues. Eur J Work Organ Psychol. 1999;8(2):155-77.

122. Andersen LP. Arbejdsrelateret stress — fra symptomer til et komplekst samspil. Tidsskrift for Arbejdsliv. 2007;9:17.
123. Siegrist J. Effort-reward imbalance at work and health. In: Perrewe PL, Ganster DC, editors. Historical and Current Perspectives on Stress and Health. Research in Occupational Stress and Well Being. 2. Leeds: Emerald Group Publishing Limited; 2002. p. 261-91.
124. Judge TA, Colquitt JA. Organizational justice and stress: the mediating role of work-family conflict. J Appl Psychol. 2004;89(3):395-404.
125. Nielsen M, Einarsen S. Outcomes of exposure to workplace bullying: A meta-analytic review. Work Stress. 2012;26.
126. Hulin CL, Judge TA. Job Attitudes. Handbook of Psychology: Wiley; 2003. p. 255-76.
127. Judge TA, Thoresen CJ, Bono JE, Patton GK. The job satisfaction-job performance relationship: a qualitative and quantitative review. Psychol Bull. 2001;127(3):376-407.
128. Wagner CM. Organizational commitment as a predictor variable in nursing turnover research: literature review. J Adv Nurs. 2007;60(3):235-47.
129. Michel JS, Kotrba LM, Mitchelson JK, Clark MA, Baltes BB. Antecedents of work–family conflict: A meta-analytic review. J Organ Behavior. 2011;32(5):689-725.
130. Andersen LL, Thorsen SV, Flyvholm MA, Holtermann A. Long-term sickness absence from combined factors related to physical work demands: prospective cohort study. Eur J Public Health. 2018;28(5):824-9.
131. Bláfoss R, Sundstrup E, Jakobsen MD, Brandt M, Bay H, Andersen LL. Physical workload and bodily fatigue after work: cross-sectional study among 5000 workers. Eur J Public Health. 2019;29(5):837-42.
132. Locks F, Gupta N, Hallman D, Birk Jørgensen M, Oliveira AB, Holtermann A. Association between objectively measured static standing and low back pain – a cross-sectional study among blue-collar workers. Ergonomics. 2018;61(9):1196-207.
133. Andersen JH, Haahr JP, Frost P. Risk factors for more severe regional musculoskeletal symptoms: a two-year prospective study of a general working population. Arthritis Rheum. 2007;56(4):1355-64.
134. Carøe TK, Ebbehøj N, Agner T. A survey of exposures related to recognized occupational contact dermatitis in Denmark in 2010. Contact Dermatitis. 2014;70(1):56-62.
135. Arbejdstilsynet. National Overvågning af Arbejdsmiljøet Blandt Lønmodtagere (NOA-L 2021). København: Arbejdstilsynet; 2021.
136. Dyreborg J, Andersen L, Carstensen O, Cleal B, Grytnes R, Grøn S, et al. Forebyggelse af alvorlige arbejdsulykker gennem intervention i sikkerhed og sikkerhedskultur. København: Det Nationale Forskningscenter for Arbejdsmiljø, Arbejdsmedicinsk Klinik Herning; 2008.
137. Ilmarinen J. Work ability - a comprehensive concept for occupational health research and prevention. Scand J Work Environ Health. 2009;35(1):1-5.
138. Palmlöf L, Skillgate E, Talbäck M, Josephson M, Vingård E, Holm LW. Poor work ability increases sickness absence over 10 years. Occup Med. 2019;69(5):359-65.
139. Prakash K, C., Oakman J, Nygård CH, Siukola A, Lumme-Sandt K, Nikander P, et al. Intention to Retire in Employees over 50 Years. What is the Role of Work Ability and Work Life Satisfaction? Int J Environ Res Public Health. 2019;16(14).

140. Bláfoss R, Vinstrup J, Skovlund SV, López-Bueno R, Calatayud J, Clausen T, et al. Musculoskeletal pain intensity in different body regions and risk of disability pension among female eldercare workers: prospective cohort study with 11-year register follow-up. BMC Musculoskelet Disord. 2021;22(1):771.
141. Arbejdstider, søvn og sikkerhed. København: Det Nationale Forskningscenter for Arbejdsmiljø; 2005.
142. Bláfoss R, Micheletti JK, Sundstrup E, Jakobsen MD, Bay H, Andersen LL. Is fatigue after work a barrier for leisure-time physical activity? Cross-sectional study among 10,000 adults from the general working population. Scand J Public Health. 2019;47(3):383-91.
143. Bruun JE, Dalsager L, Nordentoft M, Framke E, Madsen IEH, Sørensen JK, et al. Det psykosociale arbejdsmiljø og risikoen for diabetes, sygefravær og førtidspensionering blandt lønmodtagere i Danmark (PSA-DISPO). København: Det Nationale Forskningscenter for Arbejdsmiljø (NFA); 2022.
144. Bech P, Rasmussen NA, Olsen LR, Noerholm V, Abildgaard W. The sensitivity and specificity of the Major Depression Inventory, using the Present State Examination as the index of diagnostic validity. J Affect Disord. 2001;66(2):159-64.
145. Bech P, Timmerby N, Martiny K, Lunde M, Soendergaard S. Psychometric evaluation of the Major Depression Inventory (MDI) as depression severity scale using the LEAD (Longitudinal Expert Assessment of All Data) as index of validity. BMC Psychiatry. 2015;15:190.
146. Theorell T, Hammarström A, Aronsson G, Träskman Bendz L, Grape T, Hogstedt C, et al. A systematic review including meta-analysis of work environment and depressive symptoms. BMC Public Health. 2015;15(1):738.
147. Podsakoff PM, MacKenzie SB, Lee JY, Podsakoff NP. Common method biases in behavioral research: a critical review of the literature and recommended remedies. J Appl Psychol. 2003;88(5):879-903.

Lersø Parkallé 105
2100 København Ø

T 39 16 52 00
F 39 16 52 01

E nfa@nfa.dk
W www.nfa.dk